*Løgtingsins umboðsmaður*

*Ársfrágreiðingin 2008*

# *LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR*

## *Ársfrágreiðingin 2008*

Tórshavn 2009

Løgtingsins umboðsmaður
Ársfrágreiðingin 2008
© 2009 Løgtingsins umboðsmaður
Umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent

ISBN 978-99918-969-7-7

# Innihaldsyvirlit


I. Um embætið . . . . . . 9
II. Gongdin í 2008 . . . . . . 11
III. Hagtøl . . . . . . 12

IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum
í málum avgreidd í 2008 . . . . . . 21

***11. Innlit*** . . . . . . 21
11.1 Noktandi innlit frá Vinnumálaráðnum . . . . . . 21

***21. Kommunu-, Umhvørvis-,***
***Byggi-/leigumál og Friðing*** . . . . . . 26
21.1 Keyp av telduútgerð til Runavíkar kommunu . . . . 26

***24. Heilsu-, Uttanríkis- og Verjumál*** . . . . . . 39
24.1 Viðurskifti hjá sjúklingi á Psykiatriska Deplinum 39

***25. Persóns-, Familju- og Arvamál*** . . . . . . 41
25.1 Serlæknaváttan frá Landssjúkrahúsinum . . . . . . 41

***28. Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m.*** . . . . . 45
28.1 Uppsøgn av starvsfólkum hjá Strandfaraskipum
Landsins –uppafturtøka . . . . . . 45
28.2 Setan við Sørvágs skúla . . . . . . 53
28.3 Umflokking av starvi sum
stjóri á Rúsdrekkasølu landsins . . . . . . 104
28.4 Handfaringin hjá Nærverk og Almanna-
og heilsumálaráðnum av klaguni um leiðaran
á sambýlinum á Mýrini . . . . . . 124
28.5 Avgerð hjá Javnstøðunevndini . . . . . . 196

V. Egnar kanningar . . . . . . 248
32.1 Kanning av 10 fyritíðarpensjónsmálum og
15 endurbúgvingarmálum hjá Almannastovuni . . 248

VI. Skjøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 353
1. Umboðsmanslógin . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 353
2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann . . . . . . . . . 357

Lógaryvirlit . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 360

# *Til Løgtingið*

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2008. Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2009

Frágreiðingin er býtt upp soleiðis:


I. Um embætið
II. Gongdin í 2008
III. Hagtøl
IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2008
V. Egnar kanningar
VI. Skjøl
   1. Umboðsmanslógin
   2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann


Tórshavn, mai 2009

*Sólja í Ólavsstovu*

# *I. Um embætið*

Sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5-ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins (§ 1). Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4,stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.( § 4, stk. 5 ).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5).

Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4).

Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5).

Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja

støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. (§ 8).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann at álvarsligt mistak ella vatnsketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10).

Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá. ( § 12 ).

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru viðheft ársfrágreiðingini sum skjøl.

Løgtingið valdi tann 23. november 2005 meg sum Løgtingsins Umboðsmann fyri tíðarskeiði 1. janaur 2006 til 31. desember 2010. Eg tók við embætinum tann 1. janaur 2006.

Umframt meg sjálvan er embætið mannað við løgfrøðiligu medarbeiðarum mínum, Birita Ludvíksdóttir, ráðgeva og Lailu Egholm, skrivstovufulltrúa.

Í sambandi við at Johnhard Klettheggj fór í farloyvi í september 2008, varð Jóhanna Arge, løgfrøðingur sett í starv sum ráðgevi.

Adressan er Traðagøta 43, Postsmoga 2008, FO-165 Argir, og teldupostadressan er lum@lum.fo.

Heimasíða umboðsmansins eitur www.lum.fo.

# *II. Gongdin í 2008*

Í 2008 vórðu upprættaði 73 mál, sum innihalda 87 sjálvsstøðugar klagur. Hetta er eitt lítið fall samanborið við undanfarna ár. Av teimum vóru 62 endaliga avgreiddar við árslok umframt 16 klagur, sum stóðu eftir frá 2008.

Við heimild í § 4, stk. 1, § 5, § 6, stk. 5 og § 8, stk. 1 í umboðsmanslógini, og sum ein liður í verksemi mínum og viðframdi eg eina kanning av 10 fyritíðarpensjónsmálum og 15 endurbúgvingarmálum hjá Almannastovuni. Frágreiðingin frá hesum kanningum er at finna í ársfrágreiðingini.

Umboðsmenninir í Noregi, Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum koma regluliga saman til fundar eina ella tvær ferðir um árið, har evni av felags áhuga koma til viðgerðar. Í 2008 vórðu tveir fundir hildnir. Annar 21. og 22. mai í Keypmannahavn og hin í Reykjavík 16. og 17. oktober. Eisini umboðsmenninir í øllum Norðanlondunum halda relguligar fundir annað ella triðja hvørt ár. Eg luttók á einum slíkum fundi í Oslo tann 15. og 16. september í 2008.

# III. Hagtøl

**Klagur innkomnar í 2008 býttar á myndugleikar**

Í 2008 blivu upprættaði 73 mál, sum innihildu 87 sjálvstøðugar klagur. Hesar klagurnar vóru býttar soleiðis millum ymsu myndugleikarnar:

(Talva 1)

| ***Myndugleiki:*** | ***Klagur:*** |
|---|---|
| Mentamálaráðið | 7 |
| Innlendismálaráðið | 5 |
| Fíggjarmálaráðið | 2 |
| Vinnumálaráðið | 3 |
| Fiskimálaráðið | 4 |
| Almanna- og heilsumálaráðið | 4 |
| Løgmansskrivstovan | 2 |
| Uttanríkisráðið | 1 |
| Kommunur | 29 |
| Almannastovan | 4 |
| Nærverkið | 3 |
| Landsverk | 1 |
| Barnaverndarnevndir | 1 |
| Landssjúkrahúsið | 3 |
| Føroya rættur | 1 |
| Javnstøðunevndin | 1 |
| Strandfaraskip Landsins | 1 |
| Kærunevndin í alm. og heilsumálum | 1 |
| Búnaðarstovan | 1 |
| Yvirlandbúnaðarstevna | 1 |
| Kærunevndin í lendismálum | 1 |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan | 1 |
| Føroya Lívstrygging | 1 |
| Skuldarumskipanarnevndin | 1 |
| Loyvisnevndin | 1 |

| | |
|---|---|
| Føroya Stiftsstjórn | 2 |
| Vinnuháskúlin | 1 |
| Útlendingastovan | 1 |
| Stuðulsstovnurin | 1 |
| Toll- og Skattstova Føroya | 2 |
| **Tilsamans** | **87** |

**Innkomnar klagur í 2008 býttar á málsøki og klaguinnihald**
Klagurnar, sum komu inn í 2008 kunnu býtast upp eftir málsøki og innihaldi, sum gjørt er niðanfyri:

(Talva 2)

| *Málsøki* | *Tal av klagum* | *Klagur um avgerðir* | *Klagur um málsviðgerð* |
|---|---|---|---|
| Starvsfólkamál | 20 | 14 | 6 |
| Fiskivinnumál | 1 | 0 | 1 |
| Almannamál | 9 | 2 | 7 |
| Skattur v.m. | 2 | 2 | 0 |
| Undirvísing v.m. | 2 | 1 | 1 |
| Byggimál v.m. | 16 | 8 | 8 |
| Innlit | 16 | 15 | 1 |
| Vinnumál | 5 | 2 | 3 |
| Persónsmál | 3 | 0 | 3 |
| Ymiskt | 13 | 8 | 5 |
| **Tilsamans** | **87** | **52** | **35** |

**Klagur endaliga avgreiddar í 2008**

Av teimum 87 klagunum, sum komu inn í 2008 vóru 62 endaliga avgreiddar innan 31. des. 2008. Harumframt vóru avgreiddar 16 klagur, sum vóru innkomnar (men ikki avgreiddar) í 2007. Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

(Talva 3)

| *Myndugleiki* | *Klagur* | *Avvístar* | *Viðgjørdar* | *Viðgjørdar uttan átalu/ tilmæli* | *Viðgjørdar átala/tilmæli givið* |
|---|---|---|---|---|---|
| Mentamálaráðið | 3 | 3 | 0 | 0 | 0 |
| Innlendismálaráðið | 3 | 1 | 2 | 1 | 1 |
| Alm.- og heilsumálaráðið | 5 | 2 | 3 | 2 | 1 |
| Vinnumálaráðið | 4 | 2 | 2 | 1 | 1 |
| Uttanríkismálaráðið | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Fíggjarmálaráðið | 1 | 0 | 1 | 0 | 0 |
| Løgmansskrivstovan | 3 | 2 | 1 | 1 | 0 |
| Almannastovan | 6 | 5 | 1 | 0 | 1 |
| Kommunur | 28 | 20 | 8 | 4 | 4 |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Toll- og Skattst. Føroya | 2 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| Yvirlanbúnaðarstevnan | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Búnaðarstovan | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Javnstøðunevndin | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 |
| Nærverk | 2 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| Landssjúkrahúsið | 5 | 3 | 2 | 1 | 2 |
| Landsverk | 2 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| Kærunevndin í lendismálum | 1 | 0 | 1 | 0 | 0 |
| Barnaverndarnevndir | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Føroya Stiftsstjórn | 2 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| Føroya Lívstrygging | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Strandfaraskip Landsins | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 |
| Kærun. í alm. og heilsum. | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Føroya rættur | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **78** | **53** | **25** | **11** | **14** |

**Klagur avvístar í 2008**

Í 2008 vórðu 53 klagur avvístar av ymiskum orsøkum. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

(Talva 4)

| *Avvísingarorsøk* | *Klagur* |
|---|---|
| Innkomin ov seint; § 6, stk. 2 | 2 |
| Kærumøguleiki ikki troyttur; § 6, stk. 3 | 13 |
| Ikki grundarlag fyri víðari kanningum; § 6, stk. 4 | 23 |
| Uttanfyri heimildarøki; § 4 | 7 |
| Afturkallað | 8 |
| **Tilsamans** | **53** |

**Viðgjørdar klagur í 2008 býttar á málsøki**

Tey málini, sum blivu endaliga viðgjørd í 2008, kunnu býtast upp eftir málsøki á hendan hátt:

(Talva 5)

| *Málsøki* | *Klagur* |
|---|---|
| Starvsfólkamál | 7 |
| Undirvísing v.m. | 1 |
| Almannamál | 7 |
| Innlit | 4 |
| Byggimál v.m. | 5 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 1 |
| **Tilsamans** | **25** |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av viðgjørdum klagum**

Í teimum 25 endaliga viðgjørdu klagunum hevur miðal viðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 6)

| *Viðgerðartíð í miðal:* | |
|---|---|
| Aftaná partshoyring: | 2 mðr. 14 dg. |
| Samlað: | 5 mðr. 10 dg. |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av avvístum klagum:**

Í teimum 53 avvístu klagunum hevur miðal viðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 7)

| *Viðgerðartíð í miðal:* | |
|---|---|
| Aftaná partshoyring: | 14 dg. |
| Samlað: | 1 mðr.13 dg. |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av bæði viðgjørdum og avvístum klagum:**

Fyri allar klagurnar, tvs. bæði avvístar og endaliga viðgjørdar klagur, hevur málsviðgerðartíðin í miðal verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 8)

| **Klagur** | **Viðgerðartíð aftaná partshoyring** | **Viðgerðartíð tilsamans** |
|---|---|---|
| Viðgerðartíð í miðal: | 1 mðr. 14 dg. | 2 mðr. 21 dg. |

**Klagur innkomnar í 2008 býttar á myndugleikar**



**Klagur innkomnar í 2008 býttar á málsøki**




**Klagur innkomnar í 2008 býttar eftir klaguinnihaldi**



**Klagur endaliga avgreiddar í 2008**




**Klagur avvístar í 2008 býttar eftir avvísingarorsøk**



**Klagur viðgjørdar í 2008 býttar á málsøki**




**Innkomnar klagur**



# *IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2008*

## *11. Innlit*

### 11.1 Noktandi innlit frá Vinnumálaráðnum

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um noktandi innlit frá Vinnumálaráðnum í málinum um keyp av egnum partabrøvum í Atlantic Airways. Umboðsmaðurin gav Vinnumálaráðnum rætt í, at fleiri av teimum skjølum, ið ráðið hevði noktað innlit í vóru fevnd av § 7, nr. 1 og 2 í innlitslógini, og tí undantikin innliti. Tó metti umboðsmaðurin, at tvey skjøl vóru uttanhýsis skjøl, ið Vinnumálaráðið átti at givið innlit í. Harumframt metti umboðsmaðurin tað ikki vera nøktandi, at Vinnumálaráðið ikki hevði kannað, hvørt 4 ávís skjøl í málinum kortini vóru fevnd av rættinum til innlit sambært §§ 8 og 11 í málinum. Umboðsmaðurin mælti tí Vinnumálaráðnum til at taka málið uppaftur til viðgerðar og lata seg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kom til í hesum sambandi.* ***(J. nr. 200800064)***

### Klagan

Við skrivi, dagfest 18. juli 2008, hevur A klagað um avgerð Vinnumálaráðsins um ikki at veita alment innlit í øll skjøl í málinum um keyp av egnum partabrøvum í Atlantic Airways. Hóast talan var um innanhýsis arbeiðsskjøl, metti A málið at hava so mikið stóran almennan áhuga, at alment innlit átti at verða veitt í øll skjøl.

### Málsgongd

Av tí at partshoyringin niðanfyri lýsir málsviðgerðina í málinum á nøktandi hátt, havi eg valt ikki at gera eina nærri lýsing av málsgongdini.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 4. august 2008, varð klagan send Vinnumálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Vinnumálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 27. august 2008 sendi Vinnumálaráðið umboðsmanninum viðmerkingar. Vinnumálaráðið boðaði frá, at ráðið í fleiri ferðum í juli 2008 fekk áheitanir frá fjølmiðlunum, herundir frá A, um innlit í málið viðvíkjandi Atlantic Airways. Innlit varð í fyrsta umfari bert givið í tað, ið biðið varð um, nevniliga skjal nr. 1. Hetta er skriv frá nevndarformanninum í Atlantic Airways og frágreiðing frá nevndini um keyp av partabrøvum frá leiðslu felagsins.

Eftirfylgjandi bóðu fleiri fjølmiðlar um at fáa útflýggjað øll skjøl í málinum. Tá vóru tilsamans 31 skjøl skrásett í yvirlitinum hjá Vinnumálaráðnum, og mett var, at flest øll skjøl kundu útflýggjast saman við málsyvirlitinum. A fekk, tann 18. juli 2008, innlit í skjøl nr. 4, 5, 6, 7, 10, 11, 12, 13, 14, 15, 16, 17, og 27. Hini skjølini metti Vinnumálaráðið at vera innanhýsis arbeiðsskjøl gjørd til egna nýtslu, sum ikki átti at verða útflýggjað. Vinnumálaráðið vísti í hesum sambandi til § 7, nr. 1 og 2 í innlitslógini. Vinnumálaráðið vísti eisini til bókina: „Offentlighedsloven med kommentarer“, Jurist- og økonomforbundets Forlag, 3. útgáva 1998, s. 160-165, nr. 1-3.

Hjáløgd skrivinum frá Vinnumálaráðnum til umboðsmannin vóru skjølini 1-31.

Tann 2. september 2008 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at tað var ikki mett neyðugt at hava framhaldandi partshoyringar, og at umboðsmaðurin tí fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

Við telduposti, dagfestur tann 5. november 2008, boðaði umboðsmaðurin Vinnumálaráðnum frá, at sjálvt málsyvirlitið og skjal nr. 27 ikki vóru ímillum tey skjøl, ið Vinnumálaráðið hevði sent

umboðsmanninum. Umboðsmaðurin bað Vinnumálaráðið senda sær hetta. Eisini varð spurt um, hví tvey skjøl vóru skrásett sum nr. 26.

Við telduposti, dagfestur 6. november 2008, sendi Vinnumálaráðið umboðsmanninum málsyvirlitið í málinum. Vinnumálaráðið greiddi samstundis umboðsmanninum frá, at skjal nr. 26 og 27 var sama skjal, tó at skjal nr. 27 varð undirskrivað og skannað.

Umboðsmaðurin helt síðani áfram við viðgerð sínari av hesum málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um hvørt klagarin hevur fingið innlit í tey skjøl, sum hann sambært innlitslógini hevur rætt til at fáa innlit í.*

*Klagarin fekk tann 18. juli 2008 innlit í umleið helvtina av skjølunum, sum tá vóru í málinum. Hini skjølini metti Vinnumálaráðið verða innanhýsis arbeiðsskjøl, ið eru undantikin innliti, jb. § 7, nr. 1 og 2 í innlitslógini.*

*§ 7, nr. 1 og 2 í innlitslógini er soljóðandi:*

> *„§ 7. Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Innanhýsis arbeiðsskjøl eru*
> *1) skjøl, sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu,*
> *2) brævaskifti millum ymiskar deildir innan fyri sama myndugleika og*
> *…“*

*Tá ið eitt skjal er fevnt av § 7 í innlitslógini, skulu myndugleikarnir meta um, hvørt skjølini kortini eru fevnd av innliti sambært reglunum í § 8 í lógini, ella um tey innihalda upplýsingar um veruligu umstøðurnar av stórum týdningi fyri málið, jbr. § 11, stk. 1.*

*Hesar greinir eru soljóðandi:*

*„§ 8. Rætturin til skjalainnlit fevnir hóast ásetingina í § 7 um innanhýsis arbeiðsskjøl, ið eru til skjals í endaligum líki, tá*

1) *skjølini bert endurgeva innihaldið av endaligu støðutakan myndugleikans viðvíkjandi avgerðini í einum máli,*
2) *skjølini bert innihalda eina endurgeving av upplýsingum, sum myndugleikin hevur havt skyldu til at skriva upp sambært ásetingini í § 6,*
3) *skjølini eru sjálvstøðug skjøl, ið eru gjørd av einum myndugleika fyri at fáa til vega prógvandi ella annan samsvarandi greidleika viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum í einum máli, ella*
4) *skjølini innihalda almenn stevnumið fyri viðgerðini av ávísum málssløgum.*

*…*

*§ 11. Upplýsingar í skjølum, ið eru umfatað av § 7 og § 10, nr. 1-4, um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, skulu hóast hesar ásetingar latast í samsvari við vanligu reglur lógarinnar.*

*…“*

*Eg havi lisið øll skjølini í málinum. Skjølini nr. 3, 8, 9, 19, 20, 22, 23, 24, 25 og 28 eru teldupostar ímillum landsstýriskvinnuna, aðalstjóran, deildarstjóran á Samskiftisdeildini og løgfrøðing á Vinnudeildini. Eg eri samd við Vinnumálaráðnum í, at hesi skjøl eru innanhýsis skjøl, ið eru fevnd av § 7, nr. 1 og 2 í innlitslógini. Hesi skjøl vísa bert tey stig, ið eru tikin í málsviðgerini, og meti eg tí ikki, at hesi skjøl eru fevnd av rættinum til innlit sambært § 8 ella § 11 í innlitslógini. Eg havi tí ikki viðmerkingar til, at Vinnumálaráðið ikki hevur latið innlit í hesi skjøl.*

*Øðrvísi er við skjali nr. 21. Hetta er ein teldupostur við upplýsingum frá uttanhýsis serfrøðingi. Hóast skjalið verður nýtt til innanhýsis metingar av málinum, er ein teldupostur frá øðrum myndugleika ikki eitt innanhýsis skjal. Eftir mínari meting átti Vinnumálaráðið tí at givið A innlit í hetta skjal.*

*Skjal nr. 29 er ein teldupostur frá B, nevndarformanni, til Vinnumálaráðið. Viðheft teldupostinum er skriv til Vinnumálaráðið og ein frágreiðing*

*frá nevndini um málið. Skrivið og frágreiðingin er sama skjal, sum er skrásett sum skjal nr. 1 í málinum, og hevur Vinnumálaráðið givið fjølmiðlunum innlit í hetta. Telduposturin (skjal nr. 29) er ikki eitt innanhýsis skjal, og átti Vinnumálaráðið tí eisini at givið fjølmiðlunum innlit í teldupostin við skjølum.*

*Skjal nr. 2 er eitt telefonnotat skrivað í Vinnumálaráðnum eftir samrøðu við nevndarformannin í Atlantic Airways, og skjal nr. 18 er ein fundarfrásøgn frá fundi ímillum nevndarformannin í Atlantic Airways og Vinnumálaráðið. Skjøl nr. 30 og 31 eru notat frá ymiskum telefonsamrøðum.*

*Eg eri samd við Vinnumálaráðnum í, at hesi skjøl eru innanhýsis skjøl fevnd av § 7, nr. 1 í innlitslógini. Vinnumálaráðið hevur tó ikki mett um, hvørt ávís av hesum skjølum kortini eru fevnd av rættinum til innlit sambært § 8, ella um tey innihalda upplýsingar, ið innlit eigur at verða givið í sambært § 11 í innlitslógini. Hetta er ikki nøktandi.*

*Eg fari tí at mæla Vinnumálaráðnum til at taka málið uppaftur til viðgerðar og at lata meg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kemur til í hesum sambandi.*

Við skrivi, dagfest tann 28. januar 2009, boðaði vinnumálaráðið umboðsmanninum frá, at ráðið hevði tikið málið uppaftur til viðgerðar, og hevði tikið avgerð í málinum. Ráðið hevði, eftir ítøkiligar metingar givið innlit í fleiri skjøl í málinum, tó hevði ráðið ikki givið innlit í ávísar upplýsingar vísandi til §§ 12 og 13 í innlitslógini.

# *21. Kommunu-, Umhvørvis-, Byggi-/leigumál og Friðing*

## 21.1 Keyp av telduútgerð til Runavíkar kommunu

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu frá P/F A um málsviðgerð og innlit í eitt mál hjá Runavíkar kommunu um keyp av telduútgerð. Viðvíkjandi innlitsspurninginum kom umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at skjøl og upplýsingar um tilboðsupphæddir og dygd á vørum var fevnt av § 13, stk. 1, nr. 5 í innlitslógini, og at Runavíkar kommuna tí ikki hevði skyldu til at geva innlit í tilfarið, áðrenn málið var liðugt avgreitt. Umframt innlitsspurningin klagaði P/F A um, at avgerðin um at velja annað tilboð enn teirra ikki var saklig. Hóast fyrisitingarlógin ikki er galdandi viðvíkjandi eginrættarligum gerðum, hava almennir myndugleikar skyldu til at halda seg til góðan fyrisitingarsið í sínum virksemi. Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja annað enn, at málið var viðgjørt á sakligan hátt frá kommununar síðu, og helt tí ikki at grundarlag var fyri at gera meira við hetta málið.* ***(J. nr. 200800019)***

## Klagan

Við skrivi, dagfest 20. februar 2008, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> **„Kæra um málsviðgerð hjá Runavíkar kommunu**
> A kærir hervið málsviðgerðina hjá Runavíkar kommunu í sambandi við tilboð uppá teldur til Runavíkar skúla.
>
> 1. Kært verður um, at A ikki hevur fingið upplýsingarnar og grundgevingar, sum Runavíkar kommuna átti at havt givið í sambandi við at Runavíkar kommuna valdi at samráðast við annan veitara.
> 2. Væntandi grundgevingar í svari uppá fyrispurning um partsinnlit og partshoyring.

## Málsgongdin

Runavíkar Kommuna bjóðaði hin 3. desember 2007 A at geva tilboð uppá telduútgerð til Runavíkar skúla (sí hjáskjal 1 um tilboðstilfar). Kommunan upplýsti, at tvey onnur feløg eisini vórðu boðin at geva tilboð. Í sambandi við at tilboð vóru givin. Í hesum sambandi var í onkrum føri víst til lisitatiónslógina.

A lat hin 14. desember Runavíkar kommunu tilboð uppá veitingar av telduútgerð og uppsetan av teimun til Runavíkar skúla. Tilboðið er givið í innbodnari lisitatión. Tilboðsupphæddin er kr. 1.709.400,13 fyri telduútgerðina umframt kr. 400.000,- fyri eina telefonskipan, ella ein samlað tilboðsupphædd uppá kr. 2.109.400,13. Fyri tænastuveitingar uppá útgerðina bjóðar A tímatakstin kr. 450,- um tíman. Vørurnar sum A bjóðaði í tilboðnum, lúka øll góðskukrøvini, sum sett vórðu í útbjóðingartilfarinum.

Hin 19. desember 2007 gjørdi Runavíkar kommuna vart við at feilur varð í útrokningum. A svaraði soleiðis aftur í telduposti, endurgevi:

> *„Viðvíkjandi tilboð uppá KT-útgerð til Runavíkar skúla*
>
> *Eftir at A hevði innlatið tilboð uppá KT-útgerð til Runavíkar skúla gjørdi útbjóðarin, Runavíkar kommuna, vart við, at ósamsvar var í prísfylgiskjalinum, ið varð innlatið saman við tilboðnum.*
>
> *Kommunan hevur rætt í, at ósamsvar er í prísfylgiskjalinum, men hetta ósamsvar ávirkar á ongan hátt samlaðu tilboðsupphæddina á kr. 1.709.400,13 (u/mvg og ikki íroknað telefonskipan) fyri alla veitingina.*
>
> *Ósamsvarið komst av, at tá tilboðið varð reinskrivað og tølini vórðu flutt úr arbeiðsskjalinum til tilboðsskjølini, eru skrivifeilir hendir.*
>
> *A innletur hervið eitt nýtt prísfylgiskjal, har ið ávístu feilirnir eru*

*rættaðir, men vil samstundis og aftur vísa á, at hesar rættingarnar ikki ávirka samlaða tilboðsprísin á kr. 1.709.400,13 (umframt telefonskipan) fyri samlaðu veitingina.*

*Viðheft: prís-fylgiskjal í rættaðari útgávu.*"

Endurgeving endar.

Síðani hendi ikki meira fyrrenn hin 7. januar 2008.

**Hin 7. januar 2008 fekk A soljóðandi svar frá Runavíkar kommunu, endurgevi:**

*„Vit vilja takka fyri væl úr hondum greitt tilboð.*
*Tilboð vóru sera jøvn í prísi, meðan dygdin á vørum í bjóðaðar vóru, var nakað ymisk.*

*Byggiharrin hevur saman við ráðgevum innan KT-tøkni gjøgnumgingið tilboðini, og eru vit komnir til tað niðurstøðu, at vit hava valt at arbeiða víðari við tilboðnum frá F.*"

Endurgeving endar.

A vildi hava útgreinaðar grundgevingar fyri svarinum, tí at svarið ikki leyk ásetingarnar í Lisitatiónslógini, sum kommunan hevði víst til. Mett var heldur ikki, at kommunan grundgav sambært ásetingunum í Fyrisitingarlógini.

**Hin 11. januar 2008 sendi A soljóðandi fyrispurning til Runavíkar Kommunu, endurgevi:**

*„Í sambandi við, at byggiharrin í Runavíkar skúla hevur valt annan veitara enn A at veita KT-vørur, fara vit at biðja um fylgjandi upplýsingar:*

1. *Hvør var tilboðsupphæddin frá hvørjum einstøkum veitara, ið gav tilboð?*
2. *Í hvørjum førum metir byggiharrin, at dygdin á vørunum,*

*frá veitaranum, ið byggiharrin valdi, er betri enn dygdin á vørunum, ið A bjóðar?*

3. *Hvør er orsøkin til, at byggiharrin metir dygdina á hesum vørunum at vera betri?"*

Endurgeving endar.

Hin 15. januar fór telefonsamrøða fram millum Runavíkar kommunu og A. Sum svar uppá tað samrøðuna sendi Runavíkar kommuna henda teldupost.

Endurgevi:

> *„Sum sagt í maili tann 07.01.2008, so hava vit valt at arbeiða víðari við tilboðnum frá F. Enn hava vit ikki valt nakran, og kann eg tí heldur ikki svara tínum spurningum."*

Endurgeving endar.

Hin 22. januar 2008 var fundur millum A, B og C og Runavíkar kommunu, C og E. Á fundinum fekst ikki greiða á spurningunum, sum A setti Runavíkar kommunu hin 11. januar 2008. Á hesum fundinum varð upplýst at ongin lóg er galdandi fyri tilboð uppá telduútbúnað.

Tað er óivað rætt, at ongin lóg er galdandi fyri tilboð uppá telduútbúnað, men av tí at Runavíkar kommuna upprunaliga vísti til lisitatiónslógina sum grundarlag, hevur A hildið seg til ásetingarnar í Lisitatiónslógini.

Sama dag varð brævsent Mentanarnevndini í Runavíkar kommunu umvegis teldupost (sí skjal 2).

Hin 30. januar, varð undirritaði uppringdur av formanninum í Mentanarnevndini har avtalað varð at hava fund um málið. Formaðurin í Mentanarnevndini skuldi venda aftur við fundarboðum, boðini eru ikki komin í skrivandi løtu.

Hin 4. Februar bað A um partsinnlit smb. § 9. stk 1 í Fyrisitngarlógini. Haraftrat varð biðið um partshoyring smb. § 18. stk. 1 í Fyrisitingarlógini (sí skjal 3, umbøn um skjalainnlit).

Hin 14. februar váttaði Runavíkar kommuna at hava móttikið umbøn um innlit (sí skjal 4)."

Tann 26. februar 2008 sendi A umboðsmanninum soljóðandi ískoyti til klaguna:

„**Kæra um málsviðgerð hjá Runavíkar kommunu**

Víst verður til kæru dagfest hin 20. februar og sum varð send tygum sama dag. A víðkar hervið kæruna við 2 punktum:

1. Kært verður um, at Runvavíkar kommuna sýtir A partsinnlit í málið um telduveitingar til Runavíkar skúla
2. Runavíkar kommuna sýtir fyri at partshoyra A

**Orsøk til víðkan av kæruni**
Hin 22. februar 2008 fekk A bræv frá Runavíkar kommunu, dagfest hin 18. februar 2008 (sí skjal 5). Í brævinum staðfestir Runavíkar kommuna, at teir ikki vilja geva A partsinnlit, sum A bað um hin 4. februar. Sambært brævinum frá Runavíkar kommunu er grundgevingin, at teir eru í samráðingum við annan part í málinum. Sostatt verður A ikki partshoyrt í samsvari við § 18 í Fyrisitingarlógini."

## Málsgongd

Av tí at málsgongdin verður lýst í sjálvari klaguni, havi eg valt bert at gera ein samandrátt av teimum skjølum, sum eg havi fingið til láns frá Runavíkar kommunu, ið hava týdning fyri málið.

Tann 3. desember 2007 bjóðaði Runavíkar kommuna ávísum fyritøkum at geva tilboð uppá telduútgerð til Runavíkar skúla. Trý tilboð komu inn, og vóru hesi frá F, G og A.

Við skrivi, dagfest 26. desember 2007, gjørdi H, telduráðgevi eina

meting á 6 síður av tilboðunum til telduútgerð til Runavíkar skúla. Tey trý tilboðini vóru mett í mun til tilboð uppá skrivstovuteldur og servarar, farteldur, tráðleyst net og aðra netútgerð, telefonskipan, kopimaskinur og prentarar. Niðurstøðan var, at F fekk fyrstapláss, G annað pláss, og A triðja pláss.

Av notati, dagfest 3. januar 2008, frá gerðabókini hjá Runavíkar kommunu sæst, at Mentanarnevndin á fundi hendan dagin hevur umrøtt innkomnu tilboðini. Fakliga ráðgevingin hevði innkallað H, telduráðgeva, sum í notati hevði viðgjørt einkultu lutirnar í tilboðnum. Niðurstøðan á fundinum var, at F fekk fyrstapláss, G annað pláss, og A triðjapláss. Grundgevingin var, at tekniska dygdin hjá F var mest í tráð við ynskini. Mentanarnevndin gjørdi av at fara í samráðingar við F.

Við telduposti, dagfestur tann 11. januar 2008, biður A um innlit í tilboðsupphæddir og dygd á vørum hjá einstøku veitarunum í málinum, og metingar í hesum sambandi.

Við telduposti, dagfestur tann 14. januar 2008, boðar Kommunusamskipan Føroya Runavíkar kommunu frá, at vísandi til § 13, stk. 1, nr. 5 eigur kommunan at nokta innlit, av tí at samráðingar ganga fyri seg enn, og málið tískil ikki er liðugt avgreitt.

Við telduposti, dagfestur tann 15. januar 2008, boðar Runavíkar kommuna A frá, at kommunan, sum fráboðað í telduposti tann 7. januar 2008, hevur valt at arbeiða víðari við tilboðnum frá F. Enn hevur kommunan ikki valt eitt ávíst tilboð, og kann kommunan tí heldur ikki svara spurningunum frá A.

Tann 22. januar 2008 var fundur millum Runavíkar kommunu og A. Til umrøðu var KT-tilboð til Runavíkar skúla. Á fundinum varð greitt frá gongdini í málinum, og at støða var tikin til at arbeiða víðari við tilboðnum frá F, sum áður fráboðað. Umboðini frá A hildu ikki, at teir høvdu fingið svar uppá tað, sum teir ynsktu. Runavíkar kommuna segði, at tað ikki var møguligt at geva neyvari svar nú, men at A kundi søkja um innlit, tá ið málið var avgreitt.

Við skrivi, dagfest 4. februar 2008, biður A aftur um innlit í tilboðsupphæddir og dygd á vørum hjá einstøku veitarunum, og metingar í hesum sambandi.

Við skrivi, dagfest tann 11. februar 2008, boðar Runavíkar kommunu A frá, at kommunan hevur móttikið umbøn um innlit.

Við telduposti, dagfestur tann 18. februar 2008, spyr Runavíkar kommuna seg fyri hjá Kommunusamskipan Føroya viðvíkjandi innlitsspurninginum frá A. Kommunusamskipanin svarar sama dag við telduposti.

Við skrivi, dagfest 18. februar 2008, boðar Runavíkar kommuna A frá, at umbønin um skjalainnlit ikki verður gingin á møti vísandi til § 13, stk. 1, nr. 5 í innlitslógini, tí samráðingar eru enn í gongd. Runavíkar kommuna vendir aftur til A, tá ið samráðingarnar við F eru endaliga lidnar.

Av notati, dagfest 18. februar 2008, frá Gerðabókini hjá Runavíkar kommunu sæst, at Mentanarnevndin á fundi hendan dagin hevur samtykt at halda fast við viðtøkuna frá seinasta fundi, at taka av tilboði frá F. Av kommununar innanhýsis notati, dagfest tann 18. februar 2008 sæst, at sáttmálin nú er tillagaður, og klárur til undirskrivingar. Tilboðsupphædd og góðska eru óbroytt. Avtala er gjørd um 12. stk. eyka battarí til farteldur og eina skipan til kvotuprent til brúkarar, hetta er uttan meirkostnað. Út yvir vanliga trygd er eisini gjørd lutvís viðlíkahaldsavtala fyri eitt ár, og er hetta eisini uttan meirkostnað.

Tann 22. februar 2008 sendi Runavíkar kommuna teldupost til F, har boðað varð frá, at politikarar endaliga høvdu tikið støðu til taka av KT-tilboðnum frá F. Uppstartsfundur varð avtalaður 25. februar kl. 14.30 á Setrinum. Tann 25. februar 2008 varð avtalan um veitan av telduútgerð ímillum Runavíkar kommunu og F undirskrivað.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 26. februar 2008, varð klagan send Runavíkar kommunu til

ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur. Kommunan varð eisini biðin um at greiða umboðsmanninum frá, hví kommunan ikki hevði svarað A uppá spurningarnar settir í skrivi, dagfest 11. januar 2008, og hví kommunan ikki hevði svarað innlitsumbønini, dagfest 4. februar 2008. Samstundis varð Runavíkar kommuna biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Av tí at A ynskti at víðka klagu sína til eisini at fevna um innlitsmálið, sendi umboðsmaðurin, tann 28. februar 2008, Runavíkar kommunu skriv, har biðið var um frágreiðing um sjálvt innlitsmálið.

Tann 17. mars 2008 sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> „Viðvíkjandi: Klagu frá A.
>
> Víst verður til skriv tygara 26. og 28. februar, har kommunan verður biðin um at geva frágreiðing í málinum, har A kærir kommununa fyri ikki at hava fingið innlit og fyri ikki at verða blivið partshoyrt í málinum, har kommunan hevur valt at fara víðari við samráðingunum við F.
>
> Uttan mun til, um talan er um fyrisitingarliga avgerð ella ikki, so hevur Runavíkar kommuna í hesum máli ongantíð ætlað annað enn at geva teimum tilboðsgevum, sum ikki fingu sáttmálan, eina nøktandi grundgeving fyri avgerðini.
>
> At Runavíkar kommunan er farin víðari at sámráðast við F merkir ikki uttan víðari, at F fer at fáa sáttmálan. Meir enn so kann henda, at samráðingarnar ikki koma mál, hóast kommunan hevur valt at fara eitt stig víðari við hesum eina partinum.
>
> Tá samráðingarnar ikki vóru endaðar, metti kommunan seg hava ein rímiligan áhuga í at halda øllum málinum aftur frá innliti, heilt til ein endalig niðurstøða var fingin í málinum. Hetta er eisini tann støða, ið kommunan fyrr hevur kunnað A um, seinast við skrivi 18. februar 2008, hóast kommunan skal viðganga, at

svarið kundi havt betri frágreiðing um, hví kommunan í hesi fasuni ikki kundi geva innlit.

Svarið hjá kommununi skal tískil skiljast sum eitt svar og støðutakan til umsókn um innlit, meðan samráðingar enn ganga fyri seg. Hesa støðu metir kommunan vera fult sambæriliga við ta praksis, sum er eftir § 13, stk. 1, nr. 5, í lógini um alment innlit og tilsvarandi § 15, stk. 1, nr. 5, í fyrisitingarlógini. Praksis eftir hesum greinum verjir líknandi áhugamál, sum kommunustýrið eftir § 26, stk. 1, í kommunustýrislógini kann velja at viðgera fyri afturlatnum hurðum – júst slík mál sum hetta.

Kommunan skilir ikki klaguna um partshoyring. Sum umboðsmaðurin sjálvur sigur, so er ikki talan um eitt fyrisitingarrættarligt mál, og tí er kommunan ikki pliktað til at partshoyra, hóast hon sjálvandi skal halda seg til góðan fyrisitingarrættarligan sið. Kommunan dugir annars ikki at skilja, hvussu reglurnar um partshoyring skula kunna vera viðkomandi í hesum máli, tí ongi týðandi faktisk viðurskifti eru ógreið í hesum máli, eins og partshoyring ikki gevur meining og bara vil undirgrava samráðingarprosessina fram móti eini avgerð í málinum.

Til spurningin um, hví kommunan ikki hevur svarað A uppá spurningar 11. januar 2008 og innlitsumbøn 4. februar 2008 er at siga, at kommunan hevur svarað A bæði við telduposti 15/01-2008, á fundi millum kommununa og A 22/01-2008 og við skrivi df. 18/02-2008, tó at svarið til A kundi havt betri frágreiðing og at A kanska ikki hevur fingið svar rættstundis.

- Í telduskrivi 7. januar og 15. januar hevur kommunan boðað A frá, at kommunan ikki kann ganga umsókn teirra um innlit á møti. Sagt varð frá, at arbeitt varð við tilboðnum frá F, men avgerð var ikki tikin um tilboðið og at kommunan tí ikki kundi svara spurningunum frá A.
- Á fundi millum kommununa og A sum varð hildin á býráðsskrivstovuni 22/01-2008 um spurningarnar frá A varð greitt frá gongdini í málinum og var víst til, at av tí at

samráðingarnar við F ikki vóru endaðar kundi kommunan ikki svara fyrispurningi teirra um innlit. Umboðini fyri A vóru ikki samd í niðurstøðuni hjá kommunalu umboðunum um at nokta innlit og hildu ikki at teir høvdu fingið svar uppá tað sum teir ynsktu. Sama dag sum fundurin hevði verið, sendir A skriv til kommununa við somu spurningum sum fundurin fyrr um dagin snúði seg um.

- Skrivið frá A df. 4. febr. 2008 við umbøn um skjalainnlit og partshoyring hevur kommunan svarað við skrivi df. 18. febr. 2008, har sagt verður, at kommunan vil venda aftur til A tá samráðingarnar við F eru endaliga lidnar.

Samráðingarnar við F eru nú lidnar og endaligur sáttmáli gjørdur, og kann A nú fáa innlit í málið.

Aftaná páskir fer kommunan at seta seg í samband við A at avtala nærri um hetta.

Avrit av hesum skrivi hava vit sent A.“

Við skrivi, dagfest 10. apríl 2008, vórðu viðmerkingarnar hjá Runavíkar kommunu sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Av tí at umboðsmaðurin einki frætti aftur frá klagaranum, varð, tann 7. mai 2008, boðað frá, at málið varð tikið upp til endaliga viðgerð.

Tann 4. juli 2008 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at nógv mál høvdu verið at avgreitt hjá umboðsmanninum, hevði tað tíverri ikki eydnast umboðsmanninum at avgreiða hetta málið enn. Umboðsmaðurin roknaði tó við, at viðgerðin av hesum máli varð liðug í september 2008.

Undir viðgerðini av málinum kom umboðsmaðurin fram á, at Runavíkar kommuna ikki hevði sent umboðsmanninum øll skjølini í hesum málinum, hóast umboðsmaðurin hevði biðið um tað. Við

skrivi, dagfest 6. august 2008, bað umboðsmaðurin tí Runavíkar kommunu um at senda sær øll skjølini í málinum.

Tann 2. september 2008 sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum øll skjølini í málinum. Umboðsmaðurin helt síðani fram við viðgerð síni av málinum.

## *Niðurstøða*

*Klagan snýr seg um málsviðgerð og innlit í eitt mál hjá Runavíkar kommunu um keyp av telduútgerð.*

*Sambært § 2, stk. 1 í fyrisitingarlógini er lógin galdandi fyri viðgerðina av málum, har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð. Í § 2 verður skilt ímillum avgerðir og mál um gerð av sáttmálum ella líknandi eginrættarligum gerðum (privatrættarligum dispositiónum). Tað eru bert reglurnar um ógegni í kap. 2 og tagnarskyldu v.m. í kap. 8 í fyrisitingarlógini, sum eru galdandi fyri viðgerðina av málum viðvíkjandi eginrættarligum gerðum, jb. § 2, stk. 2 og stk. 3. Eginrættarligar gerðir fella uttanfyri avgerðarhugtakið sambært fyrisitingarlógini. Eftir mínari meting er tað, at kommunan velur eitt tilboð uppá telduútgerð fram um eitt annað ein eginrættarlig gerð hjá Runavíkar kommunu, og er hetta tí ikki ein avgerð, ið er fevnd av fyrisitingarlógini.*

*A klagar um, at virkið ikki er partshoyrt og ikki hevur fingið partsinnlit í málið. Av tí at fyrisitingarlógin í síni heild ikki er galdandi í hesum máli, eru reglurnar um partsinnlit og partshoyring heldur ikki galdandi.*

*Hóast hetta eru reglurnar í innlitslógini galdandi. Hetta av tí, at innlitslógin fevnir um alt virksemið hjá almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, jb. § 1, stk. 1 í innlitslógini.*

*§ 13, stk. 1, nr. 5 í innlitslógini er soljóðandi:*

> *„**§ 13.** Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi:*
> …

*5) fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, herundir fremjing av vinnuvirksemi tess almenna …*

*Stk. 2. Um umstøður, sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum."*

*Um bakgrundina fyri hesari grein stendur m.a. soleiðis í „Offentligheds-loven med kommentar af John Vogter", 3. útgáva, bls. 244:*

> *„Hvor staten og kommunerne udøver forretningsmæssig eller anden økonomisk virksomhed, medfører hensyn til det offentliges økonomi og navnlig dets stilling som part i kontraktsforhold, at der må gives sådan virksomhed en vis beskyttelse mod offentlighed. Man har ikke ment at burde begrænse bestemmelsen … til alene at omfatte forretningsvirksomhed. Det må således være en vis begrænsning af offentlighedsprincippet, f.eks. med hensyn til afgivne tilbud, køb og salg af fast ejendom og løsøre til brug for de almindelige forvaltningsmyndigheder, optagelse af lån m.v. Også med hensyn til dokumenter vedrørende forhandlinger, som det offentlige fører om løn- og personaleforhold m.v., må offentlighedsprincippet undergives begrænsninger."*

*Eg eri samd við Runavíkar kommunu í, at skjøl og upplýsingar um tilboðsupphæddir og dygd á vørum er fevnt av § 13, stk. 1, nr. 5 í innlitslógini, og at Runavíkar kommuna tí ikki hevði skyldu til at geva innlit í tilfarið, áðrenn málið var liðugt avgreitt tann 25. februar 2008. Eftir at hava lisið skjølini í málinum, dugi eg heldur ikki at síggja, at Runavíkar kommuna, áðrenn málið var avgreitt, hevði skyldu til at geva innlit í partar av teimum skjølum ella upplýsingum, ið A bað um innlit í, jb. § 13, stk. 2 í innlitslógini.*

*A førir fram, at Runavíkar kommuna ikki hevur svarað virkinum uppá settar fyrispurningar, herundir umbøn um innlit. Sambært § 16 í innlitslógini skal ein myndugleiki sum skjótast gera av, um ein áheitan um innlit kann verða gingin á møti. Verður umbøn um innlit ikki gingin á møti innan 10 dagar, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.*

*Av skjølum í málinum sæst, at Runavíkar kommuna hevur svarað A uppá innlitsumbøn, dagfest 11. januar 2008, við telduposti 15. januar 2008. Hetta er í tráð við tíðarfreistina í § 16, stk. 2 í innlitslógini. Tá ið A aftur søkir um innlit í sama mál, tann 4. februar 2008, svarar Runavíkar kommuna A við skrivi tann 18. februar 2008. Í hesum førinum heldur Runavíkar kommuna seg ikki til svarfreistina í innlitslógini, men av tí at A fyrr hevur fingið svar frá kommununi um, at innlit ikki verður givið í umbidnu skjøl og upplýsingar, havi eg ikki viðmerkingar til hetta.*

*Umframt innlitsspurningin klagar A um, at avgerðin um at velja annað tilboð enn teirra ikki var saklig. Hóast tað, at fyrisitingarlógin í síni heild ikki er galdandi viðvíkjandi eginrættarligum gerðum, hava almennir myndugleikar skyldu til at halda seg til góðan fyrisitingarsið í sínum virksemi. Tað vil m.a. siga, at málsviðgerðin skal vera saklig og málsviðgerðartíðin rímilig.*

*Eg kann bert í avmarkaðan mun taka støðu til avgerðir, sum heilt ella partvíst byggja á serligan fakkunnleika. Ein kanning av metingunum hjá Runavíkar kommunu í hesum máli, krevur ein fakkunnleika, sum eg sum umboðsmaður ikki havi. Í viðgerð mínari av hesum máli, havi eg tí avmarkað meg til at viðgera løgfrøðiligu spurningarnar í málinum, sum t.d. um málið er nóg væl upplýst, og um allir týðandi upplýsingar eru tiknir við. Eg havi lisið øll skjølini í málinum, og dugi ikki at síggja annað enn, at málið er viðgjørt á sakligan hátt frá kommununar síðu.*

*Eg haldi tí ikki grundarlag vera fyri at gera meira við hetta málið.*

# *24. Heilsu-, Uttanríkis- og Verjumál*

## 24.1 Viðurskifti hjá sjúklingi á Psykiatriska Deplinum

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eitt mál um viðurskiftini hjá einum sjúklingi, ið var tvingsilsinnlagdur á reyð pappír á stongda deild á Landssjúkrahúsinum.*

*Av tí at talan er um eitt mál við viðkvomum persónsupplýsingum, verður bert ein samandráttur av niðurstøðuni í álitinum almannakunngjørdur á heimasíðu umboðsmansins.*

*Sambært § 6, stk. 5 í umboðsmanslógini kann umboðsmaðurin sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja kanningar í hesum sambandi. Umboðsmaðurin avmarkaði seg í viðgerð síni til viðurskiftini viðvíkjandi tvingsilsinnleggjanini av sjúklinginum. Bæði avgerð um tvingsilsinnleggjan, og avgerð um, at ein sjúklingur ikki longur er tvingsilsinnlagdur, eru avgerðir, ið eru fevndar av fyrisitingarættinum.*

*Ein tilsýnsverji varð tilnevndur til sjúklingin. Sambært tilnevningini frá Skiftirættinum skuldi tilsýnsverjin halda seg kunnaðan um støðuna hjá sjúklinginum og syrgja fyri, at uppihaldið á sjúkrahúsinum ikki varð longri enn neyðugt. Uppgávan hjá einum tilsýnsverja heldur uppat, tá ið tvingsilsinnleggjanin endar. Í tilfarinum í málinum var ikki noterað, nær tvingsilsinnleggjanin helt uppat.*

*Sambært víðkaðu notatskylduni, hevur ein myndugleiki skyldu til at skriva upp innihaldið á øllum upplýsingum, sum hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina. Hetta er ein fortreyt fyri einum munadyggum eftirliti við, at myndugleikin hevur borið seg rætt at, og at málsviðgerðin er farin rætt fram. Ein tvingsilsinnleggjan er sera inntrívandi í rættindini hjá einum menniskja. Tað er tí neyðugt fyri*

*rættartrygdina hjá tí einstaka sjúklinginum, at tað verður skrivað upp í journal, nær tvingslið byrjar og endar. Harumframt er tað neyðugt, at lækni skrivar upp, nær sjúklingurin er kunnaður um, at hann ikki longur er tvingsilsinnlagdur, og hvat hetta inniber, og nær tilsýnsverjin er kunnaður um, at uppgáva hansara er endað, av tí at sjúklingurin ikki longur er tvingsilsinnlagdur.*

*Umboðsmaðurin helt tað vera atfinningarsamt, at hetta ikki var gjørt, og gav tí Landssjúkrahúsinum eina átalu fyri hetta.*

*Umboðsmaðurin vísti á, at skal tilsýnsverjin hava møguleika til at røkja sína uppgávu, má verjin hava atgongd til sjúklingin, meðan sjúklingurin er tvingsilsinnlagdur. Um verjin ikki sær sjúklingin og umstøður hansara, hevur verjin ikki møguleika fyri at røkja sína uppgávu.*

*Burtursæð frá givnu átalu, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við hetta málið.* ***(200700078)***

Álitið er ikki tikið við í hesa ársfrágreiðing.

# *25. Persóns-, Familju- og Arvamál*

## 25.1 Serlæknaváttan frá Landssjúkrahúsinum

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um málsviðgerðartíð í sambandi við eina serlæknaváttan frá Landssjúkrahúsinum.*

*Føroya Rættur sendi eitt skriv við umbøn um serlæknaváttan til Landssjúkrahúsið tann 23. februar 2007. Síðani varð rykt eftir svari tvær ferðir. Landssjúkrahúsið svaraði Føroya Rætti tann 11. mars 2008.*

*Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at Landssjúkrahúsið sambært góðum fyrisitingarsiði eigur at syrgja fyri, at áheitanir um serlæknaváttanir, ið eru stílaðar til sjúkrahúsið, verða avgreiddar innan rímiliga tíð. Tað var ikki nøktandi, at myndugleikar og/ella borgarar bíða í meira enn eitt ár, áðrenn ein áheitan um serlæknaváttan verður avgreidd.*

*Harumframt var tað als ikki nøktandi, at Landssjúkrahúsið ikki svaraði Føroya Rætti í nærum eitt ár. Umboðsmaðurin gav Landssjúkrahúsinum eina átalu fyri hetta.*

*Burtursæð frá givnu átalu, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við hetta málið.* ***(J. nr. 200700088)***

## Klagan

Við telduposti, dagfestur 10. oktober 2007, sendi A umboðsmanninum eina klagu um málsviðgerðartíð viðvíkjandi serlæknaváttan hjá Landssjúkrahúsinum í einum máli um myndugleikatøku. Í klaguni greiddi klagarin frá, at klagarin og systkin hennara í januar 2007 vendu sær til advokat, sum seinni sendi umbøn til Føroya Rætt um myndugleikatøku av mammu teirra. Klagarin hevði ikki enn fingið nakra avgerð viðvíkjandi myndugleikatøkuni, av tí at Føroya Rættur bíðaði eftir serlæknaváttan frá Landssjúkrahúsinum.

## Málsgongd

Tann 20. februar 2007 sendi Advokatskrivstovan, vegna klagaran og systkin hennara, umbøn til Føroya Rætt um myndugleikatøku av mammu teirra.

Tann 23. februar 2007 sendi Føroya Rættur umbøn til Landssjúkrahúsið um serlæknaváttan. Føroya Rættur kann ikki taka avgerð um myndugleikatøku, fyrr enn serlæknaváttan fyriliggur.

Tann 29. mai 2007 og tann 27. september 2007 sendi Føroya Rættur rykkjara til Landssjúkrahúsið.

## Partshoyring

Fyri at umboðsmaðurin kundi taka støðu til, um hetta var eitt mál, sum umboðsmaðurin antin kundi ella átti at taka upp til viðgerðar, var klagan send Landssjúkrahúsinum tann 11. oktober 2007. Landssjúkrahúsið varð í hesum sambandi biðið um innan 4 vikur at lata umboðsmanninum eina frágreiðing um, hví Landssjúkrahúsið ikki enn hevði svarað umbønunum frá rættinum.

Av tí at umboðsmaðurin einki frætti frá Landssjúkrahúsinum, varð ein áminning send Landssjúkrahúsinum tann 20. november 2007.

Av tí at umboðsmaðurin einki frætti frá Landssjúkrahúsinum, varð skriv, tann 14. desember 2007, sent Landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum. Biðið varð um, at landsstýrismaðurin tók neyðug stig til, at umbidna frágreiðing varð latin umboðsmanninum.

Tann 18. desember 2007 sendi Landssjúkrahúsið umboðsmanninum viðmerkingar í málinum. Boðað varð frá, at avgreiðslutíðirnar viðvíkjandi serlæknaváttanum vóru langar vegna manglandi serlæknamanning á psykiatriska økinum. Hetta harmaðist Landssjúkrahúsið um.

Tann 20. desember 2007 bað umboðsmaðurin Landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum um at síggja burtur frá skrivi umboðsmansins, dagfest 14. desember 2007, av tí at svar nú var komið frá Landssjúkrahúsinum.

Tann 22. januar 2008 var umboðsmaðurin á fundi við Landssjúkrahúsið um m.a. hetta mál. Á fundinum upplýstu læknastjórin og depilsleiðarin á psykiatriska deplinum, at trupulleikin var, at Landssjúkrahúsið ikki hevur arbeiðsorku til at skriva út læknaváttanir. Tað er sera trupult at fáa hjálp til hetta uttanífrá, av tí at tað er nærum ógjørligt at fáa ein psykiatara til hesa uppgávu. Sum nú er arbeiðir bert ein psykiatari á psykiatriska deplinum. Tá ið so lítil arbeiðsorka er, hevur Landssjúkrahúsið raðfest innløgdu sjúklingarnar á Landssjúkrahúsinum hægri enn at skriva út læknaváttanir.

Í telefonsamrøðu, dagfest 25. januar 2008, segði leiðandi yvirlæknin á Psykiatriska Deplinum, at hann hevði roynt at fingið í lag eina samrøðu við sjúklingin, men tað var trupult, av tí at nøkur av teimum avvarðandi ikki vildu hava, at sjúklingurin fekk vitjan av yvirlæknanum.

Tann 25. januar 2008 var fundarfrásøgn send Landssjúkrahúsinum til viðmerkingar. Tann 25. februar 2008 sendi Psykiatriski Depilin á Landssjúkrahúsinum viðmerkingar sínar. Yvirlæknin skrivaði m.a. at ein serlækni í psykiatri er í Føroyum, sum arbeiðir nakað privat, og er fyrrverandi yvirlækni á Psykiatriska Deplinum. Eftirfylgjandi hevur Landssjúkrahúsið gjørt eina avtalu við hendan yvirlæknan um at gera nakrar av serlæknaváttanunum.

Tann 28. februar 2008 sendi umboðsmaðurin skriv til Landssjúkrahúsið, har spurt varð, nær málið fór at verða avgreitt til rættin. Biðið varð um svar innan 14 dagar. Tann 26. mars 2008 sendi umboðsmaðurin áminning í málinum til Landssjúkrahúsið.

Tann 28. mars 2008 sendi psykiatriski depilin á Landssjúkrahúsinum skriv til umboðsmannin har upplýst varð, at serlæknaváttan var send sorinskrivaranum tann 11. mars 2008. Hjálagt skrivinum var serlæknaváttan frá Landssjúkrahúsinum.

Tann 1. apríl 2008 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um málsviðgerðartíðina hjá Landssjúkrahúsinum viðvíkjandi einari umbøn um serlæknaváttan í einum máli um myndugleikatøku.*

*Føroya Rættur sendi eitt skriv við umbøn um serlæknaváttan til Landssjúkrahúsið tann 23. februar 2007. Rykt varð eftir svarið tann 29. mai 2007 og 27. september 2007. Hóast hetta svaraði Landssjúkrahúsið ikki rættinum fyrr enn tann 11. mars 2008. Meira enn eitt ár eftir, at Føroya Rættur sendi sína fyrstu áheitan.*

*Sambært góðum fyrisitingarsiði eigur Landssjúkrahúsið at syrgja fyri, at áheitanir um serlæknaváttanir, ið eru stílaðar til sjúkrahúsið, verða avgreiddar innan rímiliga tíð. Tað er ikki nøktandi, at myndugleikar og/ella borgarar bíða í meira enn eitt ár, áðrenn ein áheitan um serlæknaváttan verður avgreidd.*

*At Landssjúkrahúsið ikki svarar Føroya Rætti í nærum eitt ár, er als ikki nøktandi, og fari eg tí at geva Landssjúkrahúsinum eina átalu fyri hetta.*

*Í hesum málinum sendi eg tvær áminningar, áðrenn svar fekst til vega frá Landssjúkrahúsinum. Seinni sendi eg aftur eina áminning fyri at fáa svar uppá, nær Landssjúkrahúsið fór at avgreiða málið. Sambært § 8, stk. 1 í umboðsmanslógini hevur fyrisitingin skyldu til at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt. Sambært § 7, síðsta punktum í umboðsmanslógini, kann umboðsmaðurin áseta tíðarfreist viðvíkjandi latan av frágreiðing. Tað er ikki nøktandi, at Landssjúkrahúsið ikki sendi umboðsmanninum frágreiðing innan ásettu tíðarfreist.*

*Burtursæð frá givnu átalu, geri eg ikki meira við hetta málið.*

# *28. Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m.*

## 28.1 Uppsøgn av starvsfólkum hjá Strandfaraskipum Landsins –uppafturtøka

*Í áliti frá 26. sept. 2007 mælti umboðsmaðurin Innlendismálaráðnum til at taka kærumálið um uppsagnirnar av starvsfólkum hjá Strandfaraskipum Landsins á Leirvíksfjarðarleiðini uppaftur til viðgerðar. Eftir at hava fingið eina nýggja frágreiðing frá Strandfaraskipum Landsins, hevur ráðið boðað klagarunum frá, at ráðið ikki heldur grundarlag vera fyri at taka málið til nýggja viðgerð.*

*Eftir at hava lisið frágreiðingina ivaðist umboðsmaðurin framvegis í rættleikanum í, at leysu størvini vórðu sett eftir einum sonevndum tignarstiga. Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja, at nøkur ítøkilig meting var gjørd av førleikanum hjá skiparunum / maskinstjórunum í mun til stýrimenninar / maskinmeistararnar. Umboðsmaðurin ivaðist serliga í rættleikanum í teirri eini uppsøgnini og mælti tí ráðnum til at taka hesa uppaftur til viðgerðar einaferð enn. **(J. nr. 200600091)***

## Klagan

Í áliti mínum, dagfest 26. sept. 2007, mælti eg Innlendismálaráðnum til at taka kæruna viðvíkjandi hesum uppsagnunum uppaftur til viðgerðar. Hetta varð gjørt vísandi til ivan, sum eg helt vera um útveljingina og tey nýttu atlitini í sambandi við uppsagnirnar og setanirnar av leysu størvunum.

## Málsgongd

Innlendismálaráðið hevur sent Strandfaraskipum Landsins soljóðandi skriv, dagfest 8. okt. 2007:

> „Á fundi í dag við stjóran á Strandfaraskipum Landsins varð niðurstøðan hjá Løgtingsins Umboðsmanni í málinum um uppsøgn av starvsfólkum á Strandfaraskipum Landsins umrødd.

Niðurstøðan varð, at Strandfarskip Landsins skuldi gera viðmerkingar til niðurstøðuna hjá umboðsmanninum í síni heild.

Strandfaraskip Landsins verður somuleiðis biðin um at gera viðmerkingar til tað, sum umboðsmaðurin førir fram um, at tað tykir henni ivasamt, hvørt tað var rætt, tá leysu størvini vóru boðin skiparum/maskinstjórum framum stýrimonnum/maskinmeistarum."

Við skrivi, dagfest 29. jan. 2008, hava Strandfaraskip Landsins svarað Innlendismálaráðnum soleiðis:

**„Viðv. Leirvíksfjarðaleiðini**
Eg skal vísa til bræv tygara, dagfest, 8. oktober 2007.

Innleiðandi skal eg vísa á, at eg meti, at mannagongdirnar í sambandi við uppsøgnirnar í sambandi við niðurlegging av Leirvíksfjarðarleiðini hava lokið tær fyrisitingarligu ásetingarnar.

Annars havi eg loyvt mær at gera fylgjandi serstakar viðmerkingar til (1) hví júst tey, sum røktu tað niðurløgdu leiðina, vóru uppsøgd, (2) hví avgjørt varð at varðveita og seta starvsfólk eftir tignarstiga og at enda (3) nakrar viðmerkingar um málið sum heild.

**Ad. 1**
Orsakað av niðurlegging av Leirvíksfjarðarleiðini varð sum kunnugt, at 28 ársverk hjá siglandi fólki blivu burtur hjá Strandfaraskipum Landsins.

Ein heildarmeting varð gjørd av siglandi starvsfólkinum av einum arbeiðsbólki, sum varð settur í sambandi við, at Leirvíksfjarðarleiðin varð niðurløgd. Arbeiðsbólkurin varð mannaður av manningarsamskiparanum, starvsfólkaleiðaranum, rakstrarleiðaranum og lønarumsitaranum á Strandfaraskip Landsins.

Tað framgongur av viðlagda uppriti, sum varð gjørt í tí sambandi, at arbeiðsbólkurin kom til ta niðurstøðu, at øll siglandi fólk –

herundir tey starvsfólk sum røktu Leirvíksfjarðarleiðina – høvdu nøktandi førleika og royndir til tær ymisku uppgávurnar.

Meginreglan í sambandi við uppsøgnirnar varð, at starvsfólk, ið røktu Leirvíksfjarðarleiðina, vórðu uppsøgd. Frávik frá meginregluni vóru grundgivin í tí einstaka førinum.

Orsøkin til at hendan meginreglan varð nýtt var í høvuðsheitum, at starvsfólk, sum frammanundan sigldu á øðrum leiðum, høvdu hollan kunnleika og fullan førleika til tað starv, ið tey røktu.

Útgangsstøðið varð tí, at tað ikki vóru sakligar grundgevingar, ið talaðu fyri at siga starvsfólk, ið røktu aðrar leiðir, úr starvi heldur enn tey, sum røktu Leirvíksfjarðarleiðina.

Einstøk undantøk vórðu gjørd, har onnur starvsfólk vórðu søgd úr starvi fyri at geva rúm fyri starvsfólkum, ið vóru rakt av niðurleggingini av Leirvíksfjarðarleiðini. Grundgevingin var, at munur varð á førleikanum, soleiðis at Strandfaraskip Landsins varðveitti starvsfólkini við bestu førleikunum.

Eisini varð tikið atlit til, at starvsfólk, ið røktu aðrar leiðir, høvdu uppbygt sær royndir á teimum leiðum, ið tey røktu. Allar farleiðir eru sjálvandi ikki eins, eins og ferjurnar ikki eru eins. Hóast starvssetanin innanfyri Strandfaraskip Landsins umfatar øll skip, er starvsfólkið vanliga bert tilknýtt eitt ávíst skip.

Tey starvsfólk, ið hava starvast á eini ávísari leið, hava orsakað av royndunum, ið tey hava fingið í starvi sínum, ein betri førleika fyri at røkja júst teirra starv enn eitt starvsfólk við tilsvarandi uppgávum á Leirvíksfjarðarleiðini.

Samanumtikið metti Strandfaraskip Landsins sostatt – í tann mun at talan var um starvsfólk við somu førleikum fyri at røkja eina ávísa uppgávu – at starvsfólk á øðrum leiðum sum útgangsstøðið høvdu betri førleika fyri at røkja teirra starv enn tey starvsfólk, ið røktu Leirvíksfjarðarleiðina.

Tí valdi Strandfaraskip Landsins at siga starvsfólk á Leirvíksleiðini upp framum starvsfólk á øðrum leiðum, um førleikin annars fyri at røkja eina ávísa uppgávu á eini leið varð tann sami.

**Ad. 2**
Í tann mun, at onnur størv vórðu tøk hjá Strandfaraskip Landsins, metti Strandfaraskip Landsins tað vera skynsamast at raðfesta tey leiðandi starvsfólkini, sum vórðu rakt av tí niðurløgdu leiðini.

Við øðrum orðum vórðu starvsfólkini sett eftir einum sonevndum tignarstiga, har skiparar og maskinstjórar vórðu raðfestir ovast.

Høvuðsorsøkin er, at skiparar og maskinstjórar sum leiðandi starvsfólk hjá SL í verki hava prógvað, at tey hava teir arbeiðsligu eginleikar sum krevjast.

SL setir størri krøv við starvsetan av skiparum og maskinstjórum enn til aðrar bólkar. Uttan í heilt serstøkum førum hava hesir vanliga fyrst verið í einum lægri starvi, har SL hevur kunna roynt, um viðkomandi hevur teir eginleikar, sum krevjast til tað hægra starvi. Skipari og maskinstjóri er at meta sum eitt leiðandi starv, sum kann sammetast við eitt deildarleiðarastarv.

Í starvi teirra røkja skiparar og maskinstjórar eisini fyrisitingarligar uppgávur, umframt at skiparar og maskinstjórar hava evstu ábyrgd fyri teirra virkisøki.

Fyrisitingarligar uppgávur verða í minni mun røktar av stýrimonnum og maskinmonnum, eins og ábyrgdin fyri virkisøki teirra sum útgangsstøðið ikki áliggur teimum, men á ávikavist skiparanum ella maskinstjóranum.

Grundgevingin fyri at nýta tignarstiga í sambandi við setan av starvsfólkum, ið vóru rakt av niðurleggingini av Leirvíksfjarðarleiðini, var tann sama sum í sambandi við uppsøgn av teimum, ið røktu hesa leiðina.

Strandfaraskip Landsins ynskti at varðveita tey starvsfólk, ið Strandfaraskip Landsins metti høvdu besta førleika og eginleikar fyri at røkja tær uppgávur, ið framhaldandi eru á eftirverandi fjarðaleiðum hjá Strandfaraskip Landsins.

**Ad. 3**
Sum nevnt omanfyri varð meginreglan í sambandi við uppsøgnirnar, at starvsfólk, ið røktu Leirvíksfjarðarleiðina, vórðu uppsøgd. Frávik frá meginregluni vóru grundgivin í tí einstaka førinum.

Gjøgnumgangandi hevur tað í sambandi við uppsagnir og setanir av starvsfólkum sum avleiðing av niðurleggingini av Leirvíksfjarðarleiðini verði lagdur dentur á førleika og arbeiðseginleikar hjá tí siglandi fólkinum hjá Strandfaraskipum Landsins.

Arbeiðsførleikar og -eginleikar eru saklig atlit í slíkum førum, og verður tað eisini umrøtt av umboðsmanninum í viðgerðini av málinum.

Strandfaraskip Landsins hevur í tí sambandi lagt seg eftir at varðveita starvsfólk við bestu førleikunum og arbeiðseginleikunum fyri at røkja tær uppgávur, ið eru á teimum leiðum, sum framhaldandi skulu røkjast av Strandfaraskipum Landsins.

Strandfaraskip Landsins hevur í teimum einstøku uppsøgnunum gjørt eina ítøkiliga meting av umstøðunum, eins og møguligar viðmerkingar frá viðkomandi eru tiknar við í metingina, áðrenn endalig støða hevur verið tikin.

At enda skal verða upplýst, at niðurleggingin viðførdi, at 21 fólk skuldi uppsigast. Av hesum valdu 4 sjálvi at siga seg úr starvi í uppsagnartíðini. Í uppsagnartíðini hava verið onnur leys størv hjá SL, sum tey uppsøgdu hava haft høvi at søkja. 10 av teimum uppsøgdu nýttu hendan møguleika, og hava fingið annað starv hjá SL, og fóru sostatt ongantíð úr fyritøkuni. Tey 7 eftirverandi hava ikki søkt starv aftur hjá SL, og eru tí farin frá SL."

Við skrivi, dagfest 5. mars 2008, hevur Løgmálaráðið sent umboðsmanninum soljóðandi fráboðan:

> „Soljóðandi skriv er í dag sent hiðani til Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Starvsmannafelagið og Maskinmeistarafelagið, Jekaragøta 10, 100 Tórshavn:
>
> „Viðvíkjandi uppsagnum av limum tykkara, sum starvaðust hjá Strandfaraskip Landsins á Leirvíksleiðini.
>
> Løgmálaráðið skal við hesum boða frá, at ráðið tann 29. januar 2008 hevur fingið svar frá Strandfaraskip Landsins í nevnda máli. Avrit av svarinum verður hjálagt.
>
> Løgmálaráðið tekur svarið til eftirtektar og metir ikki, at tað er grundarlag fyri at taka málið aftur til nýggja viðgerð.
>
> Avrit av hesum skrivi er sent Løgtingsins umboðsmanni.
> + skjal“
>
> Sagt verður frá hesum.
>
> Skrivið frá Strandfaraskip Landsins, dagfest 29. januar 2008, er hjálagt.“

## *Niðurstøða*

*Í framhaldi av fyrra áliti mínum hevur Innlendismálaráðið biðið Strandfaraskip Landsins um eina frágreiðing um uppsagnirnar og tey nýttu atlitini í sambandi við setan av leysu størvunum.*

*Eftir at hava lisið hesa frágreiðingina loyvi eg mær framvegis at ivast í rættleikanum, tá Strandfaraskip Landsins valdu at seta leysu størvini eftir einum sonevndum tignarstiga, soleiðis at uppsagnarhóttu skipararnir og maskinstjórarnir fingu tilluta hesi størvini framum stýrimenn og maskinmeistarar.*

*Strandfaraskip Landsins greiðir í skrivinum frá, at høvuðsorsøkin var*

*tann, at hesi leiðandi starvsfólk í verki hava prógvað, at tey hava teir arbeiðsligu eginleikarnar, sum krevjast.*

*Hetta sigur bert, at leiðandi starvsfólkini vóru nóg væl kvalifiseraði, men sigur hinvegin einki um, hvørt tey vóru betri kvalifiseraði til tey leysu stýrimans- og maskinmeistarastørvini, enn teir uppsøgdu stýrimenninir og maskinmeistararnir.*

*Strandfaraskip Landsins greiðir eisini frá, at størri krøv verða sett við setan av skiparum og maskinstjórum enn til aðrar starvsbólkar. Einki framgongur av skrivinum um, hvørji størri krøv talan er um, ella á hvønn hátt hesi krøv gera umrøddu skiparar og maskinstjórar betri førar fyri at røkja leysu stýrimans- og maksinmeistarastørvini, enn teir uppsøgdu.*

*Eins og umrøtt í fyrra áliti mínum, hevur myndugleikin í sambandi við slíkar uppsagnir skyldu til at siga teimum úr starvi, sum myndugleikin best kann vera fyri uttan, sæð í mun til tær uppgávur, sum myndugleikin framyvir skal røkja. Leysu størvini skulu á sama hátt, mannast við teimum starvsfólkum, sum hava bestu førleikarnar til at røkja hesi.*

*Um so var, at tignin í leiðandi størvunum gav betri førleika at røkja leysu stýrimans- og maskinmeistarastørvini, átti heldur ikki at verið neyðugt at nýtt tignarstigan. Eg dugi ikki at síggja, at nøkur ítøkilig meting er gjørd av førleikanum hjá skiparunum / maskinstjórunum í mun til stýrimenninar / maskinmeistararnar. Skjalatilfarið í málinum gevur tvørtur ímóti ta fatan, at leiðandi starvsfólkini hava verið sjálvskrivaði til leysu størvini framum hini.*

*Eg haldi framvegis ikki, at Strandfaraskip Landsins ella Løgmálaráðið við sínum frágreiðingum hava kunnað sannført meg um rættleikan í uppsøgnini av J. Vísandi til upplýsingarnar í máli hansara, ið eisini koma til sjóndar í nýggju klagu hansara til umboðsmannin, dagfest 12. mai 2008, fari eg at mæla Løgmáláráðnum til at taka hesa uppsøgnina uppaftur til viðgerðar einaferð enn. Eg fari samstundis at biðja ráðið lata meg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kemur til hesum viðvíkjandi.*

Innlendismálaráðið (áður Løgmálaráðið) hevur uppá fyrispurning í skrivi, dagfest 15/9-08, boðað umboðsmanninum frá, at ráðið fór at biðja Stransfaraskip Landsins um at taka málið upp aftur. Ráðið hevur somuleiðis uppá fyrispurning í skrivi, dagf. 17/2-09, boðað umboðsmanninum frá, at málið er tikið uppaftur, men at viðgerðin ikki er liðug enn.

## 28.2 Starvssetan við Sørvágs skúla

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um starvssetan við Sørvágs skúla. Klagan snúði seg um, at klagarin metti seg vera best skikkaða umsøkjaran til øll trý leysu størvini, og tí átti at verið sett í starv. Umboðsmaðurin metti, at starvssetanin av teimum settu lærarunum bygdi á lóglig, saklig og viðkomandi atlit. Umboðsmaðurin undraðist tó á, at klagarin ikki varð innstillað til 2 av størvunum. Sambært § 23, stk, 2 í fyrisitingarlógini skal ein grundgeving um neyðugt hava eina stutta frágreiðing um veruligu umstøðurnar, sum hava týdning fyri avgerðina.Havandi í huga, at klagarin hevði undirvíst á skúlanum, og at skúlastjórin bert tveir mánaðir framman undan hesi starvssetan hevði givið klagaranum sítt besta viðmæli, hevði setanarmyndugleikin eina serliga skyldu til at geva henni eina neyvari grundgeving fyri, hví hon ikki varð innstillað ella sett í starv. Umboðsmaðurin gav setanarmyndugleikanum eina átalu fyri ikki at hava givið klagaranum eina nøktandi grundgeving. Burtursæð frá givnu átaluni gjørdi Umboðsmaðurin ikki meira við málið. (**J. nr. 200800040**)*

## Klagan

Við skrivi, dagfest 1. mai 2008, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> **„Kæra um starvssetan við Sørvágs skúla skúlaárið 2007/2008**
> Fyri at fáa eina óhefta og objektiva niðurstøðu av kæruni, vil eg her við heita á Løgtingsins umboðsmann at kanna hjálagda kærumál, ið er viðgjørt av umsitingini hjá Landstýriskvinnuni í mentamálum.
>
> Eg eri ikki sannførd um, at avgerð Mentamálaráðsins er røtt.
>
> **Kanst tú vinarliga kanna, um eg havi rætt í, at eg átti at verið sett í eitt av føstu størvunum.**
>
> Skúlastjórin er einsamallur setanarmyndugleiki, og settur í starv av Mentamálaráðnum.
>
> Er tað í lagi, at Mentamálaráðið, sum er kærumyndugleiki, ikki

fylgir § 35, stk. 2 í fólkaskúlalógini, men ger sær sínar egnu siðvenjingarligu mannagongdir, ið ganga beint ímóti ásetingunum í fólkaskúlalógini? Siðvenja Mentamálaráðsins hevur sambært teirra egnu útsøgn verið, at tey í nógv ár hava verið samd um at fyribilsseta lærara við danskari útbúgving í fast fyribils starv, fyri síðan at seta hann í fast starv eftir lokna roynd í føroyskum.

**Best skikkaði umsøkjarin varð ikki settur í fast starv.**
Eg meti meg hava skjalprógvað, at eg eri best skikkaði umsøkjarin. Eg havi tríggjar útbúgvingar við góðum støðumetum og bestu viðmælum frá m.a. setanarmyndugleikanum sjálvum. Harumframt havi eg undirvísingar og pedagogiskar starvsroyndir sum útbúgvin lærari síðan 1985.“

## Málsgongd

Lýsingin eftir lærarum til umrøddu størvini var soljóðandi:

**„Lærarastørv í Sørvágs skúla**
Søkt verður eftir 2 lærarum í fast starv og 1 lærara í tíðaravmarkað starv at lesa avlopstímar skúlaárið 2007/08. Endaliga tímatalið hjá síðstnevnda verður ikki greitt fyrr enn 1. september 2007.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum F.L. og FMR í lønarflokkunum 18.1–27.4

Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær:
flokslærarauppgávu
dreingjaítrótt
enskt og smíð í framhaldsdeildini
náttúru/tøkni og støddfrøði í 1.-7. fl.
tímar í serligum tørvi

**Førleikakrøv:**
Lærarautbúgving. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum. Tó kunnu lærarallesandi, ið lúka prógv í summar eisini søkja størvini.

**Umsóknir** við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi 21. juni 2007 á middegi.

Nærri fæst at vita um størvini frá B, skúlastjóra á tlf. …
**Sørvágs skúli** hevur umleið 150 næmingar í 1.-10. fl. og koma 16 lærarar at starvast í skúlanum komandi skúlaár."

Við skrivi, dagfest 14. juni 2007, sendi klagarin soljóðandi umsókn:

„**Starvsumsókn**
Vísandi til lýsing í bløðunum, vil eg hervið søkja starv í Sørvágs skúla.

Hjáløgd eru avrit av c.v., prógvum og ummælum."

Millum ummælini, sum víst verður til í umsókninni, eru tvey, sum eru undirskrivaði av skúlastjóranum, dagfest ávikavist 5. mai 1992 og 18. apríl 2007, og eru tey soljóðandi:

„**Viðmæli**
A, f. …, arbeiddi sum royndarsettur lærari í Sørvágs skúla skúlaárini 1985/86 og 1986/87.

A sýndi seg sum íðin og dugandi lærari. Hon vísti gott hegni í lærarastarvinum og dugdi at skapa sær virðing millum næmingar og lærarar.

A kendi sína ábyrgd fyri skúlanum sum heild og vísti tað í góðum samstarvi við hinar lærarar skúlans.

Skúlin kann tí geva henni sítt besta viðmæli."

„**Viðmæli**
A, f. …, hevur starvast sum royndarsettur lærari í Sørvágs skúla skúlaárini 1985/86 og 1986/87. Hesi bæði árini var hon flokslærari í 1. og 2. flokki, har hon undirvísti í føroyskum. Í framhaldsdeildini undirvísti hon í týskum og donskum.

Aðrar lærugreinir hon undirvísti í vóru evning, handarbeiði og kristni.

Skúlaárið 2005/2006 starvaðist A sum fyribils sáttmálasettur lærari í Sørvágs skúla við niðursettum tímatali. Hetta árið tók hon sær sera nógv av næmingum, ið høvdu serligan tørv fyri neyðini.

A hevur sýnt gott hegni sum lærari. Hon møtti stundisliga, og við siðiligu og róligu medferð síni dugdi hon at skapa sær virðing millum næmingar og starvsfelagar.

A hevur í stuttum røkt sína uppgávu sum lærari til lítar.

Undirritaði gevur henni tí sítt besta viðmæli."

Millum skjølini liggja notat frá setunarsamrøðunum saman við metingum av umsøkjarunum, og hava allir liminir í setanarbólkinum givið stig fyri sínar eygleiðingar av samrøðuni av teimum umsøkjarunum, sum komu uppá tal til størvini.

Við skrivi, dagfest 22. juni 2007, hevur skúlastjórin svarað umsóknini soleiðis:

„Skúlin takkar fyri umsókn tygara til størvini sum lærari í Sørvágs skúla og sigur samstundis frá, at settir eru aðrir umsøkjarar í størvini.

Tey, ið sett eru í størvini sum lærarar, hava umframt at lúka førleikakrøvini, royndir sum lærarar í fólkaskúlanum. Harumframt hava tey settu undirvíst í teim lærugreinum, sum dentur var lagdur á, og sum gera, at tey, út frá einum heildarsjónarmiði, eru best egnaði til hesi størvini.

Skúlin takkar fyri, at tygum hava sýnt áhuga fyri størvunum. Henda avgerð kann kærast til landsstýrismannin í mentamálum."

A hevur sent skúlastjóranum soljóðandi skriv, dagfest 22. juni 2007:

„**Viðvíkjandi starvssetanum skúlaárið 2007/2008**
Vísandi til starvslýsingina í fjølmiðlunum eftir lærarum til Sørvágs skúla, vil eg her við biðja um eina grundgeving fyri, at eg ikki varð sett í starv."

Við skrivi, dagfest 26. juni 2007, hevur A sent Mentamálaráðnum soljóðandi kæru:

„**Kæra um starvssetan við Sørvágs skúla skúlaárið 2007/2008**
Sambært §59 í fólkaskúlalógini vil eg hervið kæra lærarastarvssetanina hjá skúlamyndugleikanum í Sørvágs skúla 22-06-2007:

1. Ein persónur við danskari læraraútbúgving frá 2007, varð settur í **fast starv**. Ósannlíkt er, at viðkomandi hevur staðið eina serliga roynd í føroyskum, ið sambært §35 stk. 2 í fólkaskúlalógini, er ein treyt fyri fastari setan sum lærari.
2. Starvssetanin varð ikki eftir førleika og starvsroyndum. Lærarar við lítlum starvsroyndum fingu starv, fram um betur útbúnar lærarar við nógvum starvsroyndum.

Til starvssamrøðuna vísti stjórin mær tímabýtið fyri komandi ár. Tímarnir vórðu býttir út til: Vikar 1, 2 og 3. Brúk varð fyri lærara at undirvísa í:

Føroyskum í 3. flokki.
Eg havi uml. 20 ára starvsroyndir í hesum.
Enskum í 7. og 9. flokki.
Uml 10 -15 ára starvsroyndir
Undirvísti hesum 7. flokki í enskum skúlaárið 2005/2006
Málskeið í …
„Refreshercourse in English Language and Teacher Training" á University of …

Smíð í 9. flokki.
Hevði smíð sum grundlærugrein á Føroya Læraraskúla.
Tvey ára starvsroyndir.

Evning.
Uml 13-15 ára starvsroyndir innan P-faksskipanina
Hevði handarbeiði sum linjulærugrein á Føroya Læraraskúla við endapróvtalinum 13.
Undirvíst í handarbeiði á kvøldskúla í tvey ár í … .
Harumframt verið á ymiskum skeiðum bæði í … og Føroyum.
M.a. leirlist v/H, málningalist v/ I og eisini seymi og veviskeið hjá m.a. J, K, L og fleiri øðrum.

Næming v/ serligum tørvi.
Undirvísti júst hesum næmingi skúlaárið 2005/2006

í 7. flokki
Uml. 6 ára starvsroyndir,

og 9. flokki.
Starvsroyndir skúlaárið 2005/2006 við júst hesum næmingum.

Flokslærarauppgávuni.
Uml. 20 ára starvsroyndir.

Lærugreinir eg havi undirvíst í: fø, da, en, týskt, støddfrøði, kristni, søga, landalæra, lívfrøði, ítrótti, svimjing, evning, smíð, køk, handarbeiði og næmingum v/serligum tørvi.

Skúlastjórin hevur givið mær bestu viðmæli fyri árini, eg havi starvast í Sørvágs skúla.
Í telefonsamrøðu við skúlastjóran 22. juni 2007, segði hann mær, at mín umsókn ikki varð gingin á møti í hesum føri. Men:"Tú kláraði teg væl til setanarsamrøðuna".

Tveir lærarar fara úr starvi í ár. Hesir undirvístu í m.a. týskum

og evning. Eg havi týskt sum linjulærugrein. Einki stóð í starvslýsingini um hesar lærugreinirnar!
…

NB: Eg fekk einki av hesum trimum størvunum í boðið! Lærarin, ið fekk tað tíðaravmarkaða tók ikki av tilboðnum. Annar umsøkjari varð settur í hansara starv. Í alt vóru 7 umsøkjarar.“

Við skrivi, dagfest 20. juli 2007, hevur Sørvágs skúli sent Mentamálaráðnum soljóðandi frágreiðing í sambandi við kæruna:

**„Viðvíkjandi kæru frá A um starvssetan í Sørvágs skúla skúlaárið 2007/08**

**Ummæli og frágreiðing viðvíkjandi kæruni:**
7 umsøkjarar vóru til tey trý størvini, tvey føst størv og eitt fyribils sáttmálasett starv í Sørvágs skúla skúlaárið 2007/08.

Setanarnevndin, M, N, O og B høvdu fund um umsóknirnar hósdagin 21.06.07 kl. 15.00, og seinni um dagin hevði nevndin setanarsamrøður við umsøkjararnar. Tey, sum søkt høvdu vóru: P, D, C, G, A, E og F. Allir umsøkjararnir hava lærarapróg v.

Tímatalvan var liðug, og tí vórðu størvini sett soleiðis upp:

| Starv 1 (fast starv) | Starv 2 (fast starv) | Starv 3 (tíðaravmarkað) |
|---|---|---|
| Fø 3 | En og Kr 7 | Tón og evn 1 |
| Fø 7 | Ít 4/5 dr | Rok 4 |
| Rok 1 | N/T og Kr 6 | En og la 7 |
| En 9 | Evn 5/7 | Sø 6 |
| N/T 5 | Ro 5 | Kr og ser. tørvur í 9 |
| Lí 9 | Stuðul í 2 | |
| Smíð 8/10 | | |
| Ser. tørvur 7 | | |

Aftaná at hava viðgjørt allar umsóknirnar nágreiniliga og havt setanarsamrøðurnar varð henda innstillingin gjørd:

**Starv 1 (fast starv)**
1. C
2. D
3. A

**Starv 2 (fast starv)**
1. D
2. C
3. P

**Starv 3 (tíðaramarkað)**
1. E
2. F
3. G

Skúlastjórin fylgdi innstillingini, nevniliga við at seta C í starv 1, D í starv 2 og E í starv 3.

Umsøkjararnir fingu boð um telefonina morgunin eftir um setanina. Skrivliga fingu teir tað at vita seinni um dagin saman við øllum teirra privatu skjølum.
Morgunin eftir boðaði E frá, at hon hevði tikið av øðrum starvi, og tí setti skúlastjórin í samráð við setanarnevndina F, sum innstillað varð nr. 2 í tíðaravmarkaða starvið.

**Grundgevingar fyri innstilling og setan:**
**C** varð innstillaður og settur í starv 1, av tí at hetta er júst hansara flokkar og lærugreinir, sum hann við sera góðum úrsliti hevur undirvíst í, tey árini hann hevur starvast í Sørvágs skúla. Hann hevur arbeitt sera nógv við barnaskúlanum og kennir hesar næmingar og flokkar, sum hann hevur skapt eitt sera gott læruumhvørvi fyri.

**D** var einmælt innstillaður og settur í starv 2, av tí at mett var, at hann sum útlærdur … og lærari var best egnaður at undirvísa

í smíði í framhaldsdeildini, og at hann eisini kundi átaka sær at undirvísa í dreingjaítrótti í 4/5 flokki. D er málsligur studentur, útbúgvin …, lærari og haraftrat útlærdur … . D hevur arbeitt sum ófaklærdur lærari í 11 ár, 9 ár í Sørvágs skúla. Hann hevur verið sera íðin í sínum lærarayrki og havt sera gott takføri við allar næmingar og lærarar skúlans. Meðan hann hevur lisið í …, hevur hann eisini arbeitt við menningartarnaðum á stovni, umframt at hann eisini hevur verið avloysari á einum privatum kristnum frískúla, har hann hevur undirvíst í enskum.

D er tilmeldaður og sloppin inn á skeiðið í føroyskum fyri fólkaskúlalærarar, ið hava útlendskt læraraprógv. Spurdi meg fyri hjá Føroya Lærarafelag og MMR um § 35 stk. 2 og fekk at vita, at um hann kundi átaka sær lærugreinirnar í starvinum til fulnar, og tað meta vit, at hann kann, so var einki til hindurs fyri, at hann kundi fáa eitt fyribils setanarbræv, til hann hevði fullført skeiðið í føroyskum. Hetta gjørdi eg D greitt, og tað góðtók hann. Veit annars um lærarar við útlendskum lærarprógvi, sum í dag sita í føstum lærarastarvi uttan eykaprógv í føroyskum. So hetta átti eisini at borið til hesu ferð.

Um hetta, at seta D í starv við einum fyribils setanarbrævi, ikki letur seg gera, so kann eg broyta mína setan, so at starv 2 verður fyribilssett, og starv 3 verður fast starv, men tá er vandi fyri, at vit missa ein sera dugnaligan lærara, avhildin av bæði lærarum, foreldrum og næmingum, og sum hevur prógvað sítt virði í … skúla í 9 ár.

Vónandi hendir hetta ikki.

**F** varð innstillað sum nr 2 í starv 3 og seinni sett, av tí at nr 1 tók av øðrum starvi. F varð sett í starv, av tí at hon í setanarsamrøðuni vísti á aðrar og fjølbroyttar undirvísingarhættir, hon hevði fingið kunnleika til í …, har hon hevði verið í praktikk og partvíst nýtt í Føroyum við góðum úrsliti. Í tímatalvuni fyri starv 3 eru sera nógvir tímar (serligur tørvur og einstaklingaundirvísing) til 2 næmingar … í 9 flokki. Við sínum musiska førleika (undirvíst í Musikskúlanum í fleiri ár) og …lærarprógvi, mettu vit hana

at vera sera væl egnaða at taka sær av hesum næmingunum, sum ikki bert kunnu undirvísast eftir bókini, men fáa sínar avbjóðingar í ítrótti/svimjing og á tí kreativa økinum.

**So út frá einum heildarsjónarmiði er setanarnevndin og undirritaði ikki í iva um, at vit við hesum starvssetanum hava sett teir umsøkjarar, sum eru best egnaðir til lýstu størvini. Sostatt avvísa vit øllum ákærum um, at starvssetanin í Sørvágs skúla skúlaárið 2007/08 ikki er framd eftir skúlans tørvi, førleika og royndum hjá umsøkjarunum.**“

Við skrivi, dagfest 3. sept. 2007, hevur Mentamálaráðið biðið Sørvágs skúla um øll skjøl í sambandi við setanarmálið.

Skúlastjórin sendi Mentamálaráðnum skjølini saman við soljóðandi skrivi:

„Hey Q!
Her er alt tilfarið, vit nýttu í starvssetanunum í summar. Um tit hava lisið mína frágreiðing gjølla, so skilji eg ikki, hví tit siga, at tit ikki kunnu taka støðu í málinum.

Vit í setanarnevndini eru ikki í iva. Vit hava sett tey best egnaðu í lýstu størvini, aftan á at vit gjølla hava kannað prógv og skjøl og havt setanarsamrøðurnar. Eftir okkara meting er klagarin ikki millum áður nevndu, og er hann tí ikki settur í starv.

…

Hóast tað býður mær nógv ímóti, og sum tað stendur í kap. 6 í fyrisitingarlógini undir viðmerkingum, at tað skal ásannast, at tað serliga í setanarmálum kann vera trupult at grundgeva fyri, hví ein umsøkjari ikki hevur fingið starv, og eigur at vera víst serligt fyrilit í slíkum førum. Ein óheppin orðað grundgeving kann gerast steinur oman á byrðu, so loyvi eg mær at leggja hesi orðini afturat mínari fyrr innsendu frágreiðing.

Tú gert sjálv av, um tú nýtir hetta skjal ella ikki. Eg havi einki ímóti, at skjalið saman við frágreiðing mínari verður sent A, um tit halda, tað er juridiskt forsvarligt.“

Skjalið, sum víst verður til í skrivinum, er notat frá skúlastjóranum, dagfest 13. sept. 2007, ið er soljóðandi:

> „Prógv, fakkunnleiki og ummæli siga ikki alt um eginleikarnar hjá einum persóni. Tað eru aðrir persónligir eginleikur, ið eisini telja við, tá persónar, og her hugsi eg serliga um lærarar, skulu setast í starv. Ein fyritreyt er, at teir eru disiplinert sterkir.
>
> Kenni allar settu lærararnar sera væl, havi arbeitt saman við teimum í skúlahøpi og eisini læraranum, ið klagar um starvssetanina, og mín persónliga hugsan í hesum føri er, at settu umsøkjararnir eru væl sterkari disiplinert í øllum flokkunum í fólkaskúlanum, enn klagarin er.
>
> Hetta viðgongur klagarin sjálvur í setanarsamrøðuni (sí hjálagda skjal).“

Við skrivi, dagfest 12. okt. 2007, hevur Mentamálaráðið biðið skúlan um neyvari frágreiðing um málið.

Við skrivi, dagfest 21. nov. 2007, hevur R, adv. vegna skúlan sent Mentamálaráðnum soljóðandi frágreiðing:

> „**Kæra um starvssetan – kæra frá A**
> Sørvágs skúli og setanarnevndin hava vent sær til mín í sambandi við, at omanfyri nevnda hevur kært starvssetanina hjá skúlamyndugleikanum í Sørvágs kommunu, har annar umsøkjari varð settur í fast starv sum lærari í Sørvágs skúla.
>
> Eg havi gjøgnumgingið skjølini í málinum, havi havt samrøðu við allar limirnar í setanarnevndini og skal í samráð við nevndina geva hesa frágreiðing til málið.
>
> Tað vóru 7 umsøkjarar til tey 3 størvini, sum vórðu lýst leys. Talan var um 2 fast størv og 1 fyribilssáttmálastarv fyri skúlaárið 2007/2008.

Størvini kunnu lýsast soleiðis:
Starv 1 (fast starv); fø 3, fø 7, rok 1, en 9, n/t 5
Starv 2 (fast starv): en og kr 7, ít 4/5 dr, n/t og kr 6, evn 5/7, ro 5, lí 9, smíð 8/10, serl. tørvi 7
Starv 3 (tíðaravmarkað): tón og evn 1, rok 4, en og la 7, sø 6, kr og serl tørvur 9, stuðul í 2

Setanarnevndin hevði hesar limir:
M, N, O og B fyrrv. skúlastjóri.

Setanarnevndin hevði fund við umsøkjararnar tann 21. juni 2007. Viðmerkast skal, at setanarnevndin frammanundan hevði kunnleika til C, sum áður hevði verið til setanarsamtøðu. P, sum var ímillum umsøkjararnar, møtti ikki upp til setanarsamrøðuna, men skúlastjórin hevði havt eina samrøðu við hann frammanundan.

Setanarnevndin viðgjørdi allar umsóknirnar nágreiniliga og varð samd um hesar innstillingar:

Starv 1, fast starv: 1 C, 2 D, 3 A
Starv 2, fast starv: 1 D, 2 C, 3 P
Starv 3, tíðaravmarkað starv: 1 E, 2 F, 3 G
Skúlastjórin, sum sambært løgtingslóg um fólkaskúlan er setanarmyndugleiki, fylgdi tilmælinum frá setanarnevndini og setti C og D í føstu størvini, meðan F varð sett í tíðaravmarkaða starvið. Orsøkin til hetta var, at E tók við øðrum starvi í skúlanum á …

Setanarnevndin hevur givið hesa frágreiðing um innstillingina til starv 1:

C varð innstillaður og settur í starvið, av tí at hetta júst varð hansara flokkur og hansara lærugreinar, sum hann við sera góðum úrsliti hevur frálært tey seinastu árini, hann hevur starvast í … skúla. Hann hevur arbeitt nógv við barnaskúlanum, kennir næmingarnar væl og teir flokkar, hann hevur frálært.

Hann hevur dugað at skapað eitt sera gott læruumhvørvi, har hann hevur frálært.

C er … ára gamal, býr í … og hevur útbúgving á Føroya Lærara-skúla. Lærugreinarnar, sum vóru knýttar at starvi 1, hóskaðu væl til hansara.

D varð einmælt innstillaður sum nr. 2 í hetta starv, tí mett varð, at hann sum útlærdur … og lærari var best skikkaður at frálæra í teimum lærugreinum, sum vóru avsettar til hetta starvið.

D er … ára gamalur, býr í …, er giftur og eigur … børn. Hann hevur drúgvar praktiskar royndir í skúlaverkinum í 11 ár, harav givið frálæru í … skúla í 9 ár. Hann er sera væl dámdur. Í 2005 fór hann til … at fáa sær útbúgving innan lærarayrki, júst við tí endamáli at kunna fáa eitt fæst starv í føroyska fólkaskúlanum.

D er annars málsligur studentur, er útbúgvin … og haraftuat útlærdur … . Hann hevur verið sera íðin í sínum lærarayrki og hevur havt gott takføri við allar næmingarnar og lærarar skúlans.

Meðan hann las í …, frálærdi hann eisini menningartarnaðum umframt at hann eisini hevur verið avloysari í einum privatum kristnum frískúla, har hann hevur havt enska frálæru.

D hevði ikki, tá samrøðan fór fram, staðið serliga roynd í føroyskum, men hann er farin undir hesa útbúgving og verður liðugur um ársskiftið.

Setanarnevndin spurdi seg fyri hjá Mentamálaráðnum, sum upplýsti, at undantøk kunnu gerast í serligum førum viðvíkjandi kravinum um eina serliga føroyska roynd. Víst verður eisini til grein 37 í fólkaskúlalógini, sum eisini leggur upp til, at frávik kunnu gerast í serstøkum føri.

Setanarnevndin spurdi seg eisini fyri hjá Føroya Lærarafelag

viðvíkjandi tulkingini av grein 35, stk, 2 í fólkaskúlalógini og varð upplýst, at hetta í sjálvum sær ikki var til hindurs fyri eini setan, tó soleiðis, at setanarbrævið átti at verða fyribils, til endaligt prógv er lokið. Umsøkjarin góðtók eisini hesa treyt.

A varð innstillað sum nr. 3 til hetta starv. Setanarnevndin er av teirri áskoðan, at hon er skikkað til starvið, og hon hevur somuleiðis drúgvar frálæruroyndir.

Undir setanarsamrøðuni upplýsti hon, at hon av og á hevði trupulleikar at halda disiplin millum næmingarnar, men hon metti ikki, at hetta var nakar trupulleiki.

Sum heild kann sigast at A hevur góðan teoretiskan kunnleika og drúgvar praktiskar royndir.

Tað var út frá eini heildarmeting, at hon ikki varð innstillað til starvið, við tað at hinir umsøkjararnir vórðu mettir at hóska betri inn í umhvørvið á skúlanum, eisini tá hugsað verður um samlaða alders-og kynsbýtið millum lærararnar í Sørvágs skúla.

Tað hevur eisini havt týdning fyri innstillingina hjá setanarnevndini, at A ikki tykist at hava verið serliga støðug í teimum setanum, hon higartil hevur havt.

Samanumtikið var setanarnevndin av teirri áskoðan, at A er skikkað til starvið, men eftir eini ítøkiligari metan av hinum umsøkjarunum, metti nevndin, at C var tann best skikkaði til júst hetta starvið.

Tað sæst av innstillingunum, at setanarnevndin hevur ynskt at seta C og D í ávikavist starv 1 og 2, og er hetta orsøkin til, at D verður innstillaður sum nr. 1 og C sum nr. 2.

P varð innstillaður sum nr. 3 til starv 2.

Viðmerkjast skal, at P ikki møtti upp til setanarsamrøðuna,

men at hann frammanundan hevði havt eina samrøðu við skúlastjóran, sum metti hann vera kreativan og áhugaðan í arbeiði sínum. Eitt, sum eisini taldi við í innstillingini, var, at hann fæst nógv við ítrótt, sum eru nakrar av lærugreinunum, sum knýta seg til hetta starv.

Viðvíkjandi starvi 3 varð E innstillað sum nr. 1.

E býr í …, er … ára gomul og hevur 1 ára starvsroyndir. Hon hevur frálært í skúlanum á … og hevur arbeitt sum stuðul hjá nemingi við … . E varð innstillað sum nr. 1, eftir at setanarnevndin hevði gjøgnumgingið øll skjøl í málinum, og eftir at hava hoyrt hennara sjónarmið. Hon hevur í fleiri ár virkað sum stuðul í vikuskiftunum og til aðrar tíðir hjá … við … . Eisini er tónleikur ein stórur partur av lívi hennara, og hon varð mett at hava stór kreativ evni.

Út frá hesum varð hon innstillað sum nr. 1 í starvi 3, men E varð ikki sett í starvið, tí hon beint eftir samrøðuna tók við øðrum starvi.

F varð innstillað sum nr. 2 til starv 3.
F er … ára gomul, er gift, eigur … børn og býr í … . Hon hevur verið nógv uttanlands og varð mett at hava stórar kreativar førleikar. Hon hevur góð evni innan tónleik og ítrótt. Undir setanarsamrøðuni vísti hon á aðrar og fjølbroyttar frálæruhættir, sum hon hevði fingið kunnleika til í … . Hon hevur verið í starvsvenjing í … og hevur eisini frálært eftir hesum leisti í Føroyum við góðum úrsliti.

Í tímatalvuni fyri starv 3 eru nógvir tímar settir av til … næmingar við … í … flokki. Við sínum tónleikarliga førleika, umframt at hon eisini hevur frálært í Musikkskúlanum í mong ár og er svimjilæraraútbúgvin, metti setanarnevndin hana vera sera væl skikkaða til at taka sær av hesum næmingum.

G varð innstillað sum nr. 3 til hetta starv.

G er … ára gomul og býr í … . Hon hevur drúgvar frálæruroyndir bæði í fólkaskúlanum og í kvøldskúlanum. Hon hevur frálært í fimleiki og handarbeiði og hevur góð kreativ evni.

Hon varð útbúgvin sum lærari í summar og hevur eisini verið í starvsvenjing í … . Hon varð innstillað sum nr. 3, fyrst og fremst av hennara kreativu evnum og varð mett væl skikkað til starvið.

G er annars sett í starv í skúlanum á … .

Setanarnevndin hevur upplýst, at nevndin ikki var í iva, tá hon gjørdi sínar innstillingar, sum fyrst og fremst eru gjørdar út frá einum heildarsjónarmiði og út frá tí tørvi, sum skúlin varð mettur at hava.

Setanarnendin hevur einki ilt at siga um A, tí sannleikin er, at hon eisini er væl skikkað til starvið.

Við hesum metir setanarnevndin og skúlin seg at hava svarað áheitan tykkara viðvíkjandi tí fyriliggjandi kæruni í málinum. Um Mentamálaráðið ynskir aðrar upplýsingar í málinum, vænti eg at frætta aftur."

Frágreiðingin frá advokatinum varð send kæraranum til ummælis. Við skrivi, dagfest 13. des. 2007, hevur A sent Mentamálaráðnum soljóðandi viðmerkingar:

**„Kæra um starvssetan við Sørvágs skúla skúlaárið 2007/2008 máltal …**

**Lógarbrot:**
Setanarmyndugleikin setti lærara í fast starv. Setanin var ólóglig sambært §35 stk. 2 í Fólkaskúlalógini. Setanarmyndugleikin viðurkennir í skrivi dagfest 20. juli 2007 og 21. nov. 2007, at myndugleikin varð væl vitandi um hesi viðurskifti. Hevði eisini spurt seg fyri hjá MMR og Lærarafelagnum.

Landstýrissmaðurin hevði ikki givið undantaksloyvi sambært §37 í Fólkaskúlalógini.

*Fólkaskúlalógin, Kapittul 4, Lærararnir*
***§ 35.** Til at kunna røkja undirvísingina í fólkaskúlanum skal viðkomandi hava lokið útbúgvingina sum fólkaskúlalærari á Føroya Læraraskúla ella á donskum læraraskúla, smb. tó 2. og 3. stk., ella aðra læraraútbúgving, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent hesum viðvíkjandi.*
*stk. 2. Tað er ein treyt fyri fastari setan sum lærari, at viðkomandi hevur staðið eina serliga roynd í føroyskum. Landsstýrismaðurin ásetir greiniligari reglur um hesa roynd.*

***§ 37.** Landsstýrismaðurin kann í serstøkum føri loyva frávik frá teimum í § 35 og § 36 settu reglum.*

R advokatur grundgevur vegna setanarmyndugleikan í skrivi dagfest 21. nov. 2007, at ein av orsøkunum til, at eg ikki fekk starv varð, at tev høvdu hugsað um „Samlaða kynsbýtið". Sambært §3, stk. 1 í Javnstøðulógini er hetta greitt lógarbrot, tá hetta verður brúkt sum grundgeving.

*Javnstøðulógin: Starvsseting o. a.*
***§ 3.** Tað er ikki loyvt arbeiðsgevara at gera mismun á løntakara vegna kyn. Hesin mismunur er bannaður í sambandi t. d, starvsseting, uppsøgn, starvsmeting, lønarflokkin, starvaflyting, starvsuppflyting, farloyvi, arbeiðsumstøður og framíhjárættindi.*

Í sambandi við lógarbrotið omanfyri, vil eg minna á, at setanarnevndin sigur seg vera samda í øllum avgerðum!

**Óerlig grundgeving:**
**Í skrivi frá setanarnevndini dagfest 21. nov 2007 stendur, at umsøkjarin, ið fekk starv 1, áður hevði verið til setanarsamrøðu. Tí loyvi eg mær at ivast í, um spurnarskjølini, ið eiga at verða útfylt beint eftir samrøðuna ikki eru *framleidd* væl seinni.**

Eg meini, at grundgevingin er ósonn, ella kanska beinleiðis skjalafalsan. Lærarin var **ikki til setanarsamrøðu**, sambært skrivi frá setanarnevndini dagfest 21. nov. 2007. Eg ivist eisini í, um setanarnevndin hevði samrøðu við læraran, ið fekk starv 2. Hann varð staddur í … tá setanarsamrøðurnar fóru fram. **Kann setanarmyndugleikin skjalprógva hesa samrøðu við útskrift frá telefon rokning ?**

Setanarmyndugleikin sigur í skrivi dagfest 13. sep. 2007 *„Kenni allar settu lærararnar sera væl, havi arbeitt saman við teimum í skúlahøpi*". Setanarmyndugleikin **hevur ikki arbeitt saman við báðum lærarunum**, ið fingu starv 3, **eftir at teir hava fingið læraraprógv**. Her fer SETANARMYNDUGLEIKIN SERA LÆTT UM SANNLEIKAN.

**Kreativ grundgeving:**
Í øllum skrivligum skjølum frá setannevndini stendur, at nevndin er samd. Sum um tað er ein grundgeving í sær sjálvum. Hóast hetta megnaði setanarmyndugleikin ikki at grundgeva fyri sínum rættvísi í starvssetanini sjálvt um hann fekk næstan 5 mánaðar at svara. Úrslitið er, sum kunnugt, at setanarmyndugleikin fekk R, advokat, at grundgeva sína vegna. Í niðurstøðuni hjá advokatinum eru **nýggjar „ullintar" grundgevingar** gjørdar, sum til dømis:

*1. Hinir umsøkjararnir vórðu mettir at hóska betri inn í umhvørvið á skúlanum.*
Hvussu kann setanarmyndugleikin grundgeva fyri hesi útsøgn? Tvey av mínum viðmælum, dagfest 5. mai 1992 og 18. apríl 2007 eru frá setanarmyndugleikanum, har sagt verður, at eg havi omanfyri nevndu eginleikar!

*2. Samlaða aldursbýti.*
Lærari, ið er eitt ár eldri enn eg, varð settur í starv 2. Setanarmyndugleikin ger mismun vegna aldur, hóast eg hvørki eri yngst ella elst. Eg dugi ikki at ímynda mær, hvussu henda grundgeving kann brúkast?

*3. Samlaða kynsbýtið millum lærararnar.*
Sí omanfyri nevnda lógar brot. **Einki varð sagt í starvslýsingini, um at ávís kyn høvdu fyrimun! Tað er ikki loyvt sambært §3 stk, 1-2 í Javnstøðulógini.**

*4. Kærarin tykist ikki at hava verið serliga støðugur í teimum setanum, hon higartil hevur havt.*
Sí frágreiðing seinni í hesum skrivi.

**Høvuðsgrundgevingin hjá setanarmyndugleikanum** frá 13. sep. 2007 um, at setanarmyndugleikin hevði arbeitt við øllum teimum settu lærarunum í skúlahøpi og, at teir eru væl disiplinert sterkari enn eg, er gjørd til eina **PARADOKSALA ÚTSØGN**. Mentamálaráðið spurdi setanarmyndugleikan í skrivi dagfest 12. okt 2007, „um viðkomandi hevur **ítøkiligar disiplinerar trupuleikar og hvussu umfatandi?**"
Hesum hevur setanarmyndugleikin ongan tíð svarað.
Eg vil hava at vita nágreiniliga, hvat setanarmyndugleikin meinar við!

**Paradoksalar grundgevingar:**
Advokaturin sigur í skrivi dagfest 21. nov 2007, at *„undir setanarsamrøðuni upplýsti hon, at hon <u>av og á hevði trupulleikar</u> at halda disiplin millum næmingarnar, men hon metti <u>ikki, at hetta var nakar trupulleiki</u>"*. Tí undrist eg ikki sørt á, hvussu ein kann hava ein trupulleika, tá ein ikki hevur ein trupulleika? Hvussu kann setanarmyndugleikin brúka hetta sum grundgeving, tá hetta ikki er ein trupulleiki?

| | |
|---|---|
| Lærari 1 | Her verður sagt *„við sera góðum úrsliti hevur frálært"*. Hvørji ítøkilig úrslit ? ella hevur hann til dømis góð viðmæli? |
| Lærari 2 | Her verður: sagt *„hevur eisini frálært eftir hesum leisti…. við góðum úrsliti"*. Hvørji úrslit eru, ið kunnu staðfestast ? |
| Lærari 3 | Her verður **einki** sagt um **góð úrslit !** |

Felags í øllum grundgevingunum frá Advokat… um lærararnr, ið fingu starv er, at teir búgva í … og gjalda skatt har. Eg búgvi í …, og gjaldi skatt har !

Um tveir lærarar verður sagt, at teir eru giftir og eiga fleiri børn, sum. um tað er ein fyrimunur ? Einki verður nevnt um tann læraran, ið fekk starv 1. Hann er nevniliga ógiftur og eigur ikki børn. Eg eri gift og eigi … børn.

Í grundgevingini til starv 2 verður nevnt, at setti viðkomandi hevur *„drúgvar praktiskar royndir í skúlaverkinum í 11 ár"*. Einki stendur um, at allar hesar royndir eru sum **ófaklærdur vikarur**. í grundgevingini verða eisini brúkt orð sum *„takføri"* og gott *„læraraumhvørvi"* uttan at allýsa, hvørja merking setanarmyndugleikin leggur í hesi orð. Orðið takføri merkir, sambært orðabókini, samband/nerting, og á donskum merkir tað kontakt. Sera løgið og óskilligt, tá hugsað verður um, at hetta verður brúkt sum ein ítøkilig grundgeving.

Setanarmyndugleikin skrivaði í síni grundgeving dagfest 20. juli 2007 fyri læraran, ið fekk starv 1, at *„hann hevur arbeitt **sera** nógv við barnaskúlanum"*. Í skrivi frá Advokat… dagfest 21. nov. 2007 er henda gjørd veikari, til at *„hann hevur arbeitt nógv við barnaskúlanum"*. Hesin lærarin hevur undirvíst umleið 3 – 4 ár í fólkaskúlanum.

**Torskiltar grundgevingar:**
Setanarnevndin sigur í skrivi dagfest 21. nov. 2007, at lærarin, ið fekk starv 1 *„hevur skapt eitt gott læruumhvørvi, har hann hevur frálært"*. Hvat meina tey við? Orðið *læruumhvørvið* er ikki í orðabókini!

Grundgevingin hjá setanarnevndini dagfest 21. nov. 2007, fyri at stilla læraran, ið fekk starv 2, inn sum nr. 2 til starv 1 er so ljóðandi *„(lærari 2) varð einmælt innstillaður sum nr. 2 í hetta starv, tí mett varð, at hann sum útlærdur snikkari og lærari var*

*best skikkaður at frálæra í teimum lærugreinum, sum vóru avsettar til hetta starvið"* Tímatalvan fyri hetta starv er:
Fø í 3
Fø í 7
Rok í 1
En í 9
N/T í 5.

Eg skilji ikki, hví tað er ein fyrimunur at verða snikkari fyri at fáa. hetta starvið ? **Tað sum undrar meg mest er, at ein stórur partur av hesi tímatalvu er Føroyskt. Tað er jú tann lærugreinin, sum tann nýútbúni lærarin við danskari læraraútbúgving manglar !**

Einasta grundgevingin hjá setanarnevndini, í sama skrivi, fyri at stilla læraran, ið fekk starv 1 inn sum nr. 2 til at fáa starv 2 ljóðar soleiðis *„Tað sæst av innstillingunum, at setanarnevndin* ***hevur ynskt at seta*** *(lærararnar, sum fingu starv 1 og 2), og* ***er hetta orsøkin*** *til, at (lærari 2) verður inntillaður sum nr. 1 (til starv 2) og (lærari 1) sum nr. 2.* HENDA GRUNDGEVING ER BERT **GRUNDAÐ Á EITT YNSKI**, har tað als **ikki** verður **hugsað um førleikar og starvsroyndir**, og so slett ikki **veruliga tørv skúlans**.

Dømini omanfyri lýsa alla setanina sera væl. Starvssetanin ber brá av, at ynski og kenslur, eru raðfest fram um vit og skil !

**Manglandi skjøl:**
Í skrivi frá setanarmyndugleikanum dagfest 13. sep. 2007 verður sagt: *„Hetta viðgongur klagarin sjálvur í setarsamrøðuni (si hjálagda skjal)"*. Eg havi spurt MMR eftir hesum hjálagda skjali bæði skrivliga og munnliga. Fái bert upplýst, at eg havi fingið øll skjøl, sum tey hava. Tí undrist eg á, hvar hetta skjalið er?

Eg sakni avrit frá gerðarbókini og fundarfrágreiðingina frá starvssetanini, har allir limirnir til dømis hava skrivað undir,

at teir eru einmælt samdir. Somuleiðis sakni eg notat frá setanarsamrøðuni. Tað er løgið, at tað fyrliggur so lítið skrivligt tilfar. <u>Setanarnevndin hevur jú ein skrivara.</u>

Í telefonsamrøðu 22. juni 2007, segði setanarmyndugleikin nevniliga, at eg kláraði meg væl til setanarsamrøðuna. Tí meti eg, at hann við vilja ikki vil vísa notatir frá setunarsamrøðuni. **Notatini eiga at verða partur av kæruni !**

**Starvslýsingin :**
Sambært starvslýsingini er tørvur á lærarum, ið m.a. kunnu átaka sær:
Flokslærarauppgávu
Dreingjaítrótt
Enskt og smíð í framhaldsdeildini
Náttúru/tøkni og støddfrøði í 1. -7. fl.
Tímar í serligum tørvi

Tá lýsingin verður samanborin við tímatalvurnar sæst, at einki er nevnt í starvslýsingini um:
Føroyskt í 3 & 7
Kristni í 7 & 9
Evning í 1, 5 & 7
Lívfrøði í 9
Tónleikur í 1
Landalæra í 7
Søga í 6
Stuðul í 2.
Av tí at lærarauppgávurnar í starvslýsingini ikki samsvara við tímatalvuna, geri eg ta niðurstøðu, at starvslýsingin umboðaði ikki tann veruliga tørvin hjá skúlanum !

**Førleikakrøv sambært lýsingini:**
*Læraraútbúgving. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum. Tó kunnu lærara-lesandi, ið lúka prógv í summar eisini søkja størvini.*

Treytir fyri at søkja starvið er:
*Umsóknir við c.v. og avrit av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta tagi 21. juni 2007 á middegi.*

Samanumtikið, er treytin fyri at søkja starv, at niðanfyri nevndu skjøl verða send skúlastjóranum:

1. Umsókn.
2. Curriculum Vitae.
3. Prógv.

**Starv 1 grundgeving:**
*Setanarnevndin hevur givið hesa frágreiðing, dagfest 21. nov. 2007, um innstillingina til starv 1:*

*Lærari nr. 1 varð innstillaður og settur í starvið, av tí at hetta júst varð hansara flokkur og hansara lærugreinar, sum hann við sera góðum úrsliti hevur frálært tey seinastu árini, hann hevur starvast í … skúla. Hann hevur arbeitt nógv við barnaskúlanum, kennir næmingarnar væl og teir flokkar, hann hevur frálært. Hann hevur dugað at skapað eitt sera gott læruumhvørvi, har hann hevur frálært.*

*Lærari nr. 1 er … ára gamal. Býr í … og hevur útbúgving á Føroya Læraraskúla. Lærugreinarnar, sum vóru knýttar at starvi 1, hóskaðu væl til hansara.*

*Lærari nr. 2 varð einmælt innstillaður sum nr. 2 í hetta starv, tí mett varð, at hann sum útlærdur snikkari og lærari varð best skikkaður at frálæra í teimum lærugreinum, sum vóru avsettar til hetta starvið.*

*Lærari nr. 2 er … ára gamalur, býr í …, er giftur og eigur … børn. Hann hevur drúgvar praktiskar royndir í skúlaverkinum í 11 ár, harav givið frálæru í … skúla í 9 ár. Hann er sera væl dámdur. Í 2005 fór hann til … at fáa sær útbúgving innan lærarayrki, júst við tí endamáli at kunna fáa eitt fæst starv í føroyska fólkaskálanum.*

*Meðan hann las í …, frálærdi hann eisini menningartarnaðum, umframt at hann eisini hevur verið avloysari í einum privatum kristnum fbrískúla, har hann hevur havt enska frálæru.*

*Lærari 2 hevði ikki, tá samrøðan fór fram, staðið serliga roynd í føroysum, men hann er farin undir hesa útbúgving og verður liðugur um ársskiftið.*

Kærarin varð innstillaður sum nr. 3

| | |
|---|---|
| Tímatalvan 1 | |
| (fast starv) | Starvsroyndir hjá kæraranum: |
| Fø 3 | Víst verður til kæruna dagfesta 26-06-2007 |
| Fø 7 | C.V. prógv, viðmæli og viðmælini, |
| Rok 1 | eg fekk frá sjálvum setanarmyndugleikanum. |
| En 9 | |
| N/T 5 | |

**Starv 2 grundgeving:**
Setanarnevndin hevur givið hesa frágreiðing, dagfest 23. nov. 2007, um innstillingina til starv 2 :
*Tað sæst av innstillingunum, at setanarnevndin hevur ynskt at seta Lærara nr. 1 og Lærara nr. 2 í ávikavist starv 1 og 2, og er hetta orsøkin til, at Lærari nr. 2 verður innstillaður sum nr. 1 og Lærari nr. 2 sum nr. 2*

Advokaturin, R, hevur vegna Setanarnevndina **broytt grundgevingina** fyri innstilling til starv 2 hjá setanarmyndugleikanum frá 20. juli 2007. Nú er bert talan um eitt ynski!

Læraran, ið varð innstillaður sum nr. 3 til starv 2, havi eg ongar upplýsingar um!

| | |
|---|---|
| Tímatalvan 2 | |
| (fast starv) | Starvsroyndir hjá kæraranum: |
| En & Kr 7 | Víst verður til kæruna dagfesta 26-06-2007 |
| Ít dr 4/5 | C.V. prógv, viðmæli og viðmælini, |

N/T & Kr 6 eg fekk frá sjálvum setanarmyndugleikanum.
Evn 5/7
Ro 5
Lí 9
Smíð 8/10
Ser. Tørvur 7

**Henda setanin er ólóglig. Nr. 2 á listanum varð bert innstillaður grundað á eitt ynski. Eg havi ongar upplýsingar um nr. 3. Tí meti eg tað ikki vera neyðugt hjá mær at grundgeva í hesum føri!**

**Starv nr. 3 grundgeving:**
Setanarnevndin hevur givið hesa frágreiðing, dagfest 21. nov. 2007 um innstillingina til starv 3:

*Lærari 3 er … ára gomul, er gift, eigur … børn og býr í … Hon hevur verið nógv uttanlands og varð mett at hava stórar kreativar førleikar. Hon hevur góð evni innan tónleik og ítrótt, undir setanarsamrøðuni vísti hon á aðrar og fjølbroyttar frálæruhættir, sum hon hevði fingið kunnleika til í … og hevur verið í starvsvenjing í … og hevur eisini frálært eftir hesum leisti í Føroyum við góðum úrsliti.*

*Í tímatalvuni fyri starv 3 eru nógvir tímar settir av til næmingar … í … flokki. Við sínum tónleikarliga førleika, umframt at hon eisini hevur frálært Í Musikkskúlanum í mong ár og er svimjilæraraútbúgvin, metti setanarnevndin hana vera sera væl skikkaða til at taka sær av hesum næmingum……(sum ikki bert kunnu undirvísast eftir bókini, men fáa sínar avbjóðingar í ítrótti/svimjing og á tí kreativa økinum 20. jul. 2007).*

Læraran, sum bleiv innstillaður sum nr, 3 til starv 3, havi eg ongar upplýsingar um !

Tímatalvan 1
(fast starv) Starvsroyndir hjá kæraranum, uml 20 ár:

| | |
|---|---|
| Tón og evn 1 | Víst verður til kæruna dagfesta 26-06-2007 |
| Rok 4 | C,V. prógv, viðmæli og viðmælini, |
| En og La 7 | eg fekk frá sjálvum setanarmyndugleikanum. |
| Sø 6 | |
| Kr & ser. Tørvur í 9 | |
| Stuðul í 2 | |

Kann setanarmyndugleikin vísa á nøkur ítøkilig kreaktiv úrslit hjá lærara 3? Eg kann til dømis vísa á 13 talið, ið eg fekk á Føroya Læraraskúla fyri handarbeiði.

Næmingarnir … í 9. flokki, eru nærum høvuðsgrundgevingin hjá setanarnevndini fyri hetta starvið. Eg undirvísti júst hesum næmingunum skúlaárið 2005/2006, har **eg gjørdi mítt arbeiði til lítar** og fekk **besta viðmæli**, sambært setanarmyndugleikanum dagfest 18. apríl 2007.

**Disiplinerir trupuleikar:**
Skriv frá B 13. sept. 2007:

*Kenni allar settu lærararnar sera væl, havi arbeitt saman við teimum í skúlahøpi og eisini læraranum, ið klagar um starvssetanina, og mín persónliga hugsan í hesum føri er,* ***at settu umsøkjararnir eru væl sterkari disiplinert í øllum flokkunum í fólkaskúlanum, enn klagarin er.***

B hevur ikki arbeitt saman við báðum umsøkjarunum, ið fingu starv 3, eftir at teir hava fingið lærarapróv. Tí meti eg útsøgnina hjá B, um at hann hevur „arbeitt saman við teimum í skúlahøpi“ **ikki vera sanna**.

**Kann setanarmyndugleikin skjalprógva, at settu umsøkjararnir hava undirvíst í øllum flokkunum í fólkaskúlanum, og at teir tá hava verið væl sterkari disciplinert enn eg ?** Eg havi nevniliga undirvíst, síðan eg fekk lærarapróv í 1985, øllum flokkunum í fólkaskúlanum frá 1. upp til 10. flokk, (sí C.V.). Próvbyrðan, um hvør er disiplinert sterkast, má liggja hjá B. Eg havi fingið bestu viðmæli frá B sjálvum.

Eg havi góð prógv, frálæruevni, gott samband við næmingar, foreldur og lærarar. Eisini havi eg bestu ummæli, har eg havi starvast.

Eg meti meg hava víst í verki og lívsroyndum, at eg eri framúr disciplinert sterk. Eg havi tríggjar útbúgvingar við góðum støðumetum: Lærari, statsautoriseraður … og …lærari. Harafturat eri eg góðkendur …lærari í … og í Føroyum. Eg havi staðið allar próvtøkur fyrstu ferð við góðum úrslitum. Eg havi brúkt allar tríggjar útbúgvingarnar, Sí C. V.

Eg havi verið sjálvstøðug vinnurekandi seinastu tíggju árini við framúr góðum úrslitum. Sí viðmæli frá S, stjóra á … .

Í kreppuárunum 1993, var eg einsamallur forsyrgjari við … smábørnum.

**Viðmerkingar til grundgevingina hjá setanarmyndugleikanum:**
„Tykist ikki at hava verið serliga støðug í teimum setanum, hon higartil hevur havt.“
…
**Eg skal leggja aftrat, at eg ongan tíð eri givin mitt í einum skúlaári. Sørvágs skúli hevur í dag ikki minni enn tveir lærarar í føstum starvi, ið góvust mitt í einum skúlaári.**

**Haraftrat starvast minst tríggir aðrir lærarar í Sørvágs skúla, sum hava starvsroyndir aðrastaðni frá, so mín spurningur er:"Hvussu støðugur" skal ein vera fyri at kunna setast í starv í Sørvágs skúla?**

**Viðmerkingar til setanarsamrøðuna:**
**B noteraði einki, tá eg varð spurd um mínar sterku síður.**

Heldur ikki, tá eg tosaði um mínar serligu royndir ígjøgnum tvey ár í … skúla. Har undirvísti eg fýra flokkum ísenn í tveimum lærugreinum. Vit arbeiddu tvørfakliga ein dag um vikuna, har allir flokkarnir frá fyrsta til sjeynda flokk vórðu býttir í bólkar.

Millum annað høvdu vit smíðlæraran U frá Føroya Læraraskúla til evnisdagar í smíð, V, stjóra í Listaskálanum til máling og list, W serlærara úr … til serundirvísing og teldu.

Nakrar ferðir um árið høvdu vit framførslur fyri foreldrum og avvarðandi. Meginparturin av bygdini luttóku hesi kvøldini.

Eitt av tvørfakligu arbeiðnum endaði við framførslu av dukku-sjónleiki í sjónvarpinum. Børnini høvdu sjálv smíðað og prýtt pallin, gjørt dukkurnar og seymað klæðini.

Eisini hevði eg tætt samstarv við Æ, upphavskvinnuna til ta nú væl kendu SANSUSTIMBRANDI venjingarnar. Eg gjørdi eisini hesar venjingarnar við lesiveikum næmingum. Hetta gav sera gott úrslit eftir bert tveimum mánaðum.

Ø av sernámsdeplinum var eisini ein av okkara sera góðu vegleiðarum.

**Men B byrjaði at notera, tá hann spurdi meg um mínar veiku síður.**
Als einki hald er í ákæru skúlastjórans um manglandi disciplin hjá mær. Hetta er einki minni enn ÆRUMEIÐING.

Málið eigur at verða gjøgnumgingið sakliga, siðiliga og á einum nóg høgum persónligum og fakligum støði.

Vísandi til skriv dagfest 17. sept 2007 frá B til Mentamálaráðið, vil eg viðmerkja, at eg ongan tíð havi sagt í setanarsamrøðuni, at eg hevði disciplinerar trupulleikar.

Til setanarsamrøðuna tráðspurdi B meg, hvat eg gjørdi, um eg fekk slíkar trupulleikar. Eg visti meg ikki hava nakrar tílíkar trupulleikar. Men eg skuldi hugsa meg væl um, kundi eg fara 22 ár aftur í tíðina, tá eg sum nýklaktur lærari, ikki ordiliga visti, hvussu eg skuldi bera meg at í einum 9. flokki. Tá bjóðaði hann

mær hjálp. Viðmerkjast skal, at flokkurin hjá mær kláraði seg framúr væl til próvtøkuna.

Eg viðmerkti, at mín persónliga áskoðan er, at tað er ikki rætt at geva einum nýggjum / fremmandum lærara ein flokk í framhaldsdeildini sum lærarar framman undan halda vera truplan. Tað tekur tíð bæði hjá næmingum og lærarum at venja seg við hvønn annan. Tíðin er alt ov dýrabar í eitt nú 9. flokki, tí tey skulu so nógv annað enn at verða undirvíst á skúlabonki ( Starvsvenjing.osf.)

Undrist eisini á, hví tveir smíðtímar skuldu verða avgerandi fyri starvssetanina av lærara 2, tá tríggir væl útbúnir smíðlærarar framman undan eru á skúlanum. Teirra millum er lærari 1, men hann undirvísir ikki í smíð.

Eg bleiv **ikki** spurd, hvar eg havi arbeitt á ymiskum skúlum, ella um eg hevði verið eitt nú uttanlanda í starvsvenjing. Eg var nevniliga í starvsvenjing á einum kristnum fríakúla í Keypmannahavn.

**Ískoyti:**
Tá eg í 1997 fekk farloyvi frá Sørvágs skúla, vegna flyting til …, bønaði og bað B meg, og segði millum annað: „Góóóða A, ikki fara. Tú skalt fáa allar teir tímarnar, tú vilt hava. Bara sig til. Eg fái aaaldrin ein so góðan lærara aftur sum teg.Tú gert so nógv kreativt saman við børnunum. Dóttir mín forgudar teg. Tú ert óerstattilig."

Serlærarin, ið hevur arbeitt í Sørvágs skúla í meira enn 20 ár, segði við meg, at hon hevði sagt við B skúlastjóra, at tað hevði ongan tíð gingið so væl í frálæruni hjá næmingum við serligum tørvi, sum hetta árið 2005-2006, eg hevði undirvíst teimum.

Skúlaárið 2005/2006, tá eg arbeiddi í Sørvágs skúla, bað skúlastjórin meg javnan lesa eykatímar.

**Samandráttur:**

1. Eg átti at verið innstillað sum nr 1 til øll trý størvini.
2. Missurin er ikki bert ein ársløn, men eisini bilettin til fast starv fram til eftirlønaraldur.
3. Setanarmyndugleikin hevur við sínum ósakligu grundgevingum varpað so dapurt ljós á mítt umdømi og evni, bæði sum persón og sum lærara, at tað í framtíðini kann verða trupult hjá mær at fáa fast starv aftur í føroyska fólkaskúlanum.
4. Endurgjald fyri ærumeiðing, tort, sviða og mista inntøku er sostatt eftir míni metan ein sjálvfylgja."

Frágreiðingin frá kæraranum varð send skúlanum. Við skrivi, dagfest 18. jan. 2008, hevur R, adv. vegna skúlan latið Mentamálaráðnum hesar viðmerkingar:

„**Viðv. kæru um starvssetan – kæra frá A**
Sørvágs skúli og Setanarnevndin hava vent sær til mín í sambandi við viðmerkingar frá A, soleiðis sum hesar eru settar fram í skrivi, dagfest 13. desember 2007.

Eg kann upplýsa, at viðmerkingarnar frá A ikki geva høvi hjá skúlanum ella Setanarnevndini at broyta støðu í málinum.

Setanarnevndin heldur fast við sína innstilling, soleiðis sum hendan er gjørd samsvarandi skrivi, dagfest 20. juli 2007, og samsvarandi skrivi mínum, dagfest 21. november 2007.

A ger eitt sindur burturúr, at Setanarnevndin í sambandi við setanirnar hevur víst á samlaða aldurs- og kynsbýtið við skúlan.

Hetta hevur einki við javnstøðulógina at gera. Tað er ein samlað og yvirornað meting, sum Setanarnevndin hevur gjørt sær í hesum sambandi, og tað skal eisini viðmerkjast, at hesi viðurskifti ikki hava verið høvuðsorsøkin til endaligu innstillingina.

Viðvíkjandi setanarsamrøðunum skal viðmerkjast, at Setanar-

nevndin framman undan hevði havt setanarsamrøður við C. Hesin søkti starv eitt ár framman undan við skúlan í Sørvági, og ein setanarsamrøða fór tá fram við hann.

Í hesum samanhangi vórðu notat frá setanarsamrøðuni gjørd, og spurnarskema varð útfylt. Eingin í Setanarnevndini metti seg hava tørv fyri eini nýggjari samrøðu, deils tí Setanarnevndin kendi viðkomandi væl, og tí fleiri av limunum í Setanarnevndini arbeiða saman við honum í tí dagliga.

Setanarsamrøðan við D fór fram gjøgnum telefon, har skúlastjórin og limirnir í Setananevndini allir hoyrdu samrøðuna, og har allir limir fingu høvi at seta fram spurningar, D var staddur í …, tá samrøðan varð gjørd. Einki ólógligt liggur í hesum.

Annars upplýsir skúlastjórin, at hann, áðrenn starvssetanin fór fram, tosaði við Mentamálaráðið um treytina í fólkaskúlalógini § 35, stk. 2, at viðkomandi hevur staðið eina serliga roynd í føroyskum. Skúlastjórin fekk at vita, at persónar kunnu setast í starv, hóast teir ikki hava staðið eina roynd, men at setanarmyndugleikin skuldi seta sum treyt fyri setanini, at viðkomandi fór undir slíka roynd, og at hann, tá lærutíðin er yvirstaðin, stóð hesa roynd.

Annars kann eg upplýsa, at D í løtuni er á skeiði saman við fleiri øðrum lærarum, sum eru settir í starv, hóast teir ikki hava staðið eina serliga roynd í føroyskum. Skúlastjórin upplýsir somuleiðis, at hann eisini tosaði við Føroya lærarafelag, sum eisini upplýsti, at hesi viðurskifti ikki vóru treyt fyri, at D varð settur, tó soleiðis at hann eftirfylgjandi má standa eina slíka roynd.

Eg skal enn einaferð endurtaka, at bæði skúlastjórin og Setanarnevndin meta seg hava fingið váttan frá Mentamálaráðnum um, at hesi viðurskifti ikki vóru til hindurs fyri, at D varð settur undir nevndu fyritreytum.

Samanumtikið skal viðmerkjast, at skúlastjórin og Setanar-

nevndin meta, at teir persónar, sum vóru best skikkaðir til størvini, eru settir. Hetta merkir ikki, at A ikki var kvalifiserað til starvið, men at setanarmyndugleikin hevur mett, at hinir umsøkjararnir vóru betri kvalifiseraðir.

Í einum føri sum hesum er neyðugt við eini heildarmetan, og tað er tað, Setanarnevndin hevur gjørt. Bæði skúlastjórin og Setanarnevndin eru hørm um, at A eftir øllum at døma hevur uppfatað innstillingina hjá nevndini sum eina diskvalifisering av henni. Hetta hevur ongantíð verið ætlanin.

Støðan er nevniliga tann, at A er kvalifiserað til starvið, men at setanarmyndugleikin mátti velja ímillum teir kvalifiseraðu umsøkjararnar. Í hesum konkreta føri gekk valið tíverri útyvir A, og soleiðis er støðan, tá veljast skal millum fleiri kvalifiseraðar umsøkjarar.

Við hesum fara Sørvágs skúli og Setanarnevndin at mæla Mentamálaráðnum til at taka endaliga avgerð í málinum.

Um Mentamálaráðið ynskir fleiri upplýsingar í málinum, vænti eg at frætta aftur."

Við skrivi, dagfest 29. apríl 2008, hevur Mentamálaráðið svarað kæruni soleiðis:

„**Svarskriv í sambandi við kæru um lærarastarvssetan**
Tygum hava í skrivi til landsstýrismannin í mentamálum, dagfest 26. juni 2007, kært lærarastarvssetanina hjá skúlamyndugleikanum í Sørvágs skúla tann 22. juni 2007.

Mentamálaráðið hevur við heimild í § 59, stk. 1 í fólkaskúlalógini viðgjørt kæru tygara og gjørt niðurstøðu í málinum.

Fyrst verður greitt nærri frá innihaldinum í kæru tygara, partshoyringini og Mentamálaráðsins meting av málinum.

**Kæran**
Í kæruni vísa tygum á fylgjandi viðurskifti sum grundarlag fyri kæruni:

1. Ein persónur við danskari lærarautbúgving frá 2007 varð settur í fast starv. Ósannlíkt er, at viðkomandi hevur staðið eina serliga roynd í føroyskum, ið sambært § 35, stk. 2 í fólkaskúlalógini er ein treyt fyri fastari setan sum lærari.
2. Starvssetanin varð ikki eftir førleika og starvsroyndum. Lærarar við lítlum starvsroyndum fingu starv fram um betur útbúnar lærarar við nógvum starvsroyndum.

Eisini vísa tygum í kæruni á, at skúlastjórin hevur givið tygum bestu viðmæli fyri árini, tygum hava starvast í Sørvágs skúla, og at skúlastjórin í telefonsamrøðu við tygum tann 22. juni 2007 upplýsti, at tygara umsókn ikki varð gingin á møti í hesum føri, men at tygum høvdu klárað tygum væl til setanarsamrøðuna.

Harumframt upplýsa tygum í kæruni, at tveir lærarar, sum m.a. hava undirvíst í týskum og evning, fara úr starvi, og at tygum hava týskt sum linjulærugrein, men at einki stóð í starvslýsingini um hesar báðar lærugreinirnar.

## Partshoyring

Tygum hava í viðgerðini hjá Mentamálaráðnum av kærumálinum havt høvi til at gera viðmerkingar, sum partur í málinum sbrt. § 18 í fyrisitingarlógini, til tey ummæli og frágreiðingar, sum skúlamyndugleikin í Sørvágs skúla hevur sent Mentamálaráðnum málinum viðvíkjandi.

Í hoyringarsvari tygara, dagfest 13. desember 2007, verður hildið fast við upprunaligu kæru tygara, og hava tygum eisini víst á onnur viðurskifti í setanarmálinum, sum tygum eru misnøgd við, og sum nærri viðmerkingar verða gjørdar til niðanfyri.

**Meting av málinum**

*Ad. kærupunkt 1.*

*Viðvíkjandi at umsøkjari við danskari læraraútbúgving varð settur í fast starv, uttan at hava lokið serliga roynd í føroyskum.*

Tað framgongur av kærumálinum, at lærarin, sum í innstillingini frá setanarnevndini varð innstillaður sum nr. 2 til starv 1 (fast starv), og sum nr. 1 til starv 2 (fast starv), hevur tikið læraraprógv í … .

Fyrrverandi skúlastjórin í Sørvágs skúla, sum setti lærarastørvini, vísir í sínari frágreiðing til Mentamálaráðið, dagfest 20. juli 2007, í hesum sambandi m.a. á fylgjandi:

„D er tilmeldaður og sloppin inn á skeiðið í føroyskum fyri fólkaskúlalærarar, ið hava útlendskt læraraprógv. Spurdi meg fyri hjá Føroya Lærarafelag og MMR um § 35, stk. 2 og fekk at vita, at um hann kundi átaka sær lærugreininar í starvinum til fulnar, og tað meta vit at hann kann, so var einki til hindurs fyri, at hann kundi fáa eitt fyribils setanarbræv, til hann hevði fullført skeiðið í føroyskum. Hetta gjørdi eg D greitt, og tað góðtók hann."

Í § 35, stk. 1 í fólkaskúlalógini er fylgjandi ásett:

„Stk. 1. Til at kunna røkja undirvísingina í fólkaskúlanum skal viðkomandi hava lokið útbúgvingina sum fólkaskúlalærari á Føroya Læraraskúla ella á donskum læraraskúla, smb. tó 2. og 3. stk., ella aðra læraraútbúgving, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent hesum viðvíkjandi."

Tann fyribilssetti lýkur sostatt kravið um, at hesin skal hava lokið útbúgving sum fólkaskúlalærari á Føroya Lærararaskúla ella á donskurn lærararaskúla v.m. fyri at kunna røkja undirvísingina í fólkaskúlanum, tí at hesin sambært fyriliggjandi upplýsingum í málinum hevur lokið fólkaskúlalæraraprógv á donskum lærararaskúla.

Í § 35, stk. 2 í fólkaskúlalógini er fylgjandi ásett:

„Stk. 2. Tað er ein treyt fyri fastari setan sum lærari, at viðkomandi hevur staðið eina serliga roynd í føroyskum. Landsstýrismaðurin ásetur greiniligari reglur um hesa roynd.“

Mentamálaráðið kann í hesum sambandi viðmerkja, at tað er ein føst umsitingarlig siðvenja í Mentamálaráðnum, at lærarar við donskum fólkaskúlalæraraprógvi kunnu verða fyribilssettir í fast lærarastarv, um hesir lúka lógarásettu serligu royndina í føroyskum, sbrt. § 35, stk. 2 í fólkaskúlalógini, og verður endaligt setanarbræv útskrivað, tá ið viðkomandi lærari hevur lokið nevndu roynd í føroyskum.

Í hesum konkreta málinum verður upplýst, at tann fyribilssetti, ið hevur danskt læraraprógv, hevur fingið upplýst frá setanarmyndugleikanum í Sørvágs skúla sum treyt fyri setan í fast starv, at hesin eftirfylgjandi lýkur nevndu serligu roynd í føroyskum, og verður eisini upplýst, at tann fyribilssetti er farin undir hesa eykaútbúgving.

Vísandi til omanfyri nevndu føstu umsitingarligu siðvenju, og at tann fyribilssetti sambært upplýsingunum í málinum hevur fingið álagt sum treyt fyri fastari setan, at hesin lýkur serliga roynd í føroyskum sbrt. § 35, stk. 2 í fólkaskúlalógini, og at einki stóð í starvslýsingini um, at tað er ein treyt fyri at verða settur í eitt av føstu størvunum, at viðkomandi hevur lokið serliga roynd í føroyskum, so metir Mentamálaráðið, at tað ikki er orsøk til at finnast at avgerðini hjá skúlastjóranum at fyribilsseta læraran í fast starv, hóast hesin hevur danskt læraraprógv og ikki hevur lokið serliga roynd í føroyskum, sbrt. § 35, stk. 2 í fólkaskúlalógini.

Eisini vísa tygum í hoyringarsvari tygara á, at landsstýrismaðurin ikki hevur givið undantaksloyvi sambært § 37 í fólkaskúlalógini, ið hevur fylgjandi áseting:

„§ 37. Landsstýrismaðurin kann í serstøkum føri loyva frávik frá teimum í § 35 og § 36 settu reglum.“

Vísandi til omanfyri nevndu føstu umsitingarligu siðvenju, er tað eftir Mentamálaráðsins meting ikki neyðugt hjá setanarmyndugleikanum,

áðrenn setanin kann verða framd, at søkja um frávik sbrt. § 37 frá kravinum um serliga roynd í føroyskum sbrt. § 35, stk. 2.

> *Ad. kærupunkt 2.*
> *Viðvíkjandi at starvssetanin ikki varð eftir førleika og royndum*
>
> *Førleikakrøv í starvslýsingini*
> Tað framgongur av starvslýsingini, at førleikakrøvini til tey lýstu lærarastørvini var læraraútbúgving, og var ynskt, at umsøkjarar høvdu starvsroyndir í fólkaskúlanum. Læraralesandi, ið luku prógv summarið 2007, kundu eisini søkja størvini.

Fyri at meta um, hvønn førleika teir settu umsøkjararnir høvdu í mun til tygum, verða nøkur brot úr teirra umsóknum viðvíkjandi útbúgvingum og starvsroyndum endurgivin her:

Brot úr umsókn hjá umsøkjaranum, ið varð settur í starv 1 (fast starv):

> …
> Mentamálaráðið kann við støði í hesum staðfesta, at allir teir settu umsøkjararnir sostatt lúka tey formligu førleikakrøvini, ið sett vóru í starvslýsingini til tey trý størvini. Harumframt hava teir settu eisini allir starvsroyndir í fólkaskúlanum, eins og ynski verður sett fram um í starvslýsingini.
>
> *Innstilling og grundgeving fyri setan*
> Í hoyringarsvarinum frá setanarmyndugleikanum við Sørvágs skúla, dagfest 20. juli 2007, verður m.a. upplýst, at setanarnevndin hevði fund um umsóknirnar 21. juni 2007, og at nevndin seinni sama dag hevði setanarsamrøður við umsøkjararnar. Upplýst verður víðari, at setanarnevndin framdi sína innstilling eftir at hava viðgjørt allar umsóknirnar nágreiniliga og havt setanarsamrøður.
>
> Upplýst verður, at skúlastjórin fylgdi innstillingini frá setanarnevndini.

> Samanumtikið verður í hoyringarsvarinum víst á, at setanarnevndin og setanarmyndugleikin meta seg út frá einum heildarsjónarmiði at hava sett teir umsøkjarar, sum eru best egnaðir til lýstu størvini, og verða allar ákærur avvístar um, at starvssetanin ikki var framd eftir skúlans tørvi, førleika og royndum hjá umsøkjarunum.

Skúlastjórin vísir í skrivi til Mentamálaráðið, dagfest 13. september 2007, á fylgjandi viðurskifti, sum nærri grundgeving fyri ikki at seta tygum í starv:

> „Prógv, fakkunnleiki og ummæli siga ikki alt um eginleikarnar hjá einum persóni. Tað eru aðrir persónligir eginleikar, ið eisini telja við, tá persónar, og her hugsi eg serliga um lærarar, skulu setast í starv. Ein fyritreyt er, at teir eru disiplinert sterkir.
>
> Kenni allar settu lærararnar sera væl, havi arbeitt saman við teimum í skúlahøpi og eisini læraranum, ið klagar um starvssetanina, og mín persónliga hugsan í hesum føri er, at settu umsøkjararnir eru væl sterkari disiplinert í øllum flokkunum í fólkaskúlanum, enn klagarin er.
>
> Hetta viðgongur klagarin sjálvur í setanarsamrøðuni (sí hjálagda skjal).“

Í notatinum frá tygara setanarsamrøðu verður m.a. víst á fylgjandi:

> „Einaferð eg fór til B, kláraði ikki ein 9. fl. Ringt at koma inn í ein t.d. 9.fl. sum man ikki kennir.“

Í hoyringarsvarinum frá setanarnevndini og setanarmyndugleikanum, dagfest 21. november 2007, verður viðvíkjandi tygum m.a. víst á fylgjandi:

> „Undir setanarsamrøðuni upplýsti hon, at hon av og á hevði trupulleikar at halda disiplin millum næmingarnar, men hon metti ikki, at hetta var nakar trupulleiki.“

Eisini verður upplýst, at:

> „Sum heild kann sigast, at A hevur góðan teoretiskan kunnleika og drúgvar praktiskar royndir.
>
> Tað var út frá eini heildarmeting, at hon ikki varð innstillað til starvið, við tað at hinir umsøkjararnir vórðu mettir at hóska betri inn í umhvørvið á skúlanum, eisini tá hugsað verður um samlaða aldurs- og kynsbýtið millum lærararnar í Sørvágs skúla.
>
> Tað hevur eisini havt týdning fyri innstillingina hjá setanarnevndini, at A ikki tykist at hava verið serliga støðug í teimum setanum, hon higartil hevur havt.
>
> Samanumtikið var setanarnevndin av teirri áskoðan, at A er skikkað til starvið, men eftir eini ítøkiligari metan av hinum umsøkjarunum, metti nevndin, at C var tann best skikkaði til júst hetta starvið.“

Í hoyringarsvarinum, dagfest 18. januar 2008, vísir setanarnevndin og setanarmyndugleikin m.a. eisini á fylgjandi viðurskifti:

> „A ger eitt sindur burturúr, at setanarnevndin í sambandi við setanirnar hevur víst á samlaða aldurs- og kynsbýtið við skúlan.
>
> Hetta hevur einki við javnstøðulógina at gera. Tað er ein samlað og yvirornað meting, sum setanarnevndin hevur gjørt sær í hesum sambandi, og tað skal eisini viðmerkjast, at hesi viðurskifti ikki hava verið høvuðsorsøkin til endaligu innstillingina.
>
> Viðvíkjandi setanarsamrøðunum skal viðmerkjast, at setanarnevndin framman undan hevði havt setanarsamrøður við C. Hesin søkti starv eitt ár framman undan við skúlan í …, og ein setanarsamrøða fór tá fram við hann.
>
> Í hesum samanhangi vórðu notat frá setanarsamrøðuni gjørd, og spurnarskema varð útfylt. Eingin í setanarnevndini metti seg

hava tørv fyri eini nýggjari samrøðu, deils tí setanarnevndin kendi viðkomandi væl, og tí fleiri av limunum í setanarnevndini arbeiða saman við honum í tí dagliga.

Setanarsamrøðan við D fór fram gjøgnum telefon, har skúlastjórin og limirnir í setanarnevndini allir hoyrdu samrøðuna, og har allir limir fingu høvi at seta fram spurningar. D var staddur í …, tá samrøðan varð gjørd. Einki ólógligt liggur í hesum."

Umframt høvuðskæru tygara vísa tygum í hoyringarsvarinum í høvuðsheitum eisini á fylgjandi viðurskifti:

a) at setanarnevndin ikki hevur hildið seg til § 3, stk. 1 í javnstøðulógini.
b) at eingin setanarsamrøða var við umsøkjaran, sum er settur í starv 1,
c) at tað er ivasamt, um setananevndin hevði setanarsamrøðu við umsøkjaran, sum er settur í starv 2,
d) at tað er skeivt, sum skúlastjórin førir fram, at hesin hevur arbeitt saman við báðum lærarum, ið fingu starv 3, eftir at teir hava fingið lærarprógv,
e) at setanarmyndugleikin ikki hevur megnað at grundgivið fyri sínum rættvísi í starvssetanini.
f) at setanarmyndugleikin ikki útgreinar, hvat meint verður við, tá ið nevnt verður, at teir settu umsøkjararnir eru sterkari disiplinert enn tygum,
g) at grundgevingarnar fyri innstilling ikki vóru nøktandi,
h) at starvslýsingin ikki umboðaði tann veruliga tørvin hjá skúlanum,
i) at setanarnevndin hevur innstillað umsøkjara til starv grundað á eitt ynski.
j) at skúlastjórin í sambandi við setanarsamrøðuna bert noteraði um tygara veiku síður,
k) at tygum áttu at verið innstillað sum nr. 1 til øll trý størvini.

Mentamálaráðið hevur fylgjandi viðmerkingar til kærupunkt 2 og tygara atfinningar í hoyringarsvarinum:

Ad.a.
Mentamálaráðið metir ikki, at tað er ósakligt av setanarnevndini, tá ið hon vísandi til, at setanarnevndin útfrá einari samlaðari og yvirornaðari meting hevur tikið ávís atlit fyri samlaða kyns- og aldursbýtinum í skúlanum. Setanarnevndin vísir eisini á, at hesi atlit ikki vóru høvuðsorsøkin til endaligu innstillingina.
Mentamálaráðið metir ikki, at hetta kann metast at verða brot á § 3, stk. 1 í javnstøðulógini.

Ad.b.
Mentamálaráðið metir ikki, at ein setanarsamrøða, sum fór fram árið frammanundan til annað lærarastarv við Sørvágs skúla, kann metast at vera setanarsamrøða til tey lýstu lærarastørvini við Sørvágs skúla 2007/08. Í hesum førinum er sostatt talan um, at setanarnevndin hevur framt innstilling viðvíkjandi tí eina umsøkjaranum, uttan at hesin hevur verið til setanarsamrøðu til tey lýstu størvini.
Mentamálaráðið metir, at setanarnevndin átti at havt setanarsamrøðu við umsøkjaran á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar, soleiðis at allir umsøkjarar vórðu viðgjørdir eins, og setanarnevndin fekk høvi til at samanbera umsøkjararnar á sama grundarlagi.

Mentamálaráðið kann ikki góðtaka tílíka mannagongd fyri setanum og átalar, at setanarmyndugleikin við Sørvágs skúla ikki hevur havt setanarsamrøðu við umsøkjaran, áðrenn hesin var innstillaður til starvið.

Ad.c.
Í hoyringarsvarinum frá setanarnevndini verður í hesum sambandi víst á, at setanarnevndin hevði setanarsamrøðu umvegis telefon við umsøkjaran, vegna at hesin var staddur í …, og at limirnir í setanarnevndini høvdu havt høvi til at seta spurningar v.m. til umsøkjaran.

Mentamálaráðið hevur einki at finnast at í hesum sambandi.

Ad.d.
Mentamálaráðið skal í hesum sambandi viðmerkja, at skúlastjórin í sínum skrivi frá 13. september 2007 m.a. vísir á fylgjandi: *„Kenni allar settu lærararnar sera væl, havi arbeitt saman við teimum í skúlahøpi… „.*

Mentamálaráðið dugir ikki útfrá skjølunum í málinum at síggja, at nakað er nevnt um, at skúlastjórin skal hava arbeitt saman við báðum lærarunum, sum fingu starv 3, eftir at hesir hava fingið læraraprógv.

Ad.e.
Mentamálaráðið metir, at tað er eitt sakligt sjónarmið hjá setanarmyndugleikanum at vísa á, at aðrir umsøkjarar eru settir í tey lýstu størvini vísandi til, at hesir útfrá einum heildarsjónarmiði vórðu mettir at vera best egnaðir til størvini.

Mentamálaráðið metir tó, at setanarmyndugleikin í sínum svari uppá umsókn tygara átti at grundgivið nærri fyri, hví mett verður, at førleikin hjá teimum settu svarar betur til lýstu størvini, enn førleikin hjá tygum, eitt nú viðvíkjandi útbúgving, starvsroyndum, persónligum eginleikum og/ella samstarvsvilja v.m.

Ad.f.
Í hesum sambandi verður í hoyringarsvarinum, dagfest 21. november 2007, víst á fylgjandi:

„Undir setanarsamrøðum upplýsti hon, at hon av og á hevði trupulleikar at halda disiplin millum næmingarnar, men hon metti ikki, at hetta var nakar trupulleiki.“

Mentamálaráðið metir í hesum sambandi, at setanarmyndugleikin átti at havt grundgivið nærri fyri útsøgnini um, at hinir umsøkjararnir vóru sterkari disiplinert enn tygum, t.d. við at vísa á ítøkilig dømi.

Ad.g.
Mentamálaráðið dugir ikki at síggja, at setanarnevndin hevur framleitt nakað innstillingarskjal við grundgevingum til skúlastjóran at taka støðu útfrá, men í hoyringarsvarinum, dagfest 20. juli 2007, umframt í seinni hoyringarsvarum verður greitt nærri frá teimum grundgevingum, ið lagdar verða til grund fyri innstillingum og setan.

Mentamálaráðið metir ikki, at setanarnevndin á nøktandi hátt hevur grundgivið fyri innstillingini til starv 1. Eingin setanarsamrøða var við umsøkjaran, sum fekk starvið, og mett verður ikki, at grundgevingar sum t.d. „*hetta eru júst hansara flokkar…*“ og „*kennir hesar næmingar og flokkar*“ eru saklig atlit at taka í sambandi við innstilling til starvið.

Tað framgongur ikki nærri, hvørjar fakligar ella persónligar eginleikar dentur verður lagdur á fyri at innstilla viðkomandi til starvið í mun til aðrar umsøkjarar. Ein samanbering av umsøkjarunum vantar eisini í innstillingini, eins og hetta heldur ikki framgongur í innstillingunum til starv 2 og 3.

Samanumtikið metir Mentamálaráðið, at grundgevingarnar fyri innstilling í stóran mun eru ófullfíggjaðar og ikki nøktandi at taka støðu útfrá.

Ráðið metir eisini, at setanarnevndin átti at havt framleitt eitt skrivligt innstillingarskjal, sum neyvt lýsir, hvussu setanarnevndin hevur málsviðgjørt setanarmálið, og sum inniheldur allar neyðugar upplýsingar um umsøkjarar, herundir relevantar upplýsingar frá setanarsamrøðum, hvørjar metingar setanarnevndin hevur gjørt um teir einstøku umsøkjararnar og nærri frágreiðing um, hvussu funnið verður fram til innstillingina, tvs. ein samanbering av umsøkjarunum.

Eisini skal ráðið í hesum sambandi vísa á, at ein myndugleiki hevur, sbrt. § 6, stk. 1 í lógini um innlit í fyrisitingina, skyldu

til at skriva upp allar upplýsingar um veruligu umstøðurnar, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum.

Sambært einari ikki-lógarfestari fyrisitingarligari meginreglu hevur setanarmyndugleikin eisini eina víðkaða skyldu at skriva upp innihaldið á øllum upplýsingum, ið hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina, soleiðis at tað ber til at føra munadygt eftirlit við, at setanarmyndugleikin hevur borið seg rætt at, og at málsviðgerðin er farin rætt fram.

Mentamálaráðið metir ikki, at setanarnevndin og setanarmyndugleikin á nøktandi hátt hava skrivað upp upplýsingar og upplýst málið, áðrenn avgerð var tikin um innstilling og setan.

Ad.h.
Tað framgongur av skjølunum í málinum, at setanarmyndugleikin í starvslýsingini lutvíst hevur upplistað tær lærugreinir, har skúlin hevur tørv á lærarum, og verða ikki allar lærugreinir nevndar í starvslýsingini.
Í starvslýsingini verður tó fylgjandi orðing nýtt um tørvin hjá skúlanum: *„Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær…“*, og gevur hetta eina ábending um, at lærugreinayvirlitið í starvslýsingini bert skuldi skiljast sum eitt partvíst yvirlit.

Mentamálaráðið kann í hesum sambandi vísa á, at tað eftir ráðsins meting hevði givið eina meira fullfíggjaða mynd av lærara-tørvinum hjá skúlanum, um skúlin í starvslýsingini upplistaði allar tær lærugreinir, sum skúlin søkti eftir lærarum til.

Ad.i.
Sum víst verður til omanfyri, so metir Mentamálaráðið, at innstillingin frá setanarnevndini í stóran mun hevur verið ófullfíggjað, og metir ráðið eisini, at tað er ikki nøktandi grund-geving bert at vísa til, at setanarnevndin hevur ynskt at innstilla umsøkjaran, sum fekk starv 1, sum nr. 2 til starv 2, og umsøkjaran, sum fekk starv 2, sum nr. 2 til starv 1. Hetta krevur eina nærri

grundgeving, soleiðis at tað framgongur, hví júst hesir skulu innstillast til starvið í mun til aðrar umsøkjarar.

Ad.j.
Av notatinum í málinum frá tygara setanarsamrøðu ber ikki til hjá Mentamálaraðnum at staðfesta, at skúlastjórin bert skal hava noterað tygara veiku síður undir setanarsamrøðuni. Í notatinum verða bæði sterkar og veikar síður lýstar v.m.

Ad.k.
Ein setanarnevnd hevur viðgjørt tær innkomnu umsóknirnar, havt setanarsamrøður og mett um umsøkjararnar, og vísir setanarnevndin á, at nevndin út frá einum heildarsjónarmiði hevur innstillað best egnaðu umsøkjararnar til tey lýstu størvini.

Mentamálaráðið metir ikki, at tað útfrá upplýsingunum í málinum ber til at staðfesta, at tygum áttu at verið innstillað sum nr. 1 til øll trý størvini.
*Viðvíkjandi at einki stóð í starvslýsingini um lærugreinirnar týskt og evning*
Av starvslýsingini framgongur, at: „*Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær: flokslærarauppgávu, dreingjaítrótt, enskt og smíð í framhaldsdeildini, náttúru/tøkni og støddfrøði í 1.-7.fl. og tímar í serligum tørvi.* „

Í hoyringarsvarinum, dagfest 20. juli 2007, verður staðfest, at tímatalvan var liðug fyri tey trý lýstu lærarastørvini, og er lærugreinin týskt ikki er at finna á tímatalvuni, meðan evning framgongur á tímatalvuni fyri starv 2.

Mentamálaráðið metir ikki, at tað ber til at finnast at, at einki verður nevnt í starvslýsingini um týskt, tá ið hetta ikki er ein lærugrein, sum teir settu lærararnir skulu undirvísa í.

Viðvíkjandi lærugreinini evning er at siga, at henda lærugreinin ikki framgongur í starvslýsingini, hóast lærugreinin er ein partur av tímatalvuni fyri starv 2.

Mentamálaráðið metir, at tað hevði verið rættari um skúlin í starvslýsingini upplistaði allar lærugreinirnar, sum søkt verður eftir lærarum til, serliga vísandi til, at tímatalvan eftir øllum at døma var liðug. Í starvslýsingini verður orðingin „m.a." nýtt í sambandi við upplistingina av lærugreinum, og kann hetta geva eina ábending um, at lærugreinalistin ikki skal metast sum úttømandi, og at aðrar lærugreinir eisini kunnu koma afturat, herundir lærugreinin evning.

*Viðvíkjandi vantandi innliti*
Í hoyringarsvari tygara, umframt í fleiri teldupostum sendar Mentamálaráðnum, vísa tygum á, at tygum ikki hava fingið nøktandi innlit í skjøl setanarmálinum viðvíkjandi.

Tygum hava sbrt. § 9, stk. 1 í fyrisitingarlógini rætt til at verða gjørd kunnug við skjølini í málinum, men sbrt. § 10, stk. 2 í somu lóg er hetta bert galdandi fyri upplýsingar, ið viðvíkja tygara egnu viðurskifti í setanarmálinum.

Mentamálaráðið hevur fleiri ferðir gjøgnumgingið skjølini í málinum, ið eru innkomin til Mentamálaráðið, og metir ráðið, at tygum hava fingið fult innlit í øll skjøl viðvíkjandi tygara viðurskiftum í hesum setanarmálinum.

## *Niðurstøða*
Mentamálaráðið hevur viðgjørt kæruna við heimild í § 59 í fólkaskúlalógini, og hevur ráðið fylgjandi viðmerkingar og niðurstøðu til kæru tygara:

Setanarmyndugleikin við Sørvágs skúla hevur, eins og aðrir almennir myndugleikar, skyldu til at seta best skikkaða umsøkjaran í starv. Setanarmyndugleikin skal í hesum sambandi nýta øll viðkomandi, saklig og lóglig atlit, og eigur setanarmyndugleikin at skriva niður tær metingar, ið verða gjørdar undir setanartilgongdini.

Starvssetanir eru at meta sum fyrisitingarligar avgerðir og eru fevndar av ásetingunum í fyrisitingarlógini, og hevur setanarmyndugleikin

skyldu til at lýsa málið á nøktandi hátt, áðrenn avgerð verður tikin í málinum.

Mentamálaráðið metir, at setanarmyndugleikin við Sørvágs skúla hevði heimild til at fyribilsseta umsøkjaran, sum var settur í fast starv (starv 2).

Ráðið metir, at tann fyribilssetti lýkur tey formligu krøvini fyri setan, sum eru ásett í starvslýsingini, og staðfestir ráðið, at tað er ein føst umsitingarlig siðvenja í Mentamálaráðnum, at lærarar við donskum fólkaskúlalæraraprógvi kunnu verða fyribilssettir í fast lærarastarv, um hesir lúka lógarásettu serligu royndina í føroyskum sbrt. § 35, stk. 2 í fólkaskúlalógini, sí nærri frágreiðing omanfyri.

Mentamálaráðið metir ikki, at tað útfrá upplýsingunum í málinum ber til at staðfesta, at starvssetanin við Sørvágs skúla ikki varð framd eftir førleika og starvsroyndum.

Ráðið skal í hesum sambandi viðmerkja, at setanin er framd útfrá einari heildarmeting av umsøkjarunum, og at allir teir settu umsøkjararnir lúka tey formligu førleikakrøvini, sum eru ásett í starvslýsingini, og hava teir settu eisini allir starvsroyndir í fólkaskúlanum, eins og ynski verður sett fram um í starvslýsingini.

Mentamálaráðið metir tó, at málsviðgerðin hjá setanarnevndini og setanarmyndugleikanum við Sørvágs skúla í hesum máli í stóran mun hevur verið ófullfíggjað.

Ráðið skal í hesum sambandi vísa á fylgjandi viðurskifti, sum ráðið metir ikki eru nøktandi viðgjørd í setanarmálinum:

> Ráðið metir, at setanarnevndin átti at havt setanarsamrøðu við umsøkjaran, sum var settur í starv 1, á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar, soleiðis at allir umsøkjarar vórðu viðgjørdir eins, og setanarnevndin fekk høvi til at samanbera umsøkjararnar á sama grundarlagi.

Ráðið metir, at setanarmyndugleikin við Sørvágs skúla í sínum svari uppá umsókn tygara átti at grundgivið nærri fyri, hví mett verður, at førleikin hjá teimum settu svarar betur til lýstu størvini, enn førleikin hjá tygum, eitt nú viðvíkjandi útbúgving, starvsroyndum, persónligum eginleikum og/ella samstarvsvilja v.m.

Ráðið metir, at setanarmyndugleikin átti at havt grundgivið nærri fyri útsøgnini um, at hinir umsøkjararnir vóru sterkari disiplinert enn tygum, t.d. við at vísa á ítøkilig dømi.

Ráðið metir, at setanarnevndin átti at havt grundgivið nærri fyri sínum innstillingum til tey lýstu størvini, soleiðis at tað í innstillingini greitt framgongur, hvørjar metingar setanarnevndin hevur gjørt sær um umsøkjararnar, og hvørja sammeting setanarnevndin hevur gjørt av umsøkjarnum sum grundarlag fyri innstillingini.

Ráðið metir ikki, at setanarnevndin í sínari málsviðgerð í setanarmálinum á nøktandi hátt hevur skrivað upp upplýsingar sbrt. § 6, stk. 1 í lógini um innlit í fyrisitingina og upplýst málið nøktandi, áðrenn avgerð varð tikin um innstilling og setan.

Mentamálaráðið fer í næstum at boða setanarmyndugleikanum við Sørvágs skúla frá, at ráðið átalar omanfyri nevndu fyrisitingarligu feilir, og fer ráðið at heita á setanarmyndugleikan um at gjøgnumganga og endurmeta sínar mannagongdir fyri setanarmálum, soleiðis at tílíkir fyrisitingarligir feilir ikki skulu koma fyri aftur. Eisini fer ráðið at minna setanarmyndugleikan á notat og grundgevingarskyldina sbrt. fyrisitingarlógini.

Mentamálaráðið skal vísa á, at hóast omanfyri nevndu fyrisitingarligar feilir eru gjørdir í setanarmálinum, so metir ráðið ikki, at hetta gevur grundarlag fyri, at setanarmálið verður víst aftur til nýggja viðgerð. Í hesum sambandi skal ráðið vísa á, at setanin er framd útfrá einari heildarmeting av umsøkjarunum, og at teir settu umsøkjararnir allir lúka tey formligu førleikakrøvini, sum

verða sett í starvslýsingini, og hava umframt hetta starvsroyndir í fólkaskúlanum.

At enda skal verða víst á, at Mentamálaráðið metir ikki, at tað ber til hjá ráðnum, útfrá upplýsingunum í málinum, at staðfesta, at setanarmyndugleikin ikki skal hava sett best skikkaðu umsøkjarar í størvini í Sørvágs skúla."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 16. mai 2008, varð klagan send Mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur. Mentamálaráðið varð eisini biðið um at lata umboðsmanninum til láns øll skjølini, bæði hjá skúlanum og ráðnum.

Við skrivi, dagfest 9. juni 2008, hevur Mentamálaráðið svarað umboðsmanninum soleiðis:

„Við hesum verður latið umboðsmanninum avrit av øllum skjølunum í málunum sum viðvíkja A:
Persónsmál hennara, máltal …
Lærarastørv í Sørvágs Skúla – Kæra um setan, máltal … ."

Við skrivi, dagfest 16. juni 2008, boðaði umboðsmaðurin Mentamálaráðnum frá, at umboðsmaðurin hevði móttikið skjølini, og at umboðsmaðurin skilti skrivið frá ráðnum soleiðis, at ráðið ikki ynskti at gera fleiri viðmerkingar til málið, men helt seg til skjalatilfarið og áður givnu frágreiðingina, dagfest 3. des. 2007. Umboðsmaðurin boðaði tí pørtunum frá, at málið bleiv tikið upp til endaliga viðgerð.

Við skrivi, dagfest 4. juli 2008, hevur Mentamálaráðið svarað umboðsmanninum soleiðis:

„**Viðvíkjandi kæru frá A**
Mentamálaráðið hevur ikki sent serstaka frágreiðing saman við skjalatilfarinum. Mentamálaráðið metir, at svarskrivið til

A, dagfest 29. apríl 2008, skjal 50, greiðir frá málinum og málsgongdini.

Tá ið skjalatilfarið var latið tygum, skuldi eisini verða tilskilað í fylgiskrivinum, sum var sent saman við skjalatilfarinum, at svarskrivið, skjal 50, eisini var at meta sum frágreiðing í málinum.

Biðið verður um umbering fyri, at hetta ikki er upplýst í skrivi, dagfest 9. juni 2008, skjal 52."

Av tí, at frágreiðingin, sum Mentamálaráðið vísir til í skrivinum, er sjálv kæruavgerðin, sum ráðið áður hevur sent klagaranum, helt umboðsmaðurin tað ikki vera neyðugt við framhaldandi partshoyringum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um, at klagarin, sum heldur seg hava verið best skikkaða umsøkjaran til øll trý størvini, átti at verið sett í starv.*

*Tá ein almennur myndugleiki setir fólk í starv, hevur myndugleikin við støði í kravinum um sakligheit, skyldu til at seta tann ella tey, sum úr einum heildarsjónarmiði eru best egnaði til tað umrødda starvið.*

*Eftir at hava kannað skjalatilfarið í málinum, tvs. frágreiðingarnar og skjølini frá setanarmyndugleikanum, umframt kæruviðgerðina hjá Mentamálaráðnum, havi eg ikki grundarlag fyri at halda, at starvssetanin av teimum trimum lærarunum byggir á annað enn lóglig, saklig og viðkomandi atlit. Allir limirnir í setanarbólkinum hava aftaná setanarsamrøðurnar gjørt sínar niðurstøður og givið stig fyri sínar eygleiðingar. Samlað hava teir 3 settu lærararnir fingið fleiri stig enn klagarin.*

*Eg undrist tó á, at klagarin, sum hevur undirvíst á skúlanum skúlaárið 2005/06 og tann 18. apríl 2007 fekk sítt besta viðmæli frá skúlanum, umframt at teir førleikar og royndir, sum setanarmyndugleikin grundgevir fyri setanina, eins væl hóska til klagarin, sum til teir settu*

*lærararnar, bert varð innstillað sum nummar 3 til starv 1, og als ikki varð innstillað til starv 2 og 3.*

*Setanarmyndugleikin vísir á, at talan ikki er um, at klagarin ikki er egnaður til størvini, men heldur, at tey settu vóru betri egnaði, og at tey disiplinert eru væl sterkari enn klagarin. Ongin av teimum innstillaðu til starv 3 hevur arbeitt á skúlanum eftir lokið prógv, og tað er onki tilfar í málinum sum vísir, at teir settu lærararnir vóru sterkari disiplinert enn klagarin. Eg haldi ikki , at ein tilburður, sum fór fram fyri 22 árum síðani kann brúkast sum grundarlag fyri niðurstøðuni um, at hini vóru sterkari dispilinert.*

*Sambært § 23, stk, 1. í Fyrisitingarlógini skal ein avgerð vísa til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Avgerðin skal í tann mun, tað er neyðugt, hava eina stutta frágreiðing um tær veruligu umstøður, sum metingin byggir á. Sum ført verður fram, kann tað vera trupult at grundgeva fyri, hví ein umsøkjari ikki hevur fingið starv, og eigur at vera víst serligt fyrilit í slíkum førum. Ein óheppin orðað grundgeving kann gerast steinur oman á byrðu. Men havandi í huga, at klagarin hevur undirvíst á skúlanum, og at skúlastjórin bert tveir mánaðir framman undan hesi starvssetan hevur givið klagaranum sítt besta viðmæli, hevði setanarmyndugleikin eina serliga skyldu til at geva henni eina neyvari grundgeving fyri, hví hon ikki varð innstillað ella sett í starv.*

*Eg fari at geva setanarmyndugleikanum eina átalu fyri ikki at hava givið eina nøktandi grundgeving í hesum setanarmáli. Av tí, at teir settu lærararnir vóru skikkaðir til størvini, og so long tíð er fráliðin, fari eg tó ikki at gera meira við hetta.*

*Harumframt vísir klagarin á, at lærari 2 ikki leyk treytirnar í lógini fyri at verða settur í starv, tí hann hevði danskt lærarapróg v. Mentamálaráðið hevur víst á, at sambært § 35, stk. 1. í Fólkaskúlalógini krevst, at viðkomandi hevur føroyska ella danska læraraútbúgving, fyri at kunna undirvísa í fólkaskúlanum. Føst setan er tó sambært stk. 2 í somu grein treytað av, at viðkomandi hevur staðið eina serliga roynd í føroyskum. Hesum eri eg samd í. Eg dugi tí ikki at síggja nakran trupulleika í hesari*

*setanini, tí viðkomandi lærari er settur í starv við einari fráboðan um, at hann fyri at fáa fast starv, skal lúka hesa royndina innan ávísa freist.*

*Burtursæð frá givnu átalu, geri eg ikki meira við hetta málið.*

## 28.3 Umflokking av starvi sum stjóri á Rúsdrekkasølu landsins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um, at Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur noktað umflokking av starvinum sum stjóri á Rúsdrekkasølu landsins. Klagarin førdi fram, at avgerðin um at nokta umflokking var ósaklig, og at grundgevingin ikki var nøktandi. Í avgerð síni um umflokking vísti Lønardeildin bert til eitt atlit, nevniliga at starvið ikki var broytt. Hetta metti umboðsmaðurin vera alt annað enn nøktandi. Avgerðir í flokkingarmálum eiga at verða bygdar á metingar og vigan av øllum teimum sakligu og viðkomandi atlitum og umstøðum, ið gera seg galdandi í tí einstaka flokkingarmálinum. Av tí at Lønardeildin ikki hevði tikið støðu til øll saklig og viðkomandi atlit í málinum, metti umboðsmaðurin ikki, at málið hevði fingið nakra veruliga viðgerð. Umboðsmaðurin gav Fíggjarmálaráðnum eina átalu fyri handfaringina av málinum, og bað ráðið um at taka hetta málið til nýggja viðgerð, og lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum.* (**J. *Nr. 200800015*)**

## Klagan

Við skrivi, dagfest 28. januar 2008, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> „Kæra um setanarviðurskifti míni
>
> Undirritaða, sum eri stjóri á Rúsdrekkasølu Landsins, eri flokkað í 36. lønarflokk.
>
> Eg havi í mars 2006 reist málið mótvegis Vinnumálaráðnum og gjørt vart við, at hendan flokking er ov lág, og Vinnumálaráðið er samt í hesum, og hevur í fleiri umførum søkt Fíggjarmálaráðið um umflokking.
>
> Í hesum sambandi verða løgd við:
> - brøv, dagfest 31. oktobur 2006, 3. novembur 2006 og 24. mai 2007 um umflokking,
> - umframt yvirlit yvir stovnsleiðarar, sum er dagfest 2. mars 2004.

Fíggjarmálaráðið hevur í tveimum umførum svarað brøvunum frá Vinnumálaráðnum. Hesi brøv eru dagfest 16. novembur 2006 og 13. desembur 2007. Fíggjarmálaráðið hevur í báðum førum noktað at umflokka starvið.

Harumframt verður løgd við:

- vegleiðing um flokking og umflokkingar,
- umframt notat um umsetningstøl fyri 2007.

Undirritaða metir, at tað er ósakligt hjá Fíggjarmálaráðnum at nokta umflokking.

Viðvíkjandi sjónarmiðum verður víst til tað, sum Vinnumálaráðið í skrivum sínum hevur ført fram.

Undirritaða metir, at flokkingin av stjórastarvinum á Rúsdrekkasøluni eigur at vera í 39. flokki. Í hesum sambandi verður víst á, at starvið sambært teir upplýsingar, sum eru í málinum, liggur í millum Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og Landsverk. Í skjalinum frá 2004 um stovnleiðarar og lønarviðurskifti teirra kann stjórastarvi á Rúsdrekkasøluni samanberast við stjórastarvið á Postverkinum og Strandferðsluni, sum liggja/lógu í lønarflokki 39.

Landsverk er flokkað í 39. flokki og Heilsufrøðiliga Starvsstovan í 38. flokki.

Harumframt verður mett, at tann grundgeving, ið Fíggjarmálaráðið hevur givið í sambandi við at teir hava nokta umflokking, ikki er nøktandi sambært galdandi fyrisitingarreglur.

Eg kann leggja afturat, at eg uppá munnligan fyrispurning frá Lønardeildini havi fingið tey boð/grundgeving at „eg fekk tað løn eg hevði uppiborið“.

Eg fari vinarliga at biðja Umboðsmannin, um at viðgera málið

og taka støðu til um meting mín um at starvið eigur at verða flokkað í 39. flokki er røtt.

Sum tað sæst av brævaskiftinum, hevur ein umflokking verið í 2002. Umboðsmaðurin fær uttan iva avrit av hesum skjølum frá Fíggjarmálaráðnum.

Avrit av hesum skrivi er sent Vinnumálaráðnum og til Fíggjarmálaráðið."

## Málsgongd

Tann 11. mars 2002 sendi Vinnumálaráðið soljóðandi umsókn um umflokking til Lønardeildina:

„Tilmæli um umflokking av stjórastarvinum á Rúsdrekkasølu Landsins
Starvið sum stjóri á Rúsdrekkasølu landsins er flokkað í 35. lønarflokki eftir tænastumannasáttmálanum, og fær stjórin sostatt lægstu stjóralønina undir Vinnumálastýrinum, ájavnt við stjóran í Vinnuframagrunninum.

Rúsdrekkasølan hevur eina útreiðslusíðu uppá 103 mió. kr., og starvast 33 fólk á fyritøkuni í 6 sølubúðum kring landið. Útreiðslurnar er næstan líka stórar sum hjá Postverki Føroya, hvørs stjóri verður løntur í 38. lønarflokki, og hevur millum 7 og 11 ferðir størri útreiðslur enn stovnar, hvørs stjórar verða løntir í 37. lønarflokki undir Vinnumálastýrinum. Rúsdrekkasølan hevur millum 2 til 5 ferðir so nógv starvsfólk sum allir aðrir stovnar undir vinnumálum, har stjórin verður løntur í 37. lønarflokki. Stjórin í Vinnuframagrunninum hevur onki starvsfólk undir sær og fíggjarábyrgd fyri 7 mió. kr., sum Dagmar er lønt ájavnt við.

Tað setur stór krøv til stjóran at reka fyritøkuna, og er lønin alt ov lág samanborið við lønina hjá stjórum undir Vinnumálastýrinum og almennum stjórum sum heild. Undirritaði mælir

tí til, at lønin hjá stjóranum á Rúsdrekkasølu landsins verður umflokkað til 37. lønarflokk beinanvegin.

Víst verður til yvirlit niðanfyri yvir stovnsleiðarar innan § 6. Vinnumál.“

Hjálagt umsóknini var yvirlit yvir stovnsleiðarar innan § 6. Vinnumál.

Tann 26. juli 2002 sendi Lønardeildin soljóðandi svarskriv til Vinnumálaráðið:

„Umflokka stjóran á Rúsdrekkasølu landsins
Stjórin á Rúsdrekkasølu landsins skal verða umflokkaður í 36. lønarflokk hjá tænastumonnum landsins.

Vinnumálastýrið hevur í skrivi dagfest 11. mars í 2002 biðið um, at stjórin varð umflokkaður í 37. lønarflokk. Fíggjarmálaráðið sendi í skrivi dagfest 4. juli í 2002 Løgmansskrivstovuni málið at taka støðu til. Í skrivinum stóð, at Fíggjarmálaráðið tók undir við, at starvið varð umflokkað, men í 36. lønarflokk. Løgmansskrivstovan hevur í skrivi dagfest 21. august í 2002 tikið undir við, at starvið verður umflokkað í 36. lønarflokk.“

Tann 15. september 2005 lýsir Vinnumálaráðið eftir nýggjum stjóra til Rúsdrekkasølu Landsins. Tann 22. september 2005 søkir klagarin starvið, og verður sett í starvið tann 17. oktober 2005.

Tann 3. november 2006 sendir Vinnumálaráðið aftur umsókn til Lønardeildina um at umflokka starvið sum stjóri á Rúsdrekkasølu Landsins til 37. lønarflokk. Umsóknin um umflokking varð grundað á stóru fíggjarligu ábyrgdina og starvsfólkaleiðsluna á stovninum. Eisini varð í umsóknini víst á, at Rúsdrekkasølan rekur 6 handlar kring landið, og at fyritøkan so vítt gjørligt verður rikin út frá handilsligum treytum, tó við atliti til heilsulig sjónarmið, sum miðja eftir at avmarka rúsdrekkanýtsluna. Sambært fíggjarlóg skal fyritøkan

hava eitt ávíst yvirskot árliga. Víst verður eisini á, at núverandi stjóri hevur hægri útbúgving. Harumframt verður starvið sum stjóri á Rúsdrekkasølu Landsins samanborið við onnur størv viðvíkjandi setanarviðurskiftum. Í umsóknini er yvirlit yvir stovnsleiðarar innan § 6. Vinnumál.

Tann 16. november 2006 sendir Lønardeildin soljóðandi svarskriv til Vinnumálaráðið:

> „Umflokka stjóran á Rúsdrekkasølu landsins
> Vinnumálaráðið hevur í skrivi dagfest 3. november 2006 biðið um, at stjórin á Rúsdrekkasølu landsins verður umflokkaður frá 36. lønarflokk til 37. lønarflokk hjá tænastumonnum landsins.
>
> Grundgevingarnar eru m.a., at starvið krevur stóra fíggjarliga ábyrgd og starvsfólkaleiðslu. Upplýst verður, at útreiðslurnar eru umleið 89 mió. kr. og inntøkurnar umleið 100 mió. kr. árliga. Starvið er fjøltáttað og stjórin skal loysa nógvar og truplar uppgávur. Landsfyritøkan rekur seks handlar og skal sambært galdandi rættarregluni, so vítt gjørligt, rekast útfrá handisligum treytum og somuleiðis taka atlit til heilsulig sjónarmið. Ein slík javnvág kann verða trupul, verður sagt, tí fyritøkan skal hava yvirskot uppá 11,0 mió kr. árliga.
>
> Tikið verður ikki undir við at umflokka starvið frá 36. lønarflokki til 37. lønarflokk hjá tænastumonnum, tí starvið varð í august 2002 flokka í 36. lønarflokk hjá tænastumonnum landsins og starvið er ikki, sambært frágreiðing frá Vinnumálaráðnum, broytt.
>
> Í hesum sambandi verður víst til skriv hiðani dagfest 4. juli 2002.“

Tann 29. mai 2007 sendir Vinnumálaráðið Lønardeildini nýggja umsókn um at umflokka starvið sum stjóri á Rúsdrekkasølu Landsins. Skrivið er soljóðandi:

„Umsókn um at umflokka starvið sum stjóri á Rúsdrekkasølu landsins

Inngangur
Hetta mál snýr seg um at umflokka starvið, sum stjóri á Rúsdrekkasølu landsins. Sí grundgevingarnar niðanfyri.

**Yvirlit yvir stovnsleiðarar innan § 6. Vinnumál, lønarviðurskifti, ábyrgd o.a. 1. mai 2007**

| Stovnur | Setanarviðurskifti | Hægri útbúgving: Ja/nei | Fíggjarábyrgd Brutto | Starvsfólka-Leiðsla, tal | Aðrar starvsuppgávur |
|---|---|---|---|---|---|
| Aðalstjóri VMS | Tænastum. 40. fl | Ja | 75 mió. kr | 20 | Myndugleiki, fyrisiting, lóggáva, skipan, eftirlit, fjølbroytni |
| Landsverk | Sersáttmáli 39. fl | Ja | 425 mió. kr | 160 | Myndugleiki, Rakstur, bygging, fyrisiting, eftirlit, fjølbroytni |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | Tænastum. 38. fl | Ja | 27 mió. kr. | 50 | Myndugleiki, eftirlit, gransking, fjølbroytni |
| Jarðfangi | Sáttmálasett 38.fl | Ja | 33 mió. kr | 23 | Myndugleiki, fyrisiting, eftirlit, fjølbroytni |
| Samvit | Tænastum. 37. fl | Ja/Nei | 15 mió. kr | 18 | Menning, ráðgeving |
| Landsdjóralæknin | Tænastum. 37. fl | Ja | 0 | 2 | Myndugleiki, lóggáva, fyrisiting, eftirlit, fjølbroytni |
| Búnaðarstovan | Sáttmálas. 37. fl | Ja | 22 mió. kr | 16 | Myndugleiki, stuðulsfyrisiting |
| Royndarstøðin | Sáttmálas. 37. fl | Ja | 5 mió. kr | 8 | Royndir, ráðgeving, menning |
| Kappingarráðið | Tænastum. 37. fl | Ja | 7 mió. kr | 11 | Myndugleiki, eftirlit, ráðgeving |
| Akstovan | Tænastum. 37. fl | Nei | 12 mió. kr | 18 | Eftirlit, skráseting |
| Arbeiðseftirlitið | Tænastum. 37. fl | Nei | 6 mió. kr | 10 | Myndugleiki, eftirlit |
| Deildarst. Vms | Tænm.líkn. 37. fl | Ja | 0 | 3-4 | Fyrisiting, lóggáva, samskipan |
| Rúsdrekkasøla | Sersáttmáli 36. fl | Ja | 100 mió. kr | 34 | Rakstur av fyritøku, myndugleiki, fjølbroytni |
| Vinnuframagr. | Sáttmálas. 35. fl | Nei | 8 mió. kr | 1 | Stuðulsfyrisiting |

Allýsing:
Setanarviðurskifti: Talan er um størv, sum eru flokkaði eftir sáttmálanum hjá Tænastumannafelag Landsins, ella ájavn nevnda sáttmála. T.d. tænastumannastørv, tænastumannalíknandi størv, „stjórar við sersáttmála“, ella eftir øðrum sáttmálum, tó soleiðis at teir fáa eina viðbót, sum er munurin millum flokkingina t.d. hjá verkfrøðingunum, og ávísan lønarflokk í tænastumannasáttmálanum. Í onkrum føri fær tænastumaður viðbót, sum svarar til ein lønarflokk, og er lønarflokkur tá nevndur við viðbótini, dømi 37 fl. + viðbót svarandi til 1 fl. = 38 lønarflokkur.

Hægri útbúgving: Skynað verður millum stjórar við universitetsútbúgving og teir, sum ikki hava universitetsútbúgving.

Fíggjarábyrgd: Samlaðar útreiðslur (brutto) bæði rakstur og íløgur, sum stjórin fyrisitur.

Starvsfólkatal: Tal av fulltíðarstørvum, í onkrum føri á fleiri játtanum.

Aðrar starvsuppgávur: Ein „myndugleiki“ tekur fyrisitingarligar avgerðir við heimild í rættarreglum, og „eftirlit“ verður framt við heimild í rættarreglum.

Fjølbroytni: Hetta skal skiljast sum ein samlað meting av, hvussu „umfatandi“ starvið er, t.d. vav av arbeiðsleiðslu, neyðugt er at taka nógvar og truplar uppgávur og avgerðir, og at stjórin er undir trysti frá nógvum aktørum.

Umflokking
Starvið sum stjóri fyri Rúsdrekkasølu landsins, er flokkað ájavnt við 36. lønarflokk hjá tænastumonnum landsins, tó uttan at verða tænastumannastarv. Setanartreytirnar annars eru ásettar í sersáttmála. Mælt verður til at starvið í staðin verður flokkað ájavnt við 38. lønarflokk hjá tænastumonnum landsins.

Hetta er m.a. grundað á at tað er sera stór fíggjarlig ábyrgd og stór starvsfólkaleiðsla í starvinum. Útreiðslurnar eru umleið 90 mió kr., og inntøkurnar góðar 100 mió kr. árliga. Tað starvast 34 fólk (ársverk) í landsfyritøkuni.

Starvið er fjøltáttað, og skal stjórin loysa nógvar og truplar uppgávur.

Landsfyritøkan rekur seks handlar kring landið, og skal Landsfyritøkan sambært galdandi rættarreglum, so vítt gjørligt rekast út frá handilsligum treytum, tó við atliti til heilsulig sjónarmið, sum miðjar eftir at avmarka rúsdrekkanýtsluna. Ein javnvág sum kann verða trupul, eisini tí at fyritøkan sambært fíggjarlóg, skal hava eitt yvirskot uppá umleið 11,0 mió kr. árliga.

Krøvini til Rúsdrekkasøluna økjast alsamt. Seinast við lógarásettum umhvørviskrøvum, har landsfyritøkan eisini skal kunna taka ímóti einnýtsluíløtum o.t. í deildunum kring landið.

Stjórin samskiftir og samstarvar við nógvar aktørar, umframt politiska myndugleikan, eitt nú leverandørar og fyritøkur, og hevur ein umfatandi kundaskara.

Viðmerkjast skal, at undanfarni stjóri ikki hevði hægri útbúgving, meðan nýggi stjórin hevur hægri útbúgving.

Samanbering o.a.
Verður starvið sum stjóri á Rúsdrekkasølu landsins, samanborið við onnur stjórastørv undir vinnumálum, so svarar fíggjarliga ábyrgdin til millum 38. og 39 lønarflokk, og starvsfólkaleiðslan til 38. lønarflokk. Sí yvirlitið.

Nú Menningarstovan og Ferðaráð Føroya eru løgd saman í ein stovn, SamVit, verður onki stjórastarv á nøkrum stovni undir § 6. Vinnumál, flokkað niðanfyri 37. lønarflokk, undantikið á Rúsdrekkasølu landsins.

> Starvið sum stjóri í Vinnuframagrunninum er flokkað í 35. lønarflokki hjá tænastumonnum landsins, men starvast bert eitt fólk í VFG, og umsitur grunnurin umleið 7,0 mió kr. árliga.
>
> Tá málið um umflokking varð tikið upp seinast, svaraði Lønardeildin í skrivi dagfest 16. november 2006, at umbønin ikki varð gingin á møti, tí starvið ikki varð broytt síðan tað varð flokkað í 2002.
>
> Til tað er at siga, at starvið eftir Vinnumálaráðsins fatan, rætt og slætt er flokkað alt ov lágt, hetta sjálvt um vit hugsa okkum at ongar broytingar vóru í starvinum. Lønin svarar á leið til lønina hjá deildarleiðarum/ráðgevum I eftir BLF- sáttmálanum.
>
> Síðan starvið varð flokkað, er sjálvt starvsinnihaldið broytt, tí rættargrundarlag landsfyritøkunar er meiri fjølbroytt. A hevur, sum tilskilað omanfyri, eisini hægri útbúgving."

Tann 13. desember 2007 sendir Lønardeildin soljóðandi skriv til Vinnumálaráðið:

> „Viðvíkjandi starvinum sum stjóri á Rúsdrekkasølu landsins Vinnumálaráðið skrivar tann 29. mai í 2007 soleiðis: „… at starvið eftir Vinnumálaráðsins fatan, rætt og slætt er flokkað alt ov lágt, …"
>
> Vit kunnu bara staðfesta, at semja er ikki millum Vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið, Lønardeildina, um, hvussu starvið eigur at verða flokkað.
>
> Vit hava einki at leggja aftrat tí, sum er sagt í skrivum okkara frá 16. november í 2006 og 4. juli í 2002. Starvið verður ikki umflokkað, og gjørt verður ikki meira við málið."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 15. februar 2008, varð klagan send Fíggjarmálaráðnum,

Lønardeildini og Vinnumálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur. Samstundis vóru myndugleikarnir bidnir um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 4. mars 2008 sendi Fíggjarmálaráðið, Lønardeildin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> „Viðvíkjandi klagu, A, dagfest tann 28. januar í 2008
>
> A skrivar: „…Vinnumálaráðið er samt…“.
> Tað er ikki óvanligt, at stjórnarráðini eru ikki samd við okkum um, hvussu størv verða flokkað, og Vinnumálaráðið var heldur ikki samt við okkum, tá ið starvið sum stjóri á Rúsdrekkasølu Landsins varð umflokkað úr 35 í 36 tann 26. august í 2002. Tað var áðrenn A kom í starvið. Eitt flokkanarmál millum mong onnur. Skjølini í málinum liggja við í avriti.
>
> A skrivar: „…tað er ósakligt hjá Fíggjarmálaráðnum…“
> Tá ið hon ikki sigur, hvat tað er, sum er ósakligt, gera vit onga viðmerking til hetta.
>
> A skrivar: „… ikki er nøktandi sambært galdandi fyrisitingarreglur.“
>
> Her verður møguliga víst til reglurnar í sambandi við at ein myndugleiki tekur eina fyrisitingarliga avgerð. Sum vit áður hava sagt, meina vit ikki, at lønarásetingar, flokkanir og tað at áseta starvsaldur, eru fyrisitingarligar avgerðir. Her kunnu vit eitt nú vísa til hægstarættardóm frá 2005, UfR2005.2111H, har niðurstøðan var, at avtalur millum ein fyrisitingarmyndugleika og ein sáttmálapart um býti av „lokallønsmidler“ ikki var ein avgerð, sum var fevnd av fyrisitingarlógini. Próvgrundirnar hjá arbeiðstakaranum vóru í hesum málinum ógvuliga líkar teimum hjá tí danska umboðsmanninum í FOB 1998.139, men fyrisitingarmyndugleikin varð frídømdur bæði í Eystara Landsrætti og í Hægsta Rætti. Dr. jur. Jens Kristiansen skrivar í UfR2005B.214 um hendan og aðrar dómar: „…viser en betydelig

forståelse for, at personaleområdet er forankret i det arbejdsretlige system, og at forvaltningslovens formål ikke er at undergrave dette systems funktionsmåde".

A skrivar: „…biðja Umboðsmannin …taka støðu til um meting mína um at starvið eigur at verða flokkað í 39. flokki er røtt."

Hesum mugu vit mæla frá, tí tað er okkara arbeiði, og tað eru vit, sum hava tær heimildirnar."

Hjálagt skrivinum vóru skjølini í málinum.

Tann 5. mars 2008 sendi Vinnumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„Viðvíkjandi kæru um flokking av starvi

Víst verður til skriv frá Løgtingsins umboðsmanni, dagfest 15. februar 2008, við kæru frá stjóranum á Rúsdrekkasølu landsins, um setanarviðurskifti síni. Umboðsmaðurin biður Vinnumálaráðið um frágreiðing til málið.

Vinnumálaráðið lýsti eftir nýggjum stjóra til Rúsdrekkasølu landsins 15. september 2005. Har verður gjørt greitt at starvið verður lønt ájavnt við 36. lønarflokki hjá Tænastumonnum landsins, tó uttan at talan er um tænastumannastarv.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum setti A í starv sum stjóri frá 17. oktober 2005. Setanarsáttmálin var góðkendur av Lønardeildini 23. januar 2006. Har verður í stykki „4. Arbeiðstíð" ásett at starvið er flokkað í 36. lønarflokki.

Vinnumálaráðið metti at starvið var flokkað ov lágt, og søkti tí Lønardeildina, í skrivi dagfest 3. november 2006, um at starvið bleiv umflokkað frá 36. til 37. lønarflokk eftir sáttmálanum hjá tænastumonnum landsins. Hetta var m.a. grundað á tað stóru fíggjarligu ábyrgd og stóru starvsfólkaleiðslu sum er í starvinum,

at stjórin skal loysa nógvar og truplar uppgávur og at líknandi størv innan vinnumál eru flokkaði í 37. lønarflokki.

Í svarskrivi frá Lønardeildini, dagfest 16. november 2006, verður sagt, at Lønardeildin ikki kundi taka undir við umbønini, grundað á at starvið síðan tað var umflokkað frá 35. til 36. lønarflokk, í august 2002, ikki var broytt.

Vinnumálaráðið reisti málið av nýggjum í skrivi til Lønardeildina, dagfest 29. mai 2007, har mælt var til at umflokka starvið frá 36. til 38. lønarflokk eftir sáttmálanum hjá tænastumonnum landsins. Í øðrum lagi til 37. lønarflokk, um nevnda umbøn ikki var gingin á møti. Vinnumálaráðið vísti m.a. á at starvið rætt og slætt er flokkað ov lágt, og at sjálvt starvsinnihaldið er broytt, tí rættargrundarlag fyritøkunar er meiri fjølbroytt.
…“

Hjálagt skrivinum vóru skjølini í málinum.

Við skrivi, dagfest 11. mars 2008, vórðu viðmerkingarnar hjá Fíggjarmálaráðnum og Vinnumálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 7. apríl 2008 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„Viðvíkjandi kæru um lønarspurning hjá A

Viðmerkingar til skrivið frá Fíggjarmálaráðnum/Lønardeildini, B, dagfest 4. mars 2008:

Tað er at fílast á, at Lønardeildin, B, so lættliga loypir yvirum ynski at fáa sakligar grundgevingar fyri flokking av stjórastarvinum á Rúsdrekkasølu Landsins. Í einum rættarsamfelagið, eru tað objektivar sakligar grundgevingar (kriteriir/lógartekstur), sum liggja til grund fyri einari støðutakan í málsviðgerum, og tað eru júst hendan mannagongdin, sum skal tryggja borgaranum

eina rættvísa viðgerð og harvið rættartrygdina. Men hetta sýnist ikki at vera støðan í hesum máli.

Tað var og er enn mítt ynski, at umboðsmaðurin ger eina meting í málinum um tey fyrisitingarligu og løgfrøðiligu viðurskiftini, hóast Lønardeildin ikki metur hetta er ein spurningur, sum Umboðsmaðurin hevur heimild til. Mín spurningur er: hvørjar eru heimildirnar hjá Lønardeildini?

Hóast svarskriv frá Lønardeildini/Fíggjarmálaráðnum, meti eg ikki, at innplacering av stjórastarvinum á Rúsdrekkasøluni í 36. lønarflokk, er røtt.

B vísir á, at umboðsmaðurin ikki hevur heimildir til at gera eina meting, um starvið eigur at verða flokkað í 39. Lønarflokki ella ikki. Spurningurin hjá mær er, eftir hvørjum heimildum (fyrisitingarligum reglum ella rættningslinjum) B/Lønardeildin kann fasthalda 36. Lønarflokk, hóast 2 umsóknir frá Vinnumálaráðnum um umflokking.

Eg ynski at vita, hví stjórastarvið á Rúsdrekkasølu Landsins verður lønt í 36. lønarflokki, lægri enn flest onnur almen stjórastørv, hóast Rúsdrekkasøla Landsins er ein av landsins størstu fyritøkum? Tað er ynskiligt at fáa staðfest, hvat fyri eitt lógargrundarlag (heimildir), Lønardeildin hevur í slíkum málum, og hvørjar rættningslinjir (sakligum kriterium) Lønardeildin nýtir, tá stjórastørv verða flokkað? Ella um tað er reint tilvildarligt, eftir hvørjum leisti flokkingin av almennum stjórastørvum fer fram?

Vinnumálaráðið hevur gjørt eitt yvirlit yvir, hvussu stjórarnir tengdir at Vinnumálaráðnum eru løntir (sí hjálagt yvirlit í kæruskrivinum, dagfest 28. januar 2008 frá undirritaðu). Tað eru saklig kriteriir, sum eru sett upp í mun til fíggjarliga ábyrgd, starvsfólkaábyrgd, hvussu trupult starvið er, og um stjórin er stjóri á einari fyritøku, sum er fevnt av bæði umsitingaruppgávum, er myndugleiki á økinum, rekur handil, er kærumyndugleiki, tí

kompleksiteti, fyritøkan/stovnurin skal virka undir o.s.fr. Hetta eru rímuliga konkret og hondføst viðurskifti, sum kunnu brúkast í einari samanbering, tá flokking av størvum verður viðgjørd. Hetta eru viðurskifti, sum kunnu mátast uppá. Slík kriteriir vera eisini nýtt aðrastaðni, tá staðfestast skal, hvar/hvussu eitt starv skal flokkast.

Slík kriteriir eru m.a. innan handilsgymnasii í Danmark, har eg sjálv starvaðist. Fyri mær sýnist tað, sum um, Lønardeildin „efter forgodtbefindende“ ásetur, hvussu eitt stjórastarv skal flokkast, og ikki eftir sakligum kriterium, tí eg enn ikki havi sæð sakligar grundgevingar fyri metingini í mínum máli. Soleiðis er mín fatan, tí eg enn ikki havi fingið staðfest av Lønardeildini, hví stjórastarvið á Rúsdrekkasøluni skal verða flokka so lágt, hóast fullan uppbakning frá mínum arbeiðsgevara um umflokking; hetta serliga tá eg í eini samanbering við onnur stjórastørv síggi, at tey eru nógv hægri lønt, hóast tey hava nógv lægri fíggjarliga ábyrgd, lægri starvsfólkatal, tal av deildum, og kanska heldur ikki hava tað fjølbroytni bæði at verða myndugleiki, fyrisiting og reka handil, eins og Rúsdrekkasølan. Eisini kann samanberast við eitt annað konkret dømi, har skrivstovuleiðari í TAKS (sum er ein stovnur undir Fíggjarmálaráðnum!)er løntur í 37. lønarflokki, meðan stjórastarvið á Rúsdrekkasøluni er lønt í 36. lønarflokki. Mong onnur líknandi dømir kundi verðið tikin fram í einari samanbering um hetta ynskist.

Við í metingini mugu eisini takast viðurskifti, sum gera stjórastarvið á Rúsdrekkasøluni serliga trupult, og tað er í mun til politiska trýsti, kravmiklum trýsti frá kundunum (størri krøv enn áður um úrval, tænastustøði, ráðgeving og kunning), samstundis sum stjórin er útsettur fyri eitt trýst frá nógvum ymsum samfelagsbólkum, sum antin eru fyri ella ímóti rúsdrekka/fríari rúsdrekkasølu. Starvið er serliga trupult, tí rúsdrekka er eitt eymt og sera viðbreki evni at hava við at gera – eisini hjá politisku skipanini, og tað ger beslutningsprocessina óvanliga trupla. Starvið er tí sera útsett. Harafturat ger fíggarliga støðan ikki uppgávuna lættari, tí stjórin hevur yvirordnaðu ábyrgdina

av at tálma, samstundis sum man frá politiskari síðu setur fram krav um eitt høgt avlopskrav (11-12 % av umsetninginum), samstundis sum Rúsdrekkasølan ikki má selja fyri at røkka avlopskravinum, men tvørturímóti skal selja minst møguligt, tí Rúsdrekkalógin ásetur tálming sum sítt yvirordnaða endamál.

Tað er mín sannføring, at rættartrygdin hjá tí einstaka er tryggja við, at Lønardeildin hevur ásett kriteriir fyri, hvussu almen stjórastørv vera flokkað. Tað er mítt ynski at fáa at vita, hvat fyri eitt lógargrundarlag er nýtt sum grundarlag (ella onnur av myndugleikanum ásett kriteriir) fyri metingini um, at 36. lønarflokkur er í samsvar við munandi størri uppgávur og ábyrgd hjá stjóranum á Rúsdrekkasølu Landsins samanborið við flest onnur almen stjórastørv, sum liggja 1-3 lønarflokkar hægri við munandi minni ábyrgd (fíggjarábyrgd, starvsfólkaábyrgd o.s.fr).

Eg havi trupulleikar at síggja, at ein umsókn um eina umflokking ikki er ein fyrisitingarlig avgerð. Eg meti, at Fíggjarmálaráðið er ein fyrisitingarlig eind -og harvið eru allar avgerðir, sum verða tiknar ein fyrisitingarlig avgerð. Eg havi ilt við at síggja, hvussu B kann samanlíkna „lokallønsmidler" við flokking av einum starvi. Eg eri ikki sáttmálapartur við Fíggjarmálaráðið, so sum B vísir til. Umsóknin um umflokking av stjórastarvinum á Rúsdrekkasølu Landsins er eitt mál millum 2 fyrisitingarligar eindir. Umsóknin er send av Vinnumálaráðnum og avgerðin tikin av Fíggjarmálaráðnum.

Í samband við, at eg ringdi til Lønardeildina/B, fáir dagar undan kæran var send til Umboðsmannin, fekk eg eitt sera óhøviskt svar frá B, tá eg spurdi, um hann hevði viðgjørt seinnu umsóknina frá Vinnumálaráðnum. Svar hansara var: „Málið er viðgjørt. Og tú fært tað løn, tú hevur uppiborið". Eg vóni, at tað ikki eru slíkar subjektivar metingar, sum liggja til grund til fyri ikki at vilja umflokka starvið.

Viðmerkingar til svarskriv frá Vinnumálaráðnum/C, fíggjarráðgeva, dagfest 5. mars 2008:

Viðmerkingarnar frá Vinnumálráðnum um broytingar í starvinum kunnu útgreinast, um hetta er neyðugt. Vinarligast sig mær frá aftur, um Løgtingsins Umboðmaður hevur tørv á hesum útgreiningum.

Generelt hent í spurninginum um lønarbygna á Rúsdrekkasølu Landsins:

Á heysti 2007 reisti stjórin á Rúsdrekkasølu Landsins mál um at fáa endurskoðað lønarbygnaðin á Rúsdrekkasøluni. Í 1992 staðfestir táverandi Fíggjarmálaráð, at lønarbygnaðurin á Rúsdrekkasøluni skuldi endurskoðast aftaná ½ ár var gingið. Hendan endurskoðanin er ongantíð gjørd fyrrenn nú, málið varð reist á heysti 2007. Sammetingarnevndin (Lønardeildin og Starvsmannafelagið) tók málið til viðgerar og niðurstøðan er, at øll leiðarastørv á Rúsdrekkasøluni vóru flutt 2 lønarflokkar. Harafturat vórðu flest øll onnur størv á Rúsdrekkasøluni umflokkaði – tó ikki krambafólkini. Eftir mínari meting bera allar hesar umflokkingar vitnisburð um, at semja er millum Lønardeildina og Starvsmannafelagið, at størvini á Rúsdrekkasølu Landsins í heila tikið eru ov lágt flokkaði – heilt frá byrjan av.“

Rúsdrekkasøla landsins hevur givið umboðsmanninum skjølini viðvíkjandi umflokking av størvum á Rúsdrekkasølu landsins til láns. Í sambandi við viðgerðina av málinum hevur umboðsmaðurin lisið skjølini.

Við skrivi, dagfest 10. apríl 2008, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Fíggjarmálaráðnum og Vinnumálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest tann 17. apríl 2008, boðaði Vinnumálaráðið umboðsmanninum frá, at ráðið ikki hevði fleiri viðmerkingar.

Av tí at umboðsmaðurin einki frætti aftur frá Fíggjarmálaráðnum, boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá við skrivi, dagfest 7. mai 2008, at hetta málið varð tikið upp til endaliga viðgerð.

Tann 4. juli 2008 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at nógv mál vóru at avgreiða í løtuni, varð hetta málið væntandi ikki avgreitt fyrr enn í september 2008.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um, at Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur noktað umflokking av starvinum sum stjóri á Rúsdrekkasølu Landsins.*

*Í hoyringsskrivi sínum førir Lønardeildin fram, at talan í hesum førinum ikki er um eina fyrisitingarliga avgerð.*

*Sambært § 2, stk. 1 í fyrisitingarlógini er lógin galdandi fyri viðgerðina av málum, har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð. Føroyska lógin er, hesum viðvíkjandi, einsljóðandi donsku fyrisitingarlógini. Í viðmerkingunum til donsku fyrisitingarlógina stendur soleiðis á sp. 115-116, ískoyti A í Fólkatingstíðindi 1985/86:*

> *„Med udtrykket „truffet afgørelse“ sigtes til udfærdigelse af retsakter, dvs. udtalelser, der går ud på at fastsætte, hvad der er eller skal være ret i et foreliggende tilfælde. Uden for lovens anvendelsesområde falder således navnlig den administrative sagsbehandling, der har karakter af faktisk forvaltningsvirksomhed, … Det følger endvidere af bestemmelsens formulering „truffet afgørelse“, at loven kun omfatter sagsbehandlingen i forbindelse med udfærdigelsen af offentligretlige retsakter i modsætning til indgåelse af kontraktsforhold eller andre privatretlige dispositioner, …“*

*Á bls. 46 í „Forvaltningsretten, 2. udgave“ av Hans Gammeltoft Hansen v.fl stendur soleiðis um avgerðir á starvsfólkaøkinum:*

*„… inden for det samlede område af bindende personaleadministrative beslutninger er det først og fremmest væsentlighedskriteriet som er udslagsgivende.*
*…*
*Klart er det, at afskedigelse er en afgørelse. Det samme gælder beslutninger om (andre) disciplinære reaktioner såsom degradering, forflyttelse, advarsel og irettesættelse. Også beslutning om suspension og de hermed forbundne lønmæssige konsekvenser anses for afgørelser. Ansættelser er afgørelser … også forfremmelser, beslutninger om særlige lønforhold, orlov mv. er forvaltningsafgørelser.“*

*Eyðkenni fyri eina fyrisitingarliga avgerð er, at almenni myndugleikin einsamallur mótvegis borgaranum tekur bindandi avgerð um, hvør rættarstøðan hjá viðkomandi skal vera í viðurskiftum, sum hava stóran týdning og víðfevndar avleiðingar fyri tann, sum avgerðin viðvíkur.*

*Umflokking av einum starvi kann vera ein partur av samráðingum, men talan er ikki um samráðingar í hesum málinum. Talan er heldur ikki um, at ein avtala er gjørd partanna millum, sum í U2005.2111H og U2005B.214, sum Lønardeildin vísir á í partshoyringini.*

*Lønardeildin hevur í hesum máli, einsíðugt tikið bindandi avgerð um at nokta umflokking av starvinum sum stjóri á Rúsdrekkasølu landsins. Ein avgerð um umflokking hevur stóran týdning fyri tann, sum avgerðin viðvíkur. Eftir mínari meting er hetta tí ein fyrisitingarlig avgerð.*

*Klagarin førir fram, at avgerðin um at nokta umflokking av starvi hennara er ósaklig, og at grundgevingin ikki er nøktandi. Harumframt biður klagarin umboðsmannin taka støðu til, um klagarin eigur at verða umflokkað í 39. lønarflokk hjá tænastumonnum landsins.*

*Til hetta síðsta er at siga, at tað er uppgávan hjá Lønardeildini at meta um og viga tey atlit og umstøður, ið kunnu liggja til grund fyri, at eitt starv verður umflokkað. Eg havi ikki serligar fortreytir fyri at viga hesi ymisku atlit og umstøður á annan og betri hátt enn Lønardeildin. Eg*

*fari tí ikki inn í eina nærri viðgerð av, í hvørjum flokki starvið skal flokkast, men fari í hesum áliti at avmarka meg til at meta um, hvørt málsviðgerðin og avgerðin um umflokking byggir á lóglig, saklig og viðkomandi atlit.*

*Í málum um flokking og umflokkingar nýtir Lønardeildin LD-vegleiðing nr. 1999-7 um flokkingar og umflokkingar. Ein slík vegleiðing er, í orðsins rætta týdningi, bert vegleiðandi, og ikki bindandi fyri hvørki myndugleika ella borgara. Vegleiðingin kann nýtast sum eitt íkast til, hvat verður lagt til grund í flokkingarmálum, men vegleiðingin kann ikki nýtast, sum grundgeving fyri, at bert ávís atlit verða løgd til grund, tá ið snýr seg um umflokkingar.*

*Avgerðir í flokkingarmálum eiga at verða bygdar á metingar og vigan av øllum teimum sakligu og viðkomandi atlitum og umstøðum, ið gera seg galdandi í tí einstaka flokkingarmálinum.*

*Í 2002, 2006 og 2007 sendi Vinnumálaráðið umsókn um at umflokka starvið sum stjóri á Rúsdrekkasølu landsins. Í 2002 tók Lønardeildin avgerð um at flokka starvið í 36. lønarflokk hjá tænastumonnum landsins uttan grundgeving. Hetta hóast søkt varð um at flokka starvið í 37. lønarflokk. Í 2006 og 2007 noktaði Lønardeildin umflokking uttan aðra grundgeving, enn at starvið ikki var boytt, síðani starvið varð umflokkað í 2002.*

*Vinnumálaráðið og klagarin hava í málinum víst á ymisk atlit, ið hava týdning fyri umflokkingina. Ráðið vísir á, at starvið í heila tikið er ov lágt flokkað, um starvið verður samanborið við onnur stjórastørv undir vinnumálum. Harumframt verður víst á stóru fíggjar- og starvsfólkaábyrgdina hjá stjóranum, at talan er um eina landsfyritøku, ið skal hava eitt ávíst yvirskot á hvørjum ári í mun til aðrar almennar stovnar, at herd umhvørviskrøv eru til landsfyritøkuna, og at hini leiðarastørvini á Rúsdrekkasøluni fyri stuttum eru flutt upp í lønarflokki. Hetta eru alt atlit, ið eru saklig og viðkomandi fyri meting og avgerð um umflokking.*

*Lønardeildin vísir í hesum málinum bert til eitt atlit, tá ið avgerð verður tikin um at nokta umflokking, nevniliga at starvið ikki er broytt. Hetta meti eg vera alt annað enn nøktandi.*
*Av tí, at støða ikki verður tikin til tey sakligu og viðkomandi atlit, ið eru í hesum flokkingarmálinum, hevur málið, eftir mínari meting, ikki fingið nakra veruliga viðgerð.*

*Vísandi til omanfyristandandi fari eg at geva Fíggjarmálaráðnum eina átalu fyri handfaringina av málinum, og fari at biðja Fíggjarmálaráðið um at taka málið upp til nýggja viðgerð.*

*Eg fari at biðja Fíggjarmálaráðið um at lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum. Burtursæð frá hesum, geri eg ikki meira við málið í løtuni.*

Við skrivi, dagfest tann 11. desember 2008, boðaði Lønardeildin frá, at málið varð tikið upp til nýggja viðgerð. Við skrivi, dagfest tann 26. januar 2009, boðaði Lønardeildin frá, at nýggj avgerð var tikin í málinum.

## 28.4 Handfaringin hjá Nærverk og Almanna- og heilsumálaráðnum av klaguni um leiðaran á sambýlinum á Mýrini

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Nærverk og Almanna- og heilsumálaráðnum av klagu hjá 9 starvsfólkum á sambýlinum á Mýrini. Umboðsmaðurin metti ikki, at Nærverk hevði upplýst málið á nøktandi hátt og helt tað vera sera átaluvert, at starvsfólkini ikki fingu høvi at greiða nærri frá klaguni, áðrenn avgerð varð tikin. Umboðsmaðurin var av teirri fatan, at Nærverk sjálvt átti at viðgjørt trupulleikar á stovninum heldur enn at áleggja leiðaranum einsamøllum at loysa málið. Umboðsmaðurin metti, at Nærverk drálaði alt ov leingi við at fylgja málinum upp og helt tað vera átaluvert, at Nærverk í hesum tíðarskeiði sýtti fyri at fara á fund við starvsfólkini og leiðaran. Umboðsmaðurin undraðist á, at Nærverk gav leiðaranum, men ikki starvsfólkunum, ítøkiligt tilboð um at flyta í annað starv, men gjørdi ikki meira við hendan spurningin, tí starvsfólkini høvdu sagt seg úr starvi. Samanumtikið gav umboðsmaðurin Nærverk eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av hesum máli. Somuleiðis gav umboðsmaðurin Almanna- og heilsumálaráðnum eina átalu fyri ikki at hava viðgjørt kæruna á nøktandi hátt. Samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini varð álitið sent formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum í almannamálum.* ***(J. nr. 200800024)***

## Klagan

Við skrivi, dagfest 26. febr. 2008, hevur Føroya Pedagogfelag sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> **„Viðvíkjandi handfaringini hjá Nærverkinum og Almanna- og Heilsumálaráðnum av málinum um leiðaran á stovninum á Mýrini 4 – 6 og seinni viðgerðin av starvssetanarviðurskiftunum hjá teimum starvsfólkum, sum hava sent nevndu kæru og starvsviðurskiftunum hjá táverandi leiðaranum og flytan av hesum í annað starv.**
>
> Vit senda hjálagt avrit av kæruskrivinum, sum starvsfólkini sendu Nærverkinum og avrit av skrivliga samskiftinum millum

starvsfólkini og Nærverkið umframt samskiftið millum starvsfólkini og Almanna- og Heilsumálaráðið.

Talan er um hesi fyrrverandi starvsfólk, sum eru limir í felag okkara: A, B, C, D, E, F, G, H og I.

Vegna nevndu limir okkara skulu vit heita á Løgtingsins Umboðsmann um at <u>taka upp hetta mál</u> fyri at <u>kanna</u>, um málsviðgerðin hjá Nærverkinum og Almanna- og Heilsumálaráðnum er farin fram sambært fyrisitingarlógini og almennum fyrisitingarreglum annars.

Tað, sum vit serliga skulu vísa á, er:

- <u>at</u> hoyringsreglurnar í fyrisitingarlógini ikki eru hildnar,
- <u>at</u> tær avgerðir, sum ávikavist Nærverkið og Almanna- og Heilsumálaráðið hava tikið ikki eru sakliga grundaðar,
- <u>at</u> málsviðgerðartíðin hjá ávikavist Nærverkinum og Almanna- og Heilsumálaráðnum hevur verið alt ov long,
- <u>at</u> nógv er, sum bendir á, at Nærverkið hevur havt samskifti við táverandi stovnsleiðaran uttan at tær upplýsingar, sum fram eru komnar í hesum samskifti, eru lagdar fyri frammanfyri nevndu limir okkara til hoyringar,
- <u>at</u> Nærverkið ikki hevur givið frammanfyri nevndu limum okkara sama møguleika fyri at fáa eitt passandi starv innan fyri Nærverkið, sum Nærverkið hevur bjóðað táverandi stovnsleiðaranum at fáa.

Tað er rættiliga umráðandi, at umboðsmaðurin í sambandi við kanningina av málinum fær innlit í øll tey skjøl og øll tey notat, sum gjørd eru av Nærverkinum og/ella Almanna- og Heilsumálaráðnum, tí vit hava fingið váttan um, at táverandi stovnsleiðarin nærum hevur verið í dagligum samskifti við Nærverkið.

Gjørt verður galdandi, at tá talan var um eitt kærumál, har avgerð skuldi takast, so hevur Nærverkið havt skyldu til, sambært lógini

um innlit í fyrisitingina, at gera notat um tey viðurskifti, sum hava verið umrødd á hesum fundum, og frammanfyri nevndu limir okkara hava gjørt vart við, at teir als ikki hava fingið fyrilagt nøkur av hesum notatum til kunningar og hoyringar.

Tað sum limir okkara m.a. hava víst á er:

– at Nærverkið ongantíð kom niðan á stovnin at kanna viðurskiftini,
– at tað er ikki møguligt, sakliga at viðgera kæruna frá starvsfólkunum, um Nærverkið ikki vildi koma á staðið og har síggja veruligu umstøðurnar hjá starvsfólkunum,
– at Nærverkið, í sambandi við fyrstu kæruna, bert hevur víst á sokallaðu „loyalitetsskylduna" hjá starvsfólkunum mótvegis leiðaranum,
– at Nærverkið tyktist at royna at brúka hetta við loyalitetsskylduni til at forða starvsfólkunum í at halda fast við kæruna,
– at Nærverkið vildi ongantíð koma á fund við starvsfólkini, men hinvegin so hevur leiðarin sjálvur sagt, at hann so at siga hvønn dag hevði samskifti við Nærverkið, og at leiðarin bleiv kunnaður um allar ætlanir og fráboðanir frá Nærverkinum til starvsfólkini, áðrenn starvsfólkini frættu nakað sum helst frá Nærverkinum.
– at Nærverkið als eingi stig tók yvirhøvur, fyrr enn tey høvdu bjóðað leiðaranum nýtt leiðarastarv undir Nærverkinum,
– at Nærverkið við hesum taktikki sínum fekk trýst starvsfólkini so nógv, at tey ongan annan møguleika sóu uttan at siga seg úr starvi,
– at Nærverkið beinanvegin eftir at tey vistu, at starvsfólkini fóru at siga upp, bjóðaðu leiðaranum at flyta til annað leiðarastarv,
– at hetta er ein viðurkenning av, at hald var í kæruni hjá starvsfólkunum, tí eingin grund var at flyta leiðaran í annað starv, um einki grundarlag var fyri teimum kærum, sum starvsfólkini hava víst á.

Í skjølunum sæst meira nágreiniliga hvussu út av lagi vánaligar

arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkunum vóru, uttan at Nærverkið ella Almanna- og Heilsumálaráðið vildi taka upp til veruliga viðgerðar nevnda mál.

Starvsfólkini vísa eisini á, at tey beinleiðis bóðu um fund við Nærverk fyri nærri at greiða frá viðurskiftunum, men alt til fánýtis.

Fyri starvsfólkini og fyri okkum sum fakfelag, er tað umráðandi at fáa staðfest, um ein almennur myndugleiki soleiðis kann halda hondina yvir einum leiðara, sum ger arbeiðsumstøðurnar fullkomuliga ómøguligar, og í veruleikanum roynir at forða starvsfólkunum í at fáa viðgjørt kærur teirra.

Avleiðingin fyri starvsfólkini varð, at tey øll kendu seg trýst at siga upp arbeiði sítt, og tí standa tey sum taparar, og veruliga ábyrgdina av hesum hava myndugleikarnir, sum ikki hava víst vilja til at taka eina støðu til kærurnar.

Um umboðsmaðurin hevur tørv á øðrum upplýsingum, eru tit vælkomin at venda tykkum til undirritaða felag."

## Málsgongd

Við skrivi, dagfest 29. sept. 2006, senda 9 starvsfólk á sambýlinum á Mýrini klagu um leiðaran og um framferð hansara mótvegis starvsfólkunum til Nærverk. Klagan er soljóðandi:

„Undirritaðu starvsfólk vilja við hesum senda meginskrivstovuni kæru um J, leiðara og um framferðina, ið hann nýtir mótvegis okkum starvsfólkum á stovninum sambýlið á Mýrini 4 og 6.

Tað er við ringum tannabiti, at vit senda inn hesa kæru. Støðan er nú so álvarslig, at vit halda okkum hava skyldu at gera vart við hesi heilt ótolandi viðurskifti, sum ikki bert hava ávirkað arbeiðsumstøður okkara, men sum uttan iva eisini ávirkar búfólkini á stovninum.

Vit skulu gera vart við, at øll starvsfólkini eru við í hesi kæru

okkara, og at vit loyalt hava roynt at fingið J at broyta hugburð og framferð mótvegis okkum starvsfólkum, men alt til fánýtis. Vit hava bæði sent J bræv um hesar trupulleikar, og eisini hava vit tikið stig til fund við leiðaran, men støðan er framvegis óbroytt.

Vit síggja tí ikki annan møguleika enn at gera vart við hesi viðurskifti, soleiðis at serstovnadeildin kann taka málið upp og taka tey stig, sum neyðug eru, soleiðis at øll starvsfólk ikki siga upp størv síni, tí hetta vildi verið ein vanlukka fyri stovnin.

Fyri at koma meira ítøkiliga inn á teir trupulleikar, sum vit dag og dagliga hava at stríðast við, so eru vit samd um, at J als onga virðing tykist hava fyri okkum starvsfólkum, og hetta merkir alt samskfitið, sum vit hava við hann sum leiðara okkara.

Sum dømi kunnu vit nevna:

…

Hetta eru bert nøkur fá dømi um framferðina og málburðin, sum leiðarin brúkar, og sum vit als ikki kunnu góðtaka.

Vit skulu viðmerkja, at vit øll kunnu vátta tað, sum vit hava upplivað, og um neyðugt kunnu vit greiða nærri frá hesum yvirfyri serstovnadeildini.

Vit hava sum nevnt, bæði skrivliga og munnliga, roynt at fáa J at broyta framferðarhátt, men tað sum órógvar okkum almikið er, at tað als ikki tykist at ávirka hann, og tí meta vit, at talan er um ein hugburð mótvegis starvsfólkum, sum helst verður trupul at broyta.

Av tí at málið hevur skund, og vit ikki vilja arbeiða undir hesum dagliga trýsti longur, so vóna vit at frætta aftur skjótast tilber."

> Saman við klaguni sendu starvsfólkini avrit av skrivi, sum tey frammanundan høvdu latið leiðaranum um somu viðurskifti.

Eina viku seinni sendir Nærverk leiðaranum klaguna til hoyringar við freist til 23. okt. 16. okt. 2006 biður leiðarin um at fáa svarfreistina longda til 31. okt. Leiðaran skrivar m.a. soleiðis í skrivinum 16. okt.:

> „… Harafturat havi eg tann 10. okt. vent mær til álitisfólkið E viðv. kæruni, og spurt um tað var/er møguligt at fáa aðra loysn – tvs. mekling/seming – í málinum, tí eg meinti at hetta vildi verða ein betur loysn fyri framtíðina. Eg havi tó ikki kravt at kæran skuldi takast aftur í hesum sambandi, men bert víst á ein annan møguleika og í mun til kærumálið. E hevur d.d. boða mær frá, at málið skal ganga, sum tað nú gongur, tvs. sum kærumál. …“

Nærverk eftirlíkar at útseta freistina, og 30. okt. 2006 sendir leiðarin Nærverk viðmerkingar til klaguna. Í svarinum skrivar leiðarin m.a. soleiðis:

> „…
> **Inngangur**
> Tá ið kæra og skrivið frá starvsfólkum eru samantvinnað, verða hesi skriv viðgjørd undir einum. Tvs. tað eftir leiðara meting er talan um eitt og sama mál. Hetta merkir ikki, at leiðarin góðtekur sjálva kæruna, tvs. tað, sum skrivað stendur, men heldur er talan um ymiska áskoðan í sambandi við ósemjur og viðurskifti í mun til tiknar avgerðir, og hesar krevja at verða rætt viðgjørdar. Tað metir leiðarin, at starvsfólk ikki gera í skrivinum og kæruni til tygara.
>
> Eftir leiðara meting er í stóran mun talan um støk starvsfólkamál, stakar samrøður og stakar avgerðir og niðurstøður hjá leiðara, sum í sambandi við skriv og kæru eru vorðin til eitt felagsmál. Felagsmál, sum ikki eru endurgivin rætt.

Hervið er ikki sagt, at leiðarin onga ábyrgd hevur av tí, sum hent er, tvs. at tað er greitt, at íkomin er ein støða, sum hann er partur í – og harvið ábyrgd av. Tað er eisini greitt, at støðan er versnað, eftir at leiðarin í mun til skrivið tók eitt val, tvs. eitt val, sum kravdi, at leiðarin, varaleiðarin og álitisfólkið vóru samd um leistin frameftir. Tvs. at leiðslan var samd um tað, sum skuldi gerast her og nú í mun til skrivið.

Eftir at kæran var send tygum, havi eg vent mær til álitisfólkið við uppskoti um mekling, men hevur hon vegna starvsfólkini boðað frá, at málið skal ganga sína gongd.

Ætlanin við hesum sv.skrivinum er ikki at viðgera støk persónlig viðurskifti – hetta við atliti til framtíðina og lóg – men heldur at vísa á gongdina fram til d.d. og fáa afturvíst skeivleikum í sambandi við skriv og sjálva kæruna. Sum hetta málið hevur tikið seg upp, verður tó í ávísan mun neyðugt at vísa á leiklutin hjá varaleiðara og álitisfólkið.

…

4/10-2006
Fór á Nærverkið at tosa við …, men var hann sjúkur, tók síðan eina samrøðu við stjóran um støðuna sum heild, stjórin greiddi mær frá, at … skuldi taka sær av kæruni, men mælti til at hann kom á Mýrina skjótt.

… ringdi til mín, tí eg hevði ringt til hann, hetta var stutt undan starvsfólkafundinum kl. 11 – greiddi honum frá, hvat eg hevði tosað við stjóran um – … segði, at eg kundi boða (tvs. starvsf., sum hava sent kæru) frá á fundinum, at hann kom á Mýrina fyrst í komandi viku at tosa við tey.

…

10/10-2006
… Ringi til … – sum er í feriu – og greiði honum frá, hvat eg havi

> gjørt – og hvønn eg havi tosað við d.d. – og hvat eg vil við hesum. Eisini vísti eg á, at tað sum mær varð boðað frá, sum eg hevði boðað starvsf. á fundi 4/10 ikki sá út til at halda, tvs. eg hevði ikki sætt nakran frá Nærverkið á Mýrini, men … nevndi, at tað hevði verið samband við hin partin, tí kærara vóru misnøgdir við mína kunning á starvsfólkafundi 4/10 viðv. boðum frá …
>
> …
>
> **Niðurstøða**
> Tit drejer det sig om at kunne finde ***orkanens øje*** og herfra arbejde sig i gennem stormen – er svarið eftir mínari bestu sannføring.
>
> Samamuntikið byggir kæran og skrivið – eftir mínari meting – á eitt kollektivt grundarlag, sum á ongan hátt má góðtakast. Tað vísir m.a. málsgongdin fram til d.d. eisini.
>
> Tí vil eg hervið heita á tygum, um at leiðarin og starvsfólkabólkurin fáa játtan til externan meklara í eitt ávíst tíðarskeið. Hesin kann so koma við einari niðurstøðu til tygara. Tvs., at tað sum útgangsstøðið verður álagt pørtunum mekling. Í hesum tíðarskeiði skulu eisini gerast starvslýsingar fyri hvørt starvsfólk sær.
>
> Hvør tann er, sum kemur at loysa hesa uppgávu er felagsmál og tí krevur tað semju partanna millum.“

Viðmerkingarnar hjá leiðaranum verða 8. nov. 2006 sendar starvsfólkunum til hoyringar við freist til 22. nov.

9. nov. 2006 er fundur millum K, virkandi stjóra í Nærverk og L, deildarleiðara og M, advokat og mediator. Endamálið við fundinum er at viðgera møguleikan at nýta mediatión í sambandi við viðgerð og loysn av kærumálinum.

10. nov. 2006 er fundur millum L, deildarleiðara, N, fakligan fulltrúa

og tvey umboð fyri starvsfólkini, har kunnað verður um mediatión og møguleikarnar fyri konfliktloysn í sambandi við ítøkiliga máli. Í skrivi til Nærverk, dagfest 10. nov. 2006, og sum er stemplað at vera móttikið í Nærverk sama dag, skriva starvsfólkini m.a. soleiðis:

> „… Vit skulu við hesum boða frá, at vit ikki síggja nakra meining í at halda sokallaðan „semingsfund" í sambandi við kæru okkara. Umstøðurnar á stovninum eru als ikki batnaðar, heldur tvørturímóti, og tí halda vit ikki rættuliga at tit hava skilt álvaran í málinum. …".

Sambært notati, dagfest 15. nov., boðaðu umboðini fyri starvsfólkini frá á fundinum 10. nov., at tey ikki vóru áhugað í øðrum enn eini fyrisitingarligari niðurstøðu.

Sambært notati, dagfest 15. nov. 2006, ger L, deildarleiðari av 13. nov. í samráð við K, virkandi stjóra og M, advokat og mediator at kalla kærararnar til kunnandi fund um mediatión. Eftir fundin er ætlanin at bjóða pørtunum at loysa málið við samráðing/mediatión. Fundurin, sum eftir ætlan skal haldast tann 27. nov., verður eftir áheitan frá kærarunum útsettur til 13. des. 2006.

22. nov. 2006 móttekur Nærverk viðmerkingar frá starvsfólkunum til hoyringsskrivið hjá leiðaranum.

13. des. 2006 er kunnandi fundur um mediatión. Sambært fundarinnkallingini luttaka starvsfólkini, leiðarin og mediator.

Við skrivi, dagfest 14. des. 2006, boða starvsfólkini Nærverk frá, at tey síggja ikki nakað endamál við eini mekling, og um ein endalig niðurstøða ikki fyriliggur áðrenn 21. des. 2006, verður kæra send Løgtingsins Umboðsmanni um viðgerðarháttin hjá Nærverk. Nærverk boðar starvsfólkunum frá, at málið verður ikki liðugt viðgjørt til ásetta dagin, men at tey kunna vænta svar innan ársskiftið.

15. des. 2006 skrivar L, deildarleiðari m.a. soleiðis í einum telduposti til M:

„… Eg havi fingið svar frá starvsfólkunum, har tey lata skilja, at tey ikki eru áhugað í mekling. Eg velji hesaferð at taka fráboðan teirra til eftirtektar. Málið verður nú viðgjørt og avgreitt. Sum vit áður hava tosað um, so er eingin vegur fram, uttan at tann grundleggjandi konfliktin verður loyst. Í útgangsstøðinum er trupulleikin, at starvsfólkini ikki vilja innsíggja, at talan er um eina konflikt, og at einasta loysn tí er konfliktloysn. Tó vænti eg at ein avgerð í málinum kemur at staðfesta, at talan er um eina konflikt, og at ein partur av niðurstøðuni verður, at tey starvsfólk sum ynskja at vera verandi á stovninum, verða noydd til at fara inn í ein skipaðan dialog við leiðaran. …"

26. des. sendir umboð fyri starvsfólkini soljóðandi teldupost til L, deildarleiðara:

„… Nú vit skilja, at endaliga avgerðin í málinum enn einaferð er seinkað og harvið verður jólatrøll, vilja vit enn einaferð gera vart við, at vit eru sinnaði til at greiða nærri frá málinum munnliga, hvussu ótolandi núverandi arbeiðsviðurskiftini eru á sambýlinum á Mýrini. Her er semja millum starvsfólkið, at vit ikki kunnu halda áfram at arbeiða undir einum leiðara, ið hvørki hevur okkara stuðul ella álit, vegna sín leiðsluhátt og atburð mótvegis starvsfólkunum."

29. des. 2006 svarar L í telduposti, at væntandi kann málið verða avgreitt áðrenn januar mánaður er úti.

31. jan. 2007 tekur Nærverk soljóðandi avgerð í málinum:

**„Viðvíkjandi kæru um J, leiðara fyri sambýlinum á Mýrini 4-6 í Hoyvík**
G, varaleiðari og E álitisfólk hava saman við B, I, A, F, D, H og C í skrivi til Trivnaðartænastuna, dagfest tann 29. september 2006 kært J leiðara fyri sambýlinum á Mýrini 4-6 í Hoyvík.

Kæran snýr seg í høvuðsheitum um framferðarhátt og hugburð, ið leiðarin nýtir mótvegis starvsfólkunum.

…
Í sambandi við málsviðgerðina hevur Trivnaðartænastan heitt á partarnar um at royna mekling við óheftum ráðgeva til tess at lýsa trupulleikarnar og loysa hesar, tó uttan at hesar áheitanir hava givið úrslit.

Út frá viðgerðini av málinum kann Trivnaðartænastan staðfesta, at álvarsamir trupulleikar eru millum varaleiðaran, álitisfólkið og starvsfólkini á Mýrini øðrumegin og leiðaran J hinumegin, og útfrá teimum dømum, ið ítøkiliga eru nevnd í kæruni, sýnast hesir trupuleikar at vera trupulleikar í dagliga samskiftinum og samstarvinum á stovninum. Tað, ið er komið fram í málinum, bendir á, at trupulleikar í dagliga samskiftinum og samstarvinum á stovninum kunnu stava frá vantandi virðing millum leiðslu og starvsfólk hvør móti øðrum, hvat viðvíkur rættindum og ábyrgdum hjá teimum respektivu pørtunum, og fyri leiðslu og starvsfólki sum persónum.

Bæði leiðsla og starvsfólk hava rættindi og skyldur mótvegis hvør øðrum og mótvegis arbeiðsplássinum.

Leiðarin hevur rætt til at leggja dagliga arbeiðið á stovninum til rættis og hevur samstundis ábyrdina av, at stovnurin virkar eftir ætlan. Hetta skal samstundis gerast við virðing fyri einstaka starvsfólkinum, ið verður sett at útinna hesar uppgávur.

Hinvegin, so hevur hvørt einstakt starvsfólk skyldu til at gera eftir boðum frá leiðsluni og útinna tær uppgávur, ið verða álagdar starvsfólkinum og at vera loyal mótvegis leiðsluni, starvsfeløgum og stovninum sum heild.

Trivnaðartænastan kann útfrá tí, ið er komið fram í málinum ikki gera av, hvørjir ávísir persónar eru uppruni og orsøk til trupulleikarnar, ið eru íkomnir. Trivnaðartænastan staðfestir, at leiðarin hevur átikið sær sín part av ábyrgdini fyri trupulleikunum, hóast hann er ósamdur í kæruni, samstundis sum hann hevur verið sinnaður at tikið lut í semjuroyndum fyri

at fáa greitt ósemjuna. Hinvegin staðfestir Trivnaðartænastan samstundis, at tað ikki hevur eydnast at fáa starvsfólkini við til tílíkar semjuroyndir.

Eftir eina gjøgnumgongd av hvørjum einstøkum dømi í kæruni, metir Trivnaðartænastan ikki, at tey dømi um framferðarhátt og atburð frá leiðaranum mótvegis starvsfólkunum, ið kærararnir lýsa í kæruskrivinum frá 29. september 2006 og hoyringssvarinum frá starvsfólkinum, innkomið til Trivnaftartænastuna tann 22. november 2006, er av tílíkum slag, at hesi í sjálvum sær eru at meta sum brot á skyldur hansara sum leiðari fyri sambýlið, soleiðis at hetta gevur høvi til tiltøk, ið eiga at fáa avleiðingar fyri starvið hjá J sum leiðara á sambýlinum á Mýrini 4-6.

Í metingini hjá Trivnaðartænastuni er dentur lagdur á, at talan er um fleiri einstakar hendingar í dagliga samskiftinum og samstarvinum á sambýlinum, og at hesar hendingar sum útgangsstøði mugu viðgerast hvør sær. Talan er bæði um mál – ósemjur – viðvíkjandi tilrættalegging av arbeiðnum og fyri ein stóran part um einstøk starvsfólkamál, ið eiga at verða viðgjørd sum einstøk starvsfólkamál og ikki sum ein samlaður trupulleiki í sambandi við eina kæru.

Kæran hevur varpað ljós á viðurskifti og trupulleikar á stovninum, ið Trivnaðartænastan tekur í størsta álvara. Upplýsingarnar í málinum benda á, at partarnir hava ilt við at hava eitt dagligt samskifti um arbeiðsviðurskifti á stovninum, ið er á einum støði, ið er virðiligt fyri leiðara, starvsfólk og búfólk. Hetta er ikki ein støða, ið kann standa við í longdini, við tað, at hon er til skaða fyri allan stovnin. Trivnaðartænastan fer tí beinanvegin at seta seg í samband við leiðaran fyri stovnin fyri at fáa lýst og greinað trupulleikarnar nærri og fyri at tey tiltøk kunnu verða sett í verk, ið mugu metast at vera neyðug og hóskandi til tess at fáa loyst trupulleikarnar.
…“

Avgerðin verður send leiðaranum og einstøku starvsfólkunum, sum hava kært leiðaran. Í skrivunum til varaleiðaran og álitisfólkið verður soljóðandi brot sett aftrat avgerðini:

> „Viðvíkjandi spurninginum, hvørt leiklutur tygara í sambandi við kæruna er sambæriligur við starv tygara sum álitisfólk, so fer Trivnaðartænastan at taka henda spurning upp til nærri kanningar og frætta tygum aftur hesum viðvíkjandi.“

5. febr. 2007 er fundur millum umboð fyri Nærverk og leiðaran. Fundurin verður fylgdur upp við skrivi, dagfest 20. febr., frá Nærverk til leiðaran, har Nærverk m.a. skrivar soleiðis:

> „… Hóast viðgerðin av sjálvari kæruni ikki hevur givið nakað ítøkiligt høvi til atfinningar mótvegis tygum, ið kunnu fáa avleiðingar fyri starv tygara sum leiðari fyri sambýlinum á Mýrini 4-6, so sær Trivnaðartænastan álvarsamt uppá viðurskifti á stovninum, ið kæran hevur varpað ljós á.
>
> Sum eisini sæst av skrivinum til kærarnar, staðfestir Trivnaðartænastan, at trupulleikar eru í dagliga samskiftinum og samstarvinum millum leiðslu og starvsfólk á stovninum, uttan at Trivnaðartænastan er før fyri at siga, hvør hevur høvuðsábyrgdina av hesum trupulleikum.
>
> Hinvegin hava tygum sum leiðari av stovninum høvuðsábyrgdina av at fáa stovnin at virka til fulnar. Trivnaðartænastan fer tí við hesum staðiliga at mæla tygum til beinanvegin at fáa loyst trupuleikarnar á stovninum, møguliga við hjálp frá uttanhýsis ráðgeva, ið kann vera við til at lýsa og greina trupulleikarnar á stovninum og ráðgeva um, hvørji tiltøk mugu metast at vera neyðug og hóskandi til tess at fáa loyst trypulleikarnar.
>
> Trivnaðartænastan væntar at frætta frá tygum innan 2 mánaðir, hvussu gongur við málinum.“

Við skrivi, dagfest 24. febr. 2007, sendir Føroya Pedagogfelag

umboðandi starvsfólkini soljóðandi kæru til Almanna- og heilsu-málaráðið:

„**KÆRA**
**Víðv. kæru sum starvsfólki á sambýlinum á Mýrini 4-6 hevur latið Nærverkinum um framferðarháttin hjá J, leiðara.**

Hjálagt senda vit avrit av skrivi sum Nærverkið tann 31.1.2007 hevur sent starvsfólkunum, í sambandi við kæru, sum starvs-fólkini hava latið Nærverkinum um framferðarháttin hjá leið-aranum.

Avgerðina hjá Nærverkinum, um ongi tiltøk at taka í sambandi við kærurnar, loyva vit okkum vegna starvsfólkini at kæra til Almanna- og heilsumálaráðið.

Vit skulu í hesum sambandi vísa á, at starvsfólkini ikki kunnu góðtaka:
– <u>at</u> Nærverkið nú tykist at benda málinum inn á, at tað einstaka starvsfólkið hevur skyldu at gera eftir boðum frá leiðsluni og útinna tær uppgávur sum álagdar verða
– <u>at</u> Nærverkið ikki útgreinar og skjalprógvar at hesi starvsfólk ikki hava fylgt boðum frá leiðsluni og at tey hava útint tær uppgávur sum álagdar hava verið teimum,
– <u>at</u> onki prógv er fyri, at starvsfólkið ikki hevur verið loyalt mótvegis leiðsluni,starvsfeløgum og stovninum sum heild,
– <u>at</u> Nærverkið nú tykist at benda málinum inn á, at talan skal vera um bæði ósemjur um tilrættalegging av arbeiðinum og starvsfólkamál, sum eiga at verða viðgørd sum einstøk starvsfólkamál og ikki „sum ein samlaður trupulleiki í sambandi við eina kæru“, uttan at Nærverkið yvirhøvur útgreinar á hvørjum grundarlag Nærverkið kemur til hesa niðurstøðu,
– <u>at</u> Nærverkið staðfestir, at upplýsingar í málinum benda á, at partarnir hava ilt við at hava eitt dagligt samskifti um arbeiðsviðurskiftini á stovninum, hóast øll starvsfólkini hava víst á, at tey til fánýtis fleiri ferðir hava roynt at fingið

eitt skilagott samskifti við leiðaran uttan at leiðarin hevur víst vilja ella evni til at luttaka í slíkum samskifti,

- at Nærverkið ikki hevur latið starvsfólkini munnliga sleppa at útgreina kærur sínar, hóast starvsfólkini hava boðið sær til nærri at greiða frá umstøðunum á stovninum og framferðini hjá leiðaranum,
- at Nærverkið ikki hevur givið eina nøktandi grundgeving fyri avgerð sínari,
- at Nærverkið ikki tykist at hava skilt álvaran í málinum, serliga við atliti til avleiðingarnar av framferðini hjá leiðaranum mótvegis starvsfólkunum,
- at Nærverkið við avgerð sínari tykist at góðkenna, at ein almennur leiðari nýtir eina niðurgerandi framferð móti starvsfólkinum og nýtir ein slíkan málburð sum víst er á í dømunum frá starvsfólkunum og sum ikki er afturvíst av leiðaranum.

Vit senda hjálagt avrit av skjølunum í málinum og fara at heita á Almanna- og Heilsumálaráðið um at realitetsviðgera hesa kæru skjótast tilber, soleiðis at ráðið tryggjar starvsfólkunum rímilig og trygg arbeiðskor á almenna arbeiðsplássi teirra.“

Við skrivi, dagfest 26. febr. 2007, sendir Føroya Pedagogfelag umboðandi varaleiðaran og álitisfólkið soljóðandi kæru til Almanna- og heilsumálaráðið:

**„KÆRA**
**Viðv. málsviðgerðini hjá R, stjóra á Nærverkinum í sambandi við kæru, sum G, varaleiðari og E, álitisfólk hava skrivað undir viðvíkjandi framferðarháttinum hjá J, leiðara fyri sambýlið á Mýrini 4-6 í Hoyvík**

Hjálagt senda vit avrit av skrivi dagfest 31.1.2007, sum R hevur sent G og E.

Vit skulu við hesum formliga senda Almanna- og heilsumálaráðnum kæru um, at stjórin fyri Nærverkinum, uttan at nøkur

kæra er latin Nærverkinum um framferðarháttin hjá G og E, boðar teimum frá:

„*viðvíkjandi spurninginum, hvørt leiklutur tygara í sambandi við kæruna er sambærilig við starv tygara sum álitisfólk, so fer Trivnaðartænastan at taka hendan spurning upp til nærri kanningar og frætta tygum aftur hesum viðvíkjandi*“

Vit kunnu ikki skilja hesa fráboðan frá stjóranum sum annað enn ein hóttan um, at tað møguliga kann fáa avleiðingar um ein varaleiðari og álitisfólk, aftaná ótaldar royndir at fáa eitt nøktandi samstarv og samskifti við leiðaran, saman við hinum starvsfólkunum skriva undir kæru til Nærverkið.

…

Vit krevja, at Almanna- og Heilsumálaráðið áleggur stjóranurn treytaleyst at taka aftur nevndu hóttanir sínar.

Vit krevja eisini, at hesar hóttanir móti limum okkara fáa avleiðingar, og vit skulu viðmerkja, at vit ætla okkum víðari við málinum um ikki landsstýrimaðurin tekur neyðugu avleiðingarnar, tí bæði fyri rættartrygdina hjá limum okkara og øðrum alment settum starvsfólkum er tað rættuliga umráðandi, at avvarandi landsstýrismaður greitt staðfestir rættin hjá alment settum starvsfólkum at senda inn kæru um almennar stovnsleislur.

Um landsstýrismaðurin ikki er sinnaður at taka neyðugu avleiðingarnar av hesari framferð hjá stjóranum fyri Nærverkinum, so ætla vit at senda inn kæru til Løgtingsins Umboðsmann og um neyðugt eisini leggja málið fyri Føroya rætt fyri at fáa staðfest rættindini hjá limum okkara.

Vit vóna, at tit skilja álvaran í hesum málinum, og vænta at frætta aftur.“

Eftir at Almanna- og heilsumálaráðið eftir umbøn hevur eftirlíkað at leingja svarfreistina, ger Nærverk í skrivi, dagfest 4. apr. 2007, soljóðandi viðmerkingar til kæruna frá 24. febr. 2007:

**„Viðvíkjandi kæru frá Føroya Pedagogfelag vegna starvfólkið á sambýlinum á Mýrini 4-6**

Við skrivi, dagfest tann 2. mars 2007 hevur Almanna- og Heilsumálaráðið biðið um viðmerkingar frá Nærverkinum til kæru frá Føroya Pedagogfelag vegna starvsfólkið á sambýlinum á Mýrini 4-6, um avgerðina hjá Nærverkinum, dagfest tann 31. januar 2007.

Fyrst av øllum verður gjørt vart við, at Nærverkið heldur fast við avgerðina frá 31. januar 2007, og við tær grundgevingar, ið avgerðin byggir á, og heldur somuleiðis fast við, at avgerðin er nøktandi og sakliga grundgivin.

Nærverkið hevur annars fylgjandi viðmerkingar til kæruna til Almanna- og Heilsumálaráðið:

Sum eisini greitt frá í avgerðini, so var tað framferðarháttur og hugburður leiðarans mótvegis starvsfólkunum, ið kært varð um, og sum var til viðgerðar. Kæran er viðgjørd við støði í teimum dømum, ið kærararnir hava nevnt í kæruskrivi sínum, og teimum eftirfylgjandi upplýsingum, ið eru komnir fram í sambandi við hoyring av pørtunum í málinum.

Nærverkið metti hereftir ikki, at grundarlag var fyri at reisa nakað mál mótvegis leiðaranum viðvíkjandi hansara setan sum leiðara, men hinvegin so hevur Nærverkið havt leiðaran til samrøðu og álagt honum at fáa viðurskiftini á stovninum í rættlag, og at søkja sær serkøna ráðgeving at fáa greinað og loyst trupulleikarnar. Hetta hevur leiðarin somuleiðis fingið skrivliga at vita í brævi frá Nærverkinum, dagfest tann 20. februar 2007.
…

Tá tað í kæruni verður lagt upp til, at Nærverkið ikki hevur skilt álvaran í málinum, so verður hetta tí staðiliga víst aftur.

Tað er ikki rætt, at Nærverkið ikki hevur latið kærararnar munnliga sleppa at útgreina kærur sínar. Í sambandi við kæru-viðgerðina, varð boðið pørtunum til seming við uttanhýsis serfrøðingi í seming, har tað stóð báðum pørtum frítt at gera sjónarmið síni galdandi. Eftir umhugsan aftur og fram ynsktu kærararnir ikki at viðvirka til seming, hóast leiðarin segði seg vera tilreiðar at luttaka í semingsroyndum.

Orsøkin til, at Nærverkið valdi at bjóða pørtunum til seming, var júst tann, at Nærverkið út frá upplýsingum í málinum metti, at dagliga samskiftið á stovninum millum leiðslu og starvsfólk ikki var á einum nøktandi støði, og tí kundi vera til skaða fyri stovnin.

Annars er at viðmerkja, at tað framvegis stendur starvsfólkunum í boði at koma á tal við Nærverkið um viðurskiftini á stovninum.

Sambýlið á Mýrini er ein stovnur undir Nærverkinum, og Nærverkið tekur tað í størsta álvara, tá tílíkir trupulleikar stinga seg upp. Nærverkið leggur í avgerðini dent á, at kæran frá starvsfólkunum hevur varpað ljós á trupulleikar á stovninum, uttan at Nærverkið kann staðfesta, hvør, ið hevur ábyrgdina av hesum trupulleikum.

Tað, at Nærverkið í avgerðini lýsir rættindi og skyldur hjá leiðslu og starvsfólki hvørt móti øðrum, er at meta sum ein vegleiðing til partarnar í eini roynd at fremja fatanina fyri samstarvinum, og skal hetta síggjast í ljósinum av, at Nærverkið í somu avgerð hevur mett, at trupulleikarnir í dagliga samskiftinum og samstarvinum kunnu stava frá vantandi virðing partanna millum um rættindi og skyldur hjá leiðslu og starvsfólki hvørt móti øðrum. Nærverkið vil nýta høvi at vísa á, at vegleiðingin

vendir sær til bæði leiðslu og starvsfólk, hóast Pedagogfelagið roynir at tulka hetta til, at Nærverkið leggur starvsfólkið undir at vera illoyal.

Nærverkið heldur fast við, at tey dømi, ið eru lýst í upprunaliga kæruskrivinum, og sum eru komin fram undir kæruviðgerðini, bæði lýsa ósemjur um tilrættalegging av ymsum uppgávum, eins og talan eisini er um einstøk starvsfólkamál, ið skulu viðgerast sum sovorðin. Sum grundgeving fyri hesi meting um, at talan er um ósemjur, kunnu nevnast t.d.

- at skrivið til J frá kærarunum, skjal nr. 1, lýsir eftir meting hjá Nærverkinum fleiri ósemjur á stovninum, bæði viðvíkjandi kunning, samstarvi og samskifti,
- hoyringsskriv frá kærarunum frá 22. november 2006 inniheldur tilvísingar til fundir, ið hava snúð seg um ósemjur um loysn av uppgávum, trupulleikar á stovninum v.m.,
- hoyringsskriv frá J frá 30. oktober 2006 inniheldur somuleiðis tilvísingar til hesar fundir, sum umrøða ósemjur.

Tað verður staðiliga afturvíst, at Nærverkið við avgerð sínari hevur góðkent, at ein almennur persónur nýtir eina niðurgerandi og óhóskandi atburð mótvegis starvsfólkunum, og í hesum sambandi vil Nærverkið vísa á, at í avgerðini, verður sagt at leiðarin „*…hevur rætt til at leggja dagliga arbeiðið á stovninum til rættis og hevur ábyrgdina av, at stovnurin virkar eftir ætlan. Hetta skal samstundis gerast við virðing fyri einstaka starvsfólkinum…* „, og er hetta júst ein staðfesting av, at niðurgerandi atburður ikki verður góðtikin. Somuleiðis verður víst til innihaldið í fundarfrágreiðingini frá fundi við J frá 5. februar 2006, ið sum nevnt er hjáløgd hesum skrivi.

Sum fyrr nevnt, og sum eisini verður boðað frá í avgerðini, so setti Nærverkið seg í samband við leiðaran og álegði honum at fáa viðurskiftini í rættlag, um neyðugt við uttanhýsis ráðgeving. Viðmerkjast kann, at Nærverkið hevur nýliga havt fund við leiðaran til tess at fáa eina dagføring um støðuna á stovninum.

Staðfestast kann, at leiðarin hevur søkt sær uttanhýsis ráðgeving, men tað er ov tíðliga at siga enn, hvørt tey tiltøk, ið eru sett í verk, eru nøktandi til tess at fáa stovnin at virka til fulnar.

Nærverkið heldur fast við, at soleiðis, sum Nærverkið hevur skilt tað, sum er komið fram undir kæruviðgerðini og eftirfylgjandi, so er ikki gjørligt at staðfesta, at tað er leiðarin einsamallur, ið hevur ábyrgdina av, at dagliga samstarvið og samskiftið ikki tykist at virka nøktandi. Tað, at leiðarin beinanvegin átók sær sín part av ábyrgdini, at hann beinanvegin var sinnaður at royna seming, at hann hevur fylgt teimum áheitanum, ið Nærverkið gav honum eftir at avgerðin varð tikin, samanhildið við, at kærararnir ikki undir kæruviðgerðini, og eftir øllum at døma heldur ikki eftirfylgjandi hava verið sinnaði at fara í ein konstruktivan dialog um viðurskiftini á stovninum, stuðla alt uppundir, at tað neyvan er gjørligt at staðfesta, at tað er leiðarin einsamallur, ið hevur ábyrgdina av støðuni á stovninum, og at tað tí ikki í verandi støðu er grundarlag fyri at taka onnur stig mótvegis leiðaranum, enn gjørt við áheitanum, ið eru givnar leiðaranum.

Samanumtikið staðfestir Nærverkið tí, at avgerðin frá 31. januar 2007, verður fasthildin sum nøktandi viðgjørd og nøktandi grundgivin."

Føroya Pedagogfelag ger m.a. soljóðandi viðmerkingar til viðmerkingarnar hjá Nærverk í skrivi, dagfest 20. apr. 2007:

„… Tað, sum vit og limir okkara kunnu staðfesta sum faktum í málinum er:

– at Nærverkið framhaldandi tykist leggja starvsfólkini undir ikki at hava gjørt eftir boðum frá leiðsluni og at hava útinnt tær uppgávur, sum álagdar hava verið uttan at Nærverkið kann vísa á eitt einasta dømi um at starvsfólki ikki hevur fylgt boðunum frá leiðsluni og hava útint sínar uppgávur,
– at tað ikki er rætt at Nærverkið hevur latið kærararnar munnliga sleppa at útgreina kærur sínar,

– at Nærverkið nú tykist blanda saman spurningin um rættin at sleppa at greiða munnliga frá kærum sínum yvirfyri Nærverkinum við uppskotið frá Nærverkinum um mediatión (sum varð sett fram út frá tí skeivu fatan, at talan er um samstarvstrupulleikar),
– at Nærverkið ikki hevur avsannað, at starvsfólkini hava sagt seg vera sinnað at koma út og greiða munnliga frá teimum kærum, sum lætnar vórðu Nærverkinum og nærri útgreina hesar, men kortini ikki lat limum okkara fáa høvi at greiða frá viðurskiftunum,
– at Nærverkið onki ítøkiligt stig hevur tikið fyri at loysa trupulleikarnar á stovninum,
– at Nærverkið hinvegin við skrivi dagfest 20.2.2007 til J boðar frá, at kæran ikki hevur givið nakað ítøkiligt høvi til atfinningar mótvegis honum, ið kunnu fáa avleiðingar fyri starv hansara,
– at hetta skriv er eitt greitt tekin til leiðaran um, at hóast øll starvsfólkini hava víst á rættiliga greið dømi um eina framferð mótvegis starvsfólki, sum á ongum øðrum arbeiðsplássi hevði verið góðtikin, so hevur Nærverkið í veruleikanum bara latið staðið til,
– at starvsfólkini nú eru so sperd, at tey hava upplýst, at tey umhugsa at fara í fjølmiðlarnar við málinum umframt at fleiri av starvsfólkunum umhugsa at siga starv sítt upp.

Vónandi skilir Almanna- og heilsumálaráðið, at talan er um eitt so álvarsligt mál, at stovnurin um stutta tíð kann liggja mannleysur við teimum avleiðingum sum hetta fer at hava fyri brúkararnar og fyri skipanina sjálva.

Starvsfólkini vísa á, at tað er ein vanlukka fyri stovnin, at Nærverkið ikki tykist at vilja ella tora at skera ígjøgnum í tílíkum máli, har so at siga øll starvsfólkini hava víst á, at framferðin hjá leiðaranum er soleiðis, at ongin orkar at starvast undir hesum viðurskiftum, eins og fleiri dømi um ótespiligar hendingar eru løgd fram."

Einki sæst at henda í málinum fyrr enn 31. mai 2007, tá málið verður umrøtt á innanhýsis fundi í Almanna- og heilsumálaráðnum.

1. juni móttekur Almanna- og heilsumálaráðið skriv frá Føroya Pedagogfealg, har spurt verður eftir málinum.

Við skrivi, dagfest 9. juni 2007, senda starvsfólkini soljóðandi skriv til landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum:

> „**Viðvíkjandi starvsviðurskiftum okkara á Mýruni 4-6.**
> Føroya Pedagogfelag hevur nú fyri meira enn 3 mánaðum síðani kært avgerðina, sum Nærverkið hevur tikið í sambandi við kæru okkara um leiðaran á stovninum.
>
> Almanna- og heilsumálaráðið hevur framvegis onga avgerð tikið í málinum, hóast vit ferð eftir ferð hava víst á, at støðan er heilt ótolandi, og tí síggja vit ikki annan møguleika enn at venda okkum beinleiðis til tygara.
>
> Tygum hava evstu ábyrgd av teimum brúkarum, sum eru á stovninum, og tí meta vit tað vera skylda okkara at boða frá, at støðan er nú so ótolandi, at vit hava avgjørt, at um ein endalig loysn ikki er funnin áðrenn hósdagin 14. juni 2007, so hava vit avgjørt at siga okkum úr starvi.
>
> Støðan er als ikki batnað síðani vit sendu inn kæru okkara, tí leiðarin hevur als ikki víst vilja ella evni til at broyta hugburð sín og framferð mótvegis okkum sum starvsfólkum á stovninum.
>
> Hóast leiðarin hevur leitað sær hjálp hjá einum ráðgeva, so er als eingin broyting at hóma, og hetta hevur enn einaferð sannført okkum um, at leiðarin ikki megnar at broyta hugburð sín.
>
> Hetta ávirkar í ólukkumát brúkararnar, eins og starvsfólkini eru fullkomiliga niðurkoyrd, og tí hvørki vilja ella kunnu vit longur taka ábyrgdina av stovninum.

Vit halda tað eisini vera skylda okkara, í sambandi við at vit siga okkum úr starvi, at kunna tey avvarandi um grundina til uppsøgn okkara, sjálvsagt alt við atliti til tagnarskyldu okkara. Vit skilja ikki, at Almanna- og heilsumálaráðið skal hava so lítlan áhuga í viðurskiftunum á stovninum, at tað skulu ganga meira enn 3 mánaðir uttan at nøkur avgerð er tikin, hóast tit í ráðnum væl vita, at støðan gerst alsamt meira ótespulig fyri bæði brúkarar og starvsfólk.

Tað er sjálvsagt við tungum huga, at vit hava avgjørt at siga frá okkum starv, sum okkum dáma væl, men við einari leiðslu, sum ger tað heilt ógjørligt at finna gleði og menning á arbeiðsplássinum, síggja vit ikki aðra loysn.

Vit skriva tygum hetta bræv, fyri at vísa tygum á, at meginparturin av starvsfólkunum á einum stovni, sum skal taka sær av einum av veikastu samfelagsbólkum okkara, hevur avgjørt at siga seg úr starvi, og veruliga grundin er tann, at tygum og aðalráð tygara ikki tykjast at taka trupulleikarnar á stovninum í nóg stórum álvara.

Vit hava tí sum áður nevnt avgjørt, at um tygum ikki innan hósdagin í komandi viku hava tikið verulig stig til at loysa trupulleikarnar á stovninum, so verða uppsagnir okkara latnar Nærverkinum. …“

11. juni 2007 tekur Almanna- og heilsumálaráðið avgerð í málinum um kæruna frá Føroya Pedagogfelag, dagfest 26. febr. 2007. Nærverk tekur 24. juli 2007 avgerðina til eftirtektar og boðar varaleiðaranum og álitisfólkinum frá, at orðingin verður tikin aftur. Avgerðin hjá Almanna- og heilsumálaráðnum er soljóðandi:

**„Viðvíkjandi kæru um málsviðgerð hjá R, stjóra á Nærverkinum í samband við kæru sum G, álitisfólk og E, varaleiðari á sambýlinum á Mýrini 4-6 hava skrivað undir.**

**Málsgongd**

…

**Kæruviðgerð.**
Kæran snýr seg um, at R, stjóri á Nærverkinum, í svarskrivi til varaleiðaran og álitisfólki í samband við at starvsfólk á sambýlinum á Mýrini 4- 6 hava kært teirra leiðara, hevur sett eina serliga orðing inn, sum av móttakarunum hevur verið mett sum ein hóttan um avleiðingar fyri tær. Talan er um orðingina:

*„Viðvíkjandi spurninginum, hvørt leiklutur tygara ísamband við kæruna er sambæriligt við starv tygara sum álitisfólk/varaleiðari, fer Trivnaðartænastan at taka henda spurning upp til nærri kanningar og frætta tygum aftur hesum viðvíkjandi“.*

Nærverkið hevur í sínum viðmerkingum til kæruna víst á, at talan var á ongan hátt um eina hóttan, men bert ein staðfesting av, at ætlanin var at kanna spurningin um leiklutur teirra var sambærilig við tey størv, tær røkja.

Almanna- og heilsumálaráðið metir, at soleiðis, sum orðingin er, kann hetta fatast sum ein hóttan, sjálvt um sagt verður eftirfylgjandi, at talan ikki var um eina slíka.

Almanna- og heilsumálaráðið metir, at avgerðin í mun til kæruna ikki hevði staðið veikari, um so var, at henda orðing ikki var við.

Hinvegin skerst ikki burtur, at varaleiðarar og álitisfólk hava eina aðra støðu á einum arbeiðsplássi enn restin av starvsfólkunum.

Varaleiðarar hava leiðsluábyrgd, og hava tí eina ávísa skyldu til sjálvi at boða leiðsluni omanfyri leiðara sínum frá, um okkurt er, sum átti at verið átalað, í øðrum lagi, um hetta ikki hjálpti, so at vent sær til Almanna- og heilsumálaráðið.

Álitisfólk hava ábyrgd av at fáa samstarv millum leiðslu og starvsfólk at glíða væl – at „slætta sjógv“ so at siga. Hinvegin hava tey sjálvsagt rætt til at kæra um viðurskifti, tey ikki eru

nøgd við á sama hátt sum onnur starvsfólk, um royndirnar at slætta sjógv ikki eydnast.

**Kæruavgerð**

Almanna-og heilsumálaráðið heldur, at Nærverkið skuldi ikki havt orðað seg á henda hátt til álitisumboðið.

Almanna- og heilsumálaráðið heldur ikki, at tað hevði verið skeivt at greitt varaleiðaranum frá, at tað liggja ávísar skyldur í starvinum, sum varaleiðari, men at ein fráboðan um hetta átti at verið gjørd á annan og meira útgreinandi og vegleiðandi hátt.

Almanna-og heilsumálaráðið fer at heita á Nærverkið um at taka orðingina í brævinum til varaleiðaran og álitisfólkið aftur, og samstundis heita á Nærverkið um at taka stig til at samskifta á annan og meira útgreinandi og vegleiðandi hátt um, hvørji rættindi og hvørjar skyldur áliggja varaleiðarum og álitisfólki.“

Við skrivi, dagfest 13. juni 2007, tekur Almanna- og heilsumálaráðið fyribilsavgerð í kærumálinum um avgerðina hjá Nærverk frá 31. jan. 2007. Niðurstøðan hjá ráðnum er soljóðandi:

„…

**Niðurstøða.**

Almanna- og heilsumálaráðið hevur staðfest, at Nærverkið aftaná kæruna frá starvsfólkunum á sambýlinum á Mýrini 4-6 hevur sett tiltøk í verk, sum mett vóru neyðug og hóskandi fyri at fáa loyst trupulleikarnar á sambýlinum.

Av hesi orsøk helt Almanna- og heilsumálaráðið tað ikki vera grundarlag undir kæruni um at Nærverkið ongin tiltøk hevur tikið.

Í nýggjasta skrivinum frá starvsfólkunum dagfest 9. juni 2007 verður sagt frá, at hesi tiltøk onki hava hjálpt.

Tí verður neyðugt hjá Almanna- og heilsumálaráðnum at fara inn í málið aftur, og við støði í nýggjasta skrivinum venda sær til Nærverkið og fáa lýst aktuellu støðuna.

> Til ber tí ikki at fráboða nakra endaliga støðu áðrenn 14. juni 2007, sum starvsfólkini ynskja, men vent verður aftur, tá málið er lýst av nýggjum við støði í skrivinum frá starvsfólkunum. …“

Sama dag sendir Almanna- og heilsumálaráðið Nærverk avrit av skrivinum frá starvsfólkunum og biður um eina frágreiðing í málinum. Dagin eftir biður Nærverk leiðaran um eina gjølligari frágreiðing um, hvørji tiltøk hann hevur framt á stovninum, nær og hvussu tey eru framd og hvørjar niðurstøður eru av tiltøkunum.

Leiðarin svarar áheitanini í telduposti til P, virkandi deildarleiðara 26. juni 2007 og við skrivi, dagfest 5. juli 2007. Í teldupostinum vísir leiðarin á, at hann leypandi hevur kunnað P um støðuna, og í skrivinum, dagfest 5. juli 2007, skrivar leiðarin m.a. soleiðis:

> „Um málsgongdina:
> …
> Jan./Feb. 2007
> …
> Leiðarin boðar Nærverkið frá, at allar royndir at fáa ein mennandi dialog við varaleiðara og álitisfólk eru miseydnaðar.
>
> Leiðarin móttekur niðurstøðuskriv við posti, seinni verður leiðarin kallaður til fundar, har løgfrøðingur hjá Nærverkið útgreinar niðurstøðuna og mannagongdir í hesum sambandi.
> …
> Leiðarin kunnar Nærverkið um sínar ætlanir, og eru tey jalig um hesar.
> …
> Mar./Apr. 2007
> …
> Fundur við Nærverkið – leiðarin tekur samanum fundin við starvsfólk og supervisor. Eg meti, at supervisor greiddi sína uppgávu væl, og at viljin frá starvsfólkum til loysn er har. Men nøkur grugga málið í mun til dialogin. Niðurstøðan var, at einaferð við supervisor var ov lítið – og kanska skal meira

til. Tosað var um arb.psyk. v.m., og Runavík modell. Eg gjørdi greitt, at mítt samstarv við varaleiðara í ávísan mun var steðga nú, ella øvugt.

Heiti á Nærverkið um at hava umboð við á næsta starvsfólkafund, og er jaligt svar haðani – seinni koma kontraboð í mun til luttøku.

Hóttanir um blaðskriving verða settar fram á starvsfólkafundi av kærara og lagt verður eftir leiðara um starvsfólk, sum ikki hevur kært. Heitt verður á starvsfólk um at halda seg til dagsskrá. Nærverkið metir í mun til kunning frá leiðara, at eg havi verið ov bleytur í handfaringini av málinum sum heild.
…
Mai/Jun. 2007
…
Fundur við Nærverkið um støðuna d.d., tvs. at víst verður til niðurstøðu hjá supervisor, har øll starvsfólkini – burtursæð frá 4 starvsfólkum – hava meldað út til J leiðara, at tey ynskja at arbeiða konstruktivt framyvir við honum sum leiðara. Eitt starvsfólk er uttanlanda og var tí ikki á seinasta fundi. Ætlanin er, at fundur verður við hana um 14 dagar. …

Leiðarin boðar Nærverk frá, at hann er burturstaddur frá 14. juni, kanska í 3 vikur.

Mítt boð er, at 4 starvsfólk fáa boði um mekling. Hesi starvsfólk siga seg hava so stórar trupulleikar við leiðara, at tey ikki kunnu halda fram, sum nú er.
…“

Við skrivi, sum er móttikið í Nærverk 2. juli 2007, sigur eitt av starvsfólkunum seg úr starvi.

2. juli eru álitisfólkið og varaálitisfólkið á fundi við landsstýrismannin

í Almanna- og heilsumálum. Á fundinum luttaka eisini umboð fyri Nærverk. Q, starvsfólkaleiðari hevur skrivað soljóðandi frágreiðing frá fundinum:

> „… Landsstýrismaðurin byrjaði fundin við at bjóða vælkomin, hann presenteraði fundarluttakararnar. Hann segði eitt sindur um, hvat hann metti fór at henda á fundinum og gav síðan orðið til starvsfólkaumboðini.
>
> B førdi orðið og greiddi frá, hví tey nú mettu neyðugt var við fundi við landsstýrismannin. Tað sum fekk tey at biðja um fundin var, at seinasta skrivið, sum tey høvdu sent higar, eisini skuldi viðgerast við hoyringum o.s.v. og tí mettu tey ongi útlit vóru til, at nøkur loysn kundi fáast á ósemjuni á Mýrini 4-6.
>
> Starvsfólkini greiddu eitt sindur frá, hvat var farið fram síðan leiðarin hevði fingið S, supervisor at hjálpa til við at greiða ósemjuna.
>
> Starvsfólkaumboðini fingu at vita, at Nærverkið hevði havt fund við Pedagogfelagið um hetta mál, og at felagið og Nærverkið vóru samd um í felag at hava fund við øll starvsfólkini fyri at vita, um tað ikki bar til at fáa loyst málið.
>
> Avtalan var, at pedagogfelagið kallaði inn til fundin. Ætlanin hevði verið at fundurin skuldi vera í seinastu viku, men tá vóru so nógv starvsfólk burturstødd, miðað verður nú eftir at fundurin verður hesa vikuna.
>
> Niðurstøðan á fundinum var tann, at landsstýrismaðurin setti sítt álit á, at hesin fundur millum partarnar, sum Pedagogfelagið skuldi skipa fyri, fór at vera eitt stig fram ímóti, at funnin varð ein loysn, og heitti á starvsfólkaumboðini um at geva hesum ein møguleika. Tað søgdu tey seg vera sinnaði til.“

Í skrivi, dagfest 6. juli 2007, skrivar Nærverk m.a. soleiðis í frágreiðing til Almanna- og heilsumálaráðið:

**„Viðvíkjandi kæru frá starvsfólkum á sambýlinum á Mýrini 4-6 í Hoyvík**

…

Í fyrsta lagi skal viðmerkjast, at soleiðis sum Nærverkið hevur skilt hesa kæruna (Mín viðmerking: skrivið frá starvsfólkunum, dagfest 9. juni 2007), so er hetta eitt ískoyti í mun til kæruna frá somu starvsfólkum frá 24. februar 2007, ið viðvíkti avgerð hjá Nærverkinum frá 31. januar 2007.

Í avgerðini frá 31. januar 2007 var niðurstøðan, at leiðarin fekk tilmæli um at útvega sær hóskandi serkøna ráðgeving til greinan og loysn á trupulleikunum á stovninum.

Nærverkið kann staðfesta, at leiðarin hevur fylgt hesum tilmæli, og hevur fingið ráðgeving til at greina inn á stovnin. Tá sagt verður í ískoytiskæruni, at leiðarin hevur leitað sær hjálp hjá einum ráðgeva, og als eingin broyting er at hóma, so hevur Nærverkið fingið upplýst, at viðkomandi ráðgevi varð valdur við tilsøgn frá starvsfólkunum, og hevur ráðgevin havt bæði samrøður við starvsfólkini, bæði í bólki og einsæris.

Hvussu hetta hevur eydnast og ikki, so kann staðfestast, at fyriliggjandi ískoytiskæra bendir á, at hetta stig ikki hevur bøtt um støðuna, uttan at Nærverkið metir tað verða prógvað, hvør hevur høvuðsábyrgdina av at støðan ikki er broytt, og av at trupulleikarnir enn ikki eru loystir, hóast nevnda stig.

…

At starvsfólk hótta við at siga seg úr starvi, um ikki ein loysn verður funnin innan eina ávísa freist, kann Nærverkið ikki taka atlit til í sambandi við málsviðgerðina – eins og Nærverkið vil nýta høvi til at viðmerkja, at hóttanin um uppsøgn í kæruskrivinum bendir á, at talan er um kollektivt átak.

Í hesum sambandi er talan um eina kæru um ein leiðara, og tí er talan um eitt starvsfólkamál, ið má viðgerðast eftir teimum reglum, ið eru galdandi fyri tílík mál.

Um starvsfólk av persónligum orsøkum velja at siga seg úr starvi, kann Nærverkið ikki gera viðmerkingar til og má taka hetta til eftirtektar.

Viðvíkjandi spurninginum um, hvørt støðan millum leiðslu og starvsfólk hevur ávirkan á brúkaran, so kann nevnast, at Nærverkið hevur fingið fyrispurning frá avvarðandi hjá búfólki á stovninum, og at Nærverkið hevur verið í sambandi við viðkomandi avvarðandi og greitt frá støðuni, eins og Nærverkið hevur kunnað Javna om støðuna.

Nærverkið hevur skilt partarnar soleiðis, at teir eru samdir um, at búfólkini ikki skulu gerast partur av samstarvstrupulleikunum millum leiðaran og starvsfólkini. Hinvegin metir Nærverkið, at málið tykist at vera so orkukrevjandi fyri bæði starvsfólk og leiðaran, at vandi er fyri, at tænastustøðið, ið Nærverkið ynskir skal vera á stovninum, ikki kann haldast.

Fyri góðan ordan skuld skal nevnast, at Nærverkið longu í vár tók stig til at halda fund við starvsfólkini, og tók upp samband við Pedagogfelagið og løgfrøðing tess, við tað, at Nærverkið metti, at neyðugt var, at fundurin varð hildin við viðvirkan frá Føroya Pedagogfelag. Í fyrstu syftu kom ætlaði fundurin í drag. Samband hevur verið aftur millum Nærverkið og Føroya Pedagogfelag, men tað hevur d.d. ikki eydnast at fingið fundin í lag, ið Pedagogfelagið, eftir avtalu við Nærverkið, hevur átikið sær at kalla inn til.

Sum nevnt, so bendir kæran á, at tey tiltøk, ið Nærverkið mælti leiðaranum til at seta í verk, og sum hann setti í verk, hava ikki verið nøktandi. Nærverkið metti í sambandi við avgerðina frá 31. januar 2007 sum kunnugt ikki, at grundarlag var fyri at taka stig viðvíkjandi starvssetanini hjá leiðaranum, og eftirsum at sama kærumálið nú liggur til viðgerðar hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum, so metir Nærverkið ikki, at Nærverkið kann taka stig viðvíkjandi hesum somu viðurskiftum við atliti

til tíðina, ið er farin síðan avgerðin fyrilá tann 31. januar 2007 og sum kæran nú viðvíkur.

Nærverkið tekur tó støðuna á stovninum í stórsta álvara, eins og Nærverkið kann staðfesta, at støðan er trupul og nærum løst, og tí hevur Nærverkið avtalað fund við arbeiðssálarfrøðing, við tí fyri eyga at fáa ráðgeving um, hvørji tiltøk eru neyðug fyri at fáa stovnin at virka nøktandi framyvir. Hesin fundur er avtalaður at vera komandi mikudag, tann 11. juli 2007.

Samanumtikið, so kann Nærverkið viðmerkja til støðuna,

at leiðarin hevur fylgt tilmælinum frá Nærverkinum í sambandi við avgerðina frá 31. januar 2007,

at staðfestast kann, at henda process ikki hevur verið nøktandi til loysn á samstarvstrupulleikunum á stovninum, og uttan at Nærverkið útfrá tí sum fyriliggur, ikki kann siga, hvør orsøkin til hetta er,

at Nærverkið tí sjálvt hevur fingið fund í lag við arbeiðssálar-frøðing, ið kann ráðgeva um, hvussu farast skal fram framyvir, ásannandi, at verandi støða ikki kann halda áfram."

Við skrivi, dagfest 9. juli 2007 tekur Almanna- og heilsumálaráðið avgerð í kærumálinum frá 24. februar 2007. Niðurstøðan hjá ráðnum er, at ráðið vísir aftur, at eingi tiltøk eru sett í verk, og at ráðið metir, at Nærverk tekur trupulleikarnar á sambýlinum á Mýrini 4-6 í størsta álvara og roynir at loysa málið. Almanna- og heilsumálaráðið biður samstundis um at verða kunnað um gongdina í málinum.

12. juli 2007 er fundur millum Nærverk og starvsfólkini. Ongin frágreiðing er skrivað frá fundinum, men fundurin verður umrøddur í skrivi frá starvsfólkunum til Nærverk, dagfest 21. juli 2007 og skrivi frá Nærverk til Føroya Pedagogfelag, dagfest 18. aug. 2007. Skrivini eru endurgivin niðanfyri.

21. juli 2007 senda starvsfólkini soljóðandi skriv til Nærverk:

„Eftir at vit hava verið á fundi við Nærverkið 12.07 hava vit so viðgjørt teir møguleikar, sum vit fingu í boði frá Nærverkinum.

Vit ynskja ikki at fara av stovninum. Vit hava ikki stríðst fyri hesum í næstan í eitt ár nú, fyri síðani, bara at fara, tá Nærverkið ikki kann koma við einari loysn.

Vit hava, eins og R, fleiri ferðir ført fram, búfólkini sum fyrsta prioritet, og vit meta at tað er ein vanlukka fyri búfólkini, at 8 starvsfólk, siga seg úr starvi ella blíva flutt samstundis.

T legði fram, hvussu gott tað var at vit sum starvsfólk, høvdu gjørt vart við okkara viðurskifti og kravt okkara rætt, sum starvsfólk. Vit hava ikki einferð fingið at vita, at nakað, sum vit hava kært um er okkara rættindi. Og umstøðurnar á Mýrini eru als ikki broyttar á nakran hátt. Har er tvørtur ímóti nógv versnað. At vit skulu velja at fara av stovninum, tí vit hava kravt okkara rætt, duga vit ikki at síggja logikkin í.

T legði eisini fram, at Nærverkið ikki metti at kæran frá 29.09.06 var so álvarslig, frá teirra síðu, at tey valdu einki at gera við hana, og fyri okkum er tað sera hugstoytt. At kæra okkara leiðara er als ikki nakað vit gera til stuttleika. Hetta hevur verið ein tilgongd, sum hevur verið ávegis í longri tíð. Tað gongur long tíð, frá at tað fer frá vaksandi individuellari ónøgd, til at vit í felag orða eina kæru, og høvdu vit tí vóna at vit vóru tikin í álvara og vird samsvarandi.

Eisini førdi T fram, at vit kundu fáa ein arbeiðssálarfrøðing inn at finna útav, hvat kann gerast, samstundis sum R sigur, at einasta loysn er at skilja partarnar. Vit duga ikki at síggja nakra loysn við at fáa ein arbeiðssálarfrøðing inn, tí nú er málið drigið so langt út, og vit duga ikki at síggja nakran veg aftur nú. Høvdu

vit fingið tað boði frá fyrstu tíðina av, so hevði støðan nokk verið ein onnur. Vit føla eisini at okkara álit bleiv misbrúkt, tá S var og tosaði við okkum. Vit fingu at vita, at tað vit søgdu var í trúnaði. Hetta var nakað sum leiðarin hevði fingið álagt frá Nærverkinum fyri at seta tey tiltøk í verk, sum mett vóru neyðug, fyri síðani at frætta, at leiðarin hevði verið á Nærverkinum, og greitt frá tí, sum vit høvdu sagt. Tað kom so slett einki burturúr hesum, og hvussu kunnu vit føla okkum trygg við, at leiðarin er tann, sum gevur informatiónirnar víðari, tá tað er hann vit hava kært??

Vit ynskja ikki at verða flutt!!!! At flyta starvsfólkini er í størstu andsøgn við tað, upplýst varð okkum á fundinum við Nærverkið 12.07.07, har dentur var lagdur á, at búfólkini standa Nærverkinum fremst í huga í hesum málinum. Hetta málið hevur staði sína tíð og má nú fáa ein enda, ið tænir búfólkunum á best møguligan hátt.

Vit meta eisini sjálvi at starvsfólkabólkurin á Mýrini er ein sterkur vælsamansjóðaður bólkur av vælkvalifiseraðum og vælútbúnum fólki, sum uttan iva kann fáa stovnin á føtur aftur. Hetta sæst aftur í at flestu starvsfólk hava arbeitt á Mýrini í longri áramál, og sjálvt avloysarar og hjálparfólk hava starvast á Mýrini í longri tíðarskeið, hóast tey eru ávegis í útbúgving innan onnur øki.

Orsakað av at Pedagogfelagið er í feriu, og ikki er opið aftur fyrr enn um 3 vikur, velja vit at gera tað uppá henda mátan.“

Við skrivi, dagfest 18. august 2007, skrivar Nærverk soleiðis til Føroya Pedagogfelag, starvsfólkini og leiðaran:

„**Viðvíkjandi loysn á trupulleikum ímillum starvsfólk og leiðara á sambýlinum á Mýrini 4-6 í Hoyvík**
Á fundi við starvsfólk og leiðslu á sambýlinum á Mýrini 4-6 tann 12.07.2007 staðfesti leiðslan fyri Nærverkinum, at møguleikarnir fyri at finna eina innanhýsis loysn á trupulleikunum ímillum starvsfólk og leiðara á Mýrini, eru uppbrúktir.

Leiðslan fyri Nærverkinum hevur somuleiðis staðfest, at ongar sakligar orsøkir eru sum kunnu grunda, at ynski hjá starvsfólkunum um at koyra leiðaran fyri sambýlinum frá, verður gingið á møti.

Niðurstøðan hjá leiðsluni í Nærverkinum er, at orsøkirnar til trupulleikarnar skulu finnast í dagligа samskiftinum og samstarvinum ímillum teir einstaklingar, sum mynda starvsfólk og leiðslu á Mýrini.

Talan er, fyri leiðsluna í Nærverkinum at síggja, ikki um trupulleikar av fakligum slag. Tey viðurskifti, sum hava verið løgd til grund fyri teimum kærum, sum settar eru fram ímóti leiðaranum fyri sambýlinum, hava at kalla øll verið av persónligum slag. Leiðslan fyri Nærverkinum staðfestir tí, at talan er um eina persónliga konflikt, og ikki um eina fakliga ella professionella konflikt.

Hetta sæst týðiliga aftur í, at ítøkiliga veitingin til búfólkini á sambýlinum í lítlan mun hevur verið nervað av konfliktini. Tó er eingin ivi um, at konfliktin við tíðini fer at syndra stovnin, eisini fakliga og professionelt, um ikki munagóð stig verða tikin nú.

Sum fráboðað á fundinum 12.07.2007 hevur leiðslan fyri Nærverkinum arbeitt við at finna fram til, hvussu komast kann burturúr teirri naggatódn, sum er íkomin. Á fundinum varð eisini boðað frá, at Nærverkið hevur avgjørt at fara undir eina endurskipan av sambýlinum, hvat viðvíkur starvsfólkum og leiðslu. Málið við hesi endurskipan er at skapa varandi arbeiðsfrið á sambýlinum, soleiðis at tann veiting, sum tað áliggur Nærverkinum at veita einstaka búfólkinum, kann koma í eina trygga og støðuga legu.

Á fundinum varð avtalað, at Føroya Pedagogfelag skuldi venda aftur til Nærverkið viðvíkjandi tí, sum leiðslan fyri Nærverkinum førdi fram á fundinum. Nærverkið metir, at starvsfólkini á Mýruni, við skrivinum til Nærverkið dagfest 21.07.2007, hava

> tikið málið aftur í egnar hendur. Avtalan við Føroya Pedagogfelag, sum umboð fyri starvsfólkini, verður sostatt ikki mett at vera viðkomandi møguleiki longur, tí málið er fari tað víðari, síðan fundin.
>
> Leiðslan fyri Nærverkinum hevur tí heitt á U virkisráðgeva um at gera eina lýsing av starvsfólkaviðurskiftunum á sambýlinum á Mýrini. Talan er um eina samlaða lýsing, sum umfatar bæði vanlig starvsfólk og leiðslu. Út frá hesi lýsing skal U geva Nærverkinum eitt tilmæli um, hvussu farast skal fram í sambandi við ta endurskipan, sum leiðslan fyri Nærverkinum hevur sett út í kortið.
>
> Lýsingin av viðurskiftunum, og harvið tilmælið til Nærverkið, kemur í høvuðsheitum at byggja á samrøður, sum U fer at hava við starvsfólk og leiðslu á Mýrini. Eftir ætlan vera samrøðurnar gjørdar innanfyri tann næsta mánaðin.
>
> Hetta skriv er eisini sent til álitisfólkið á Mýrni. Álitisfólkið er biðið um at kunna hini starvsfólkini á sambýlinum um innihaldið í skrivinum. Eisini er skrivið sent leiðaranum fyri sambýlinum á Mýrini."

Í døgunum 29. – 31. aug. 2007 siga 6 av starvsfólkunum seg úr starvi. Nærverk tekur uppsagnirnar til eftirtektar og loysir starvsfólkini úr starvi samsvarandi innihaldinum í uppsagnarskrivum teirra.

2. sept. skrivar R, stjóri í Nærverk m.a. soleiðis í eini støðufrágreiðing til Almanna- og heilsumálaráðið:

> „…Í vikuni, sum fór, bórust so tíðindini í útvarpinum um ætlaðu uppsagnirnar. Tá ongi boð komu til Nærverkið, bóðu vit álitisfólkið á Mýrini til fundar hósdagin 30. august. Hon møtti við hjásitara, t.v.s. formanninum í Pedagogfelagnum. Hon váttaði fyri, at uppsagnirnar fóru at koma.

> Við dagslok fríggjadagin tann 31. august vóru 5 uppsagnir (Mín viðmerking: 6 uppsagnir) móttiknar og stempladar inn.
>
> Eftir fundin við álitisfólkið fóru vit í holt við eina tilbúgvingarætlan fyri sambýlið. Vit sonderaðu terræn fyri, hvør kundi taka leiðsluna á sambýlinum í staðin fyri núverandi leiðara, og vit hava fingið tveir persónar til leiðsluuppgávuna. Hetta kann ikki almannakunngerast, fyrr enn vit hava tosað við leiðaran J. Hann veit enn ikki um hetta síðsta. J møtir í morgin 3. september kl. 10.00 við advokati, har vit fara at tosa formliga við hann um aðra loysn, enn at vera leiðari fyri sambýlið á Mýrini. …"

7. sept. 2007 er fundur í Almanna- og heilsumálaráðnum, har setanarviðurskiftini hjá leiðaranum vóru til viðgerðar. Sambært semju millum Nærverk, leiðaran og Almanna- og heilsumálaráðið, verður J sum liður í umskipan av stovninum fluttur frá at vera leiðari á sambýlinum á Mýrini til at leiða nýggja verkætlan undir Trivnaðartænastuni, ið er tilboð til persónar, ið hava tørv á serligum tilboði. Nærverk kunnaði Almanna- og heilsumálaráðið um, at tað hevði ikki nakrar ætlanir um, at starvsfólkini, sum høvdu sagt upp, skuldu vera partur av starvsfólkabólkinum á stovninum, tá hann var umskipaður. Almanna- og heilsumálaráðið hevði heldur ikki ætlanir um at seta hesi fólk aftur í starv á sambýlinum á Mýrini.

11. sept. 2007 verða 2 leiðarar fyribils settir á sambýlinum á Mýrini.

Við skrivi, dagfest 17. sept. 2007, skrivar álitisumboðið vegna starvsfólkini, sum hava sagt seg úr starvi, m.a. soleiðis til Nærverk:

> „…
> Eisini kenna vit okkum noydd at gera vart við, at Nærverkið í ólukkumát hevur gjørt mismun á ávikavist leiðaranum og so okkum vanligu starvsfólkum, tá talan hevur verið um at bjóða annað starv innan stovnsøki tykkara, tí vit skilja, at leiðarin longu undan fundi okkara tann 11.09.07 hevur fingið tilboð um annað starv undir Nærverkinum, meðan eingin av okkum hevur fingið tilboð um nakað tílíkt annað starv.

> Vit halda ikki at Nærverkið hevur givið okkum sama møguleika, sum leiðarin hevur fingið og tí vilja vit hava fulla greiðu á øllum viðurskiftum í sambandi við málsviðgerðina hjá Nærverkinum áðrenn vit taka støðu til, um kæra skal sendast landsstýrismanninum.
>
> Tann 11.09.2007 vórðu starvsfólkini á sambýlinum á Mýrini boðað til kunnandi fund frá Nærverkinum. Hvat kunningin snúði seg um, og hvør skuldu vera við til fundin bar ikki til at fáa upplýst frá fyrrverandi leiðaranum J. Tað skuldi tó vísa seg, at ikki færri enn 4 umboð frá Nærverkinum komu á fundin og var kunningin um framtíðina á Mýrini.
>
> R legði út við at siga, at leiðarin J nú hevði gjørt tað sama sum vit starvsfólk, sagt seg úr sínum starvi á Mýrini, og at tvey nýggj starvsfólk nú skuldu taka sær av leiðsluni. …
>
> Dagin eftir, tann 12/9, hoyra vit í ÚF, at J er settur í annað starv í Nærverkinum. Hví kom hetta ikki fram á fundinum dagin fyri ?
>
> …
>
> Vit vilja hava eina neyvari frágreiðing, um Nærverkið er sinnað at geva okkum somu tilboð, sum leiðarin hevur fingið og um Nærverkið ikki vil geva okkum sama tilboð, so vilja vit hava eina nærri grundgeving fyri hvør grundgevingin er fyri hesum mannamuni, sum tykist vera gjørdur.“

Avrit av skrivinum varð tvær ferðir sent Almanna- og heilsumálaráðnum og landsstýrismanninum.

8. okt. 2007 er fundur í Almanna- og heilsumálaráðnum millum landsstýrismannin, 5 av starvsfólkunum og umboð fyri Nærverk og Almanna- og heilsumálaráðið. Niðurstøðan á fundinum er, at landsstýrismaðurin fer ikki at taka málið uppaftur, men at hann ætlar

at gjøgnumganga tað av nýggjum fyri at kanna, um skeivleikar eru hendir undir málsviðgerðini.

Í skrivi, dagfest 12. okt. 2007, svarar Nærverk skrivinum frá álitisumboðnum m.a. soleiðis:

> „… Fyrst er at siga, at skriv tygara ikki gevur Nærverkinum høvi til at gera broytingar í teimum stigum, ið longu eru tikin í málinum ella teirri tilgond, ið er sett í verk á sambýlinum á Mýrini 4-6.
>
> Nærverkið hevur annars hesar viðmerkingar til skriv tygara:
>
> Tá sagt verður, at Nærverkið hevur gjørt mismun á leiðaranum og starvsfólki, so verður hetta staðiliga avvíst. Á fundi á Argjum tann 12. juli 2007 boðaði Nærverkið frá, at umskipan av stovninum og flyting av starvsfólki kundi koma uppá tal, um framhaldandi arbeiði við semjuloysn ikki vísti seg at geva úrslit. Í skrivi til Nærverkið, dagfest tann 21. juli 2007, har víst verður til fundin tann 12. juli 2007, siga starvsfólkini, at tey hava viðgjørt møguleikarnar, sum Nærverkið hevði greitt frá, og at tey ikki ynskja at verða flutt. Nøkur av starvsfólkunum valdu síðan at siga seg úr starvi, áðrenn arbeiðið hjá ráðgevanum, ið Nærverk hevur heitt á um at fara inn á stovnin, var byrjað.
>
> Hvat viðvíkur leiðaranum, so var semja gjørd við hann og tók hann av tilboðnum frá Nærverkinum um at flyta í annað starv.
>
> Hvat viðvíkur kunning frá Nærverkinum á fundi tann 11. september 2007, so er tað ikki rætt, tá R er endurgivin fyri at siga, at leiðarin hevur sagt seg úr starvi. Leiðarin hevur valt at fara av sambýlinum á Mýrini 4-6 og tikið av at flyta í annað starv í Nærverkinum. Hvussu ítøkiliga málsviðgerðin er farin fram er eitt mál millum leiðaran og Nærverkið. …“

Í telduposti 29. okt. 2007 spyr V, virkandi starvsfólkastjóri í Almanna- og heilsumálaráðnum R, stjóra í Nærverk:

> „Hava tit svarað skrivinum frá starvsfólkunum dagfest 19.09.07.
>
> Er nakað gjørt við at hjálpa teimum, sum søgdu seg úr starvi, at finna onnur størv. Víst verður til samrøðuna millum undirritaða, W, aðalstjóra og teg eftir fundin hin 8. oktober 2007 við starvsfólkini, sum hava sagt seg úr starvi."

7. nov. 2007 sendir Nærverk eftir áheitan frá Almanna- og heilsumálaráðnum frágreiðing um støðuna á sambýlinum, har m.a. verður sagt, at Trivnaðartænastan hevur ikki tikið stig til at bjóða starvsfólkunum annað starv.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 31. mars 2008, varð klagan send Almanna- og heilsumálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur. Almanna- og heilsumálaráðið varð eisini biðið um at lata umboðsmanninum til láns øll skjølini, bæði hjá Nærverk og ráðnum.

Í telduposti 29. apríl hevur umboðsmaðurin eftir umbøð frá ráðnum játtað at leingja freistina við 2 vikum.

Við skrivi, dagfest 9. mai 2008, hevur Almanna- og heilsumálaráðið svarað umboðsmanninum soleiðis:

> **„Viðv. j. nr. …, klagu frá Føroya Pedagogfelag, dagfest 26. februar 2008**
>
> Umboðsmaðurin hevur í brævi dagfest 31. mars 2008 heitt á Almanna- og heilsumálaráðið um at greiða umboðsmanninum nærri frá málinum um viðurskiftini millum starvsfólk og leiðara á stovninum á Mýrini 4-6, sum hevur verið viðgjørt fyrst av Nærverkinum og seinni kært til Almanna-og heilsumálaráðið. Orsøkin er ein klaga til umboðsmannin frá Føroya Pedagogfelag

um handfaringina hjá Nærverkinum og Almanna-og heilsumálaráðnum av hesum máli.

Almanna-og heilsumálaráðið hevur biðið Nærverkið um eina frágreiðing saman við øllum skjalatilfarinum í málinum.

Nærverkið hevur latið Almanna-og heilsumálaráðnum frágreiðing, sum er dagfest 28. apríl 2008 saman við skjalatilfari umframt skjølini í:
Máli nr. …
Máli nr. …
Máli nr. …
Máli nr. …
Máli nr. …

Uppsagnir og váttanir vegna starvsfólk á Mýrini 4 og 6.

Frágreiðingin hjá Nærverkinum er býtt upp í tríggjar partar við hesum heitum 1. Gjøgnumgongd av málsgongdini, 2. Frágreiðing um avgerðir og tey tiltøk, ið Nærverkið hevur tikið í málinum og 3. Viðmerkingar til einstøku kærupunktini frá Pedagogfelagnum.

Almanna-og heilsumálaráðið heldur seg til frágreiðingina hjá Nærverkinum, sum tykist at vera í tráð við tað, sum farið er fram í málinum og tekur annars til eftirtektar tær viðmerkingar, sum Nærverkið hevur til kærupunktini frá Pedagogfelagnum.

Burtursæð frá avgerð dagfest 11. juni 2007 í kærumáli um avgerð hjá Nærverkinum frá 31. januar 2007, har Nærverkið varð biðið um at taka aftur orðingarnar í seinasta reglubrotið, tekur Almanna-og heilsumálaráðið eisini undir við teimum avgerðum og tiltøkum, sum Nærverkið hevur tikið í málinum.

Viðvíkjandi avgerðunum hjá ráðnum dagfestar ávikavist 13. juni 2007 og 9. juli 2007, er at siga, at ráðið einans hevur tikið støðu til spurningin, um kærurnar hjá/vegna starvsfólk á Mýrini 4 – 6

hava elvt til, at Nærverkið hevur tikið neyðug og hóskandi tiltøk ella ikki fyri at fáa loyst trupulleikarnar á sambýlinum.

Almanna-og heilsumálaráðið staðfesti í umrøddu avgerðum, sum ikki vóru endaligar, at Nærverkið, aftaná kæruna frá starvsfólkunum, hevði sett tiltøk í verk, sum mett vóru neyðug og hóskandi fyri at fáa loyst trupulleikarnar á sambýlinum.

Starvsfólkini høvdu í brævi dagfest 9. juni 2007 til Almanna-og heilsumálaráðið sagt frá, at hesi tiltøk onki hava hjálpt. Evnið varð eisini umrøtt á fundi 2. juli 2007 millum landsstýrismannin, tvey starvsfólkaumboð frá Mýrini 4 – 6, stjóran á Nærverkinum og virkandi leiðaran fyri Trivnaðartænastuna.

Aftaná henda fundin boðaði Almanna- og heilsumálaráðið tann 9. juli 2007 Føroya Pedagogfelag frá seinnu avgerðini, ið er soljóðandi:

*„Almanna- og heilsumálaráðið kann staðfesta, at Nærverkið, aftaná at starvsfólkini kærdu til teirra, hevur sett tiltøk í verk, við at áleggja leiðaranum á Mýrini 4 – 6 at fáa hjálp frá uttanhýsis ráðgeva, tí verður kæran um, at ongi tiltøk eru sett í verk afturvíst.*

*Staðfest verður tó, at tað sær út sum um, hesi tiltøk ikki hava hjálpt uppá støðuna. Hetta siga starvsfólkini á Mýrini 4 – 6 í skrivinum dagfest 9. juni 2007, og leiðslan í Nærverkið tekur undir við hesum í skrivi dagfest 6. juli 2007.*

*Nærverkið hevur boðað frá, at avtala er gjørd við Føroya Pedagogfelag um at hava fund við starvsfólkini á Mýrini 4 – 6. Føroya Pedagogfelag skal sambært hesi avtalu taka stig til fundin. Starvsfólkaumboðini vórðu kunnaði um hetta á fundinum við undirritaða (landsstýrismannin) 2. juli 2007. Harumframt fer Nærverkið eisini at biðja um hjálp frá einum arbeiðssálarfrøðingi við tí fyri eyga at fáa ráðgeving um, hvørji stig kunnu takast fyri at fáa stovnin at virka nøktandi framyvir.*

*Almanna- og heilsumálaráðið metir út frá omanfyristandandi, at*

*Nærverkið tekur trupulleikarnar á sambýlinum á Mýrini 4 – 6 í størsta álvara og roynir at loysa málið.*

*Almanna- og heilsumálaráðið fer tó at heita á Nærverkið um javnan at kunna okkum um gongdina í málinum.*

*Av tí at Almanna- og heilsumálaráðið ikki hevur fingið nakað svar uppá, um tað er felagið ella starvsfólkini samskiftast skal við nú, verður brævið sent báðum pørtum.*"

Almanna- og heilsumálaráðið varð kunnað um gongdina í málinum við einari støðulýsing dagfest 2. september 2007 frá stjóranum á Nærverkinum. Har varð m.a. upplýst,

- at fríggjadagin 31. august 2007 vóru uppsagnir frá 5 starvsfólkum móttiknar (Mín viðmerking: 6 umsóknir),
- at farið varð í holt við eina tilbúgvingarætlan fyri sambýlið,
- at avtalað er við Javna og avvarðandi, at Trivnaðartænastan skipar fyri kunning til øll avvarðandi og Javna, tá málið er búgvið til tess,
- at Trivnaðartænastan hevur arbeitt við einum leisti fyri, hvussu farast skal um búfólkini í skiftistíðini.

Við brævi dagfest 10. september 2007 boðar Nærverkið frá, at tað hevur gjørt avtalu við P og O um at taka við leiðsluni á Mýrini 4 – 6.

Fundur hevur verið 8. oktober 2007 millum landsstýrismannin og tey starvsfolkini, sum søgdu seg úr størvunum eftir umbøn frá starvsfólkunum. Frásøgn frá fundinum er partur av hjálagda skjalatilfarinum.

Við t-posti dagfestum 7. november 2007 sendir Nærverkið Almanna- og heilsumálaráðnum eina frágreiðing viðvíkjandi støðuni á Mýrini 4 – 6. Frágreiðingin er soljóðandi:

„…

Mín viðmerking: Frágreiðingin lýsir viðurskiftini á stovninum eftir at starvsfólkini og leiðarin eru farin úr starvi. Av tí at hetta ikki er viðkomandi fyri viðgerð mína av málinum, havi eg valt ikki at endurgeva frágreiðingina.
…“

Nærverkið vísir í síni frágreiðing á, at sambýlini á Mýrini 4 – 6 hava fingið nýggja leiðslu og nýggj starvsfólk og hevur ta fatan, at stovnurin í dag virkar, sum hann skal.

Almanna-og heilsumálaráðið fegnast saman við Nærverkinum um, at stovnurin virkar, sum hann skal, men harmast – eins og Nærverkið – um, at ósemjan á stovninum gjørdist so drúgv. Hinvegin er Almanna-og heilsumálaráðið sannført um, at bæði Nærverkið og ráðið í hesum máli hava hildið seg galdandi fyrisitingarrætt.

Hjálagt fylgir alt skjalatilfarið, sum ráðið hevur móttikið frá Nærverkinum umframt alt skjalatilfarið, sum er til skjals hjá Almanna-og heilsumálaráðnum um hetta málið.“

Frágreiðingin hjá Nærverk, sum Almanna- og heilsumálaráðið vísir til, er dagfest 28. apríl 2008 og er soljóðandi:

„**Viðvíkjandi kæru frá Pedagogfelagnum**
Almanna- og heilsumálaráðið hevur biðið Nærverkið um at koma við eini frágreiðing at lata Umboðsmanninum viðvíkjandi kæru hjá Pedagogfelagnum um starvsfólkamálið á sambýlinum á Mýruni 4-6.

Henda frágreiðing er býtt upp í 3 partar, nevniliga:
1. gjøgnumgongd av málsgongdini,
2. frágreiðing um avgerðir og tey tiltøk, ið Nærverkið hevur tikið í málinum,
3. viðmerkingar til einstøku kærupunktini frá Pedagogfelagnum.

**Ad 1. Gjøgnumgongd av málsgongdini**

…

Umboðsmaðurin hevur ikki tikið hetta brotið við. Víst verður til „Málsgongd“ longur frammi í álitinum.

**Ad 2. Frágreiðing um avgerðir og tey tiltøk, ið Nærverkið hevur tikið í málinum**

Eitt mál, har starvsfólk kæra sín yvirskipaða leiðara til ein hægri myndugleika, viðførir, at málið má handfarast eftir ymiskum reglum, nevniliga teimum fyrisitingarligu reglunum og reglum í mun til setanarviðurskiftini hjá viðkomandi leiðara. Harumframt má atlit takast til, hvørjir aðrir partar verða ávirkaðir av kæruni, í hesum ítøkiliga føri, búfólkini á stovninum.

Uttan mun til, um tað er sum kærumyndugleiki ella sum arbeiðsgevari við ábyrgd fyri stovninum, at myndugleiki fer inn í málið, so er tað umráðandi, at myndugleikin ger sær greitt, hvørt tey tiltøk, ið verða sett í verk, ella avgerðir, ið verða tiknar undir málsviðgerðini, eru av fyrisitingarligum slagi ella ein partur av leiðslurættinum, og at tað eru rættar viðkomandi reglur, ið gingið verður fram eftir.

Mál um samstarvstrupulleikar eru altíð torfør at loysa, og sjáldan er nøkur standard loysn til, hvussu farast skal fram í tílíkum málum. Hetta mál var einki undantak í so máta. Málið gjørdist ikki lættari av, at nógvir aktørar vóru ávirkaðir av ósemjuni, og at atlit skuldi takast til allar hesar aktørar, herundir búfólk og avvarðandi teirra, kærararnar, onnur starvsfólk á stovninum, leiðaran, umframt at kunning skuldi gevast til fakfelag, Javna o.o. Harumframt fekk málið drúgva viðgerð politiskt og í fjølmiðlunum, og var hetta eftir Nærverksins fatan við til at gera málið torførari at loysa.

Tað er minni enn so altíð, at mál um samstarvstrupulleikar yvirhøvur kunnu loysast, og í slíkum førum kann gerast neyðugt við flytingum av starvsfólki ella uppsagnum fyri at fáa arbeiðsfrið á arbeiðsplássinum. Arbeiðsgevarin hevur tó altíð skyldu til

at royna at loysa truplleikarnar við minni inntrivum, áðrenn flytingar ella uppsagnir kunnu koma uppá tal.

Tey tiltøk og avgerðir, ið Nærverkið leypandi hevur tikið ella sett í verk í hesum ítøkiliga máli, eru øll grundað á ítøkiligar metingar um, hvørt talan er um fyrisiting ella leiðslurætt, hvørji tiltøk eru neyðug í mun til ítøkiliga trupulleikan, hvørji tiltøk eru hóskandi í mun til ávirkan á partar í ósemjuni, búfólk o.s.fr.

Í hesum kærumáli mátti Nærverkið skilja ímillum kærupunkt av fyrisitingarligum slag og kærupunkt viðvíkjandi leiðslurættinum hjá leiðaranum, J, eins og atlit alla tíðina mátti takast til búfólkini á stovninum.

Frammanundan høvdu ongar ábendingar verið til Nærverkið um, at tað vóru trupulleikar millum leiðslu og starvsfólk á sambýlinum á Mýruni 4-6. Leiðarin J, hevði tá virkað í 8 ár sum leiðari á Mýruni. Fleiri av kærarunum høvdu somuleiðis starvast í longri tíðarskeið á sama sambýli.

Í eitt tíðarskeið, 2002-2003, var J virkandi leiðari á … og í tveimum øðrum umførum, hevði hann, eftir áheitan frá leiðsl-uni, í styttri tíðarskeið í ávikavist 2005 og 2006 virkað sum leiðari á tveimum øðrum sambýlum. Í hesum tíðarskeiðum eru heldur ongar ábendingar um samstarvstrupulleikar millum J og tey starvsfólk, hann var leiðari hjá.

Tað var tí nýtt fyri leiðsluna í Trivnaðartænastuni og stjóran í Nærverkinum, at samstarvið millum leiðslu og starvsfólk á sambýlinum á Mýrini 4-6 var so út av lagi vánaligt, sum kærararnir vildu vera við.

Orsøkin til, at júst hetta verður tikið fram, er fyri at vísa á, at tá starvsfólkini fyrstu ferð klaga, sær tað út til, at støðan longu er teimum ov mikið og at bert ein loysn finnst, sum er, at leiðarin skal frá. Samstundis er hetta nýtt fyri leiðsluna í Trivnaðartænastuni, sum tí hevur eitt heilt annað útgangsstøði, tí málið tástani byrjar her.

Útfrá kæruni, ella tí sum leypandi kom fram undir málsviðgerðini, var einki grundarlag hjá Nærverkinum at taka stig til sanktiónir mótvegis leiðaranum, hvørki sum fyribils tiltak, meðan kæran var til viðgerðar, ella eftir at avgerð upp á kæruna var tikin.

Við tað at stórur partur av starvsfólkunum, umframt leiðaran, vóru partar í málinum, samstundis sum talan var um ein stovn við búfólki, ið serlig atlit skuldu takast til, mátti Nærverkið taka atlit til, at dagligdagurin hjá hesum búfólkum og raksturin av stovninum annars mátti halda áfram, hóast kæruviðgerðin fór fram.

Samstundis sum fyrisitingarliga viðgerðin av kæruni fór fram, metti Nærverkið sum arbeiðsgevari og við ábyrgd fyri bústovninum, at tað var neyðugt við tiltøkum, ið beinanvegin kundu loysa trupulleikarnar, ið eyðvitað vóru á stovninum.

Nærverkið heitti tí á mediator um at royna at finna eina loysn partanna millum. Við tað at kærararnir eftir fyrsta fundin við mediator boðaðu frá, at tey ikki dugdu at síggja nakra orsøk til mekling, so spurdist einki burturúr hesi royndini.

Eftir at málið, eftir Nærverksins meting, var fult upplýst, varð avgerð tikin í kærumálinum tann 31. januar 2007. Nærverkið kom til ta niðurstøðu, at álvarsamir trupulleikar vóru millum varaleiðara, álitisfólk og starvsfólk øðrumegin og leiðaran hinumegin, og at hesir trupulleikar sýntust at vera í dagliga samskiftinum og samstarvinum á stovninum. Nærverkið metti seg tó ikki kunna gera av, hvørjir ávísir persónar vóru uppruni og orsøk til trupulleikarnar.

Nærverkið metti tí heldur ikki, at tey dømi, ið vóru givin í kæruni góvu grundarlag fyri at taka stig til sanktiónir í starvsviðurskiftunum hjá leiðaranum J.

Sum fylgja av hesi avgerð hjá Nærverkinum, hevði Nærverkið fund við J tann 5. februar 2007, har Nærverkið m.a. heitti á leiðaran um at umhugsa sín leiðslustíl og framferðarhátt mót-

vegis starvsfólkunum og álegði honum at søkja sær ráðgeving til greinan og loysn á trupulleikunum, og at hetta skuldi gerast beinanvegin við atliti til at fáa stovnin at virka nøktandi aftur. Hesi boð til leiðaran vórðu endurtikin í skrivi frá Nærverkinum til leiðaran, dagfest tann 20. februar 2007.

Orsøkin til, at Nærverkið í fyrsta umfari álegði leiðaranum sjálvum at søkja sær ráðgeving, og at Nærverkið ikki sjálvt fór beinleiðis inn í málið, var, at Nærverkið ikki hevði kunnað staðfest, hvør persónur ella persónar, ið vóru uppruni ella orsøk til ósemjuna, og tí metti Nærverkið tað ikki vera rætt at taka leiðaran av ræði í sambandi við, at tiltakið skuldi setast í verk.

Leiðarin fylgdi boðunum frá Nærverkinum og leitaði sær ráðgeving hjá S, supervisor. Sambært statusfrágreiðingini frá leiðaranum frá 5. juli 2007, so var ein proces í gongd frá mars 2007 til mai/juni 2007 og vóru útlit til, at henda tilgongd kundi viðført ein positivan dialog í samstarvinum millum starvsfólkini og leiðaran, men tað skuldi tó vísa seg, at eisini henda royndin gjørdist úrslitaleys.

Undir allari tí fyrisitingarligu málsgongdini hevur Nærverkið samstundis, sum ábyrgdarhavandi yvirfyri stovni og starvfólki, mett tað verið neyðugt at taka atlit til at ósemjan ikki sindraði stovnin, men samstundis ikki at seta størri tiltøk í verk, enn neyðugt í mun til konkretu trupulleikarnar.

Eftir at tað kundi staðfestast, at royndir við seming uttanfyri stovnin og innanfyri stovnin endaðu úrslitaleysar, metti Nærverkið, sum arbeiðsgevari og við ábyrgd fyri stovninum, tað vera neyðugt við øðrum tiltøkum, og innibar hetta eisini, at tað kundi koma uppá tal at skilja partarnar sundur, herundir at bjóða teimum onnur størv innan Nærverkið.

Við ábyrgd fyri stovninum og sum arbeiðsgevari fylgdi Nærverkið allatíðina gongdini á stovninum. Tann 12. juli 2007 var fundur

við starvsfólkini, har kunnað var um ætlaninar hjá Nærverkinum at endurskipa stovnin.

Roynt var samstundis at fáa arbeiðssálarfrøðing at greina trupulleikarnar og koma við tilmæli til Nærverkið um, hvussu stovnurin kundi endurskipast. Í august mánaða 2007 fekst samstarv í lag við U, og varð saman við honum arbeitt við eini ætlan um, hvussu farast skuldi fram í sambandi við at endurskipa stovnin.

Áðrenn U kom í gongd við sítt arbeiði at hava samrøður við partarnar í sambandi við at endurskipa stovnin, valdi stórur partur av teimum kærandi starvsfólkunum at siga seg úr starvi sínum.

Sum partur av ætlaðu umskipanini varð, tann 7. september 2007 gjørd avtala við leiðaran J um at flyta í annað starv innan Nærverkið við virknaði frá 17. september 2007.

Sambýlið kom soleiðis brádliga í eina sera óhepna støðu, og vandi var fyri, at búfólkini komu at standa uttan starvsfólk. Tí varð beinanvegin gjørd ein bráfeingis tilbúgvingarætlan, sum tryggjaði, at búfólkini komu at hava neyðugu starvsfólkini rundan um seg. Tilbúgvingarskipanin virkaði, sum hon skuldi, í uppsagnartíðini hjá teimum, ið søgdu seg úr starvi og inntil nýggj starvsfólk vórðu sett.

Sambýlini á Mýrini 4-6 hava fingið nýggja leiðslu og nýggj starvsfólk, og Nærverkið er av teirri fatan, at stovnurin í dag virkar sum hann skal.

Nærverkið vil tó gera vart við, at hóast tað neyvan slepst undan, at ein tílík ósemja ávirkar búfólk á einum tílíkum stovni, so metir Nærverkið, at allir partar í ósemjuni gjørdu sítt besta fyri at ósemjan skuldi ávirka búfólkini sum minst.

Samanumtikið kann sigast, at Nærverkið sjálvsagt harmast um,

at ósemjan á stovninum gjørdist so drúgv, men við atliti til, at fleiri ymisk kærumál leypandi spurdust burtur úr upprunaliga kærumálinum, at hóttanir um hópuppsagnir leypandi vórðu settar fram, umframt at møguleikin fyri at loysa málið við dialogi ikki var til staðar, so gjørdist hetta málið sera orku- og tíðarkrevjandi og trupult at viðgera.

Givið er, at lættari er hjá øllum pørtum at eftirmeta málið og seta spurnaðartekin við, um málið var handfarið rætt ella ikki, nú stovnurin er fingin at virka aftur. Hinvegin, so er neyðugt hjá einum og hvørjum, ið skal gera eina tilíka eftirmeting, at hava konkretu umstøðurnar í huga, tá mett verður um tær avgerðir, ið leypandi eru tiknar í einum tilíkum máli sum hesum. Í so máta metir Nærverkið ikki, at málið í tí stóra og heila kundi verið handfarið stórt øðrvísi av Nærverkinum.

**Ad 3. Viðmerkingar til einstøku kærupunktini frá Pedagogfelagnum**

Í kæru síni frá Pedagogfelagnum verður serliga víst á:

**– at hoyringsreglurnar í fyrisitingarlógini ikki eru hildnar**

Pedagogfelagið vísir ikki ítøkiliga á nøkur viðurskifti í málsviðgerðini, har hoyringsreglurnar ikki eru hildnar. Tí er tað trupult hjá Nærverkinum at fyrihalda seg til hetta kærupunktið. Um fleiri viðmerkingar skulu gerast til hetta kærupunkt, so má kærupunktið útgreinast nærri. Viðmerkjast skal tó, at Nærverkið metir seg at hava hildið galdandi fyrisitingarligar reglur og framt tær hoyringar, ið hava verið kravdar og neyðugar fyri málsviðgerðina.

**– at tær avgerðir, sum ávikavíst Nærverkið og Almanna- og heilsumálaráðið hava tikið, ikki eru sakliga grundaðar**

Hetta kærupunktið má útgreinast nærri, soleiðis at støða kann takast til ítøkilig viðurskifti, ið kært verður um. Nærverkið vil tó vísa á, at allar avgerðir í málinum byggja á viðgerð av teimum upplýsingum sum komu fram í kærumálinum, viðkomandi atlitum, galdandi reglum og annars teimum sjónarmiðum og

viðurskiftum, ið eru førd fram av pørtunum. Nærverkið heldur tí fast við, at avgerðirnar eru tiknar á sakligum grundarlagi, og at grundgivið er fyri avgerðunum.

**– at málsviðgerðartíðin hjá ávikavist Nærverkinum og Almanna- og heilsumálaráðnum hevur verið ov long**

Nærverkið hevur í fleiri umførum víst kærarunum, Pedagogfelagnum, álitisfólki og starvsfólki á, at viðgerðin av kærumálinum mátti fara fram eftir galdandi reglum, herundir fyrisitingarligum reglum, og at hetta kann verða tíðarkrevjandi proces. Nærverkið metir ikki, at sjálv viðgerðartíðin av kærumálinum hevur verið óvanliga long. Samlaða málsgongdin, við teimum royndum, ið hava verið gjørdar at loyst trupulleikarnar á stovninum kann hinvegin tykjast at hava verið long, men tílík tiltøk eru tíðarkrevjandi, og mál um samstarvstrupulleikar eru oftast drúgv.

At fleiri kærumál hava koyrt leypandi, hevur ikki stytt um málsgongdina. Samskifti og dialogur, ið kundu havt ávirkað tilgongdina skjótari og betri, eru av somu orsøk ofta steðgað upp, meðan bíðað var eftir kæruviðgerð, hoyringarskrivum og kæruniðurstøðum.

**– at nógv er, sum bendir á, at Nærverkið hevur havt samskifti við táverandi stovnsleiðaran, uttan at tær upplýsingar, sum fram eru komnar í hesum samskifti, eru lagdar fyri limirnar til hoyringar**

Pedagogfelagið vísir á, at tað skulu hava verið fleiri fundir við J, sum høvdu avgerandi týdning fyri starvsfólkini, uttan at hesi vóru kunnaði. Nærverkið vísir hesum uppáhaldi aftur.

Nærverkið gongur út frá, at Pedagogfelagið sipar til kærumálsviðgerðina, tá illgruni verður sáddur um upplýsingar vóru frammi, ið høvdu avgerandi týdning fyri starvsfólkini, uttan at hesi vóru kunnað. Sum áður nevnt, so metir Nærverkið seg at hava hoyrt um allar upplýsingar, ið hava verið partur av kærumálsviðgerðini.

**– at Nærverkið ikki hevur givið frammanfyrinevndu limum sama møguleika fyri at fáa eitt passandi starv innan fyri Nærverkið, sum Nærverkið hevur bjóðað táverandi stovnsleiðaranum at fáa.**
Hetta uppáhald verður staðiliga avvíst.

Á fundi 12. juli 2007 fingu øll, bæði leiðarin og starvsfólkini samstundis at vita, at ætlanin var at endurskipa stovnin og flyta ósemjuna út úr sambýlinum. Hetta tí, at Nærverkið ikki kundi lata heimið hjá búfólkunum framhaldandi virka sum stríðsvøllur hjá leiðslu og starvsfólkum.

Í hesum sambandi kundi koma uppá tal, at øll tí skuldu flytast. Nærverkið skuldi bjóða øllum starv aðrastaðni í Nærverkinum. Longu áðrenn Nærverkið náddi at arbeiða víðari við hesi loysn, kom skriv frá starvsfólkunum, har tey boðaðu frá, at tey vildu ikki flyta.

Nærverkið sá tó endurskipan sum einastu loysn og helt fast við hesa. Fyri at fáa eina so lagaliga og virðiliga broyting sum møguligt varð avgjørt at fáa ein triðja part, ein arbeiðssálafrøðing, U, at arbeiða við hesum partinum. Men tá henda avgerð varð fráboðað starvsfólkunum, søgdu fleiri av teimum seg úr starvi ístaðin.

Starvsfólkini vóru loyst úr starvi við teimum treytum, sum tey ynsktu.

Í samband við endurskipanina av sambýlinum varð farið undir at arbeiða við at flyta leiðaran, ið er tænastumaður, í annað starv. Hann var sinnaður til eina tílíka loysn.

Tað var av tilvild, at uppsagnirnar og flytingin av leiðaranum, fullu saman í tíð. Í veruleikanum hevði leiðarin flutt sum ætlað, óheft av hinum starvsfólkunum. Gjøgnum summarið 2007 varð javnan tosað við leiðaran um hansara framtíð, og hvørjir

møguleikar vóru í mun til broytingar í starvsviðurskiftum hansara.

Tí afturvísir Nærverkið, at starvsfólkini ikki fingu somu sømdir sum leiðarin. Veruleikin var, at leiðarin tók av flyting, meðan nøkur starvsfólk ikki ynsktu at flyta, men valdu at siga seg úr starvi í staðin. Tænastumannasettu starvsfólkini høvdu møguleikan at biða um at verða flutt í annað starv. Men ongin teirra gav Nærverkinum nakra fatan av, at hetta var teirra ynski – tvørturímóti.

Seinni hava umboð fyri starvsfólkini skrivliga yvir fyri Nærverkinum gjørt vart við ónøgd teirra, men Nærverkið veit ikki enn, hvørji hesi starvsfólk eru at navni, tí tað hevur Nærverkið ikki fingið upplýst, hóast áheitan um hetta. Tí var heldur ikki serliga stórur møguleiki hjá Nærverkinum at vita, um veruligt ynski var um at fáa starv aftur, og hvørjum hetta skuldi bjóðast.

Ikki øll starvsfólkini søgdu upp við grundgeving í arbeiðsumstøðunum. Tað eina starvsfólkið flutti til Klaksvíkar um sama mundið. Viðkomandi hevði í hesum viðfangi fingið annað arbeiði á einum bústovni hjá Nærverkinum í Klaksvík og starvast har enn.

Eitt annað starvsfólk segði upp nakað frammanundan hinum, eftir fleiri sjúkrameldingar, orsakað av ringari heilsu. Vikomandi bleiv loyst úr starvi eftir egnum ynski. Nærverkið eftirlíkaði at víkja frá vanligu uppsagnarfreistini eftir umbøn frá starvsfólkinum sjálvum.

Tveir av kærarunum søgdu seg ikki úr starvi og eru enn á sambýlinum á Mýrini.

**– at Nærverkið ongantíð kom niðan á stovnin at kanna viðurskiftini**

Sum kærumyndugleiki í málinum, so var tað Nærverkið, ið hevði

skyldu at upplýsa kærumálið til fulnar. Nærverkið metti ikki, at tær upplýsingar, ið fyriliggja í málinum, góvu Nærverkinum orsøk til at fara út á stovnin at kanna umstøðurnar, við tað at Nærverkið metti ósemjuna standast av samstarvstrupulleikum og ikki av fysisku umstøðunum. Harumframt hevur Nærverkið frammanundan kunnleika til fysisku karmarnar á stovnum undir Nærverkinum.

**– at tað ikki er møguligt, sakliga at viðgera kæruna, um Nærverkið ikki vildi koma á staðið og har síggja veruligu umstøðurnar hjá starvsfólkunum**
Nærverkið er ikki samt í hesum. Sum fyrr nevnt, so metti Nærverkið, at ósemjan snúi seg um trupulleikar í samskiftinum og samstarvinum, og tískil hevur Nærverkið ikki mett, at tað hevði avgerandi týdning fyri málsviðgerðina at fara á stovnin at kanna (fysisku) umstøðurnar.

**– at Nærverkið í sambandi við fyrstu kæruna, bert hevur víst á sokallaðu „loyalitetsskylduna“ hjá starvsfólkunum mótvegis leiðaranum**
Í avgerðini hjá Nærverkinum frá 31. januar 2007 verður sagt soleiðis: „Leiðarin hevur rætt til at leggja dagliga arbeiði á stovninum til rættis og hevur samstundis ábyrgdina av, at stovnurin virkar eftir ætlan. Hetta skal samstundis gerast við virðing fyri einstaka starvsfólkinum, ið verður sett at útinna hesar uppgávur. Hinvegin so hevur hvørt einstakt starvsfólk skyldu til at gera eftir boðum frá leiðsluni og útinna tær uppgávur, ið verða álagdar starvsfólkunum og at vera loyal mótvegis leiðsluni, starvsfeløgum og stovninum sum heild.

Nevnda orðing skal síggjast í ljósinum av, at Nærverkið metti, at stórur partur av teimum dømum, ið vóru nevnd í kæruni, snúi seg um dagligt samskifti og tilrættalegging av arbeiði á stovninum, og at í nøkrum førum løgdu starvsfólkini seg út í leiðslurættin. Nærverkið metti tí, at neyðugt var at vegleiða partarnar í, hvussu leiðari og starvsfólk skulu fyrihalda seg hvør móti øðrum.

Nærverkið ivast í, hvat hetta kærupunkt í veruleikanum snýr seg um.

**– at Nærverkið tyktist at royna at brúka hetta við loyalitetsskylduni til at forða starvsfólkunum í at halda fast við kæruna**
Nærverkið má staðiliga avvísa at hava forðað starvsfólkum í at kæra. Hetta má í besta føri byggja á eina misskiljing av orðingini og samanhanginum, og Nærverkið undrast á, hvussu Pedagogfelagið kemur fram til hesa niðurstøðu. Orsøkin kann vera, at Pedagogfelagið ikki skilir ímillum, at orðingin um loyalitet er givin sum vegleiðing millum setanarmyndugleika og starvsfólk, og hevur als onki við spurning um kæru at gera.

Um kærupunktið skal skiljast soleiðis, at givna vegleiðingin um rættindi og skyldur hjá starvsfólki og leiðslu, var ein roynd frá Nærverkinum at fáa kærararnar at taka kærurnar aftur, so er hetta eitt undrunarvert sjónarmið, ið er tikið úr leysum lofti, og verður hetta staðiliga afturvíst.

**– at Nærverkið vildi ongantíð koma á fund við starvsfólkini, men hinvegin so hevur leiðarin sjálvur sagt, at hann so at siga hvønn dag hevði samskifti við Nærverkið, og at leiðarin bleiv kunnaður um allar ætlanir og fráboðanir frá Nærverkinum til starvsfólkini, áðrenn starvsfólkini fréttu nakað sum helst frá Nærverkinum.**
Nærverkið má afturvísa hesum uppáhaldi.

Viðvíkjandi fundum, so skal viðmerkjast, at Nærverkið ongantíð hevur noktað at hildið fund við kærararnar. Tvørturímóti, so hevur Nærverkið bæði í skrift og talu gjørt vart við, at um ynski var um fund, so var hetta eingin trupulleiki.

Á heysti 2006 vóru fundir hildnir við umboð fyri starvsfólkini.

Á vári 2007 hevði Nærverkið eisini samskifti við Pedagogfelagið

og advokat teirra um støðuna og um spurningin um at halda fund við starvsfólkini. Av ymsum orsøkum kom hetta tó ikki í lag, fyrr enn fundurin var tann 12. juli 2007.

Viðvíkjandi spurninginum um samskiftið, ið Nærverkið hevur havt við J, so verður víst til svarið omanfyri til kærupunktið: „at nógv er, sum bendir á, at Nærverkið hevur havt samskifti við táverandi stovnsleiðaran uttan at tær upplýsingar, sum fram eru komnar í hesum samskifti, eru lagdar fyri limirnar til hoyringar.

Harnæst skal viðmerkjast, at leiðarar innan Nærverkið við jøvnum millumbilum seta seg í samband við Nærverkið sum yvirskipaðan myndugleika um ymisk daglig viðurskifti m.a. á avvarðandi stovunum ella um egin setanarviðurskifti. Nærverkið hevur ikki mett tað vera neyðugt at broyta hesa mannagongd í mun til J undir kærumálsviðgerðini.

Tað er tó ikki rætt, at leiðarin er kunnaður um ítøkilig stig ella ætlanir í mun til kærumálið, áðrenn hesi stig eru tikin.

Í mun til tiltøk, ið eru sett í verk á stovninum og í mun til relatiónina millum Nærverkið sum arbeiðsgevara og við ábyrgd fyri stovninum og leiðaran fyri stovnin, so er tað heilt náttúrligt, at leiðarin fær boð um hesar ætlarnir, tað er jú hann, ið hevur dagligu ábyrgdina av stovninum.

Nærverkið metir tó, at kærupunktið er alt ov ógreitt at kunna gera ítøkiligar viðmerkingar til.

Annars skal viðmerkjast, at ein skrivlig frágreiðing dagfest 5. juli 2007 fyriliggur sum J sjálvur hevur gjørt, har tað framgongur, hvat samskifti hann m.a. hevur havt við Nærverkið.

**– at Nærverkið als eingi stig tók yvirhøvur, fyrr enn tey høvdu bjóðað leiðaranum nýtt leiðarastarv undir Nærverkinum**
Hetta uppáhald verður staðiliga avvíst. Víst verður til gjøgn-

umgongdina omanfyri um tey tiltøk, ið leypandi vórðu sett í verk í málinum.

**– at Nærverkið við hesum taktikki sínum fekk trýst starvsfólkini so nógv, at tey ongan annan møguleika sóu uttan at siga seg úr starvi**
Hetta uppáhald verður staðiliga avvíst. Sum fyrisitingarligur myndugleiki, við teimum stigum, ið blivu tikin í málinum til tess at royna at loysa trupulleikan, ynskir Nærverkið ikki at vera lagt undir at hava nýtt taktik í málinum við tí endamáli at trýsta starvsfólkini so nógv, at tey noyddust at siga seg úr starvi.

**– at Nærverkið beinanvegin eftir at tey vistu, at starvsfólkini fóru at siga upp, bjóðaðu leiðaranum at flyta í annað leiðarastarv**
Hetta verður staðiliga avvíst.

Sum áður nevnt, so var avgerðin um at flyta leiðaran í annað starv grundað á eina avtala, ið varð gjørd við leiðaran, og sum hevði verið umrødd leypandi við leiðaran. Flytingin av leiðaranum var liður í endurskipanini av stovninum, og um starvsfólkini ikki søgdu seg úr starvi, so høvdu tey eisini mest sannlíkt verið flutt í annað starv sum partur av hesi somu endurskipan av stovninum.

**– at hetta er ein viðurkenning av, at hald var í kæruni hjá starvsfólkunum, tí eingin grund var til at flyta leiðaran í annað starv, um einki grundarlag var fyri teimum kærum, sum starvsfólkini hava víst á.**
Hetta verður staðiliga avvíst.

Flytingin av leiðaranum var sum nevnt grundað á eina avtalu og liður í umskipan av stovninum, við støði í teirri fastlæstu støðu, ið var íkomin á stovninum. Nærverkið metti, at tað kundi gerast trupult at fáa nýtt starvsfólk inn á stovnin við atliti til tað stóra fokus, ið hevði verið á stovnin og ta negativu umtalu, ið stovnurin og leiðarin høvdu fingið í fjølmiðlum, og tí var

mett neyðugt at flyta leiðaran fyri at royna at endurskapa álit á stovnin. Nærverkið vísir tí aftur, at flytingin kann síggjast sum ein avleiðing av kærumálinum.

Í kæruskrivinum sigur Pedagogfelagið, at tað metir tað vera umráðandi at fáa staðfest, um ein almennur myndugleiki soleiðis kann halda hondina yvir einum leiðara, sum ger arbeiðsumstøðurnar fullkomuliga ómøguligar, og í veruleikanum roynir at forða starvsfólkunum í at fáa viðgjørt kærur teirra.

Nærverkið stendur spyrjandi yvirfyri hesi útsøgn. Fyri tað fyrsta, so leggur Pedagogfelagið til grund, at tað er J, sum ger arbeiðsumstøðurnar fullkomuliga ómøguligar, hóast Nærverkið ikki metir, at hann einsamallur hevði ábyrgdina av støðuni á stovninum. Fyri tað næsta so leggur Pedagogfelagið til grund, at Nærverkið heldur hondina yvir leiðaranum, hóast tað einasta, ið Nærverkið hevur gjørt í hesum sambandi er at halda seg til galdandi reglur, herundir at virða starvsfólkarættindini hjá J.

Sum málið útviklaði seg, og sum seinasta kæran frá Pedagogfelagnum eisini bendir á, gjørdist alt meira sjónligt, at uttan mun til hvørji tiltøk leiðarin ella Nærverkið settu í verk fyri at bøta um samstarvið, so vóru starvsfólkini bert áhugaði í einari loysn, at leiðarin fór úr starvi sínum. Nærverkið metti sum nevnt ikki í sambandi við avgerðina upp á kæruna, at grundarlag var fyri at taka stig viðvíkjandi starvssetanini hjá leiðaranum J. Hvørki Pedagogfelagið ella kærararnir tykjast enn at hava skilt, at Nærverkið má virða allar galdandi reglur í sambandi við viðgerð av einum tílíkum máli, herundir eisini reglurnar, ið eru galdandi fyri starvssetanina hjá J.

Í mun til tað, ið verður ført fram í kæruni um, at Umboðsmaðurin skal kanna, hvørt málsviðgerðin er farin fram sambært fyrisitingarlógini og almennum fyrisitingareglum annars, so skal

samanumtikið viðmerkjast, at Nærverkið metir seg at hava hildið galdandi reglur í sambandi við málsviðgerðina, og at kæran ikki hevur víst á ítøkilig viðurskifti, ið gevur orsøk til, at Nærverkið skal hava aðra fatan.

Um tørvur er á fleiri upplýsingum ella um ynskiligt er við fundi, so vænti eg at frætta."

Við skrivi, dagfest 29. mai 2008, sendi umboðsmaðurin Føroya Pedagogfelag viðmerkingarnar frá ráðnum og frágreiðingina hjá Nærverk til ummælis við eini freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 11. juni 2008, hevur Føroya Pedagogfelag latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„**Viðv. tykkara j.nr. …- Kæra um Nærverkið og Almanna- og Heilsumálaráðið.**

Vit hava fingið skriv tykkara dagfest 29.05.2008 við fylgiskjølum.

Vit hava lisið brøvini frá ávikavist Nærverkinum og Almanna- og Heilsumálaráðnum.

Hinvegin er neyðugt hjá okkum at lata teir limir okkara, sum upprunaliga sendu inn kæru um leiðara sín gera teirra viðmerkingar og til hetta er 14 daga freistin ov stutt, serliga við atliti til, at summarferiutíð er.

Vit skulu tí heita á umboðsmannin, um at útseta svarfreist okkara til 1. juli 2008. Vit hava tó gjørt hesar fyribils viðmerkingar.

**Viðvíkjandi skjølunum í málinum**
Sum vit hava víst á í kæruskrivi okkara, so er tað rættuliga umráðandi, at umboðsmaðurin í sambandi við viðgerðina av kæruni, *fær innlit í øll tey skjøl og øll tey notat, sum eru gjørd av Nærverkinum og/ella Almanna- og Heilsumálaráðnum.*

Í skrivinum frá umboðsmanninum er einki nevnt um hesi skjøl (hóast nøkur skjøl eru nevnd í skrivinum frá Nærverkinum), og vit skulu tí spyrja, um umboðsmaðurin hevur biðið um og hevur fingið avrit av øllum skjølum, sum Nærverkið og Almanna- og Heilsumálaráðið hava.

Ber til hjá okkum at fáa innlit í nevndu skjøl?

**Viðvíkjandi skrivinum frá Nærverkinum**

Viðvíkjandi „gjøgnumgongdini av málinum", so nevnir Nærverkið einki um, at teir limir okkara, sum kærdu framferðina hjá leiðara teirra, ferð eftir ferð hava biðið um fund fyri at greiða nærri frá veruligu umstøðunum á stovninum, men Nærverkið tykist ikki hava áhuga í slíkum fundi. Ikki fyrr enn 12. juli 2007 varð fundur við Nærverkið, men her var leiðarin eisini við, og soleiðis hava hesir limir okkara ongantíð fingið høvi til útgreina hvussu út av lagi vánaligar arbeiðsumstøðurnar vóru.

Eisini hava limir okkara heitt á Nærverkið um at koma niðan á stovnin at kanna umstøðurnar, men so eiðasørt, at nakar áhugi var fyri at koma niðan at síggja veruligu arbeiðsumstøðurnar á stovninum.

Viðvíkjandi fundinum við mediator, so skilja vit, at tað var so eyðsæð, at mediator bert royndi at fáa kærararnar at tillaga seg og góðtaka verandi arbeiðsumstøður, og tað var ikki sørt at onkur kendi seg rættuliga illa við hesari sokallaðu mediatión, sum myndugleikarnir skipaðu fyri.

Tað sum virkar rættuliga ørkymlandi er, at Nærverkið upp í saman kallar hetta mál eitt mál um samstarvstrupulleikar.

Talan er og hevur ongantíð verið um samstarvstrupulleikar, men um kæru um **ítøkuligar tilburðir** har leiðarin eftir meting kæraranna hevur havt ein atburð, sum má metast sum beinleiðis ágangur.

Tá talan er um kæru um ítøkiligar tilburðir, so er tað ikki lætt

at skilja, at Nærverkið ikki hevur víst vilja til at viðgera málið sum eitt mál um ítøkiligar kærur.

Nærverkið tykist als ikki hava havt vilja ella dirvi til at viðgera sjálvar kærurnar, og tí endaði málið við, at viðurskiftini gjørdust so ótolandi, at fleiri av starvsfólkunum søgdu seg úr starvi.

Hetta, at starvsfólkini søgdu seg úr starvi var so ein „loysn" á trupulleikunum, men eftir sita hesi starvsfólk, sum ongantíð fingu realitetsviðgjørt kærur sínar, tí Nærverkið skúgvaði kærurnar til viks og bert tosaði um samstarvstrupulleikar.

Nærverkið hevur sum skjølini vísa eisini beinleiðis hótt varaleiðaran og álitisfólkið, tá hesi dittaðu sær at taka undir við kæruni um framferðina hjá leiðaranum. Hóast Nærverkið seinni partvíst hevur ásannað mistak sítt so er hetta eitt mál, har Nærverkið eigur at fáa ein greiða átalu.

**Viðvíkjandi skrivinum frá Almanna- og Heilsumálaráðnum**
Almanna- og Heilsumálaráðið ger í skrivi sínum nógv burtur úr at staðfesta, at støðan á stovninum í dag er hugalig og jalig.

Stovnurin hevur fingið nýggja leiðslu, og tað at umstøðurnar nú er góðar kundi verið ábending um, at tey starvsfólk, sum sendu inn kæru høvdu grein í sínum máli.

**Samandráttur**
Samanumtikið kunnu vit fyribils viðmerkja, at einki av tí, sum Nærverkið og Almanna- og Heilsuverkið føra fram kann vísa aftur tey viðurskifti, sum felag okkara sendi inn kæru um til umboðsmannin, men hinvegin, so eru greiðar ábendingar um, at Nærverkið ongantíð hevur realitetsviðgjørt tær ítøkiligu kærurnar frá starvsfólkunum.

Vit koma við endaligu viðmerkingum okkara, tá vit hava havt stundir at tosa við teir limir okkara sum upprunalig sendu inn kæru um framferðina hjá táverandi leiðaranum."

Við skrivi, dagfest 16. juni 2008, eftirlíkaði umboðsmaðurin at leingja freistina til 1. juli 2008. Viðmerkt varð eisini, at sambært umboðsmanslógini hevur umboðsmaðurin rætt til at síggja øll skjøl í einum máli, tvs. eisini skjøl, sum møguliga eru undantikin almennum innliti, og tí sendir umboðsmaðurin ikki skjølini víðari til klagaran. Um felagið ynskti at fáa innlit í skjølini, mátti felagið venda sær til Nærverk og/ella Almanna- og heilsumálaráðið hesum viðvíkjandi.

Við skrivi, dagfest 2. juli 2008, hevur Føroya Pedagogfelag latið umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

> **„Viðv. tykkara j.nr. …- Kæra um Nærverkið og Almanna- og Heilsumálaráðið.**
> Í framhaldi av fyrra skrivi okkara skulu vit boða frá, at skrivini frá Nærverkinum og Almanna- og Heilsumálaráðnum geva okkum høvi til hesar viðmerkingar.
>
> **1. Viðvíkjandi Nærverkinum.**
>
> **1.1. Málsviðgerðartíðin**
> …
> Umboðsmaðurin hevur ikki tikið hetta brotið við, tí tað bygdi á eina misskiljing um, at viðgerðin av málinum tók eitt ár longri, enn hon gjørdi.
>
> **1.2. Spurningurin um samstarvstrupulleikar**
> Sum nevnt omanfyri, so hava starvsfólkini sent inn kæru um heilt ítøkilig mál, har leiðarin hevur brúkt eina framferð, sum gjørdi at starvsfólkini arbeiddu undir umstøðum, sum vóru heilt ótolandi.
>
> Kortini sigur Nærverkið, at talan var um „samstarvstrupulleikar“, uttan at tey nærri hava kunna útgreinað, hvat tað er fyri samstarvstrupulleikar, sum talan er um.
>
> Fyri starvsfólkini hevur talan ongantíð verið um nakrar samstarvstrupulleikar, tí talan hevur alla tíðina verið um heilt ítøkjulig viðurskifti, sum kært varð um, og tað hevur tí verið

skyldan hjá Nærverkinum at realitetsviðgera hesa kæru og út frá hesum taka eina avgerð í málinum.

Í staðin hevur Nærverkið drigið hetta mál út, soleiðis at avleiðingin varð, at fleiri starvsfólk ikki høvdu annan møguleika enn at siga seg úr starvi.

**1.3. Hóttanir móti varaleiðaranum og álitisfólkinum.**

Sum skjølini vísa, so hevur stjórin á Nærverkinum R sent varaleiðaranum og álitisfólkinum skriv, har m.a. verður sagt:

*Viðvíkjandi spurninginum, hvørt leiklutur tygara í sambandi við kæruna er sambærligt við starv tygara, sum álitisfólk/varaleiðari, fer Trivnaðartænastan at taka hendan spurning upp til nærri kanningar og frætta tygum aftur hesum viðvíkjandi.*

Orsøkin til hetta skriv, sum bæði varaleiðarin og álitisfólkið kendu sum eina hóttan, var at varaleiðarin og álitisfólkið høvdu skrivað undir kæruna saman við hinum starvsfólkunum á stovninum.

Í sambandi við kæru til landsstýrismannin, hevur landsstýrismaðurin tann 11.06.2007 boðað frá, at hann heldur at Nærverkið skuldi ikki havt orðað seg á hendan hátt til álitisumboðið, og mælir til, at Nærverkið tekur orðingina í brævinum til varaleiðaran og álitisfólkið aftur.

Tá almennur stjóri soleiðis sendir varaleiðara og álitisfólki skriv, sum ikki kann skiljast sum annað enn ein hóttan, so er hetta ein roynd at forða varaleiðaranum og álitisfólkinum, at brúka løgfrøðiliga rætt sín at kæra framferðina hjá stovsleiðara.

…

**1.4. Hoyringin**

Starvsfólkini hava greitt frá, at stovnsleiðarin ferð eftir ferð boðaði frá, at nú fór Nærverkið at taka tey og tey stigini, eftir at kæran var send Nærverkinum. Hetta skapti eina rættuliga stóra óvissu millum starvsfólkini, og tá tey vóru partur í málinum, so átti Nærverkið at sent starvsfólkunum fráboðan, áðrenn nøkur stig vóru tikin, sum høvdu við kæruna at gera.

Tá leiðarin hevði fingið fráboðan um tey stig, sum Nærverkið fór at taka, so meta starvsfólkini, at tey skuldu verið hoyrd.

**1.5. „at avgerðir, sum ávíkavist Nærverkið og AHR hava tikið, ikki eru sakliga grundaðar“**

Tær upplýsingar starvsfólkini hava givið, eru tær ítøkiligu hendingar, sum eru nevndar í kæruni. Starvsfólkini eru ongantíð nærri hoyrd um, hvat verðuliga fór fram í leiðsluhátti leiðarans, sjálvt um starvsfólkini í kæruni søgdu, at tey altíð vóru til reiðar at greiða nærri frá. So sjónarmið og viðurskifti, ið Nærverkið hevur hildið seg til, eru eftir øllum at døma bert útsagnir frá leiðaranum, tí starvsfólkini kunnu øll vátta, at tey bjóðaðu sær til at greiða Nærverkinum nærri frá veruligu umstøðunum.

Í fyrsta skrivinum, sum sent var Nærverkinum, varð boðað frá, at starvsfólkini høvdu tosað við leiðaran um hansara atburð mótvegis starvsfólkunum uttan úrslit, og tí mettu starvsfólkini, at grundarlag mátti verða fyri at kæra víðari, tá einki spurdist burturúr, men starvsfólkini máttu skjótt staðfesta, at als einki hendi og Nærverkið var ikki sinnað at realitetsviðgera kæruna.

**1.6. „at nógv er sum bendir á, at Nærverkið hevur havt samskifti við táverandi leiðara, uttan at tær upplýsingar, sum fram eru komnar í hesum samskifti, eru lagdar fyri limirnar til hoyringar“.**

Starvsfólkini blivu ongantíð kunnaði, uttan tá Nærverkið kunnaði starvsfólkini um niðurstøður tey vóru komin til.

Fyrstu upplýsingarnar um málið komu frá leiðaranum, sum segði, at Nærverkið hevði biðið hann geva starvsfólkunum kunning um hvørjar niðurstøður Nærverkið sum kærumyndugleiki fyribils hevði gjørt.

Nærverkið tyktist als ikki vilja koma á tal við starvsfólkini, tí Nærverkið tosaði alla tíðina um „samstarvstrupulleikar“, og starvsfólkini fingu ferð eftir ferð at vita frá leiðaranum, at nú fór Nærverkið at gera „tað og tað“, hóast tað var leiðaran starvsfólkini høvdu kært.

Starvsfólkini kendu seg rættuliga illa, tá tann persónur, sum tey høvdu kært tyktist at verða brúktur sum boðberi fyri Nærverkið sum kærumyndugleika.

Øll starvsfólk høvdu fatan av, at Nærverkið javnan tosaði við leiðaran um kæruna frá starvsfólkunum, og alt tað sum Nærverkið gjørdi tyktist at verða gjørt sambært avtalu, ella í hvussu so er, eftir samrøður við leiðaran. Eingi notat tykjast at vera gjørd frá hesum samrøðum, hóast talan var um eitt mál, sum Nærverkið skuldi „taka avgerð í".

**1.7. „at Nærverkið ikki hevur givið frammanfyrinevndu limum sama møguleika fyri at fáa eitt passandi starv innan fyri Nærverk, sum Nærverk hevur bjóðað táverandi stovnsleiðara at fáa".**

Á fundi tann 12. juli 2006 (Mín viðmerking: 2007) fingu starvsfólkini at vita frá R, at hon, eftir at hava tosað við U um støðuna, var blivin klár yvir, at partarnir máttu skiljast. At møguleiki var fyri flyting í aðrar stovnar.

Samstundis segði hon, at ongi nøvn vóru sett á hvør skuldi flytast. Ongantíð kom tað fram, at øll skuldu flytast, sum R her sigur. Starvsfólkini vórðu biðin um at hugsa um hetta og síðani geva boð aftur til R. Onki var á tí fundinum sagt um, at U skuldi inn at „kanna umstøðurnar". Starvsfólkini sendu skriv til R um, at tey ikki ynsktu at verða flutt í annan stovn, tí stovnurin og búfólkini vóru ikki trupulleikin.

Skrivið, ið tá kom aftur frá Nærverkinum vísti m.a á, at nú skuldi ein arb. sálarfrøðingur inn at kannað umstøðurnar. Hann skuldi síðani gera eina niðurstøu um, hvør/hvat trupuleikin var. Hetta var sum at fáa eina spann av køldum vatni í høvdið, enn einaferð. Tí starvsfólkini siga seg kenna leiðaran, og vistu hvussu tað fór at spæla av. Starvsfólkini høvdu tá tveir møguleikar, antin at halda fram at arbeiða undir teimum óvirðiligu umstøðum, ella at siga seg úr starvi, og sum kunnugt valdu starvsfólkini at siga seg úr starvi.

At tað var av tilvild, at uppsagnirnar og flytingin av leiðaranum, fullu saman? Ja ikki er gott at vita, men løgið sá tað út fyri starvsfólkini. Út frá hoyrinsskrivinum sæst at Nærverkið leypandi hevur havt samskiftið við táverðandi leiðara um framtíð hansara í Nærverkinum. Leypandi samskiftið var ongantíð við starvsfólkini, so her meta starvsfólkini avgjørt, at tey ikki hava fingið somu sømdir, sum leiðarin.

R nevnir eisini, at ikki var neyðugt at koma niðan á Mýrina at kanna *fysisku* umstøðurnar, tí tær kendu tey. Hetta ljóðar løgið, tí starvsfólkini kærdu ikki um tær fysisku umstøðurnar. Tey kærdu um tær sera vánaligu sálarligu umstøður tey arbeiddu undir. Hetta var tó als ikki tikið í álvara, tí Nærverkið vildi ikki viðgera kæruna, men royndi alt tað sum tey kundu fyri at sleppa frá at taka eina avgerð.

**1.8. S**

Í skrivinum verður eisini nevnt samstarvið við S.

Starvsfólkini fingu at vita, bæði frá S og leiðaranum, at tað „tiltakið" als onki hevði við Nærverkið at gera men bert ein hjálp til leiðaranum. Hetta var í trúðnaði, tí meta starvsfólkini tað vera løgið, at stjórin á Nærverkinum skal koma fram við tí.

Men skal her nevnast, at S segði við starvsfólkini, at starvsfólkabólkurin riggaði væl og at bólkurin saktans kundi hildið á við supervisión, men tað skuldi verða uttan leiðaran.

Starvsfólkini kundu annars hugsa sær at fingið at vita, hvat tað vóru fyri tiltøk, sum leiðarin setti í verk, sum Nærverkið sipar til fyri at fáa sambýlið av virka aftur, tí starvsfólkini siga seg als einki hava fingið at vita.

Fleiri ferðir verður í skrivunum frá Nærverkinum nevnt, at skiljast má millum kærupunkt av fyrisitingarligum slag og kærupunkt viðv leiðslurættinum hjá leiðaranum. Starvsfólkini siga, at tey meta hetta sum enn eitt dømi um, at Nærverkið vildi halda hondina yvir leiðaranum, tí Nærverkið eigur at taka avgerð tá ítøkilig kærumál verða send teimum.

Tað verður eisini nevnt, at frammanundan høvdu ongar ábendingar verið um trupulleikar millum leiðslu og starvsfólk. At leiðarin hevði verið leiðari í 8 ár og at fleiri starvsfólk somuleiðis høvdu starvast í longri tíðarskeið. Eisini verður nevnt, at hesin sami leiðari hevði verið leiðari á øðrum stovnum og har ikki vóru ábendingar um nakrar samstarvstrupulleikar.

Starvsfólkini hava meira enn einaferð víst á, at hesir trupulleikar als ikki vóru nýliga íkomnir, men at starvsfólkini í longri tíð høvdu roynt at loyst trupuleikarnar innanhýsis, tó uttan úrslit. At ongir trupulleikar hava verið á øðrum stovnum er ikki tann fatan starvsfólkini hava, og áhugavert hevði verið at fingið upplýst hvørjar persónar Nærverkið hevur tosað við um arbeiðsháttin hjá leiðaranum á øðrum stovnum.

Stjórin á Nærverkinum sigur eisini í skrivinum, at tey ongantíð hava noktað starvsfólkunum at koma á fund. Starvsfólkini avvísa staðiliga at Nærverkið var sinnað í at lata tey sleppa til orðanna, tí tey fingu ikki eingang eitt aftursvar, tá tey bóðu um fund.

Starvsfólkini gera staðiliga vart við, at tey meta ikki at Nærverkið nakrantíð kannaði kæru teirra og heldur ikki gjørdi nakra veruliga roynd at kanna veruligu umstøðurnar á stovninum. At kæra ein leiðara er ikki nakað sum starvsfólk gera uttan at arbeiðsumstøðurnar eru heilt ótolandi.

At royna mediator, ella arbeiðssálarfrøðing, tá starvsfólkini høvdu verið til supervision við S, og tá umstøðumar vóru so vánaligar, sum tær vóru á Mýrini, meta starvsfólkini bert var at gera støðuna verri.

Starvsfólkini, sum kært høvdu og sum siga seg verða kroyst at siga upp, fingu ikki ein gang møguleika fyri at siga farvæl á ein virðiligan hátt. Starvsfólkini fingu eitt sokallaða tilboð um frítøku fyri tænastu, við teirri grundgeving, at tey ikki vóru til at samstarva við.

Tá biðið var um eina skrivliga grundgeving fyri hví starvsfólkini vórðu fríttstillaði varð hetta noktað teimum, og víst varð bert til fyrisitingarlógina. Hetta meta vit heldur ikki er rættur framferðarháttur.

**1.9. Samandráttur**

Samanumtikið halda starvsfólkini, at skrivið frá Nærverkinurn er ein roynd at skava út yvir, at leiðslan á Nærverkinum antin ikki vildi ella hevði dirvi at taka ein avgerð í málinum.

Einki av tí, sum Nærverkið skrivar kann brúkast sum grundgeving fyri ikki at realitetsviðgera kæruna og taka eina avgerð í málinum.

**2. Viðv. Almanna- og Heilsumálaráðnum.**

Starvsfólkið heldur fast við, at Almanna- og Heilsumálaráðið ikki hevur gjørt eina veruliga meting av umstøðunum í sambandi við kæruna, sum latin var aðalráðnum.

Tað tykist ikki sum at Almanna- og Heilsumálaráðið vildi síggja álvaran í málinum, hóast aðalráðið kundi havt álagt Nærverkinum at realitetsviðgjørt málið og tikið eina avgerð innan rímuliga tíð.

Landsstýrismaðurin varð støðugt kunnaður um støðuna, so hann kann ikki skulka sær undan ábyrgd, tí hann visti hvussu umstøðurnar vóru á stovninum."

Við skrivi, dagfest 14. juli 2008, vórðu viðmerkingarnar sendar ráðnum til ummælis við eini freist áljóðandi 4 vikur.

Tá umboðsmaðurin einki frætti aftur frá Almanna- og heilsumálaráðnum, varð við skrivi, dagfest 20. august 2008, boðað pørtunum frá, at málið varð tikið upp til endaliga viðgerð.

Við skrivi, dagfest 2. okt. 2008, hevur umboðsmaðurin biðið Almanna- og heilsumálaráðið senda umboðsmanninum frágreiðingarnar frá 2 fundum, sum eru umrøddir í skjølunum í málinum, men sum ikki eru ímillum skjølini, sum ráðið hevur latið umboðsmanninum.

15. okt. 2008 hevur Almanna- og heilsumálaráðið sent umboðsmanninum teldupost við soljóðandi svari frá Nærverk:

„Fundurin varð hildin 12. juli 2007 við luttøku av leiðara og starvsfólki á Mýrini, Æ, advokatur, umboðandi Pedagog-

felagnum, R, stjóri, L, leiðari fyri Trivnaðartænastuna og T, advokatur, umboðandi Nærverkinum. Áðrenn Nærverkið hevði havt stundir at skriva og senda fundarfrágreiðing frá fundinum, kom eitt skriv dagfest 21.7.2007 frá 8 starvsfólkum við viðmerkingum til fundin. Hetta hevði við sær, at eingin fundarfrásøgn varð skrivað. Tað tyktist at vera til fánýtis, tí starvsfólkini longu høvdu viðgjørt fundin í brævi sínum. Nærverkið skrivaði bræv til Pedagogfelagið tann 18.8.2007, har greitt var frá um fundin 12.7.2007, og greitt varð eisini frá niðurstøðuni hjá Nærverkinum um at endurskipa sambýlini á Mýrini.

Tann 11. september 2007 bjóðaði stjórin fyri Nærverkið starvsfólkini til kunning á Mýrini. Kunningin snúði seg um at boða frá, at J var farin frá sum leiðari av sambýlini á Mýrini, og at ein fyribils leiðsla var sett í hansara stað. Leiðslan var nú mannað við P og O. Talan var ikki um ein fund sum so, og eingin fundarfrágreiðing varð skrivað.“

Við skrivi, dagfest 17. nov. 2008, hevur Almanna- og heilsumálaráðið eftir umbøn latið umboðsmanninum avrit av skjølunum í starvsfólkamálinum hjá J, fyrrv. leiðara á sambýlinum á Mýrini.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um handfaringina hjá Nærverk og Almanna- og heilsumálaráðnum av klagu frá starvsfólkunum á sambýlinum á Mýrini um leiðaran, og handfaringina av setanarviðurskiftunum hjá starvsfólkunum, sum klagaðu.*

### *Skyldan at upplýsa málið*

*Nærverk viðger klaguna um leiðaran sum eitt starvsfólkamál um J. Niðurstøðan er, at framferðarhátturin og atburðurin hjá leiðaranum kann ikki vera orsøk til at Nærverk tekur stig mótvegis honum, ella at hetta kann hava við sær avleiðingar fyri starvssetan hansara. Nærverk staðfestir tó í avgerðini, at samskiftis- og samstarvstrupulleikar eru millum varaleiðara, álitisfólk og starvsfólk øðrumegin og leiðaran hinumegin.*

*Burtursæð frá partshoyring og eini roynd at fáa starvsfólk og leiðara at fara undir mediatión, tekur Nærverk eingi stig til at finna út av, hvat trupulleikarnir standast av, ella hvussu teir kunnu loysast. Hetta sæst aftur í avgerðini, har sagt verður, at trupulleikarnir sýnast at vera trupulleikar í dagliga samskiftinum og samstarvinum, og at tað, ið komið er fram í málinum bendir á, at hesir kunnu stava frá vantandi virðing millum leiðslu og starvsfólk hvør móti øðrum.*

*Nærverk hevur sum myndugleiki skyldu at upplýsa málið, áðrenn avgerð verður tikin (offisialprinsippið), og Nærverk fekk undir viðgerðini av klaguni áheitanir frá bæði leiðaranum og starvsfólkunum, sum kundu viðvirka til at upplýsa málið betur. Tíðliga undir viðgerðini av klaguni heitti leiðarin á Nærverk um at luttaka á fundi saman við starvsfólkunum. Hesum játtaði Nærverk, men hetta kom tó ongantíð í lag. Millum jóla og nýggjárs 2006 boðaðu starvsfólkini í telduposti Nærverk frá, at tey vóru sinnað at greiða nærri frá klaguni. Nærverk svaraði ongantíð áheitanini. Tað er ein grundleggjandi regla í fyrisitingarrættinum, at ein partur kann krevja at geva ummæli í málinum, jbr. § 20 í fyrisitingarlógini. Reglan hevur sum endamál at tryggja, at málið er fullvæl lýst, tá avgerð verður tikin. Eftir mínari fatan átti Nærverk at viðgjørt teldupostin 26. des. 2006 sum eina áheitan um at geva ummæli sambært § 20 í fyrisitingarlógini.*

*Eg meti ikki, at Nærverk hevur upplýst málið á nøktandi hátt, og eg haldi tað vera sera átaluvert, at Nærverk tók avgerð í málinum uttan at lata starvsfólkini koma til orðanna, tá tey heittu á Nærverk um tað.*

*Føroya Pedagogfelag vísti í kæruni til Almanna- og heilsumálaráðið á, at starvsfólkini ikki høvdu fingið høvi at greiða Nærverk nærri frá klaguni. Ráðið átti at gjørt Nærverk vart við hetta umframt at boðið starvsfólkunum at geva nevnda ummælið í sambandi við kæruviðgerðina.*

***Avgerðin hjá Nærverk***

*Klagan frá starvsfólkunum varpar ljós á samstarvstrupulleikar og eitt vánaligt arbeiðsumhvørvi á stovninum. Hóast Nærverk staðfestir hetta í avgerðini og sigur seg taka málið í størsta álvara, so áleggur Nærverk leiðaranum sjálvum at seta tiltøk í verk til at loysa trupulleikarnar.*

*Undan hesum høvdu starvsfólk og leiðari uttan úrslit gjørt eina roynd at loysa trupulleikarnar. Starvsfólkini høvdu harumframt fleiri ferðir boðað frá, at tey ikki vóru sinnað at royna at loysa málið við mediatión. Grundað á hesi viðurskifti, og at tað var leiðaran, ið starvsfólkini høvdu klagað um, var málið í januar 2007 eftir mínari meting soleiðis háttað, at tað var órímiligt mótvegis bæði leiðara og starvsfólkum at áleggja leiðaranum einsamallum at loysa trupulleikarnar. Eftir mínari fatan átti Nærverk sjálvt at tikið trupulleikarnar á stovninum til viðgerðar og tikið neyðug stig í hesum sambandi.*

***Handfaringin av málinum eftir at Nærverk tók avgerð***

*Sambært frágreiðing frá leiðaranum, dagfest 5. juli 2007, kunnaði hann eftir avgerðina javnan ein deildarleiðara í Nærverk um støðuna á sambýlinum. Hann kunnaði m.a. um, at royndirnar at samskifta við varaleiðara og álitisfólk miseydnaðust, og at samstarvið við varaleiðaran í ávísan mun helt uppat. Eftir fleiri mánaða royndir at loysa trupulleikarnar á stovninum boðaði hann frá, at 4 starvsfólk søgdu seg hava so stórar trupulleikar við honum, at tey kundu ikki halda fram, sum støðan var. Tað framgongur somuleiðis av frágreiðingini, at leiðarin á vári 2007 til fánýtis bað umboð fyri Nærverk um at luttaka á starvsfólkafundi á sambýlinum.*

*Hóast regluligu kunningina og hóast Nærverk í avgerðini ikki helt støðuna kunna standa við, tí hon varð mett at vera til skaða fyri allan stovnin, tekur Nærverk eingi stig í málinum, fyrr enn starvsfólkini í juni 2007 boða landsstýrismanninum frá, at tey umhugsa at siga seg úr starvi.*

*Eftir mínari meting drálaði Nærverk alt ov leingi við at fylgja málinum upp. Eg haldi tað somuleiðis vera átaluvert, at Nærverk sýtti fyri at luttaka á fundi við leiðaran og starvsfólkini. Ikki minst tá hugsað verður um, at Nærverk álegði leiðaranum at loysa trupulleikarnar og væntaði at frætta aftur, hvussu gekst við hesum.*

*Almanna- og heilsumálaráðið viðgjørdi í hesum sama tíðarskeiði kæru frá Føroya Pedagogfelag um avgerðina hjá Nærverk. Sambært skjølunum kann ráðið ikki hava verið í iva um, hvussu vánalig støðan var á sambýlinum. Eftir at hava hoyrt partarnar, sæst ráðið tó ikki*

*at geva kæruni nakra veruliga viðgerð. Eg havi tí sera trupult við at síggja, hvussu ráðið í síni kæruavgerð kundi koma til ta niðurstøðu, at Nærverk tók málið í álvara og royndi at loysa tað.*

***Flytan í onnur størv***

*Eftir at starvsfólkini hava sagt seg úr starvi, og leiðarin hevur tikið av tilboði um annað leiðarastarv, spyrja 2 umboð fyri starvsfólkini, um Nærverk er sinnað at geva teimum tilboð um annað starv. Tað er Nærverk ikki. Í svarinum vísir Nærverk til kunnandi fundin 12. juli 2007 um endurskipan av stovninum, og at starvsfólkini eftir fundin boðaðu frá, at tey ikki ynsktu at verða flutt av stovninum. Somuleiðis varð víst á, at nøkur teirra valdu at siga seg úr starvi, áðrenn gongd varð sett á ætlanina at umskipa stovnin.*

*Eingin frágreiðing er skrivað frá umrødda fundinum. Í skrivliga samskiftinum eftir fundin haldi eg einki benda á, at einstøku starvsfólkini fingu ítøkilig tilboð um annað starv. Heldur var talan um, at fleiri møguleikar vórðu nevndir, herundir at tað kundi koma uppá tal at flyta starvsfólk. Eg kann ikki annað enn undrast á, at Nærverk bjóðaði leiðaranum, men ikki starvsfólkunum, at flyta í annað samsvarandi starv. Av tí at 7 av starvsfólkunum søgdu seg úr starvi í ávikavist juli og august 2007, geri eg tó ikki meira við hendan spurningin.*

***Notatskyldan***

*Sum nevnt er eingin frágreiðing skrivað frá fundinum 12. juli 2007. Nærverk hevur greitt mær frá, at orsøkin er, at partarnir aftaná høvdu viðgjørt fundin í skrivligum samskifti. Eg haldi ikki, at hetta samskiftið ítøkiliga lýsir, hvat starvsfólkini fingu til støðutakan á fundinum. Harumframt hava partarnir í frágreiðingunum til mín víst seg ikki at vera á einum máli um, hvat varð sagt á fundinum. Sambært § 6 í innlitslógini hevur ein myndugleiki skyldu til at skriva upp allar upplýsingar um veruligu umstøðurnar, sum hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina. Eg fari tí at geva Nærverk eina átalu fyri ikki at hava skrivað frásøgn frá fundinum.*

***Partshoyring***

*Pedagogfelagið hevur í klaguni gjørt vart við, at tað metti ikki reglurnar*

*um partshoyring vera hildnar. Hesar reglur hava m.a. sum endamál at tryggja, at partar í einum máli, fáa høvi at gerast kunnigir við og gera viðmerkingar til veruligu umstøðurnar í málinum, áðrenn avgerð verður tikin. Eg havi lisið øll skjølini í málinum og dugi ikki at síggja, at Nærverk ikki hevur partshoyrt starvsfólkini um allar kravdar upplýsingar. Eg haldi einki óvanligt vera í, at Nærverk og leiðarin á sambýlinum samskifta regluliga, og eg dugi heldur ikki at síggja, at tað í hesum samskiftinum komu fram upplýsingar, sum Nærverk hevði skyldu at partshoyra starvsfólkini um.*

***Samanumtikið***

*Samanumtikið fari eg at geva Nærverk eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av málinum. Hetta grundi eg á, at Nærverk ikki gav starvsfólkunum høvi at koma til orðanna undir klaguviðgerðini, at Nærverk, grundað á umstøðurnar í málinum, álegði leiðaranum at loysa málið heldur enn sjálvt at taka tað til viðgerðar, og at Nærverk dráladi alt ov leingi við at fylgja málinum upp.*

*Somuleiðis fari eg at geva Almanna- og heilsumálaráðnum eina átalu fyri ikki at hava viðgjørt kæruna frá Føroya Pedagogfelag á nøktandi hátt.*

*Burtursæð frá givnu átalunum og viðmerkingunum geri eg ikki meira við málið.*

## 28.5 Avgerð hjá Javnstøðunevndini

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Javnstøðunevndini av einum kærumáli. Málið snúði seg um eina kvinnu, sum var í barnsburðarfarloyvi, og sum helt seg vera trýstað úr starvi sínum av somu orsøk. Nevndin hevði boðsent pørtunum á fund, tí nevndin ikki helt seg hava nøktandi grundarlag at taka støðu út frá. Arbeiðsgevarin hevði í fyrstu atløgu noktað at møta á fundi. Fundurin var seinni fluttur, men arbeiðsgevarin fekk ikki boð um hetta. Stutt fyri fundin, sendi advokaturin hjá kvinnuni nevndini og arbeiðsgevaranum nýtt ummælisskriv. Nevndin tók støðu á fundinum vísandi til frágreiðingina hjá kvinnuni/advokatinum, vantandi frágreiðing frá arbeiðsgevaranum og málinum sum heild. Umboðsmaðurin vísti á, at nevndin er ein fyrisitingarmyndugleiki, ið sambært offisialprinsippinum hevur ábyrgdina av, at eitt mál er lýst á nøktandi hátt, áðrenn avgerð verður tikin. Nýggju upplýsingarnar áttu tí at verið lagdar fyri arbeiðsgevaran, áðrenn nevndin tók støðu. Umboðsmaðurin helt nevndina hava brotið reglurnar um partshoyring í fyrisitingarlógini, og mælti nevndini at taka málið uppaftur til viðgerðar. Umboðsmaðurin helt talan vera um so grundleggjandi feilir í málsviðgerðini, at nevndin eisini fekk eina átalu fyri hetta.* ***(J. nr. 200800013)***

## Klagan

Við skrivi, dagfest 1. febr. 2008, hevur Dimmalætting sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> „**Viðv.: Innleiðandi klaguskriv**
> Vit skulu hervið kæra avgerðina hjá Javnstøðunevndini í kærumálinum hjá A móti Dimmalætting vísandi til grundgevingarnar í viðlagda tíðindaskrivi.
>
> Eg skal sjálvur av landinum í kvøld og havi ikki havt stundir at fyrireika eitt fullfíggjað klaguskriv hesa vikuna. Nú málið hevur verið so nógv frammi, halda vit tó, at tað er av týdningi, at Umboðsmansstovnurin fær høvi at seta seg inn í viðurskiftini sum skjótast. Eg fari tí at loyva mær at venda aftur til tykkum við neyvari grundgevingum og øllum okkara skjølum í málinum í aðru viku (viku 7).“

Tíðindaskrivið, sum víst verður til í klaguni, er dagfest 29. jan. 2008, og er soljóðandi:

> **„Viðv.: Niðurstøða hjá Javnstøðunevndini í kæru móti Dimmalætting**
> Við síni avgerð á fundi 23. januar 2008 leggur Javnstøðunevndin Dimmalætting undir at hava framt mismun móti fyrrverandi marknaðarfólki á Dimmalætting vegna viðgongu og barnsburð. Henda avgerð kemur sera dátt við hjá okkum, og vilja vit afturvísa, at grundarlag er fyri slíkari ákæru.
>
> Málið er um, at Dimmalætting framdi bygnaðarbroytingar í 2004 við at leggja tvær deildir saman og útnevna ein skikkaðan leiðara, meðan kærarin var í barnsburðarfarloyvi. Hóast hon í nýggju deildini hevði sama starvsøki og somu starvstreytir sum frammanundan, valdi hon at siga seg úr starvi við tí grundgeving, at hon føldi seg tilsíðissetta, tí hon ikki fekk leiðarastarvið, og tí hon noktaði at arbeiða undir setta deildarleiðaranum. Trý ár seinni kærir hon málið til Javnstøðunevndina.
>
> Vit á Dimmalætting eru sannførd um, at endamálið við Javnstøðulógini ikki er at nokta arbeiðsgevarum at fremja bygnaðarbroytingar, meðan starvsfólk eru við barn ella í barnsburðarfarloyvi. Leiðslurætturin hjá arbeiðsgevara kann ikki treytaleyst verða avgjørdur av, um starvsfólk eru við barn ella ikki. Vit ivast tí í, at ein slík niðurstøða hjá Javnstøðunevndini vil fremja javnstøðu í Føroyum.
>
> Viðurskifti í málsviðgerðini eru eisini ivasom, og vit skulu tí gera fylgjandi viðmerkingar til avgerðina staðfest í skrivi nevndarinnar dagf. 25. januar:
>
> 1. Avgerðin er skeiv, tí kærarin ikki er uppsøgd ella á annan hátt hevur verið fyri vanbýti vegna barnsburð.
> 2. Tað er ikki rætt, at arbeiðsgevari sambært Javnstøðulógini skal prógva, at starvsfólk ikki hava verið fyri vanbýti. Hóast

starvsfólk ofta kenna seg vera fyri vanbýti í sambandi við bygnaðarbroytingar, so eru slíkar kenslur ikki at meta sum prógv, og lógin gevur einki grundarlag fyri at áleggja arbeiðsgevaran at mótprógva slíkum ógrundaðum ákærum.

3. Hinvegin er tað rætt, at finst prógv um vanbýti, so skal arbeiðsgevari prógva, at staðfesta vanbýti ikki er vegna barnsburð/-farloyvi. Av tí at talan ikki er um mál av hesum slagi, finnast eingi slík prógv í hesum máli.
4. Í skrivi til okkara dagf. 10. januar sigur nevndin seg ikki hava nóg gott grundarlag at gera niðurstøðu í málinum. Tí mettu vit ikki niðurstøðuna í málinum kundi ganga okkum ímóti.
5. Eftir hetta hevur kærarin sent nýtt hoyringsskriv til nevndina og hevur verið á fundi saman við nevndini, uttan at vit eru hoyrd um tey viðurskifti, ið nevnd eru í skrivinum, og sum komu fram á fundinum.
6. Sama dag sum fundurin varð hildin, bóðu vit við telduposti um innlit í – og um at verða hoyrd um – tey viðurskifti, ið umrødd vórðu á fundinum. Men svarið uppá umbønina var, at nevndin longu hevði tikið avgerð í málinum, og at málið ikki kundi bíða eftir okkara viðmerkingum, tí meginparturin av Javnstøðunevndini fer frá í næstum og skal mannast av nýggjum! – Talan er her um ósaklig atlit í málsviðgerðini, óvanligar mannagongdir umframt brot á ásetingar í Fyrisitingarlógini um partshoyring, sum eiga at ógilda avgerðina hjá nevndini.
7. Vit vilja eisini seta spurnartekin við ta heimild, ið nevndin hevur tikið sær at útmála endurgjald í slíkum málum sum hesum. Henda heimild er ikki givin nevndini við Javnstøðulógini, og hesa heimild hava nú sum fyrr bert dómstólarnir.

Dimmalætting fer tí at kæra hetta mál til Løgtingsins Umboðsmann.“

Dimmalætting hevur sent umboðsmanninum soljóðandi útgreining av klaguni, dagfest 13. febr. 2008:

„**Viðv. kæru í avgerð hjá Javnstøðunevndini**
Vísandi til bræv okkara dagf. 01.02.08 vilja vit herviðsenda skjøl okkara í málinum hjá A í Javnstøðunevndini móti Dimmalætting. Viðløgdu skjølini eru 21 í tali, og kunnu tey bólkast soleiðis:

1-2 : Starvssetanin í september 2002
3-10: Útnevning og uppsøgn, ið refererað verður til í hoyringsskrivunum, oktober 2004
11-21: Kærumálið í Javnstøðunevndini, juni 2007 – jan. 2008.

Niðurstøðuna hjá Javnstøðunevndini dagf. 25.01.08 og tíðindaskriv okkara dagf. 29.01.08 hava tit fingið tilsent frammanundan við brævinum dagf. 01.02.08.

Fleiri feilir eru framdir av Javnstøðunevndini í málsviðgerðini av hesum máli, ið eiga at ógilda avgerðina. Manglandi hoyringin, ið nevnd er í tíðindaskrivinum, er bert eitt dømi. Fundurin, ið nevndin innkallaði til (skjal 15) er eitt annað, tí hesin, so vítt vit kunnu síggja, tenderar til processina í einum rættarfundi, sum eingin heimild er fyri. At vit ikki vildu luttaka á einum slíkum fundi kann ikki nýtast sum grundarlag fyri at nokta fyri hoyring, eins og tað at meginparturin av nevndini skal frá (sí skjal 19) heldur ikki kann verða tað.

Hóast málið eigur at verða heimvíst og ganga umaftur, er tað av stórum týdningi fyri okkum, at tað yvirfyri Javnstøðunevndini samstundis verður nágreinað, at hon tulkar lógina skeivt, tá hon treytaleyst brúkar umvendu próvbyrðuna í § 6, stk. 5 í javnstøðulógini, um kærari er við barn ella í barnsburðarfarloyvi.

Vit hava gjørt okkum ómak at lýsa málið so gott sum gjørligt og hava víst á øll faktuel viðurskifti í málinum, meðan kærarin als ikki hevur kunnað ført nakað fram, sum bendir á, at útnevningin av C til sølu- og marknaðarleiðara í staðin fyri kæraran hevði nakað sum helst við hennara barnsburðarfarloyvi ella hennara kyn at gera – heldur ikki í tí hoyringsskrivi, sum vit ikki sluppu

at verða hoyrd um (skjal 17) ella í tí munnligu frágreiðingini hjá kæraranum á fundinum við nevndina 23. januar, ið verður endurgivin í úrskurðinum hjá nevndini (s. 4), har hon verður endurgivin fyri viðurskifti, ið eg sjálvur einki kenni til. Tað einasta, ið ført verður fram, eru hennara kenslur í sambandi við útnevningina av nýggjum sølu- og marknaðarleiðara. Av tí at eingi prógv eru fyri nøkrum vanbýti, gevur tað at nýta umvendu próvbyrðuna í málum sum hesum als onga meining og stillar okkum sum arbeiðsgevara í eina heilt vónleysa støðu.

Vónandi vil Umboðsmaðurin í sambandi við hetta mál áleggja Javnstøðunevndini at praktisera lógina á hesum øki, sum tað var tilætlað.

Harafturat vilja vit, sum vit eisini nevndu í síðsta punkti í tíðindaskrivinum, heita á Umboðsmannin um at áleggja nevndini ikki at taka sær heimildir, ið hon ikki hevur sambært javnstøðulógini, tá tað kemur til at útmála sjálvt endurgjaldið í javnstøðumálum. Hetta hevur nevndin heldur ikki førleika til, og vit kunnu í úrskurðinum í okkara máli ikki skilja motiveringarnar og tølini aftanfyri útrokningina av samsýningini (s. 6).

At enda vilja vit heita á Umboðsmannin um at senda okkum kvittan fyri móttøku av bæði hesum umframt brævið dagf. 01.02.08.

Um spurningar eru í sambandi við málið, kunnu tit seta tykkum í samband við meg beinleiðis á tel, … ella teldupost …@dimma.fo."

## Málsgongd

Tann 25. sept. 2002 er soljóðandi starvssáttmáli millum Dimmalætting og A undirskrivaður:

**§1 Gildiskoma**
Starvssáttmálin kemur í gildi frá 1. oktober 2002 at rokna.

**§2 Ábyrgarøki og tænastustaður**
Starvssetti verður settur sum sølu- og marknaðarfólk. Tænastustaður er í løtuni Marknaðardeildin, og arbeiðið fevnir um arbeiði, sum hoyrir marknaðardeildini til.

**§3 Løn**
Lønin er avtalað til kr. 19.100,- um mánaðin, sum verður afturútgoldin seinasta arbeiðsdag í mánaðinum.

Lønin verður endurskoðað pr. 1. november 2003,

**§4 Yvirtíð (Úrtíðararbeiði)**
Fyri álagt úrtíðararbeiði verður goldin 150% av vanligu tímalønini. Úrtíðargjald verður latið fyri hvønn byrjaðan hálvan tíma.

Innvunnin yvirtíð eigur at verða avspákað, men kann verða útgoldin, um leiðslan gevur loyvi til tess.

**§5 Arbeiðstíð og frítíð**
Setanarbrøkurin er 1/1, og er arbeiðstíðin er 37,5 tímar um vikuna. Setanarbrøkurin fyrsta mánaðin verður tó ½, og verður lønin, ið er ásett í §3, regulerað eftir hesum.

Arbeiðstíðin verður avtalað nærri við leiðsluna.

Starvssetti hevur rætttil frítíð og frítíðarískoyti sambært løgtingslóg um frítíð við løn. Innvinningarárið er álmanakkaárið.

**§6 Frídagar**
Hesir dagar eru frídagar: Ólavsøkuaftan, ólavsøkudagur, jólaaftan, nýggjársaftan og allir halgidagar. Flaggdagur er hálvur frídagur.

1. mai og grundlógardagur og 1. november eru vanligir arbeiðsdagar

**§7 Sjúka**
Verður starvssetti raktur av sjúku, er lønin sambært galdandi løgtingslóg um starvsmenn.

**§8 Barnsburður**
Starvssetti hevur rætt til barnsburðarfarloyvi sambært galdandi løgtingslóg um barsilsskipan; í løtuni 4 vikur fyri barnsburð og 24 vikur eftir barnsburð samb. Ll. nr. 48 frá 3. apríl 2001.

Løn undir barnsburðarfarloyvi verður goldin úr Barsilsskipanini.

**§9 Eftirsitiløn**
Um starvsetti doyr, meðan hann er í starvi hjá felagnum, eru reglurnar um eftirsitiløn í starvsmannalógini galdandi.

**§10 Uppsøgn**
Setanin er við royndartíð í 3 mánaðar, og kunnu partarnir í hesum tíðarskeiði uppsiga setanina við 1 viku fráboðan.

Eftir lokna royndartíð kann felagið uppsiga starvsetta samb. starvsmannalógini at fara úr starvi tann seinasta í einum mánaði soleiðis:

- Tá ið sagt verður upp innan 5 mánaða starvstíð:
  1 mánaða freist
- Tá ið sagt verður upp innan 2 ára og 9 mánaða starvstíð:
  3 mánaða freist
- Tá ið sagt verður upp innan 5 ára og 8 mánaða starvstíð:
  4 mánaða freist
- Tá ið sagt verður upp innan 8 ára og 7 mánaða starvstíð:
  5 mánaða freist
- Tá ið sagt verður upp eftir 8 ára og 7 mánaða starvstíð:
  6 mánaða freist

Starvssetti kann siga seg úr starvi við 1 mánaða freist at fara úr starvi tann seinasta í einum mánaði.

Hevur starvsetti í 12 fylgjandi mánaðir fingið løn undir sjúku í 120 dagar tilsamans, kann starvsetti verða sagdur upp við 1 mánaða freist at fara úr starvi, tá fyrsti heili mánaðin er av. Hetta er treytað av, at uppsøgnin verður givin beint eftir teir 120 sjúkradagarnar, og meðan starvsetti framvegis er sjúkur.

**§11 Slit av sáttmála**
Sáttmálin kann av øðrum partinum setast úr gildi uttan ávaring, um hin parturin munandi misheldur skyldur sínar.

**§12 Tagnarskylda v.m.**
Starvssetti hevur tagnarskyldu í øllum viðurskiftum viðvíkjandi felagnum og virksemi tess.

Tagnarskyldan er eisini galdandi eftir, at starvssetti er farin úr starvi.

Tá ið starvssetti fer frá – óansæð orsøk – skal alt tilfar, sum felagið eigur, og sum starvssetti hevur í síni varðveitslu, latast felagnum. Starvssetti kann ikki søkja sær afturhaldsrætt í nøkrum tilfari, sum felagið eigur.

**§13 Gerðarættur**
Allar ósemjur partanna millum í sambandi við starvsviðurskiftini eftir hesum sáttmála skulu fyrst og fremst loysast við samráðingum. Kunnu partarnir ikki semjast, verður ósemjan avgjørd av gerðarætti. Gerðarætturin hevur 3 limir.

Hvør parturin tilnevnir sín gerðarættarlim, og hesir avgera í felag tann triðja gerðarættarlimin, sum skal vera løgfrøðingur og formaður.

Semjast báðir gerðarættarlimirnir ikki um triðja limin, verður hesin tilnevndur av sorinskrivaranum.

Gerðarætturin ásetir sjálvur reglurnar fyri viðgerðina í samsvari við reglurnar í rættargangslógini.

> Gerðarætturin tekur avgerð um gjald av kostnaðinum av gerðarættarmálinum.
>
> **§14 Undirskriftir**
> Hesin sáttmáli verður undirskrivaður í 2 eintøkum, og fær hvør parturin sítt eintak.
> …“

Við teldubrævi, dagfest 1. okt. 2004, hevur B sent starvsfólkunum á Dimmalætting soljóðandi fráboðan:

> „Til øll starvsfólk
> Sagt skal verða frá, at við virknaði frá í dag 1. oktober er C útnevndur sølu- og marknaðarleiðari við ábyrgd av bæði Avgreiðsluni og Marknaðardeildini. Hesar deildir verða í sambandi við umbyggingina, ið er í gongd í løtuni, lagdar saman í eina tænastudeild, ið kemur at hava um hendi alt handilsligt kundaviðskifti við lýsarar, haldarar og leysasølur umframt marknaðarføringina av blaðnum.
>
> C, ið hevur verið í starvi á Dimmalætting síðani 1. mars í ár, er handilslærdur og hevur leiðsluroyndir innan hetta yrki.
>
> Eisini skal verða sagt frá, at í sambandi við at „computer-toplate“ útgerð er keypt til Prentmiðstøðina, ið framleiðir lidnar plátur, og sum verður sett upp miðan november, verður montagudeildin niðurløgd. Vit fara tá yvir til at keypa lidnar plátur frá Prentmiðstøðini.
>
> Í hesum sambandi er P, ið hevur arbeitt við at montera filmar her á Dimmalætting síðani februar 1998, sagdur úr starvi. Av tí at P er sjúkrameldaður, fyribils heilt fram til 1. desember, kemur hann ikki aftur til arbeiðis.“

Sama dag sendi Dimmalætting út soljóðandi tíðindaskriv:

> „Frá 1. oktober er C settur í starv sum sølu- og marknaðarleiðari á

Dimmalætting. Samstundis verða marknaðardeildin og avgreiðslan lagdar saman í eina tænastudeild, sum kemur at taka sær av øllum sum hevur við lýsarar, haldarar og leysasølu, umframt marknaðarføringina av Dimmalætting.

C hevur síðan 1. mars í ár arbeitt á marknaðardeildini hjá Dimmalætting. Hann er 30 ára gamal og uppvaksin í …, er handilslærdur, og hevur starvast í handilsvinnuni í Føroyum og Svøríki.“

Tann 1. okt. 2004, kl. 23.19 hevur A sent B soljóðandi teldubræv:

„Eg vil við hesum brævi siga meg úr starvi mínum sum marknaðarfólk á Dimmalætting frá 01.11.2004 at rokna.

Grundgevingin fyri hesum er, at eg føli at leiðslan á Dimmalætting beinleiðis hevur hildið meg uttan fyri bygnaðarbroytingarnar, sum viðvíkja marknaðardeildini, ímeðan eg havi verið í barnsburðarfarloyvi!

At fáa akut boð kl. 8:53 01.10.2004 seinasta dag áðrenn eg skuldi byrja aftur, um at sølu og marknaðarleiðari er settur, fyri ikki at skula hoyra tað frá øðrum, virkar bæði luskut og feikt og er á eggini til diskriminering av kvinnu í barnsburðarfarloyvi, og kann eg ikki góðtaka tílíkan framburðarhátt.

Tá eg sum kunnugt eigi ein mánaða feriu tilgóðar, ynski eg at halda hana frá dagsdato, til eg fari úr starvi.

Fundurin, sum eg ætlaði at hava við teg mánadagin, er hervið avlýstur!

MB: Avrit av hesum brævi er eisini sent við postinum“

Tann 5. okt. 2004 hevur A sent B soljóðandi teldubræv:

„Fyrst vil eg takka fyri ein góðan og sámuligan fund mánadagin.

Eg fekk nakrar brikkar í høvdinum uppá pláss og aðrir eru, eins og tá eg fekk boðini fríggjadagin, líka óskiljandi enn.

Best hevði sjálvsagt verið at hendan støðan ongantíð var íkomin, men nú mugu allir partar so fyrihalda seg til tað og taka støðu út frá tí.

Eg ynski avgjørt, at vit finna eina loysn, og talvan verður viska rein, so vit øll í felag kunna fara til arbeiðis og vísa kappingarneytunum, hvar skápi skal standa!

MEN – eg havi 3 grundleggjandi ting, sum mugu fáast uppá pláss, fyri at eg kann koma aftur:

1. Eg kann ikki góðtaka at C, krambúðarkallur úr …, sum bleiv settur í starv sum sølufólk fyri hálvum ári síðani í sambandi við mítt barnsburðarfarloyvi, skal bera starvsheitið marknaðarleiðari á Dimmalætting, og skal verða mín yvirordnaði. Eg sum eri marknaðarøkonom við HD 1. parti!. Hetta hongur als ikki saman og niðurger meg sum persón, kvinnu, mína útbúgving og starvstíð.

Fyri mína skuld kann C gott bera starvsheitið Søluleiðari og hava ábyrgdina av damunum í avgreiðsluni. Eg vil starvast á marknaðardeildini við referancum til tín, eins og áðrenn eg fór í barnsburðarfarloyvi. Hetta vísti seg at verða eitt útmerka team, sum tosaði sama mál við somu ambitiónum. Ikki tí, at eg haldi, at C ikki hevur ambitiónir, men hansara styrki liggur ikki á marknaðarøkinum ! Eg vildi meint, at C og eg áttu at kunna samstarva á ein skilagóðan hátt, sjálvt um hann ikki er leiðari yvir mær.

2. Eg góðtaki ikki at fáa lægri løn enn C !

3. Ábyrgdarumráðini og primeru starvsøkini verða definera !

Eg meti, at vit á virðiligan hátt fyri allar partar kunna loysa málið

við, at vit, í sambandi við lancering av stóru broytingum okkara fyrst í komandi ári, lancera C sum sølu- og avgreiðsluleiðara og meg sum marknaðarleiðara.

Nú havi eg kasta bóltin til tín, so kanst tú hugsa um hettar og venda aftur og siga mær tína meining.
Eg arbeiði við at gera eitt uppskot um eina skilagóða útgreinan av mínum primera ábyrgdar- og starvsøki.

Tú kanst maila ella ringja aftur til mín. Eg havi telefon … restina av kvøldinum um tú ringir í kvøld !"

Tann 6. okt. 2004 hevur A sent B soljóðandi teldubræv:

„Eg haldi at títt svar er ókonkret, men skilji at tú ætlar at standa við tína avgerð.

Fyrst vil eg siga, at eg skilji ikki, hvat tú sipar til í setninginum: „Men eg standi ikki fyri tær treytir, ið eg nevndi fyri tær á fundinum". Vinarliga gev mær eitt hint!

Orðsøkin til at eg segði, at eg skuldi verða Marknaðarleiðari, er ikki tí, at eg ikki kann liva uttan. Tað er simpulthen tí, at eg kann ikki góðtaka at C er Marknaðarleiðari, tí tað hevur hann ikki tær neyðugu fyritreytirnar fyri at vera, og tað veist tú líka væl sum eg. Tá tit spæla við høgum kortum og útdeila leiðara titlar, so geri eg tað eisini.

Sjálvsagt vil eg eisini taka mær av søluarbeiði akkurát sum áður, og C kann eisini taka sær av marknaðararbeiðnum.

Høvuðsendamálið má verða at vit øll arbeiða sum eitt gott team, annars er logikkurin burtur.

Eg vil hava, at marknaðarparturin verður mítt primera øki, og sjálvandi verið eg eisini sølufólk, akkurát sum áður eg fór í barnsburðar farloyvi.

Eg kann geva meg eitt sindur við at góðtaka, at C verður Sølu- & Avgreiðsluleiðari, men eg ætli mær ikki at arbeiða undir honum.

Tað skal og má verða, sum áðrenn eg fór í orlov, tá vit arbeiddu á jøvnum føti.

Eingin marknaðar tittul er neyðugur, hann kann tú td. sjálvur hava, høvuðssakin er, at tann, ið hevur tittulin, kann bera hann.

Umber meg, um eg royni at vísa tær á loysnir í hesum máli, tað eigur tú sjálvsagt sjálvur at finna út av.

Síggi fram til at hoyra aftur frá tær og fáa eina endaliga loysn á málinum."

Sama dag hevur B svarað A í soljóðandi teldubrævi:

„Tær treytir, eg sipi til í meylinum, eru løn umframt pensión, og sum ikki eru á hædd við tað, sum eg havi bjóða C. Hetta tí eg havi givið honum leiðaraábyrgd. Talan er her sostatt um fyrsta brot á tínar fortreytir fyri at koma aftur í starv.

Tað næsta brotið vísir seg í sambandi við, at eg havi givið C yvirskipaðu ábyrgdina fyri søluni. Tað er sostatt ikki møguligt hjá tær at selja uttan at referera til C hesum viðvíkjandi. Støðan er tí í øllum førum broytt í mun til hana, hon var, undan tú fórt í orlov. Og grundarlagið fyri „team-workinum" er tí broytt tilsvarandi.
Spurningurin er, um tú í meylinum niðanfyri, indikerar, at tú kanst góðtaka hetta hóast alt?

So til problematikkin viðv. marknaðarábyrgdini. C hevur sjálvur fleiri ferðir nevnt týdningin av at seta eitt team saman av fólki, ið komplemetera hvønn annan, og harvið hava fólk, ið vita meiri um ávis evni enn leiðarin sjálvur. Hesum sigur hann seg vera bevístur um og hevur erfaringar við, bæði ta tíðina hann var í Svøríki og her heima. Tá tú so veit meiri um marknaðarføring, enn hann ger, vil hann sjálvandi lena seg tætt upp at tínum tilráðingum á økinum. Hetta er jú ikki eins betýðandi við, at hann vil lancera tær sum sínar egnu. So marknaðarøkið verður í øllum førum títt serøkið á deildini.

Heitið á deildini framyvir verður ikki Sølu- og marknaðardeildin, men TÆNASTUDEILDIN. Vit hava tó í samstarvi við lanceringina valt at markera, at talan er um samanlegging av Avgreiðsluni og Marknaðardeildini, og tí vil onkur óiva tittulerað hann sum marknaðarleiðari eina tíð framyvir.

Í framtíðini vil eg sjálvandi eisini koma at blanda meg og verða tann sami ljósasløkkjarin, eg altíð havi verið. Og hetta meiri á marknaðarsíðuni enn sølu- og avgreiðslusíðuni.

Marknaðarøkið er, sum áður nevnt, ikki nóg umfatandi til eitt starv burturav, og sum fortreytirnar eru uppsettar, fær hetta teg helst til at halda, at eg taki partí við C. Men hetta er ikki tilfeldi, sum eg síggi tað.
Og starvið má so ella so refererað til C!

Havi eg harvið brent, allar brýr?“

A hevur 6. okt. 2004 sent B soljóðandi teldubræv:

„Hettar bleiv ein tristur endi sum sker inn í innastu hjartarót. Eg sigi meg úr starvi við upplivilsinum av, at ein krambúðarkallur hevur troka meg av stólinum í mínum barnsburðarfarloyvi, og at framferðarhátturin er so óverdigur, at eg føli meg simpulthen kleytraðan og trakkaðan á. Ringasta upplivilsi higartil í mínum lívi.

Hendan støðan svarar til, at td. E var í barnsburðarfarloyvi, og D var settur sum leiðari yvir henni, tá hon kom aftur.

Hattar rundanum tosið við, at onkur vil tittulera C sum marknaðarleiðara eina tíð framyvir, er tað reina oyragass. Tú hevur sjálvur útnevnt mannin Sølu- og marknaðarleiðara, enntá í Dimmuni leygardagin. So hví skuldu fólk ikki tittulera hann á henda hátt….

Eg fari nú at slikka míni sár, og síðani manna meg uppaftur og hugsa um, hvat nú skal henda!

B hevði tú vita, hvussu fast hettar nívir, tú kanst ikki ímynda tær tað.

Eg fari í morgin at kunnað fyrrverandi starvsfelagar mínar um, at eg havi sagt meg úr starvi sum marknaðarfólk og takka fyri tíðina.

Eg ynski tykkum góða eydnu og signing við framtíðarplanum tykkara, sum eg so innarliga ynskti at vera ein partur av."

Javnstøðunevndin hevur sent Dimmalætting soljóðandi skriv, dagfest 25. juni 2007:

**Evni: hoyringsskriv um brot á § 6 í løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu**

Góðu tit,

Sambært javnstøðulógini § 9, litra 1 skal javnstøðunevndin hava eftirlit við, at lógin verður hildin, og sambært § 11, stk. 1-2 kunnu fólk, ið halda seg vera fyri mismuni kæra til nevndina, ið síðani kann taka málið upp. Lógin er at finna á www.javnratt.fo

Nevndin hevur fingið slíkt mál, ið A, hevur lagt fyri nevndina. Nevndin hevur tikið málið upp og vil nú hoyra Dimmalætting um málið, áðrenn nevndin tekur avgerð.

**Upplýsingar í málinum**
Sambært upplýsingum okkara, varð A sett í starv í ár 2002 sum marknaðarfólk. Hon tekur akademiska útbúgving innan hetta øki, og ongar atfinningar hava verið móti starvi hennara. Hon er einsamøll á marknaðardeildini og leggur sjálv arbeiðið til rættis og hevur tilvísing til B.

A fer 1. apríl 2004 í barnsburðarfarloyvi, men er kortini við á onkrari ferð og fundum um framtíðar marknaðarføring. Hon er sera spent at møta aftur til arbeiðis.

Men umleið 1 mánað áðrenn A fer í farloyvi setir leiðslan C í starv sum sølumann á Dimmalætting aftrat A. A fær boðið lægri og broytt starv til verri treytir.

Tann 1. oktober 2004 varð í telduposti boðað frá, at C frá tí degi var „útnevndur sølu- og marknaðarleiðari við ábyrgd av bæði Avgreiðsluni og Marknaðardeildini.“ Sama stendur at lesa í blaðútgávu hjá Dimmalætting.

Samskifti er millum partanna, millum annað teldupostur frá A tann 5. oktober 2004, har hon førir fram, at hon vil sleppa aftur til arbeiðis, men hevur „3 grundleggjandi ting sum mugu fáast uppá pláss.“ Hesi eru 1) at áðurnevndi C grundað á royndir og útbúgving ikki kann gerast marknaðarleiðari í staðin fyri A; 2) at A ikki góðtekur lægri løn enn C; 3) at ábyrgdarøkini verða nærri lýst.

B svarar hesum telduposti millum annað við at orsaka framferðina, men henda gerð fær onga vend, og tí skal hann „greiða frá grundgevingum og processini, tá avgerðin var tikin.“ Henda frágreiðing er í stuttum, at hóskiligt er ikki við smáum deildum, at uppgávur ikki eru til eitt marknaðarfólk, at nevnda uppbýtið tí ikki ber til.

Tann 6. oktober 2004 sendir A aftur teldupost, og sigur, eg haldi svar títt er ókonkret“ og biður um nærri útgreinan. Eisini vísir hon á, at talan ikki er um stríð um starvsheiti, uttan heldur, at hin „ikki hevur neyðugu fyritreytirnar,“ at hon tí ikki vil „arbeiða undir honum,“ men at samstarv um søluarbeiði og marknaðararbeiði ber til „akkurát sum áður eg fór í barnsburðar farloyvi.“

B svarar hesum við greitt at boða frá, at starvstreytir hjá eftirmanninum samsvara tí, at „eg havi givið honum leiðaraábyrgd. Talan er her sostatt um fyrsta brot á tínar fortreytir fyri at koma aftur í starv.“ Hann heldur fram, at annað viðvíkjandi ábyrgdarøki verður A at vísa til nýggja leiðaran. „Støðan er tí

í øllum førum broytt í mun til hana, hon var, undan tú fórt í orlov.“ Síðani verður nakað greitt frá um skipan av sølu og marknaðarføring.

Seinni sama dag skrivar A aftur, at „Hetta bleiv ein tristur endi sum sker inn í innastu hjartarót. Eg sigi meg úr starvi við upplivilsinum av at ein krambúðarkallur hevur trokað meg av stólinum í mínum barnsburðarfarloyvi, og at framferðarhátturin er so óverdigur, at eg føli meg simpulthen kleytraðan og trakkaðan á. Ringasta upplivilsi í mínum lívi.“ A ger síðani samanbering við líknandi støðu, at hetta svarar til, at „E var í barnsburðarfarloyvi og D var settur sum leiðari.“

Tann 8. oktober 2004 takkar A í telduposti hinum starvsfólkunum fyri starvstíð sína.

Umframt at hava fingið teldupostar frá A, hevur nevndin lisið grein, ið stóð í blaðnum Kvinnu fyri jól 2005. Í teirri greinini segði A frá, hvussu hon upplivdi framferðina sum „diskrimination“ ímóti kvinnu í barnsburðarfarloyvi.

**Lógarásetingar**
Sambært javnstøðulógini § 6, stk. 1 hava løntakarar rætt at verða burtur úr arbeiði í samband við viðgongu, barnsburð og eftir barnsburð sambært lóg og/ella sáttmála. Ásett er í § 6, stk. 3, at verður løntakari uppsagdur ella fyri vanbýti ímóti reglunum, skal arbeiðsgevarin rinda samsýning, sum mesta lagi svarar til løn í 50 vikur, alt eftir starvsaldri og umstøðunum annars.

Eftir javnstøðulógini § 6, stk. 5, áliggur tað arbeiðsgevaranum at prógva, at uppsøgnin ikki var grundað á viðgongu og barnsburð.

Sambært javnstøðulógini § 3, stk. 1 er ikki loyvt arbeiðsgevara at gera mismun í sambandi við starvsmeting, starvsflyting, lønarflokking, arbeiðsumstøður og annað vegna kyn. Eftir § 2 er bæði beinleiðis og óbeinleiðis mismunur fevndur av lógini.

**Viðferðin av A**
Javnstøðunevndin metir, at greiðar ábendingar eru í málinum um, at Dimmalætting hevur viljað sagt úr starvi ella niðurflutt A í starvstign í samband við viðgongu og barnsburð. Ongar ábendingar eru um, at ætlanin var at gera broytingar í starvinum hjá A undan barnsburðarfarloyvinum, men undir farloyvinum verður minni útbúgvin persónur við styttri og minni viðkomandi royndum settur í starvið hjá henni ella fær hennara ábyrgdarøki. Hetta tykist einans vera fráboðað A í blaðnum.

Vísandi til próvbyrðuna, ið liggur á arbeiðsgevaranum, og vísandi til Kap. 5 í fyrisitingarlógini um partshoyring, verður hervið biðið um ummæli tykkara av málinum.

Tekur P/F Dimmalætting ikki undir við, at talan er um mismun eftir javnstøðulógini, kann javnstøðunevndin velja, um hon ikki metur próvbyrðuna at vera lyfta, í fyrsta lagi eftir § 11, stk. 5 senda virkinum áheitan um at fáa lógarbrotið rættað – hetta kann í hesum føri gerast við at seta starvsfólkið aftur ella við at rinda ta nevndu samsýning fyri misbrotið. Um nevndin ikki heldur svarið vera nøktandi, kann javnstøðunevndin síðani eftir § 12 1) heita á ákæruvaldið um at reisa ákæru, 2) mæla til fría rættargongd, og 3) leggja málið fyri rættin í borgarligari rættarsókn.

**Ummæli**
Biðið verður um ummæli tykkara innan 1 mánað frá móttøku. Til ber at seta seg í samband við skrivstovu nevndarinnar á telefon …, teldupost javnratt@javnratt.fo, postboks 366, 110 Tórshavn."

Við skrivi, dagfest 9. juli 2007, hevur Dimmalætting latið Javnstøðunevndini soljóðandi frágreiðing:

„**Hoyringsskriv**
Vit hava fingið skriv tykkara d. 25. juni 2007, har tit biðja um ummæli av máli, ið A hevur lagt fyri Javnstøðunevndina.

A varð sett í starv 1. oktober 2002 sum sølu- og marknaðarfólk. Hon kom afturat F, ið hevði arbeitt sum sølu- og marknaðarfólk síðani 1999, og var hann tí førur fyri at læra hana upp í starvinum. Hvørgin teirra var settur sum leiðari men vóru síðuordnaði og vístu bæði til stjóran. Ætlanin við at seta A í starv var at økja um uppsøkjandi søluarbeiði hjá Dimmalætting, tí afturat F var frammanundan bert ein í hálvtíðarstarvi (G). Men hendan ætlanin fekk eitt skot fyri bógvin, tá F valdi at siga seg úr starvi pr. 1. januar 2003. Eftir hetta arbeiddi A eina tíð saman við H, sum arbeiddi sum bæði grafikari og marknaðarfólk, til hann fór úr starvi á heysti 2003. Síðani arbeiddi A einsamøll nakrar mánaðir, til C varð settur í starv 1. mars 2004. Ein mánað seinni fór hon í barnsburðarfarloyvi. *Talan hevur sostatt ikki verið um, at hon hevur arbeitt einsamøll á deildini, sum Javnstøðunevndin nevnir í skrivi sínum.*

Líka síðani F varð settur í starv, høvdu ávísir trupulleikar staðist av, at søluarbeiðið hjá sølufólkunum og arbeiðið hjá Avgreiðsluni ikki varð nóg væl samskipað. Tey trý starvsfólkini í Avgreiðsluni høvdu sum uppgávu – umframt at taka sær av øllum haldara- og leysasøluviðurskiftum, telefonumstilling v.m. – eisini at taka sær av øllum innkomandi lýsingaordrum. Sølu- og marknaðardeildin tók sær av tí uppsøkjandi søluarbeiðinum og hevði tí eisini samskifti við somu kundar sum Avgreiðslan. Trupulleikar vóru serliga í sambandi við reservering av lýsingarplássum, og eisini mátti Avgreiðslan gera nakrar praktiskar uppgávur fyri Sølu- og marknaðardeildina í sambandi við skráseting av lýsingum, ið sølufólkini ikki sóu seg før fyri at gera rætt. Tað mest náttúrliga var tí at leggja hesar funktiónir saman í eina deild, í staðin fyri at tær báðar hvør í sínum lagi arbeiddu við lýsingakundum og hvør í sínum lagi skuldu vísa til stjóran umframt at vera plaseraðar tvey ymisk støð í húsinum við Smyrilsveg.

Orsøkin til at eg sjálvur á sumri 2004 fór at arbeiða við, hvussu hetta kundi førast út í lívið, var, at í juni 2004 komu samráðingarnar um at fusionera okkara bókaprentsmiðju við Hestprent undir land. Tann 23. juni 2004 varð Føroyaprent

stovnað, og ta summarferiuna flutti Reprodeildin, ið hoyrdi til bókaprentsmiðjuna, út úr húsinum yvir á Hoyvíksveg 59, ið varð selt til nýggja samanlagda felagið. Tað gjørdist hervið fysiskt møguligt í húsinum við Smyrilsveg at fremja ætlaninar at samanleggja Sølu- og marknaðardeildina við Avgreiðsluna.

Eftir summarferiuna tók eg samband við …, innandura arkitekt, um at gera uppskot til nýggja innrættan av bygningi okkara. Loysnin varð, saman við øðrum broytingum og dagføringum av bygninginum, at tann parturin av redaktiónini, ið húsaðist í eystara vonginum av bygninginum innan fyri Avgreiðsluna, flutti upp í hølini hjá Reprodeildini. Gamla hølið hjá blaðmonnunum varð tikið uppí Avgreiðsluna, og hervið fingu vit eitt stórt hølið til nýggju samanløgdu deildina. Arbeiðið fór í gongd á heysti 2004 og stóð liðugt um ársskiftið 04/05.

So til málið um val av leiðara til nýggju Tænastudeildina.

A hevði eina grundútbúgving innan marknaðarføring, og arbeiðsroyndir hennara vóru at standa í handli, at seyma fyri fólk og so 1½ ára royndir sum sølu- og marknaðarfolk á Dimmalætting.

*Í skrivinum sigur Javnstøðunevndin, at A hevur eina akademiska útbúgving innan marknaðarføring, men hetta er ikki heilt rætt.* Markedsøkonom-útbúgvingin hjá A er teoretiskt á hædd við HD 1. part, og útbúgvingin gevur rætt til at fara at lesa víðari á 2. parti HD. Ein akademisk útbúgving er, okkum kunnugt, ein útbúgving á bachelor stigi, sum t.d. HD, so um hon ynskir at gerast akademikari, krevst víðari lestur.

A hevði ongar leiðsluroyndir. Hon var sera fyrikomandi og dugdi væl at tosa við kundar, men hon hevur ikki viðføddar persónligar eginleikar, ið gjørdu hana til ein egnaðan leiðara.

C hevði heldur ikki akademiska útbúgving men FHS og handilsútbúgving. Men hann hevði drúgvar leiðsluroyndir, tí hann hevur verið leiðari fyri handilin hjá Rúsdrekkasølu Landsins í

Saltangará í 2 ár, leiðari fyri kundatænastu í stórsentri í Gøteborg í 3 ár og handilsleiðari hjá Svend Krosstein í 1½ ár. Í tí lutfallsliga stutta tíðarskeiðinum hann tá hevði verið í starvi hjá okkum, vísti hann seg at vera ein sera struktureraður, málrættaður og effektivur í sínum søluarbeiði og kundi vísa úrslit, ið ikki vóru sædd áður her í húsinum.

Nýggja deildin skuldi telja 6 starvsfólk. Umframt bæði úr Sølu- og marknaðardeildini (C og A) og tey trý úr Avgreiðsluni skuldi eisini ein grafikari setast í starv, tí trupulleikar høvdu staðist av at fáa avsett neyðugu orkuna til at bróta lýsingar um á okkara Blaðumbrótingardeild. Av tí at høvuðsuppgávurnar hjá deildini skuldu vera søla og tænasta, og av tí at deildin fekk so nógv starvsfólk, var tað eitt náttúrligt val at velja C til leiðara, tí hann hevði neyðugu kvalifikatiónirnar til starvið. At útnevna A kom ongantíð upp á tal, tí hon ikki var ein egnaður kandidatur!

C varð tí útnevndur leiðari pr. 1. oktober 2004, og avrátt varð, at øll hini skuldu varðveita somu uppgávur sum frammanundan. A skuldi tí varðveita sínar arbeiðsuppgávur, t.v.s. at hon umframt sína primeru uppgávu sum seljari skuldi samskipa marknaðarføringina av Dimmalætting; hetta tí hon á deildini hevði bestu førleikar innan marknaðarføring. Av tí at hon frammanundan ikki var leiðari, varð ikki talan um broytingar í hennara starvs- og lønarviðurskiftum. *Tá Javnstøðunevndin í skrivi sínum nevnir, at hon fær boðið lægri og broytt starv til verri treytir, er hetta als ikki í tráð við veruleikan.* Einasti munurin er, at hon í staðin fyri at referera til mín nú skuldi referera til nýggja deildarleiðaran – bæði starvsinnihald og lønarviðurskifti vóru óbroytt!

Kunning til starvsfólkini á Dimmalætting um útnevningina av C varð send út við telduposti 1. oktober 2004 kl. 09:57 – eisini til privatu teldupostadressuna hjá A, tí hon ikki skuldi møta til arbeiðis aftur fyrr enn mánadagin eftir og tí ikki kundi lesa sín teldupost á Dimmalætting. Fyrr um morgunin hevði eg kunnað A um útnevningina pr. telefon. Almenna kunningin fór fram við at seta grein í Dimmalætting sama dag. Áðrenn blaðið kom

í leysasølurnar, varð greinin um hetta leysgivin á heimasíðu okkara kl. 11:45. *Tað er sostatt als ikki rætt, tá Javnstøðunevndin í skrivi sínum um hetta tekur soleiðis til: „Hetta tykist einans vera fráboðað A í blaðnum.“*

A sendir mær síðan teldupost sama seinnapart kl. 14:39 og biðjur um fund mánadagin, eftir, men longu seinni um kvøldi kl. 23.19 sendir hon sína uppsøgn við telduposti og avlýsir samstundis fundin mánadagin. Eg vendi aftur til hana og biði um møguleika at greiða nærri frá avgerðini og møguliga finna eina loysn, soleiðis at hon kann halda áfram í starvinum. Hetta játtar hon, og vit halda fund mánadagin 4. oktober, har vit fáa tosað tingini ígjøgnum enn einaferð.

Fundurin varð hildin í einum góðum anda, men tá evnið kom inn á C, var tað heilt týðiligt, at hon sá niður á hann við at tosa um hann í neiligum vendingum og umtala hann „krambakall“, samstundis sum hon áhaldandi upphevjaði sína egnu bókligu bakgrund og sítt akademiska støði. Tá eg vísti á hansara úrslit og persónligu kvalifikatiónir sum grundgeving fyri, at eg hevði praktiserað mín leiðslurætt á tann hátt, eg hevði, lat hon klárt skína ígjøgnum, at hon ikki kundi eyðmýkja seg til at arbeiða undir honum.

Dagin eftir setir hon síni endaligu krøv fyri at halda áfram í starvinum fram skrivliga (meylur 5. oktober kl. 19:18), sum Javnstøðunevndin eisini siterar burturúr í skrivi sínum. Í stuttum vil hon als ikki hava við C at gera og ynskir sjálv at verða marknaðarleiðari síðuordnað C, sum í staðin skal gerast sølu- og avgreiðsluleiðari.

Av tí at tað ikki er innihald í starvinum til ein marknaðarleiðara burturav, og av tí at hetta alternativ vildi skapa stríð millum „søludeildina“ og „marknaðardeildina“ á søluøkinum, avvísi eg hennara ultimatum í meyli 6. oktober kl. 16:02, har eg grundgevi fyri teimum trimum punktunum, ið hon førir fram í meyli sínum dagin fyri. Hetta meyl kenna tit, eins og tit kenna svarið seinni um

dagin, har hon í meyli sínum kl. 17:46 samanber støðuna við eina støðu, har ein navngivin miðlagrafikaralærlingur skuldi verið settur sum leiðari fyri mest roynda grafikaran á Reprodeildini. Við slíkari samanbering niðurger A dygdirnar hjá C enn einaferð – hesu ferð skrivliga – og avdúkar ein framhaldandi manglandi vilja at viðurkenna kvalifikatiónir hansara.

Tá A tann 8. oktober kl. 09:21 við meyli kunnaði øll starvsfólk á Dimmalætting um sína uppsøgn og royndi at vinna sær sympati, undraðust fólk almikið, tí semja tyktist at vera í húsinum um, at hon ikki var egnað sum sølu- og marknaðarleiðari. Hendan niðurstøða bleiv bara váttað, tá hon seinni valdi at stilla upp í Kvinnu og har útstillaði sína egnu sjálvsøknu fatan av málinum. Tó var semja um, at tað var gott, at málið hevði viðført, at hon hevði funnið „ta røttu hillina" í lívi sínum, nú hon hevði verið við at keypt handilin „…", sum tað framgekk av greinini.

Vónandi hevur nevndin hervið fingið eina sindur meiri nuanseraða mynd av málinum, og meta vit okkum at hava grundgivið fyri, at útnevningin av C einki hevði við barnsburðarfarloyvi hjá A at gera. Vit skulu undirstrika:

- at um C ikki var egnaður, høvdu vit lýst starvið leyst, tí A ikki hevði neyðugu leiðsluroyndirnar og heldur ikki viðføddu eginleikarnar á hesum økinum.
- at tíðspunktið fyri útnevningina hevði við broyttu hølisumstøðurnar at gera, eftir at arkprentsmiðjan varð fusionerað í Føroyaprent
- at talan als ikki var um setan av minni útbúgvnum persóni við styttri og minni viðkomandi royndum, men setan av persónliga betri egnaðum persóni við viðkomandi royndum
- at ætlanin ongantíð var at siga úr starvi ella niðurflyta nakran í sambandi við stovnanina av nýggju Tænastudeildini, men at samskipa og útnytta kompetensuna hjá starvsfólkunum best møguligt, har neyðugt var, at ein nýggjur leiðari á deildini hevði ábyrgdina av at samskipa og leggja søluarbeiðið til rættis

- at talan ikki var um, at nakar yvirtók ábyrgdarøkið hjá A, tí hon skuldi arbeiða við júst somu økjum sum frammanundan.
- at ongar broytingar í lønar- og starvstreytum annars vórðu gjørdar hjá starvsfólkunum í samanløgdu Tænastudeildini, í sambandi við at henda varð sett á stovn.

Vit á Dimmalætting eru sjálvsagt sera kedd av, at A skuldi taka tað so persónliga, sum hon gjørdi við at siga upp, og at málið enn nívir hana so mikið, at hon so langa tíð eftir velur at leggja málið fyri Javnstøðunevndina. Men tað eydnaðist mær tíverri ongantíð at fáa hana at góðtaka mín leiðslurætt og mína niðurstøðu um, at C var kvalifiseraður at átaka sær leiðarastarvið fyri samanløgdu Tænastudeildina.

Leiðslan á Dimmalætting hevur valt ikki at svara hennara almennu útspilling av okkum aftur (hóast navn okkara ikki stendur nevnt í greinini í Kvinnu, vita tey flestu, hvat virkið talan er um), tí hetta hvørki vil tæna A ella Dimmalætting."

Javnstøðunevndin hevur sent pørtunum soljóðandi skriv, dagfest 14. aug. 2007:

**„Evni: hoyringsskriv um brot á § 6 í løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu**

Góðu tit,
Javnstøðunevndin hevur tikið málið upp sambært javnstøðulógini og hevur tikið samanum upplýsingarnar frá A í hoyringsskrivi sínum dagsfest 25. juni 2007, og hevur fingið hoyringssvar frá Dimmalætting dagfest 9. juli 2007.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 14. august 2007 og fer ætlandi at taka avgerð í málinum á fundi 3. oktober 2007.

**Upplýsingar í málinum**
A varð í 2002 sett í starv sum marknaðarleiðari við ávísing til

stjóran, A fer á vári 2004 í barnsburðarfarloyvi, men er kortini við á fundum undir farloyvinum. Umleið 1. oktober 2004 ger leiðslan av at tilneva annan persón til leiðara fyri sølu- og marknaðarføring á Dimmalætting.

Spurningurin er, hvørt A tá var niðurflutt í starvi ella á annan var fyri vanbýti í samband við barnsburð eftir § 6 í javnstøðulógini. Arbeiðsgevarin hevur próvbyrðuna fyri, at talan ikki er um mismun vegna viðgongu og barnsburð.

**Hoyring**
Javnstøðunevndin heitir á báðar partar um í góðari tíð áðrenn næsta fund nevndarinnar 3. oktober 2007 at gera síðstu viðmerkingar sínar, og serliga leggja dent á:

1) Nærri lýsing av setanarviðurskiftinum undan og áðrenn oktober 2004.
2) Nærri lýsing av grundgevingum, ið eru nevndar fyri ikki at seta A sum leiðara, serliga um grundgevingar fyri at flyta A niður í starvi ella ikki seta hana í starv, t.d. tá ið sagt verður í skrivi frá Dimmalætting 9. juli 2007, at „hon ikki var egnað sum sølu- og marknaðarleiðari.“
3) Málskrøv og útgreinan av lønarviðurskiftum. Heldur nevndin, at virkið hevur brotið javnstøðulógina, skal nevndin áseta samsýning eftir § 6, stk. 4, tí tørvar okkum upplýsingar og sjónarmið um lønarviðurskifti, starvsaldur og viðkomandi umstøður annars.

**Nærri um lógarásetingar**
Sambært javnstøðulógini § 6, stk. 1 hava løntakarar rætt at vera burtur úr arbeiði í samband við viðgongu, barnsburð og eftir barnsburð sambært lóg og/ella sáttmála. Hetta merkir, at vanliga skal løntakari sleppa í sama starv eftir lokið barnsburðarfarloyvi.

Ásett er í § 6, stk. 4, at verður løntakari uppsagdur ella fyri vanbýti ímóti reglunum, skal arbeiðsgevarin rinda samsýning,

sum í mesta lagi svarar til løn í 50 vikur, alt eftir starvsaldri og umstøðunum annars.

Eftir javnstøðulógini § 6, stk. 5, áliggur arbeiðsgevaranum at prógva, at uppsøgnin ikki var grundað á viðgongu og barnsburð. Henda próvbyrða má lyftast við at leggja fram viðkomandi skjøl.

Sambært javnstøðulógini § 3, stk. 1 er ikki loyvt arbeiðsgevara at gera mismun í sambandi við starvsmeting, starvsflyting, lønarflokking, arbeiðsumstøður og annað vegna kyn. Eftir § 2 er bæði beinleiðis og óbeinleiðis mismunur fevndur av lógini.

**Ummæli**
Biðið verður um skrivligu ummæli tykkara. Til ber at seta seg í samband við skrivstovu nevndarinnar á telefon …, teldupost javnratt@javnratt.fo postboks 366, 110 Tórshavn."

Við skrivi, dagfest 5. sept. 2007, hevur Dimmalætting latið Javnstøðunevndini soljóðandi viðmerkingar:

„**2. Hoyringsskriv**
Vit hava fingið skriv tykkara d. 14. august 2007, har tit biðja um okkara síðstu viðmerkingar av máli, ið A hevur lagt fyri Javnstøðunevndina.

Fyrst skulu vit rætta eina misskiljing, tá ið Javnstøðunevndin í skrivinum undir brotinum „Upplýsingar í málinum" førir fram, at A varð í 2002 sett sum marknaðarleiðari vísandi til stjóran. Tað var hon ikki! Sum vit eisini førdu fram í skrivi okkara d. 9/7-07 (2. reglubrot á 1. síðu), var hon sett sum sølu- og marknaðarfólk saman við F.

Marknaðarleiðarafunktiónina røkti eg sjálvur. Eg havi eina kandidatútbúgving innan marknaðarføring og royndir sum m.a. marknaðarleiðarí í táverandi Føroya Sparikassa, og tí var tað natúrligt fyri meg at røkja hesa uppgávuna sjálvur sum ein

partur av stjórastarvinum. Øll marknaðarátøk vórðu gjørd í samráð við undirritaða og góðkend av mær, og hvørki A, ella F undan henni, høvdu tí marknaðarleiðaraheimildir. Hetta var eisini fult í tráð við teirra setanartreytir.

Javnstøðunevndin biðjur í skrivi sínum okkum um í okkara síðstu viðmerkingum at leggja dent á trý punkt, ið vit skulu royna at greina soleiðis:

ad 1)
Til at útgreina setanarviðurskiftini viðleggja vit avrit av starvssáttmála d. 25. september 2002. Vit skulu vísa á §2, har tað verður ásett fylgjandi: „Starvssetti verður settur sum sølu- og marknaðarfólk. Tænastustaður er í løtuni Marknaðardeildin, og arbeiðið fevnir um arbeiði, sum hoyrir marknaðardeildini til". Tá A verður sett sum „sølu- og marknaðarfólk", inniber hetta onga leiðsluheimild ella -ábyrgd.

Tað er ikki í sáttmálanum ásett, hvønn hon vísir til, men av tí at eg sum stjóri eisini var marknaðarleiðari, vístu bæði A og F til mín.

Eftir 1. oktober fyriliggur av góðum grundum eingin nýggjur starvssáttmáli, tí A ongantíð kom aftur úr barnsburðarfarloyvi sínum, tí hon valdi at siga seg úr starvi.

ad 2)
Grundgevingarnar fyri ikki at útnevna A til sølu- og marknaðarleiðara eru neyvt útgreinaðar í skrivi okkara d. 9/7-07. Tað skal enn eina ferð staðiliga staðfestast, at A ikki á nakran hátt skuldi flytast niður í starv, men at hon skuldi arbeiða við júst somu arbeiðsuppgávum og til somu treytir, tá hon kom aftur til arbeiðis eftir lokið barnsburðarfarloyvi.

Eg skal bert sláa fast:
I. Tað hevur ongantíð verið upp á tal, at A skuldi ella kundi røkja starvið sum sølu- og marknaðarleiðari á nýggju Tænastudeildini. Hetta vænti eg eisini at hon er samd í.

II. Grundarlag var og er ikki fyri at seta ein marknaðarleiðara burturav á Dimmalætting.

ad 3)
Av tí at eingin niðurflyting er farin fram, er ikki so nógv at útgreina viðv. lønarviðurskiftunum. Tað skal undirstrikast, at eingin útmelding er komin frá leiðsluni yvirhøvur, um at A skuldi niður í løn, eftir at C varð útnevndur leiðari fyri Tænastudeildina. Tvørturímóti trongdi starvssáttmáli hennara til at dagførast, soleiðis at lønin kundi regulerast/hækkast fyri innvunnan starvsaldur og -royndir, men hetta fingu vit, sum kunnugt, ikki høvi til.

Viðvíkjandi lønini kann tó víðmerkjast, at avtalaða lønarlagið í 2002 var á hædd við starvsmannafelagssáttmálan lønarflokk 4, ið sambært tí sáttmálanum fevndi um „fjøltáttað, sjálvstøðugt arbeiði" og „samskipandi uppgávur". Deildarleiðarar verða eftir starvsmannafelagssáttmálanum settir inn í flokk 6 og 7. Tí kann ein heldur ikki út frá lønartreytunum siga, at A hevði grundaða orsøk at halda, at hon varð sett sum leiðari fyri táverandi marknaðardeildina.

Tað starvið, A umrøður í samskiftinum við meg – og seinni í samskiftinum við Javnstøðunevndina, og sum hon kundi hugsað sær – er ikki starvið sum sølu- og marknaðarleiðari, sum C fekk, men eitt starv sum marknaðarleiðari burturav. Hetta er eitt starv, sum ongantíð hevur verið upp á tal og ongantíð kemur upp á tal at seta á Dimmalætting, tí tað ber raksturin á einum virki á støðd við Dimmalætting snøgt sagt ikki.

Men hevði tað komið upp á tal, hevði C ikki verið tann rætti at sett í hetta starv vegna vantandi førleikar. Tað, sum var avgerandi fyri útnevningina av honum, vóru heldur ikki hansara marknaðarførsluførleikar men hansara søluúrslit og leiðsluroyndir, ið vóru mest týðandi fyri høvuðsuppgávurnar hjá nýggju Tænastudeildini. Grundarlag er tí als ikki fyri at draga javnstøðulógina inn í hetta mál.

Vit ivast heldur ikki í, at Javnstøðunevndin er greið yvir – og vil taka atlit til – at umsitingin av javnstøðulógini ikki má viðføra, at arbeiðsgevarar verða frátiknir sín leiðslurætt í málum sum hesum.“

Javnstøðunevndin hevur sent pørtunum soljóðandi skriv, dagfest 10. januar 2007 (árstalið skal vera 2008):

**„Evni: mál um ósemju millum Dimmalætting/B, stjóra, og A, fyrrverandi marknaðarfólk á Dimmalætting**

Góðu tit,
Javnstøðunevndin hevur tikið málið upp sambært javnstøðulógini. Nevndin hevur fingið munnligar og skrivligar upplýsingar frá A og tvey hoyringssvar frá Dimmalætting dagfest ávv. 9. juli 2007 og 5. september 2007 sum svar upp á áheitan frá nevndini ávv. 25. juni 2007 og 14. august 2007.

Í hoyringsskrivunum greiðir Dimmalætting/B frá sjónarmiðum sínum. Út frá frágreiðingunum hjá pørtunum báðum skilst, at teir standa langt frá hvør øðrum, og ymisk ógreið viðurskifti eru.

Sambært javnstøðulógini § 6, stk. 1 hava løntakarar rætt at verða burtur úr arbeiði í samband við viðgongu, barnsburð og eftir barnsburð sambært lóg og/ella sáttmála. Ásett er í § 6, stk. 3, at verður løntakari uppsagdur ella fyri vanbýti ímóti reglunum, skal arbeiðsgevarin rinda samsýning, sum í mesta lagi svarar til løn í 50 vikur, alt eftir starvsaldri og umstøðunum annars.

Eftir javnstøðulógini § 6, stk. 5, áliggur tað arbeiðsgevaranum at prógva, at uppsøgnin ikki var grundað á viðgongu og barnsburð.

Sambært javnstøðulógini § 3, stk. 1 er ikki loyvt arbeiðsgevara at gera mismun í sambandi við starvsmeting, starvsflyting, lønarflokking, arbeiðsumstøður og annað vegna kyn. Eftir § 2 er bæði beinleiðis og óbeinleiðis mismunur fevndur av lógini.

Nevndin metir ikki, at Dimmalætting/B í hoyringsskrivum sínum hevur ført fram nóg góð prógv um, at A ikki er degraderað ella fyri vanbýti (við at vera kroyst úr starvi sínum), meðan hon var í barsilsfarloyvi. Nevndin heldur seg hinvegin heldur ikki hava fingið nóg greiða kunning frá A um, hví hon valdi sjálv at siga seg úr starvi.

Tí er trupult hjá nevndini at taka avgerð í málinum.

**Nevndin fer tí at heita á partarnar um at koma á fund við nevndina mikudagin 16. januar kl. 15 í Portugalinum í Tinganesi at greiða munnliga frá sjónarmiðum sínum.**

Haraftrat verða partarnir bidnir um at hava møguligt skrivligt tilfar við (t.d. fundarfrásagnir), sum nevndin ikki hevur fingið, og sum kann hava týdning fyri málið. Nevndin fer síðan væntandi at taka avgerð í málinum beinanvegin.

Um ikki ber til at møta ásetta dagin, gerið so væl og sigið frá, so annar dagur kann finnast."

Tann 11. jan. 2008 hevur B sent Javnstøðunevndini soljóðandi teldubræv:

„Vit hava móttikið skriv tykkara d. 10. januar 2008, har tit heita á partarnar í málinum millum Dimmalætting og A um at koma á fund við Javnstøðunevndina mikudagin 16. januar.

Eg skal hervið boða frá, at eftir okkara bestu sannføring er málið fult upplýst frá okkara síðu í hoyringsskrivum okkara frá 9. juli og 5. sept 2007, og at vit einki hava at leggja afturat munnliga heldur.

Vit kunnu tí ikki koma við nøkrum íkasti til málið við at møta á fundi og takka tí nei til innbjóðingina til fundin mikudagin."

Ætlaði fundurin hjá Javnstøðunevndini varð hildin 23. jan. 2008.

I, adv. hevur 23. jan. 2008, kl. 14.51 sent Javnstøðunevndini og B teldubræv, har sagt verður, at hann og A koma á fund við nevndina kl. 15.15. Viðheft teldubrævinum var soljóðandi skriv til nevndina:

> **„Viðv. máli millum Dimmalætting og A**
> Eg vísi til skjøl, sum eg havi fingið frá Javnstøðunevndini í sambandi við omanfyri nevnda mál.
>
> Eg skal vegna A gera galdandi, at talan er um brot á § 6, stk. 1, í javnstøðulógini, umframt at talan eisini er um brot á § 3, stk. 1, í somu lóg.
>
> Dimmlætting hevur sent Javnstøðunevndini tvey skriv, nevniliga 9. juli og 5. september 2007.
>
> Tað eyðkennir tað, sum er ført fram frá Dimmalætting í hesum máli, at talan í einum og øllum er um eftirfylgjandi grundgevingar, sum A ikki er kunnað um ella hevur fingið møguleika at gera viðmerkingar til, áðrenn Dimmalætting tók avgerð um at gera munandi broytingar í starvsviðurskiftum hennara, meðan hon var í barnsburðarfarloyvi, og áðrenn hon kom aftur í starv í Dimmalætting eftir hetta barnsburðarfarloyvi.
>
> Í brævinum frá 9. juli 2007 verður ført fram í øðrum broti, at A byrjaði í starvi, og at hon tá starvaðist saman við F. Tá F fór úr starvi 1. januar 2003, arbeiddi A eina tíð saman við H, sum arbeiddi bæði sum grafikari og marknaðarfólk, til hann fór úr starvi á heysti 2003. Hon hevur síðani arbeitt einsamøll í nakrar mánaðir, til C varð settur í starv 1. mars 2004, ið var ein mánaða undan, at A fór í barnsburðarfarloyvi.
>
> Við øðrum orðum hevur A frá 1. januar 2003 fram til, at hon fer í barnsburðarfarloyvi, verið „fasta elementið" á marknaðardeildini.
>
> Afturat hesum kemst ikki uttanum, at A hesa tíðina hevur havt reellu leiðsluna av hesi deildini, tó at hon hevur arbeitt við

tilvísing til stjóran. Tað skal eisini viðmerkjast, at tann, sum seinni varð settur í starv sum leiðari fyri hesa deildina, eisini hevur tilvísing til stjóran.

Tá Dimmalætting seinni velur at seta C sum leiðara fyri m.a. ta deildina, sum A hevði havt reellu leiðsluna av frammanundan, og hetta verður gjørt, uttan at A á nakran hátt verður hoyrd ella fær annan møguleika fyri at gera viðmerkingar, má niðurstøðan vera, at Dimmalætting ikki hevur lyft prógvbyrðuna, sum liggur á fyritøkuni, eftir § 6, stk. 5, í javnstøðulógini.

At Dimmalætting hevur umskipað og lagt ymiskar deildir saman, broytir ikki tað, at Dimmalætting í minsta lagi átti at havt hoyrt A og givið henni høvi til at komið við viðmerkingum, áðrenn munandi broytingar vórðu gjørdar í starvsviðurskiftum hennara við tað, at annar persónur varð settur í tað starv, sum hon hevði, áðrenn hon fór í barnsburðarfarloyvi.

Í hesum sambandi er serliga at viðmerkja, at A saman við B og C tveir mánaðir undan, at hon skuldi koma aftur í starv, og meðan hon enn var í barnsburðarfarloyvi, var tveir dagar í Danmark, har vitjað varð á ymiskum bløðum, og framtíðarætlanir hjá Dimmalætting vórðu viðgjørdar.

Heldur ikki á hesum túri fekk A nakað at vita um, at starvsviðurskifti hennara skuldu broytast, tá hon kom aftur í starv eftir barnsburðarfarloyvi, og hon fekk heldur einki at vita um, at persónligu eginleikar hennara vóru soleiðis, at hon ikki kundi koma aftur í starvið, sum hon hevði, tá hon fór í barnsburðarfarloyvi.

Tað er einki í málinum, sum bendir á, at Dimmalætting á nakran hátt hevur funnist at arbeiðinum og tí dagligu leiðslu, sum A hevur havt av marknaðarpartinum hjá Dimmalætting.

Tað er ikki fyrr enn eftir, at Javnstøðunevndin vendi sær til Dimmalætting, at grundgevingar um vantandi persónligar eginleikar og líknandi verða førdar fram.

Hevði Dimmalætting havt ført hetta fram, áðrenn avgerð varð tikin um at seta C í starv sum leiðara á hesi deild, kundi tað komið uppá tal, at Dimmalætting hevði gjørt eina roynd at lyft próvbyrðuna eftir § 6, stk. 5.

Tá Dimmalætting velur at gera tílíkar broytingar uttan at geva A møguleika fyri at føra síni sjónarmið fram, má niðurstøðan eisini vera, at Dimmalætting má metast ikki at hava lyft próvbyrðu sína eftir § 6, stk. 5 í javnstøðulógini.

Dimmalætting leggur í einum hoyringsskrivi sínum eisini stóran dent á, at A skal hava úttalað seg negativt um C teir dagarnar, tá henni gjørdist greitt, at ein annar persónur hevði fingið tað starvið, sum hon reelt hevði røkt, áðrenn hon fór í barnsburðarfarloyvi.

Fyri tað fyrsta er eisini her talan um eftirfylgjandi grundgevingar, har úttalilsi, sum Dimmalætting sigur A hava ført fram, eftir at avgerð var tikin um, at C skuldi setast í starv, og eftir at avgerð var tikin um, at A ikki skuldi koma aftur í starvið, sum hon hevði, áðrenn hon fór í barnsburðarfarloyvi, verða brúkt sum grundgeving fyri, at tað var rætt, at hon ikki fekk starvið sum leiðari á marknaðardeildini.

Afturat hesum sýnist tað lítið virðiligt at brúka úttalilsi, sum A er komin við í eini støðu, sum hevur verið sera stressandi fyri hana, ímóti henni. Dimmalætting átti sum arbeiðsgevari at vitað, at støðan, sum A var í, tá henni varð greitt, at ein annar fekk starvið, sum hon hevði røkt, áðrenn hon fór í barnsburðarfarloyvi, var stressandi fyri hana, og at hon var kroyst í hesi støðu.

At talan í minsta lagi kann hava verið um ósaklig atlit, stuðlast eisini av, at A útbúgvingarliga hevur verið betri fyri enn C.

A útbúgving, sum svarar til fyrsta part í HD umframt drúgvar royndir frá starvinum á Dimmalætting, meðan C sambært upplýsingum frá Dimmalætting hevur FHS umframt handilsútbúgv-

ing. Tað skal viðmerkjast, at eingin skjalprógvan er løgd fram fyri teimum royndum, sum Dimmalætting vísir til viðvíkjandi C.

At einki er skrivað í sáttmálanum hjá A um, at hon er sett sum leiðari á marknaðardeildini, prógvar ikki, hvussu veruliga innihaldið í starvi hennara hevur verið, og tí kann sáttmálin í sær sjálvum heldur ikki brúkast at lyfta próvbyrðuna, sum sambært § 6, stk. 5, áliggur Dimmalætting.

Sum tað er Javnstøðunevndini kunnugt, kemur tað oftani fyri, at starvssáttmálar ikki lýsa reella starvsinnihaldið hjá teimum, sum sáttmálin er galdandi fyri, og tað, at A heldur ikki hevur fingið løn sum leiðari, kann heldur ikki brúkast sum prógv í hesum sambandi.

Tað er eisini vert at viðmerkja, at Dimmalætting í brævi sínum til Javnstøðunevndina frá 5. september 2007 vísir til, at sáttmálin skuldi dagførast, av tí at hann ikki samsvaraði veruligu støðuna hjá A.

Orsøkin til at A segði seg úr starvi, tá henni gjørdist greitt, at hon ikki kundi koma aftur í gamla starv sítt á Dimmalætting, er at hon kendi seg degraderaða, og at talan eftir hennara tykki var um brot á rættindi hennara sambært lóg um javnstøðu.

**Samanumtikið**
Samanumtikið skal eg vegna A gera galdandi, at talan er um brot á javnstøðulógina, og at Dimmalætting tí hevur skyldu til at rinda A samsýning eftir antin § 6, stk. 4, ella § 3, stk. 3, í lóg um javnstøðu.

Eg skal vísandi til tað, sum er ført fram omanfyri, minna á, at ongar grundgevingar eru givnar A fyri, hví hon ikki skuldi koma aftur í tað starv, sum hon hevði áðrenn barnsburðarfarloyvið.

Grundgevingarnar, sum Dimmalætting hevur ført fram í málinum, eru eftirfylgjandi grundgevingar, sum A ikki hevur fingið boð um, áðrenn hon fór í barnsburðarfarloyvi.

Tó at lønarviðurskiftini hjá A ikki eru broytt, má sigast, at hon reelt er degraderað við, at hon ikki er komin aftur í tað starvið, sum hon hevði, áðrenn hon fór í barnsburðarfarloyvi.

Dimmalætting kann ikki metast at hava lyft ta próvbyrðu, sum liggur á fyritøkuni eftir § 6, stk. 5, í lóg um javnstøðu, og tí má niðurstøðan vera, at talan er um brot á hesa lóg.

Eg skal eisini heita á Javnstøðunevndina um at áseta samsýning eftir antin § 3, stk 4, ella § 3, stk 3. Samsýningin eigur í minsta lagi at verða ásett við útgangsstøði í muninum á løn, sum A hevði, áðrenn hon fór í barnsburðarfarloyvi, og tí løn, sum varð goldin C, tá hann varð settur í starv sum leiðari fyri m.a. marknaðardeildina.

Viðvíkjandi tíðarskeiði eigur samsýningin at verða ásett fyri í minsta lagi 25 vikur."

Tann 23. jan. 2008, kl. 15.59 hevur B sent Javnstøðunevndini soljóðandi teldubræv:

„I, adv., hevur upplýst, at hann skal á fund við Javnstøðunevndina í málinum millum Dimmalætting og A.

Eg skal hervið heita á Javnstøðunevndina um at fáa innlit í nýggj skriv og freist til hoyring av nýggjum pástandum í málinum vísandi til Fyrisitingarlógina."

Tann 24. jan. 2008, kl. 23.56 hevur Javnstøðunevndin svarað Dimmalætting í soljóðandi teldubrævi:

„Tá mailurin frá tær kom í gjár, hevði nevndin tikið avgerð í málinum.

Hjálagt er nýggjasta skrivið frá I, advokati, í sambandi við málið

> um A. Endaliga avgerðin hjá javnstøðunevndini í skrivligum formi verður væntandi klár í morgin, og eg sendi tær hana tá.
>
> Meginparturin av javnstøðunevndini fer frá í næstum, og nevndin skal sostatt mannast av nýggjum. Um tú vilt, kanst tú biðja nýggju nevndina taka málið upp av nýggjum."

Tann 25. jan. 2008 hevur B sent Javnstøðunevndini soljóðandi teldubræv:

> „Í skrivinum hjá Javnstøðunevndini d. 10. januar 2008 (sjálvt um tað í skrivinum stendur 2007!) førir nevndin fram, at hon ikki hevur nóg góðar upplýsingar í málinum til at taka avgerð í málinum og heitir partarnar at koma á fund við seg munnliga at greiða frá sjónarmiðum sínum 16. jan. Havi sjálvur grundgivið hví eg ikki vildi møta í meyli d. 11. januar, men havi skilt at mótparturin hevur verið á fundi við nevndina 23. januar.
>
> Um nevndin á fundinum er komin til niðurstøðu, ið gongur kæraranum ímót, eru eingir nýggir, avgerðandi upplýsingar komnir fram í málinum, og hevur kærarin tí ikki kunna prógva, at hon hevur verið fyri vanbýti.
>
> Um nevndin eftir hendan fundin er komin til niðurstøðu, ið gongur okkum ímót, mugu sostatt nýggir, avgerðandi upplýsingar vera komnir fram í málinum. Hesir upplýsingar hava vit krav um at fáa til hoyringar samb. fyrisitingarlógini, og vildi ein slík avgerð tí verið ólóglig. Skjótasta loysn hjá okkum vildi sostatt verið at kært hana til Umboðsmannin. Vónandi kemur málið ikki so langt."

Við teldubrævi tann 27. jan. 2008, kl. 01.43 hevur Javnstøðunevndin svarað B, at nevndin tók avgerð á fundi 23. januar, og at hendan er send við postinum 25. januar.

Avgerðin hjá Javnstøðunevndini, dagfest 25. jan. 2008, er soljóðandi:

„**A móti P/F Dimmalætting – mismunur vegna viðgongu og barnsburð**
Javnstøðunevndin er sett sambært løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu.

Í nevndini sita í hesum máli:
J, formaður
K umboðandi arbeiðsgevarar
L umboðandi løntakarar
M umboðandi Kvinnufelagasamskipan Føroya
N umboðandi skúla-, heilsu-, og almannaverkið.
O er nevndarskrivari.

Nevndin hevur tikið meirilutaavgerð í hesum máli, tí K var ikki á fundi, tá ið endaliga avgerðin var tikin; K hevur ikki verið á fundi, síðani hann fór úr starvi sínum í Vinnuhúsinum, og ikki hevur borið til hjá varaumboði at møtt.

**Viðgerð av málinum**
Sambært javnstøðulógini § 9, litra 1 skal javnstøðunevndin hava eftirlit við, at lógin verður hildin, og sambært § 11, stk. 1-2 kunnu fólk, ið halda seg vera fyri mismuni kæra til nevndina, ið síðani kann taka málið upp.

A í Tórshavn hevur lagt mál fyri nevndina um møguligt brot á ásetingina, ið verjir ímóti mismuni í samband við viðgongu og barnsburð.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fylgjandi nevndarfundum:
1. 4. apríl 2007
2. 14. august 2007
3. 6. november 2007
4. 9. januar 2008
5. 23. januar 2008

Nevndin hevur skrivað hesi skriv:
1. Hoyringsskriv til Dimmalætting 25. juni 2007
2. Felags hoyringsskriv til Dimmalætting og A 14. august 2007
3. Felags hoyringsskriv til Dimmalætting og A 10. januar 2008

Nevndin hevur fingið hesi skjøl:
1. Teldupostsamskifti
2. Hoyringssvar frá Dimmalætting dagfest 9. juli 2007
3. Hoyringssvar frá Dimmalætting dagfest 5. september 2007
4. Hoyringssvar frá I advokati vegna A, dagfest 23. januar 2008.

Á fundi 23. januar 2008 møttu:
1. I og A,
2. B segði uppringdur, at hann vildi ikki møta.

Umframt skrivligu viðgerðina hava skrivari og nevndarlimir vegleitt partarnar um málið.

Nevndin tók støðu sína á fundi 23. januar 2008.

**Lógargrundarlag alment**

Hóast javnstøðulógin hevur verið í gildi í meira enn tíggju ár, tykjast fáar avgerðir at verða tiknar um mismun sambært §§ 3-7 í lógini. Tí nýtti nevndin høvi at greiða frá lógini og tulking av henni í avgerð síni í málinum Óluva móti Grón, ið eisini var um mismun vegna viðgongu og barnsburð. Víst verður til almennu tulkingina í tí málinum.

**Lógargrundarlag eftir § 6 í javnstøðulógini**

Sambært javnstøðulógini § 6, stk. 1 hava løntakarar rætt at verða burtur úr arbeiði í samband við viðgongu, barnsburð og eftir barnsburð sambært lóg og/ella sáttmála. Ásett er í § 6, stk. 3, at verður løntakari uppsagdur ella fyri vanbýti ímóti reglunum, skal arbeiðsgevarin rinda samsýning, sum í mesta lagi svarar til løn í 50 vikur, alt eftir starvsaldri og umstøðunum annars.

Eftir javnstøðulógini § 6, stk. 5, áliggur tað arbeiðsgevaranum at prógva, at uppsøgn ella annað vanbýti ikki var grundað á viðgongu og barnsburð.

Hesar ásetingar avmarka vanligu leiðsluheimildirnar hjá arbeiðsgevara. Tær vísa til aðrar ásetingar viðvíkjandi rætti til orlov, tær bera í sær próvbyrðureglu, og tær áleggja at bøta fyri brot.

At løntakari eigur „rætt at vera burtur" eftir § 6, merkir, at vanliga atgongdin at siga fólki úr starvi eftir vild er óheimilað ta tíðina, tá viðkomandi eftir lóg ella sáttmála hevur orlov. Løntakari kann kortini verða sagdur úr starvi, *um viðkomandi óheft av viðgongu hevði verið sagdur úr starvi.* Arbeiðsgevari kann minka um virksemi sítt, kann umskipa tað, kann meta løntakaran óegnaðan, kann vilja hava onkran annan í starv; arbeiðsgevarin kann enntá hava onkran subjektivan óvilja ímóti løntakaranum; allar hesar orsøkir kunnu brúkast at siga fólk úr starvi. Men bæði orsøkir og ætlanir mugu fyriliggja óheft av viðgonguni.

Í viðmerkingunum til lógina verður sagt á síðu 681 í løgtingstíðindum 1992; „Ætlanin [er] at tryggja løntakarum í sambandi við barnsburð (fyri, undir og eftir), soleiðis, at løntakarin ikki lættliga kann sigast upp, tí hesin hevur kravt tey rættindi, sum galdandi lóg ella sáttmáli ásetir."

Júst tí er próvbyrðureglan so týðandi. Arbeiðsgevarin skal prógva, at uppsøgnin ikki var grundað á „hesi viðurskifti," tvs. at viðkomandi vildi gera rættindi síni um orlov galdandi í samband við viðgongu og barnsburð. Í hesum liggja tvinnanda liðir. Fyrri er, at arbeiðsgevarin skal vísa á, hvørjar aðrar orsøkir vóru fyri uppsøgn. Seinni liður er, at arbeiðsgevarin má ávísa, at hesar orsøkir sjálvstøðugt førdu til uppsøgnina.

Próvbyrðan er tung at lyfta, um ikki ávísast kann, at ávaringar eru givnar, umskipanir samtyktar, ella aðrar greiðar próvførslur gera bæði orsøkir og ætlanir ítøkiligar, viðkomandi og nærar.

Verður staðfest, at talan er um mismun, er næsta stig at áseta samsýning ella eftir § 12 at umhugsa at áleggja at rætta brotið á annan hátt. Tá ið talan er um uppsøgn, man sjáldan vera onnur loysn møgulig enn at áseta samsýning. Orðið samsýning týðir uppá, at talan er um gjald, ið skal viga upp ímóti mismuninum, men kortini ikki neyvt svara til staðfest tap. Samsýning verður at áseta eftir meting, „verður at áseta eftir starvsaldri og umstøðum annars."

Í viðmerkingunum til § 3 verður sagt, at „Løntakarar, ið eiga uppsagnarløn, eiga hesa umframt."

Samsýningin skal vera ásett til løn faldað við tal av vikum. Seinna talið skal helst metast eftir tapi hjá løntakara og grovleika í atferðini hjá arbeiðsgevara; fyrra talið má metast eftir forvunnari og møguligari løn hjá løntakara, atlit mugu takast til, hvussu viðkomandi var starvssettur.

**Upplýsingar í málinum**
Sambært upplýsingum okkara, varð A sett í starv í ár 2002 á Marknaðardeildini við tilvísing til stjóran. Hon hevur útbúgving innan hetta øki, og ongar atfinningar hava verið móti starvi hennara; tvørturímóti hevur Dimmalætting latið henni viðmæli (anbefaling) eftir at starvsetanin var endað.

A fer á vári 2004 í barnsburðarfarloyvi, men er kortini við á ferð og fundum í Danmark um framtíðar marknaðarføring. Á nevndu ferð er hon av teirri fatan, at hon er við at leggja marknaðarføring Dimmalættingar til rættis sum avvarðandi leiðari.

Umleið 1. oktober 2004 ger leiðslan kortini av at tilnevna sølumann á stovninum til leiðara fyri sølu- og marknaðarføring á Dimmalætting. A fær boðið lægri tign og broytt starv til uppá seg verri treytir. Tað verður í telduposti boðað frá, at viðkomandi frá tí degi var „útnevndur sølu- og marknaðarleiðari við ábyrgd av bæði Avgreiðsluni og Marknaðardeildini." Sama stendur at lesa í blaðútgávu hjá Dimmalætting.

Samskifti er millum partanna, millum annað teldupostur frá A tann 5. oktober 2004, har hon førir fram, at hon vil sleppa aftur til arbeiðis, men hevur „grundleggjandi ting sum mugu fáast uppá pláss.“ Hesi eru leiðslutign, løn og ábyrgdarøki.

B, stjóri, svarar hesum telduposti millum annað við at orsaka framferðina, men henda gerð fær onga vend, og tí skal hann „greiða frá grundgevingum og processini, tá avgerðin var tikin.“ Henda frágreiðing er í stuttum, at hóskiligt er ikki við smáum deildum, at uppgávur ikki eru til eitt marknaðarfólk, at nevnda uppbýti tí ikki ber til.

Í samskiftinum førir A millum annað fram, at „Hetta bleiv ein tristur endi, sum sker inn í innastu hjartarót. Eg sigi meg úr starvi við upplivislinum av at [at verða troka burtur] í mínum barnsburðarfarloyvi, og at framferðarhátturin er so óverdigur at eg føli meg simpulthen kleytraðan og trakkaðan á. Ringasta upplivilsi í mínum lívi.“ A ger síðani samanbering við líkandi støðu á virkinum. Tann 8. oktober 2004 takkar A í telduposti hinum starvsfólkunum fyri starvstíð sína.

Umframt at hava fingið teldupostar frá A, hevur nevndin lisið grein, ið stóð í blaðnum Kvinnu fyri jól 2005. Í teirri greinini segði A frá, hvussu hon upplivdi framferðina sum „diskrimination“ ímóti kvinnu í barnsburðarfarloyvi.

Á fundinum 23. januar endurtók kærandi partur sjónarmið síni og greiddi frá, at B hevði verið sera óður um viðgonguna, umframt at Dimmalætting ikki hevði hildið lyfti síni um at hækka samsýning hennara við afturvirkni.

Dimmalætting hevur tvær ferðir skrivað nevndini brøv, men hevur frásagt sær høvi at møta á fundi við nevndina, tí virkið metti málið til fulnar upplýst.

Dimmalætting førdi í fyrru atløgu fram ymiskt, ið tykist vera eyðsýnt rætt viðvíkjandi hølisumstøðum og starvsetanum inn-

an sølu- og marknaðarøkið, men sum ikki broytir málið. Harumframt verður sagt, at:

- „Tað mest náttúrliga var tí at leggja hesar funktiónir saman í eina deild.“
- „Einasti munurin er, at hon í staðin fyri at at referara til mín nú skuldi referara til nýggja deildarleiðaran.“

Í aðru atløgu verður ført fram, at B sjálvur var marknaðaleiðari, eins og tikið verður afturíaftur umstøðurnar, ið førdi til samanlegging av funksjónum.

***Meting av próvførslu***

- At ætlanin var at fremja bygnaðarbroytingar vegna atlit til fígging, høli, marknað, starvsfólk ella annað er eyðvitað innanfyri leiðsluheimildir Dimmalættingar. Men onki er ført fram, hvørki skrivliga ella munnliga ella við prógvum av nøkrum slagi, at slíkar ætlanir vóru komnar í lag og vóru ávegis at verða framdar óheft av, at løntakarin var við barn. *Hesir upplýsingar tykjast viðkomandi, men ikki sannførandi.*
- At ikki er talan um niðurflyta A, uttan heldur at uppflyta annan løntakara, tykist vera at klúgva orð. At løntakari ikki skal vísa til stjórans, men heldur til annan leiðara, ið tekur við ábyrgdarøki viðkomanda og fær hægri tign og løn, er at meta sum niðurflyting. *Henda grundgeving tykist sera ósannførandi.*

*Um próvførslu*

Leggjast má dentur á, at javnstøðunevndin hevur lagt seg eftir at hoyra arbeiðsgevaran og geva honum høvi at lyfta próvbyrðu sína.

Nevndin hevur tvær ferðir skrivað Dimmalætting bræv. Í fyrra skrivi sínum til Dimmalættingar segði nevndin:
„Javnstøðunevndin metir, at greiðar ábendingar eru í málinum um, at Dimmalætting hevur vilja sagt úr starvi ella niðurflutt A í starvstign í samband við viðgongu og barnsburð. Ongar ábendingar eru um, at ætlanin var at gera broytingar í starvinum

hjá A undan barnsburðarfarloyvinum, men undir farloyvinum verður minni útbúgvin persónur við styttri og minni viðkomandi royndum settur í starvið hjá henni ella fær hennara ábyrgdarøki. Hetta tykist einans vera fráboðað A í blaðnum.

Vísandi til próvbyrðuna, ið liggur á arbeiðsgevaranum, og vísandi til Kap. 5 í fyrisitingarlógini um partshoyring, verður hervið biðið um ummæli tykkara av málinum…“

Í seinna skrivi sínum segði nevndin:
„Javnstøðunevndin heitir á báðar partar um í góðari tíð áðrenn næsta fund nevndarinnar 3. oktober 2007 at gera síðstu viðmerkingar sínar, og serliga leggja dent á:

1) Nærri lýsing av setanarviðurskiftinum undan og áðrenn oktober 2004.
2) Nærri lýsing av grundgevingum, ið eru nevndar fyri ikki at seta A sum leiðara, serliga um grundgevingar fyri at flyta A niður í starvi ella ikki seta hana í starv, td. tá ið sagt verður í skrivi frá Dimmalætting 9. juli 2007, at „hon ikki var egnað sum sølu- og marknaðarleiðari.“
3) Málskrøv og útgreinan av lønarviðurskiftum. Heldur nevndin, at virkið hevur brotið javnstøðulógina, skal nevndin áseta samsýning eftir § 6, stk. 4, tí tørvar okkum upplýsingar og sjónarmið um lønarviðurskifti, starvsaldur og viðkomandi umstøður annars.“

Undan fundinum 23. januar 2008 ringdi nevndarskrivarin til B og heitti á hann um at møta, men hann var týðuliga ónøgdur við, at nevndin ikki longu hevði víst málinum frá sær og segði seg ikki vilja møta, men vísti til svar síni higartil.

**Samanumtikið metir nevndin, at Dimmalætting ikki hevur lyft próvbyrðuna.**

***<u>Meting av próvførslu – samsýning</u>***
Lønin hjá A um kr. 5.000 um vikuna, tá ið uppsøgnin fór fram,

nýggi leiðarin fær um 7.500 í løn um vikuna, og var A lovað at fáa lønarhækking.

Nevndin metir tí, at rætta lønin at brúka um kr. 6.000 um vikuna.

Eftir er at meta, hvussu grovt brotið er.

Talan er um ávísan starvsaldur, men samstundis um at løntakari tekur seg úr starvi heldur enn at kæra málið fyri javnstøðunevndina fyrst. Hesi atlit toga hvør sín veg.

Tap og grovleiki merkja, at nevndin metir brotið grundað 25 vikur samsýning.

Nevndin metir tí, at samsýningin skal vera 6.000,00 kr./viku falda við 25 vikum = 150.000 kr.

**Niðurstøða**
Nevndin metir, at brot er framt á § 6 í javnstøðulógini, at A vegna uppsøgnina frá P/F Dimmalætting hevur verið fyri týðandi mismuni vegna viðgongu og eigur at fáa 25 vikur í løn sum samsýning, mettar til kr. 6.000. ella kr. 150.000 tilsamans.

**Avleiðingar**
Tekur P/F Dimmalætting ikki avgerð nevndarinnar til eftirtektar, ella verður semja ikki gjørd partanna millum, fer nevndin at umhugsa møguleikar sínar eftir lógini, ið eru í fyrsta lagi eftir § 11, stk. 5 at senda virkinum áheitan um at rinda ta nevndu samsýning fyri misbrotið, síðani eftir § 12 1) heita á ákæruvaldið um at reisa ákæru, 2) mæla til fría rættargongd, ella 3) leggja málið fyri rættin í borgarligari rættarsókn.

Avgerðin viðvíkur ikki undantøkum frá innliti og verður í fullum líki løgd í úrskurðarsavnið á heimasíðuni.

**Váttan**
Soleiðis samtykt á nevndarfundi.
J, formaður, (sign)
O, nevndarskrivari (sign)“

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 27. febr. 2008, varð klagan send Javnstøðunevndini til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur.

Við skrivi, dagfest 18. mars 2008, hevur Javnstøðunevndin latið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

**„Viðv. Klagu frá Dimmalætting, dagfest 1. februar 2008**
Takk fyri bræv tygara dagfest 27. februar 2008, har tygum biðja um frágreiðing og avrit av skjølum í málinum um A og B / Dimmalætting.

**Frágreiðing**
Javnstøðunevndin hevði samband við A á sumri 2007, har A greiddi frá málinum og sínum sjónarmiðum. A ynskti at kæra málið, og út frá hennara munnligu frágreiðing og skjølum (t.d. teldupostasamskifti) skrivaði Javnstøðunevndin hoyringsskriv til Dimmalætting dagfest 25. juni 2007 (hjálagt)

Dimmalætting svarar aftur í brævi dagfest 9. juli 2007 (hjálagt). Sum tað framgongur av brævinum, hevur Dimmalætting eina aðra uppfatan enn A. Í javnstøðulógini, § 6, stk. 5, stendur: „Verður løntakari uppsagdur ella á annan hátt fyri vanbýti í viðgongutíðini, undir barnsburði, eftir barnsburð ella ættleiðing, áliggur tað arbeiðsgevaranum at prógva, at uppsøgnin ikki var grundað á hesi viðurskifti.“ Nevndin helt ikki, at Dimmalætting í brævinum frá 9. juli hevði lyft próvbyrðuna og gjørdi tí av at senda pørtunum nýtt hoyringsskriv dagfest 14. august 2007 (hjálagt), har partarnir verða bidnir um at greiða nærri frá áðrenn javnstøðunevndarfund 3. oktober 2007, tá nevndin ætlar at taka avgerð (hesin fundur bleiv útsettur til 6. november

2007, men tá fekk málið um A og Dimmalætting ikki drúgva viðgerð).

Dimmalætting svarar aftur í brævi dagfest 5. september 2007 (hjálagt). A hevur (óvist síðan nær) latið I føra orðið fyri seg. Einki svarskriv kemur frá A/I.

Nevndin metir tað vera trupult at taka avgerð í málinum, partvíst tí Dimmalætting ikki hevur ført fram nóg góð prógv um, at A var degraderað ella fyri vanbýti, meðan hon var í barsilsfarloyvi – og partvíst tí nevndin ikki metir seg hava fingið nóg greiða kunning frá A um, hví hon valdi sjálv at siga seg úr starvi. Tí sendir Javnstøðunevndin A og Dimmalætting bræv 10. januar 2008 (hjálagt), har hon biður báðar partar koma á fund við javnstøðunevndina 16. januar 2008 at greiða munnliga frá og fáa uppklárað ivaspurningar.

11. januar 2008 svarar B aftur í maili (hjálagt), at hann einki hevur at leggja aftrat tí, sum hann longu hevur ført fram, og tískil takkar nei til innbjóðingina til fundar.

Fundurin 16. januar 2008 bleiv útsettur til 23. januar 2008, og hetta fekk B boð um frá skrivaranum í javnstøðunevndini.

Á fundinum 23. januar 2008, kl. 15.15 møttu 3 limir í javnstøðunevndini, skrivarin, A og I. I hevði eitt skriv frá 23. januar 2008 (hjálagt) við sær á fundin, har hann ger metingar í málinum.

Út frá frágreiðing hjá A og I, manglandi frágreiðing frá Dimmalætting/B og út frá málinum sum heild metti nevndin, at brot er framt á § 6 í javnstøðulógini, at A hevur verið fyri týðandi mismuni og eigur at fáa samsýning. Avgerðin (hjáløgd) er nærri lýst á heimasíðuni www.javnratt.fo (sí undir „Avgerðir”).

Haraftrat er hjálagt ymiskt teldupostasamskifti millum B og skrivaran í javnstøðunevndini og viðmæli frá Dimmalætting

til A dagfest 15. oktober 2004 – ikki er vist, at alt er so relevant, men her er tað so.

Um spurningar eru, eru tygum vælkomin at ringja á … ella maila til javnratt@javnratt.fo."

Við skrivi, dagfest 7. apríl 2008, vórðu viðmerkingarnar hjá Javnstøðunevndini sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 11. apríl 2008, hevur Dimmalætting sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

„**Viðv.: Kæra um avgerð hjá Javnstøðunevndini**
Vit hava 8. apríl móttikið bræv tykkara, har tit senda okkum svarskrivið hjá Javnstøðunevndini til ummælis.

Gjøgnumgongdin av málsgongdini hjá skrivaranum í Javnstøðunevndini váttar okkara pástand um, at nevndin lesur § 6, stk. 5 í javnstøðulógini skeivt við at leggja próvbyrðuna á Dimmalætting í spurninginum, um A varð uppsøgd ella á anna hátt fyri vanbýti undir barnsburðarfarloyvi. Eingir upplýsingar/prógv eru í svarskrivinum, ella í málinum yvirhøvur, um at A var fyri nøkrum vanbýti, og fortreytirnar fyri at nýta § 6 í Javnstøðulógini eru tí ikki til staðar.

Ein faktuellur feilur er í skrivinum hjá Javnstøðunevndini á síðu 2, triðja reglubrot. Har verður upplýst, at undirritaði fekk boð frá skrivaranum í Javnstøðunevndini um at fundurin 16. januar bleiv útsettur til 23. januar. Skrivarin setti seg ongantíð í samband við meg um hetta!

Orsøkin til, at eg fekk um fundin at vita, var, at advokaturin hjá A – I – sendi eitt avrit at sínum hoyringsskrivi til mín í telduposti kl. 14:51 tann 23. januar. Í teldupostinum, sum er hjálagdur hesum skrivi, upplýsir advokaturin, at hann skal møta á fundi við Javnstøðunevndina løtu seinni – kl. 15:15.

> Av tí, at eg ikki sat við teldu mína júst tá, læs eg ikki meylin, fyrr enn fundurin longu var byrjaður. Eg skrivaði og sendi tí ein teldupost til nevndina kl. 15.59 (sí skjal 18) og bað um innlit í nýggj skriv og hoyringsfreist. Hetta rein tó ikki við nevndina, sí skjøl 19-21.“

Við skrivi, dagfest 15. apríl 2008, vórðu viðmerkingarnar frá Dimmalætting sendar Javnstøðunevndini til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 21. apríl 2008, hevur Javnstøðunevndin sent umboðsmanninum hesar viðmerkingar:

> **„Viðv.: klagu frá Dimmalætting dagfest 1. februar 2008**
> Takk fyri bræv frá 15. apríl 2008. Hjálagt brævinum er skriv frá B dagfest 11. apríl 2008, har B ger viðmerkingar til svarskriv frá Javnstøðunevndini dagfest 18. mars 2008 upp á bræv frá Løgtingsins umboðsmanni dagfest 27. februar 2008.
>
> B ger viðmerkingar til, hvussu javnstøðunevndin lesur lógina. Hetta havi eg ongar viðmerkingar til; tað er uppgáva hjá sjálvari nevndini.
>
> Síðan sigur B, at eg ikki boðaði honum frá, at fundurin 16. januar (sum hann var boðin við til saman við A og advokati hennara I) bleiv útsettur til 23. januar. Tað helt eg meg annars hava gjørt í telefon, men um B sigur, at eg ikki havi gjørt tað, so er hetta helst soleiðis. Tað taki eg fulla ábyrgd fyri og harmist almikið um, at ein „smuttari“ í kunningini er hendur her.
>
> Hinvegin gjørdi B í maili frá 11. januar 2008 (sí fylgiskjal 1) týðuliga greitt, at hann als ongan áhuga hevði í at koma á fund, tí hann metti málið vera fult upplýst frá sínari síðu. Tað sama segði hann í telefonsamrøðu nakrar dagar áðrenn fundin.
>
> Fundurin, sum skuldi vera 16. januar, bleiv vegna forfall útsettur til 23. januar. Hetta átti eg sjálvsagt at upplýst B um, men

hinvegin hevði hann sum nevnt boðað frá, at hann einki hevði at leggja aftrat. Tað komu heldur eingi nýggj skjøl fram í málinum fyrr enn sjálvan fundardagin 23. januar kl. 14.51 (sí fylgiskjal 2), altso 25 minuttir áðrenn fundurin bleiv hildin kl. 15.15. Skjalið var eitt hoyringsskriv frá I, dagfest sama dag, altso 23. januar 2008, sum I mailaði til B og Javnstøðunevndina samstundis. Sama skriv hevði I við á fundin. Nevndin hevði sostatt ikki sæð skrivið áðrenn, og sjálv var eg ikki við telduna ta løtuna og sá ikki mailin fyrr enn seinri á kvøldi. Á hesum fundi bleiv avgerðin í Dimmalætting-málinum tikin.

Sama dag kl. 15.59 biður B í maili (sí fylgiskjal 3) um at fáa innlit í nýggj skriv og freist til hoyring av nýggjum pástandum í málinum vísandi til Fyrisitingarlógina. Eg svari honum aftur í maili 24. januar (sí fylgiskjal 4), at nevndin longu hevði tikið avgerð í málinum. Samstundis gjørdi eg vart við, at nevndin fór frá í næstum og skuldi mannast av nýggjum, og at hann – um hann vildi – kundi biðja nýggju nevndina taka málið uppaftur av nýggjum. Nevndarfundurin 23. januar var tann seinasti hjá táverandi nevnd."

Við skrivi, dagfest 30. apríl 2008, vórðu viðmerkingarnar frá Javnstøðunevndini sendar Dimmalætting til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 7. mai 2008, hevur Dimmalætting sent umboðsmanninum hesa fráboðan:

> „**Viðv.: Kæra um avgerð hjá Javnstøðunevndini**
> Vísandi til bræv tykkara d. 30.04.2008 skulu vit upplýsa, at skrivið hjá skrivaranum hjá Javnstøðunevndini d. 21.04.2008 ikki gevur orsøk til fleiri viðmerkingar frá okkara síðu."

Við skrivi, dagfest 16. mai 2008, boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at málið bleiv tikið upp til endaliga viðgerð.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um niðurstøðuna og viðgerðina hjá Javnstøðunevndini í hesum máli.*

*Javnstøðunevndin er nevnd, ið virkar undir Landsstýrinum, sambært § 9 í javnstøðulógini (løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn). Nevndin er tí at meta sum ein fyrisitingarmyndugleiki, ið er fevndur av § 1 í fyrisitingarlógini, og harvið eisini av virksemi umboðsmansins, jbr. § 4 í umboðsmanslógini.*

*Viðgerðin hjá nevndini av hesum máli er sostatt eisini fevnd av ásetingunum í fyrisitingarlógini og fyrisitingarrættinum annars.*

*Javnstøðunevndin hevur m.a. eftirlit við, at javnstøðulógin verður hildin. Sambært § 11, stk. 1 kunnu fólk, sum halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn kæra til nevndina. Yrkisfeløg og privatir arbeiðsgevarar hava sambært § 11, stk. 4 skyldu at lata nevndini neyðugar upplýsingar til viðgerðina av málum hennara. Heldur nevndin, at brot er framt á lógina, skal hon sambært § 11, stk. 5 heita á avvarðandi um at fáa brotið rættað innan 2 vikur. Um hetta ikki hjálpir, eru aðrir møguleikar fyriskrivaðir í § 12.*

*Tá nevndin boðsendir pørtunum á fund í januar 2008, verður hetta gjørt við einari frágreiðing um, at nevndini vantar upplýsingar frá báðum pørtum, og at tað tí er trupult hjá nevndini at taka avgerð í málinum. Fundurin, sum skuldi vera 16. januar, varð síðani fluttur til 23. januar.*

*Dimmalætting boðaði í fyrstu atløgu nevndini frá, at blaðið ikki ynskti at møta á fundinum 16. jan., tí blaðið helt málið vera lýst á nøktandi hátt, og tí ikki hevði nakað at leggja afturat málinum.*

*Stutta løtu áðrenn fundin 23. januar sendi advokaturin hjá kæraranum við teldubrævi nevndini og Dimmalætting nakrar viðmerkingar afturat til hetta málið. Tað má leggjast til grund, at Dimmalætting ikki kendi*

*hesar upplýsingar, tá fundurin bleiv hildin, og nevndin tók avgerð sína. Blaðið sigur seg heldur ikki hava fingið fráboðanina um flutta fundin. Í ummælisskrivinum til mín 21. apríl í ár, sigur skrivarin hjá Javnstøðunevndini, at hetta helst er rætt.*

*Fyrisitingarmyndugleikar hava sambært offisialprinsippinum ábyrgdina av, at eitt mál er lýst á nøktandi og fullgóðan hátt, tá myndugleikin tekur avgerð sína. Sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini skal myndugleiki, sum hevur móttikið upplýsingar, ið ikki eru til fyrimuns fyri partin í málinum, og sum parturin ikki er vitandi um frammanundan, lata partinum hesar upplýsingar til ummælis, áðrenn avgerð verður tikin í málinum.*

*Tá Dimmalætting varnast skrivið frá advokatinum, biður blaðið í teldubrævi kl. 15.59 sama dagin um innlit í møgulig nýggj skjøl og freist at svara nýggju viðmerkingunum. Nevndin varnast ikki hetta skrivið fyrr enn aftaná fundin.*

*Í frágreiðingini til mín, dagfest 18. mars 2008, sigur nevndin, at avgerðin varð tikin á fundinum 23. januar út frá frágreiðing frá kæraranum og advokati hennara, vantandi frágreiðing frá Dimmalætting og út frá málinum sum heild.*

*Tað sær sostatt út til, at grundlagið undir avgerðini, eru tær upplýsingar og tey sjónarmið, sum vóru førd fram á umrødda fundinum 23. januar. Í niðurstøðuni stendur m.a., at kærarin greiddi frá, at B skuldi hava verið sera óður um viðgonguna, umframt at blaðið ikki hevði hildið givin lyfti um hækkaða samsýning við afturvirkni.*

*Talan er um nýggjar upplýsingar, sum ikki framganga av teimum skjølum, sum Dimmalætting áður hevði fingið til hoyringar. Blaðið var heldur ikki umboðað á fundinum, og hevur tí ongan møguleika havt fyri at afturvísa hesum uppáhaldum. Tá hetta er tað einasta, sum kærarin hevur sagt á fundinum, ið verður endurgivið í niðurstøðuni, kann neyvan komast uttanum, at hetta hevur havt ein ávísan týdning fyri metingina hjá nevndini.*

*Vísandi til hetta og reglurnar um partshoyring í § 18 í fyrisitingarlógini haldi eg ongan iva vera um, at Javnstøðunevndin átti at steðga viðgerðini og lagt hesar nýggju upplýsingar fyri Dimmalætting til ummælis, áðrenn avgerð varð tikin.*

*Tað sær út til, at nevndin hevur skundað sær at fáa málið avgreitt, áðrenn hon skuldi leggja frá sær, og nýggj nevnd skuldi veljast. Eg haldi ikki, at hetta atlit kann nýtast sum umbering fyri ikki at geva Dimmalætting høvi til at gera viðmerkingar til seinasta skrivið frá advokati kærarans. At einki umboð ella varaumboð fyri arbeiðsgevararnar var í nevndini undir viðgerðini av málinum, ger ikki støðuna betri.*

*Nevndin fekk áheitanina frá Dimmalætting, áðrenn avgerðin varð send pørtunum, men heldur enn at taka málið uppaftur, varð boðað frá, at avgerðin var tikin, og at Dimmalætting kann heita á nýggju nevndina um at taka málið uppaftur.*

*Eg haldi talan vera um so grundleggjandi feilir í málsviðgerðini, at eg fari at geva nevndini eina átalu fyri handfaringina av málinum, eins og eg fari at mæla Javnstøðunevndini til at taka hetta málið uppaftur til nýggja viðgerð. Eg fari samstundis at biðja nevndina lata meg frætta, hvørja niðurstøðu hon kemur til í hesum sambandi.*

*Vísandi til áheitan mína um uppafturtøku geri eg ikki meira við spurningin um niðurstøðuna hjá nevndini.*

Javnstøðunevndin boðaði 1. september 2008 umboðsmanninum frá, at hon fór at taka málið uppaftur. Forkvinnan í Javnstøðunevndini hevur uppá fyrispurning, í telefonsamrøðu 24/2-09, greitt umboðsmanninum frá, at viðgerðin ikki er byrjað enn.

# *V. Egnar kanningar*

## 32.1 Kanning av 10 fyritíðarpensjónsmálum og 15 endurbúgvingarmálum hjá Almannastovuni

*Í 2005 framdi umboðsmaðurin eina kanning av ymsum málum hjá Almannastovuni, herímillum fyritíðarpensjónsmál. Nú, tá ið ein tíð er fráliðin síðani kanningin var framd, hevur umboðsmaðurin gjørt av at fremja eina nýggja kanning av 10 fyritíðarpensjónsmálum, og harumframt av 15 endurbúgvingarmálum hjá Almannastovuni.*

***Viðvíkjandi teimum 10 fyritíðarpensjónsmálunum***
*Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at málsviðgerðin viðvíkjandi móttøka av umsókn, heimildarváttan til innheintan av upplýsingum, lýsing av málinum, notatskylduni, partshoyring og samtykki til víðarilatan av upplýsingum, í teimum 10 málunum um fyritíðarpensjón samanumtikið var í lagi. Umboðsmaðurin hevði bert smávegis viðmerkingar til málsviðgerðina í hesum málum.*

*Tó vísti tað seg, at tað enn vóru trupulleikar viðvíkjandi málsviðgerðartíðini í hesum 10 fyritíðarpensjónsmálum. Umboðsmaðurin mælti tí Almannastovuni til at betra um málsviðgerðartíðina, og vísti á hvussu hetta kundi gerast. Almannastovan upplýsti, at ein skrivari nú var settur til at betra um málsviðgerðartíðina í fyritíðarpensjónsmálum.*

*Umboðsmaðurin kundi bert fegnast um tey stig, ið Almannastovan hevði tikið í hesum sambandi, og heitti á stovnin um at arbeiða við at betra tey málsviðgerðarstig, ið ikki enn vóru nøktandi.*

***Viðvíkjandi teimum 15 endurbúgvingarmálunum***
*Umboðsmaðurin hevði fleiri viðmerkingar viðvíkjandi teimum 15 endurbúgvingarmálunum. Í 6 av teimum 15 málunum var eingin umsókn til ítøkiliga málið. Í fleiri av málunum var heldur eingin heimildarváttan til innheintan av upplýsingum viðvíkjandi ítøkiliga endurbúgvingarmálinum. Hetta metti umboðsmaðurin ikki vera nøktandi. Umboðsmaðurin helt harumframt, at Almannastovan átti at fingið nýggjar læknaváttanir*

*til vega í tveimum málum, og fanst at, at tað ikki sást vera noterað, nær umsøkjarin hevði verið til samrøðu. Í einum máli var umsøkjarin ikki partshoyrdur viðvíkjandi serlæknaváttan. Í einum øðrum máli vóru upplýsingar hjá umsøkjara latnar víðari, uttan at samtykki varð fingið til vega. Í 4 málum vóru ov strangar treytir settar viðvíkjandi fráboðan við sjúku. Umboðsmaðurin helt harumframt, at endurbúgvingarætlan átti at verða gjørd í hvørjum einstøkum endurbúgvingarmáli, og at avgerðarskrivini í endurbúgvingarmálum kundu verið munandi meira persónlig og jalig.*

*Samanumtikið helt umboðsmaðurin viðgerðina av endurbúgvingarmálum verða nakað tilvildarliga, men segði, at hetta kundi koma av, at so fáar reglur vóru á økinum. Umboðsmaðurin heitti á landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum um at umhugsa at áseta nærri útgreinaðar reglur á endurbúgvingarøkinum.* ***(J. nr. 200700061)***

## 1. Inngangur

Umboðsmaðurin hevur gjørt av at fremja eina kanning av 10 fyritíðarpensjónsmálum og 15 endurbúgvingarmálum hjá Almannastovuni. Heimildin fyri einari slíkari kanning er at finna í § 4, stk. 1, § 5, § 6, stk. 5 og § 8, stk. 1 í umboðsmanslógini.

Í 2005 framdi umboðsmaðurin eina kanning av nøkrum útvaldum málsøkjum hjá Almannastovuni. Viðvíkjandi málunum um fyritíðarpensjón kom umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at viðgerðin av málunum sum heild ikki hevði verið nøktandi, serliga við atliti at viðgerðartíðini.

Nú, tá ið ein tíð er fráliðin síðani kanningin var framd, hevur umboðsmaðurin gjørt av at fremja eina nýggja kanning av 10 málum um fyritíðarpensjón. Hetta serliga við atliti til at kanna, um viðgerðin av fyritíðarpensjónsmálum er betrað.

Síðani umboðsmaðurin framdi kanning sína í 2005 er almannapensjónslógin broytt, sí niðanfyristandandi lógarreglur. Hetta hevur m.a. við sær, at Vanlukkutryggingarráðið ikki longur tekur avgerð í málum um fyritíðarpensjón. Almannastovan tekur nú sjálv avgerð í hesum málum.

Umframt málini um fyritíðarpensjón hevur umboðsmaðurin valt at kanna 15 endurbúgvingarmál hjá Almannastovuni. Orsøkin til hetta er, at umboðsmaðurin hevur fingið onkra klagu viðvíkjandi umsókn um endurbúgving, og vildi tí kanna, um málsviðgerðin viðvíkjandi hesum málum hjá Almannastovuni er nøktandi.

Umboðsmaðurin sendi fyribils frágreiðingina í hesum máli til Almannastovuna til ummælis tann 15. apríl 2008. Almannastovan sendi umboðsmanninum hoyringsskriv sítt tann 21. mai 2008. Høvuðsinnihaldið í hoyringsskrivinum er skrivað inn í frágreiðingina hjá umboðsmanninum. Sjálvt hoyringsskrivið verður hjálagt sum skjal 1 til hesa frágreiðing.

## 2. Fyritíðarpensjónir

### *a. Lógargrundarlagið*

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensiónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 165 frá 22. desember 2005, stendur m.a.:

> ”**Kapittul 2 Veitingar**
> **§ 2.** Pensjónir eftir hesi lóg eru:
> 1) Fólkapensjón,
> 2) hægsta fyritíðarpensjón,
> 3) miðal fyritíðarpensjón,
> 4) lægsta fyritíðarpensjón
> 5) veitingar eftir kap. 11 og
> 6) Avlamisveiting.
> *Stk. 2* Allar pensjónir sambært § 4 og §§ 6-8 eru settar saman við eini grundupphædd og eini viðbót. Afturat pensjónunum sambært § 6 og § 7, verður veitt ein avlamisviðbót.
> *Stk. 3.* Afturat pensjónini kunnu eftir reglunum í kapittul 4 verða veittar hesar viðbøtur:
> 1) barnaviðbót,
> 2) Hjálparviðbót,
> 3) røktarviðbót og
> 4) persónlig viðbót.

*Stk. 4.* Barnaviðbót og persónlig viðbót kunnu ikki tillutast teimum, sum fáa avlamisveiting sambært stk. 1, nr. 6.

…

**§ 6.** Hægsta fyritíðarpensión kann tillutast persónum, sum hava fylt 18 ár, men sum ikki hava fylt 60 ár, tá umsóknin verður latin inn, ið, orsakað av likamligum ella sálarligum avlamni, mugu roknast sum varandi óarbeiðsførir í eini og hvørjari vinnu, ella sum einans hava smávegis eftir av arbeiðsføri.

**§ 7.** Miðal fyritíðarpensión kann tillutast

1) persónum, sum hava fylt 18 ár, men sum ikki hava fylt 60 ár, tá umsóknin verður latin inn, hvørs arbeiðsføri, orsakað av likamligum ella sálarligum avlamni, varandi er minkað við í minsta lagi 2/3,
2) persónum yvir 60 ár, hvørs arbeiðsføri er minkað sum ásett í § 6, og
3) einkjum og einkjumonnum við uppihaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár.

**§ 8.** Lægsta fyritíðarpensión kann tillutast

1) persónum millum 18 og 67 ár, hvørs arbeiðføri, orsakað av likamligum ella sálarligum avlamni, varandi er minkað við í minsta lagi eini helvt,
2) persónum millum 50 og 67 ár og persónum ið hava móttikið pensión eftir § 7, stk. 1, nr. 3, men hava mist rættin til hesa, tí yngsta barnið hevur fylt 18 ár, tá viknandi heilsa, vantandi arbeiðsmøguleikar ella aðrar serligar umstøður gera, at viðkomandi hevur brúk fyri hjálp til uppihald.

…

**§ 9.** Í metingini av í hvønn mun arbeiðsførið er minkað eftir § 6, § 7, stk. 1, nr. 1 og 2 og § 8, nr. 1, skal metast um

1) ta inntøku, sum viðkomandi verður mettur at kunna forvinna við einum arbeiði, sum svarar til hansara kreftir og førleikar, og sum við atliti til útbúgving og virksemi fyrr, kann verða kravt av honum, samanborið við ta inntøku, sum persónar við samsvarandi útbúgving vanliga kunnu forvinna í sama øki,

2) aldur, lívsstarv, bústað og arbeiðsmøguleikar, umframt líkindi fyri betran ella versnan av avlamninum,
3) slíkar aðrar umstøður, sum hildið verður í tí einstaka førinum, at dentur skal leggjast á í heildarmetingini av skerda arbeiðsførinum.

…

**§ 25.** Almannastovan tekur avgerð um tillutan av pensjón. Almannastovan tekur avgerð um afturtøku ella flyting til aðra pensjón fyri persónar, sum fáa pensjón sambært § 6, § 7, stk. 1, nr. 1 og 2, §§ 8 og 8a,

1) um fyritíðarpensjónistur hevur persónligar inntøkur, sum fara upp um eina upphædd svarandi til dupultu árligu grundupphæddina fyri støk,
2) um arbeiðsførið er týðandi betrað ella versnað, og týðandi broytingar henda í viðurskiftum viðvíkjandi arbeiðsmøguleikum, inntøku o.ø. hjá einum pensjónisti, og
3) um broytingar eru farnar fram í viðurskiftum hjá persóni, sum fær hjálpar- ella røktarviðbót sambært § 11, sum gera, at roknast má við, at hann ikki longur lýkur treytirnar fyri at fáa slíka veiting.

*Stk. 2.* Almannastovan kann avgera, at útgjald av fyritíðarpensjón fyribils verður steðgað, tá fyriskipan eftir forsorgarlógini verður sett í verk, sum hevur til endamáls at menna ella endurmenna arbeiðsevni pensjónistsins.

*Stk. 3.* Almannastovan kann avgera, at eitt mál skal takast upp aftur til kanningar seinni.

*Stk. 4.* Almannastovan kann avgera, at ein pensjón, í sambandi við afturtøku, skal gjaldast aftur yvir í mesta lagi 12 mánaðir. Haraftrat kann Almannastovan, tá umstøðurnar tala fyri tí, avgera, at rætturin til pensjón fyribils, tó hægst í 3 ár, skal vera hvílandi.

*Stk. 5.* Almannastovan kann áleggja umsøkjara at møta og geva frágreiðing. Eisini kann Almannastovan áleggja pensjónisti at møta og geva frágreiðing um móttikna frágreiðing.

*Stk. 6.* Almannastovan kann áleggja umsøkjara at vera við í lýsing av máli, millum annað við at lata seg kanna og viðgera av lækna, ella innleggja til kanningar og viðgerð.

*Stk. 7.* Almannastovan kann avgera, at mál dettur burtur ella pensjón verður afturtikin, um persónur ikki vil vera við í neyðugum kanningum, uppvenjing ella øðrum fyriskipanum, sum ætlast at hava við sær munandi betran av arbeiðsføri.
*Stk. 8.* Almannastovan hevur heimild at lata ein ella fleiri sakkøn útinna eftirlit við atliti til arbeiðsføri, ella at kalla pensjónist inn til samrøðu.
*Stk. 9.* Darvar pensjónistur kanningum hjá Almannastovuni, og verður mett sannlíkt, at nýggj avgerð í málinum fer at hava við sær afturtøku av pensjónini, kann Almannastovan avgera at steðga útgjaldingini. Henda avgerð skal takast skjótast til ber.
*Stk. 10.* Útreiðslur til eftirlit verða goldnar av Almannastovuni.
*Stk. 11.* Viðkomandi pensjónistur kann reisa mál eftir stk. 1.
…

**Kapittul 8 Umsókn, útgjalding o.a.**
**§ 30.** Veitingar sambært hesi lóg verða bert veittar eftir umsókn.
*Stk. 2.* Serligt umsóknarblað skal nýtast, tá søkt verður um veiting.
*Stk.3.* Tað áliggur Almannastovuni at senda einum og hvørjum upplýsingar- og umsóknarblað til fólkapensjón 3 mánaðir, áðrenn persónurin gerst 67 ár.
*Stk.4.* Við umsóknini skulu fylgja upplýsingar og skjalprógv, sum eru neyðug fyri, at avgerð kann takast.
*Stk. 5.* Læknaváttanir, sum Almannastovan biður um, og aðrar útreiðslur, sum eru fylgja av viðgerðini, verða goldnar sambært hesi lóg.
*Stk. 6.* Almannastovan kann av sínum eintingum reisa mál um játtan av veitingum eftir hesi lóg.
**§ 31.** Almannastovan kann krevja skattamyndugleikar, Landsfólkayvirlitið, kommunalar myndugleikar, arbeiðsgevarar og onnur viðkomandi, herímillum sjúkrahús, læknar o.o., ið hava kunnleika til viðurskiftini, eftir upplýsingum av týdningi fyri viðgerð av pensiónsmálum.

**§ 32.** Pensjón verður veitt frá 1. í mánaðinum eftir, at treytirnar

eru loknar, tó í fyrsta lagi frá 1. í mánaðinum aftan á dagfestingina fyri móttøku av umsóknini.

**§ 33.** Tá umsókn um fyritíðarpensión er latin Almannastovuni, og mett verður sannlíkt, at pensión verður játtað, kann fyritíðarpensión útgjaldast sum forskot.
*Stk. 2.* Forskotið verður veitt innanfyri tær upphæddir, sum roknað verður við, at pensiónin fer at verða.
*Stk. 3.* Um so er, at umsøkjarin fær eina lægri pensión, verður munurin at rokna sum hjálp uttan afturgjaldsskyldu eftir lóg um almenna forsorg.

**Kapittul 9 Kærurættur**
**§ 39.** Avgerðir hjá Almannastovuni sambært hesi lóg kunnu kærast til Kærunevndina í Almannamálum.
*Stk. 2.* Kærast skal innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina."

## *b. 10 mál um fyritíðarpensjón v.m.*

**<u>Mál nr. 1</u>**
48 ára gomul kvinna, sum søkir um hægstu fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin tann 10. mai 2006. Í umsóknini gevur kvinnan Almannastovuni loyvi til at útvega neyðugar upplýsingar. Heimildarváttanin er soljóðandi:

> „Undirritaði gevur Almannastovuni/Færøernes Ulykkesforsikringsråd (FUR) loyvi til at úgvega neyðugar upplýsingar (herundir læknaligar) til nýtslu í viðgerðini av umsókn míni. Samstundis gevi eg Almannastovuni/FUR loyvi til at lata upplýsingar, ið verða mettar neyðugar fyri víðari viðgerð av umsóknini, til kommunulækna, serlækna ella annan myndugleika, ið kann úttala seg í mínum máli. Undirritaði váttar, at upplýsingar, latnar í hesum umsóknarblað, eru sannar. Eg eri kunnað/-ur um, at eg eftir pensjónslógini havi skyldu at boða frá einihvørjari broyting í mínum viðurskiftum, ið kunnu ætlast at hava við sær, at pensjónin lækkar ella fellur burtur.

> Herundir broytingar í hjúnalagsstøðu og fíggjarligum viðurskiftum, umframt longrivarandi uppihald uttanlands.“

Við skrivi, dagfest tann 30. mai 2006, biður Almannastovan kommunulækna um læknaváttan, og biður samstundis umsøkjaran um at seta seg í samband við læknan og umbiðja eina viðtalutíð. Í læknaváttanini, ið er móttikin tann 26. juli 2006, hevur læknin gjørt eina meting av arbeiðsførleikanum hjá kvinnuni. Læknin mælir frá endurbúgving, av tí at kvinnan hevur lítla útbúgving. Vegna hennara aldur og kyn metir læknin, at likamliga støða hennara mest sannlíkt ferð at versna, um hon heldur áfram í likamliga krevjandi arbeiði.

Almannastovan biður síðani kvinnuna koma til samrøðu, fyrst við skrivi, dagfest 27. oktober 2006, og síðandi við skrivi, dagfest 21. november 2006. Upprit frá samrøðunum liggur ikki í málinum.

Við skrivi, dagfest 3. apríl 2007, sendir Almannastovan, eftir tilmæli frá læknaráðgevanum, áheitan um serlæknaváttan til Landssjúkrahúsið. Tann 20. apríl 2007 er serlæknaváttan móttikin á Almannastovuni.

Tann 25. mai 2007 hevur Almannastovan móttikið ummæli frá læknaráðgeva. Í váttanini stendur m.a., at støðan hjá umsøkjaranum neyvan ferð at betrast munandi, at avlamni er varandi, at umsøkjarin ikki klárar likamliga krevjandi arbeiði vegna ryggpínu, hevur trupulleikar við samskifti vegna niðursetta hoyrn, kann tó enn røkja lættari arbeiði niðursetta tíð, og at vinnuevnini eru varandi skerd við eini helvt ella meira.

Almannastovan hevur útfylt innanhýsis skjal A, dagfest tann 18. juni 2007: Lýsing av máli um fyritíðarpensjón vegna avlamni el. varandi sjúku ella avlamisveiting. Málsviðgerðin metir ikki, at tað er sannlíkt at umsøkjarin megnar bókliga endurbúgving. Umsøkjarin hevði møguliga, fyri rygginum, klára eitt lættari arbeiði, men tað er stórliga ivasamt um tað er møguligt at finna slíkt arbeiði. Orsøkin er, at hon afturat trupulleikunum við rygginum hevur niðursetta hoyrn sum vildi verið ein forðing, um hon t.d. skuldi arbeitt í einum handli. Eisini verður mett sera ósannlíkt at finna henni eitt lættari arbeiði, sum hon megnar.

Tann 18. juni 2007 vóru skjøl og upplýsingar í hesum máli sendar kvinnuni til hoyringar, sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini.

Tann 18. juni 2007 eru inntøkuupplýsingar frá árunum 1991-2007 fingnar til vega frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Almannastovan hevur tann 26. juni 2007 útfylt innanhýsis skjal D: tilráðing, har mælt verður til at játta pensjón.

Í standard blað D hjá Almannastovuni stendur, hvørji skjøl skulu leggjast við í málsmappu á Pensjónsfund. Hesi eru: tilráðing, lýsing, umsókn, kommunulæknaváttan, evt. serlæknaváttan, sjúkrahúsútskriftir, brævaskifti við umsøkjara, lækna o.t., onnur skjøl, herundir evt. upprit um arbeiðs/endurbúgvingarroyndum, upprit frá samrøðum v.m., og upprunaskjøl.

Málið er viðgjørt á Pensjónsfundi tann 5. juli 2007, har avgjørt var at játta lægstu fyritíðarpensjón, sambært § 8, nr. 1 í almannapensjónslógini.

Tann 14. august 2007 verður avgerðin send umsøkjaranum. Niðurstøðan er soljóðandi:

> „**Meting og grundgeving fyri avgerðini:**
> Við støði í upplýsingunum í málinum, herundir um aldur, arbeiðsøki og arbeiðsroyndir tygara higartil, verður ikki mett, at rímiligt er at krevja av tygum, at tygum skulu betra tygara møguleikar á arbeiðsmarknaðinum við endurbúgvingarfyriskipan el. líkn.
>
> Almannastovan metir, at arbeiðsførleiki tygara er skerdur við meiri enn eini helvt orsakað av heilsuligu trupulleikunum, men metir ikki, at hann er skerdur so nógv, at tygum ikki kunnu arbeiða parttíð í lættari ófaklærdum arbeiði og harvið forvinna nakað av inntøku. Mett verður, at tygum við tygara arbeiðsroyndum og við atliti til tygara kreftir og førleikar, eiga at kunna átaka tygum eitt annað meiri hóskandi arbeiðið í einar 15-20 tímar um vikuna.

**Niðurstøða/avgerð:**
Við støði í omanfyri standandi grundgevingum metir Almannastovan, at tygara arbeiðsføri er niðursett við í minsta lagi eini helvt og hevur tí avgjørt at tilluta tygum lægstu fyritíðarpensjón, sambært § 8, nr. 1 í almannapensjónslógini.

Almannastovan metir ikki, at tygum kunnu roknast sum varandi óarbeiðsfør í eini og hvørjari vinnu, einans hava smávegis eftir av arbeiðsføri ella at arbeiðsføri tygara er minkað við í minsta lagi við 2/3, sum er treyt fyri at tillutað ávikavist hægstu ella miðal fyritíðarpensjón sambært §§ 6 og 7, nr. 1 í almannapensjónslógini.

Gjørt verður vart við, at mál viðvíkjandi fyritíðarpensjón verða tikin upp til nýggja viðgerð, sambært § 25, stk. 1 í almannapensjónslógini, um týðandi broytingar henda í arbeiðsførinum, arbeiðsmøguleikum, inntøkuviðurskiftunum e.ø. viðurskiftum, ið hava týdning fyri, um treytirnar fyri fyritíðarpensjón eru loknar.

Tygum fáa skjótast til ber nærri at vita um upphæddir, útgjald o.a. Tygara málsviðgerði á veitingardeildini er …

Avrit av viðkomandi lógargreinum úr almannapensjónslógini er hjálagt.

Avgerðin kann innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Føroya Kærustovnur, Skálatrøð 20, Postrúm 45, FO-110 Tórshavn.

Avrit av hesum skrivi er sent til …, kommunulækna, …“

***Mín viðmerking:***
*Málsviðgerðartíðin í hesum málinum er 15 mánaðir. Tað ganga umleið 8 mánaðir frá tí, at kommunulæknaváttan er móttikin á Almannastovuni, til biðið verður um serlæknaváttan. Hetta meti eg als ikki vera nøktandi. Tað er heldur ikki nøktandi, at Almannastovan ikki sendir umsøkjaranum fráboðan um avgerðina, fyrr enn 5 vikur eftir, at avgerðin er tikin. Hetta*

*átti at verið eitt avgreiðslumál, ið átti at verið avgreitt fáar dagar eftir, at avgerðin var tikin.*

*Viðvíkjandi standard heimildarváttanini, ið er trykt á hvørt umsóknarblað, skal umsøkjarin, sambært seinasta reglubroti, eisini skriva undir uppá, at umsøkjarin er kunnaður um, at hann hevur skyldu til at boða frá einhvørjari broyting í sínum viðurskiftum, ið kunnu ætlast at hava við sær, at pensjónin lækkar ella fellur burtur. Hetta hevur ikki nakað við innheintan av upplýsingum at gera, men er ein upplýsing til umsøkjaran um, hvørja skyldur hann hevur. Teksturin er skrivaður við lítlum, til seinast í heimildarváttanini. Eftir mínari meting verður tað ikki við hesum, nóg væl upplýst, hvør skylda áliggur umsøkjaranum. Eg fari at ráða Almannastovuni til at skilja hesa orðing frá heimildarváttanini.*

**Mál nr. 2**

55 ára gomul kvinna, sum søkir um fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin tann 17. februar 2006. Heimildarváttan til at innheinta og víðarilata upplýsingar er latin Almannastovuni.

Við skrivi, dagfest tann 21. februar 2006, heitur Almannastovan á kommunulækna um gera eina kanning/meting av umsøkjaranum, ið hevur søkt um fyritíðarpensjón. Almannastovan biður samstundis umsøkjaran um at seta seg í samband við læknan og umbiðja eina viðtalutíð.

Av tí at Almannastovan ikki móttekur læknaváttan frá kommunulæknanum, sendir Almannastovan tann 23. august 2006, tann 28. november 2006, og tann 2. januar 2007 áminning til kommunulæknan.

Tann 5. februar 2007 móttekur Almannastovan læknaváttanina. Læknin metir, at arbeiðsevnini hjá umsøkjaranum eru munandi niðursett í hesari vinnu og aðrari vinnu, sum setur krøv til rygg og bein. Somuleiðis kann hon ikki arbeiða á eitt nú røktarheimi, tí har krevst, at ein kemur rættiliga nógv í samband við vatn og sápu.

Ímillum skjølini, ið kommunulæknin hevur sent Almannastovuni, er ein serlæknaváttan frá 30. mai 2006.

Tann 13. mars 2007 móttekur Almannastovan váttan frá læknaráðgeva viðvíkjandi heilsustøðuni hjá umsøkjaranum. Læknaráðgevin metir at vinnuevnini eru skerd varandi við meira enn eini helvt, men at umsøkjarin kann klára lættari ikki-likamligt arbeiði.

Tann 20. apríl 2007 eru inntøkuupplýsingar fingnar til vega frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Almannastovan hevur útfylt innanhýsis skjal A, dagfest tann 16. juni 2007: Lýsing av máli um fyritíðarpensjón vegna avlamni el. varandi sjúku ella avlamisveiting. Í skjalinum stendur m.a., at umsøkjarin er í arbeiði, men klárar ikki at arbeiða fulla tíð. Málsviðgerðin metir tað verða ósannlíkt, at endurbúgving vil betra um støðuna. Umsøkjarin er knapt 56 ár og heilsuviðurskiftini forða henni í at arbeiða fulla tíð. Málsviðgerðin metir, at um umsøkjarin fær møguleika fyri at arbeiða hálva tíð, kann hon varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin í fleiri ár.

Tann 18. juni 2007 vóru skjøl og upplýsingar í hesum máli sendar kvinnuni til hoyringar, sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini. Við skrivi, dagfest 21. juni 2007, viðmerkti kvinnan, at hennara heilsustøða tíverri ikki var batnað, men hinvegin versna. Hon hevði arbeitt lítið teir seinastu tveir mánaðirnar vegna pínu.

Almannastovan hevur tann 26. juni 2007 útfylt innanhýsis skjal D: tilráðing, har mælt verður til at játta pensjón. Hjálagt tilráðingini eru skjølini í málinum.

Málið er viðgjørt á Pensjónsfundi tann 5. juli 2007, har avgjørt var at játta lægstu fyritíðarpensjón, sambært § 8, nr. 1 í almannapensjónslógini.

Tann 17. juli 2007 verður avgerðin send umsøkjaranum. Í niðurstøðuni stendur m.a.:

> „**Meting og grundgeving fyri avgerðini:**
> Við støði í upplýsingum í málinum, herundir um arbeiðsøki

og arbeiðsroyndir tygara higartil, verður ikki mett, at rímiligt er at krevja av tygum, at skula betra tygara møguleikar á arbeiðsmarknaðinum við endurbúgvingarfyriskipan el. líkn.

Almannastovan metir, at arbeiðsførleiki tygara er skerdur við meiri enn eina helvt orsakað av heilsuligu trupulleikunum, men metir ikki, at hann er skerdur so nógv, at tygum ikki kunnu arbeiða parttíð í lættari arbeiði. Tygum eru í starvi í …, sum tygum kunnu varðveita, um tygum arbeiða umleið ½ tíð og skipa uppgávurnar soleiðis, at tygum ikki átaka tygum tær tyngstu uppgávurnar. Mett verður, at hetta er ein góð loysn, og at tað eisini læknaliga er samsvar í hesum.

**Niðurstøða/avgerð:**
Við støði í omanfyri standandi grundgevingum metir Almannastovan, at tygara arbeiðsføri er niðursett við í minsta lagi eini helvt og hevur tí avgjørt at tilluta tygum lægstu fyritíðarpensjón, sambært § 8, nr. 1 í almannapensjónslógini.
…
Avgerðin kann innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Føroya Kærustovnur, Skálatrøð 20, Postrúm 45, FO-110 Tórshavn.“

***Mín viðmerking:***
*Tað tekur 1 ár og 5 mánaðar at avgreiða hetta fyritíðarpensjónsmál. Hetta er long málsviðgerðartíð í einum slíkum máli. Orsøkin er, at Almannastovan, hóast fleiri áminningar, ikki fær læknaváttan frá kommunulækna, fyrr enn umleið eitt ár eftir, at áheitan um læknaváttan er send. Eg skilji, at tað í summum førum kann vera trupult at fáa eina læknaváttan til vega, men eftir mínari meting kundi Almannastovan stytt um viðgerðartíðina í hesum máli við at sent fleiri áminningar. Tað er alt ov leingi at bíða í 6 mánaðir, áðrenn fyrsta áminning verður send.*

**<u>Mál nr. 3</u>**
62 ára gomul kvinna, sum søkir um fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin tann 12. juni 2006. Heimildarváttan til at innheinta

og víðarilata upplýsingar er latin Almannastovuni saman við umsóknini.

Við skrivi, dagfest tann 20. juli 2006, biðjur Almannastovan kommunulækna um læknaváttan, og biður samstundis umsøkjaran um at seta seg í samband við læknan og umbiðja eina viðtalutíð. Av tí at Almannastovan ikki móttekur læknaváttan frá kommunulæknanum, sendir Almannastovan tann 10. november 2006 og tann 12. desember 2006 áminning til kommunulæknan.

Tann 19. februar 2007 móttekur Almannastovan læknaváttanina. Diagnosan er lungaastma, hjartaflimran, fylgir eftir æðrabruna, og kroniskt skinnabeinssár. Læknin metir, at kvinnan ikki longur klárar at røkja sítt arbeiði vegna heilsutrupulleikar.

Í skjølunum, ið kommunulæknin hevur sent Almannastovuni, liggja fleiri serlæknaváttanir, tann nýggjasta er frá yvirlækna á medesinsku deild á Landssjúkrahúsinum, dagfest 10. januar 2006.

Tann 29. mai 2007 ringdi umsøkjarin til Almannastovuna fyri at spyrja til pensjónsmál sítt. Almannastovan biður tá umsøkjaran koma til samrøðu tann 4. juni 2007 kl. 13.30. Upprit frá samrøðuni er skrivað tann 14. juni 2007.

Almannastovan hevur útfylt innanhýsis skjal A, dagfest tann 11. juni 2007. Málsviðgerðin metir ikki, at tað er realistiskt við endurbúgving, tí talan er um ein 63 ára-gamla kvinnu við lítlari og ongari skúlagongd. Málsviðgerðin metir ikki, at kvinnan hevur nakrar arbeiðsførleikar eftir, eisini aldurin havandi í huga. Hon hevur klára seg við ófaklærdum arbeiði, men hetta klárar hon ikki meira. Um kvinnan bindur fri, er sannlíkt, at heilsustøðan verður stationer, men um hon ikki ger tað, kann heilsan versna.

Tann 11. juni 2007 vóru skjøl og upplýsingar í hesum máli sendar kvinnuni til hoyringar, sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini. Kvinnan ringdi til Almannastovuna tann 13. juni 2007, og upplýsti, at hon hevði einki at viðmerkja.

Tann 11. juni 2007 eru inntøkuupplýsingar fingnar til vega frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Almannastovan hevur tann 14. juni 2007 útfylt innanhýsis skjal D: tilráðing, har mælt verður til at játta lægstu fyritíðarpensjón sambært § 8, stk. 1 í almannapensjónslógini.

Málið er viðgjørt á Pensjónsfundi tann 5. juli 2007, har avgjørt var at játta lægstu fyritíðarpensjón sambært § 8, nr. 1 í almannapensjónslógini.

Tann 16. august 2007 verður avgerðin send umsøkjaranum. Niðurstøðan í skrivinum var soljóðandi:

> „**Meting og grundgeving fyri avgerðini:**
> Við støði í upplýsingum í málinum, herundir um heilsuviðurskifti, aldur, arbeiðsøki og arbeiðsroyndir tygara higartil, verður ikki mett, at rímiligt er at krevja av tygum, at skula betra tygara møguleikar á arbeiðsmarknaðinum við endurbúgvingarfyriskipan el. líkn.
>
> Hóast arbeiðsførleiki tygara er nógv skerdur orsakað av heilsuligu trupulleikunum, metir Almannastovan ikki, at hann er skerdur so nógv, at tað útilokar, at tygum arbeiða nakrar tímar um vikuna í léttari arbeiði og harvið forvinna nakað av inntøku. Mett verður, at tygum við tygara arbeiðsroyndum og við atliti til tygara kreftir og førleikar, eiga at kunnna at átaka tygum eitt hóskandi arbeiði í einar 15-20 tímar um vikuna.
>
> **Niðurstøða/avgerð:**
> Við støði í omanfyri standandi grundgevingum metir Almannastovan, at tygara arbeiðsføri er niðursett við meiri enn eini helvt og lúka tygum tí treytirnar fyri at fáa lægstu fyritíðarpensjón sambært § 8, stk. 1 í almannapensjónslógini. Mett verður ikki, at tygum eru varandi óarbeiðsførur í eini og hvørjari vinnu ella einans at hava smávegis eftir av arbeiðsføri, sum er treytin hjá umsøkjarum, ið hava fylt 60 ár, fyri fáa miðal fyritíðarpensjón sambært § 7, nr. 2 í almannapensjónslógini.

> …
> Avgerðin kann innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Føroya Kærustovnur, Skálatrøð 20, Postrúm 45, FO-110 Tórshavn.
> …"

***Mín viðmerking:***
*Málsviðgerðartíðin í hesum máli er umleið 14 mánaðir. Hetta meti eg ikki vera nøktandi málsviðgerðartíð í einum fyritíðarpensjónsmáli.*

*Almannastovan biður ikki um kommunulæknaváttan fyrr enn 5 vikur eftir at stovnurin hevur móttikið umsóknina. Tað hevði stytt um viðgerðartíðina, um læknaváttan varð umbiðin, tá ið Almannastovan móttók umsókn um fyritíðarpensjón.*

*Almannastovan móttekur ikki kommunulæknaváttan, fyrr enn umleið 7 mánaðir eftir, at áheitan um læknaváttan er send. Almannastovan sendi fyrstu áminning umleið 4 mánaðir eftir, at áheitan var send kommunulækna. Eg fari at mæla Almannastovuni til at senda fyrstu áminning fyrr, og síðani senda áminning við jøvnum millumbilum.*

*Síðani ganga aftur umleið 4 mánaðir, áðrenn umsøkjarin er til samrøðu á Almannastovuni. Eisini í hesum førinum kundi Almannastovan stytt um viðgerðartíðina við at hildið samrøðuna fyrr.*

*Síðani ganga umleið 6 vikur frá tí, at avgerð um at játta fyritíðarpensjón er tikin, til at avgerðin verður fráboðað umsøkjaranum. Eisini hetta avgreiðsluskriv átti at verið avgreitt beinanvegin.*

**Mál nr. 4**
44 ára gomul kvinna, sum søkir um hækkan av fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin tann 22. januar 2007. Heimildarváttan er latin Almannastovuni saman við umsóknini.

Tann 31. januar 2007 biður Almannastovan kommunulækna um læknaváttan, og biður samstundis umsøkjaran um at seta seg í samband við læknan og umbiðja eina viðtalutíð.

Tann 13. apríl 2007 móttekur Almannastovan læknaváttanina. Læknin metir, at likamligi førleikin hjá umsøkjaranum er munandi niðursettur. Hóast kvinnan hevur 10. flokk, og 1 ára útbúgving, kann hon ikki bjóða seg fram á arbeiðsmarknaðinum. Hon hevur fyri nøkrum árum síðani gjørt eina roynd at arbeiða 10-12 tímar um vikuna. Hon gavst eftir umleið tveimum árum, av tí hon maktaði tað ikki.

Ímillum skjølini, ið kommunulæknin hevur sent Almannastovuni, liggur ein serlæknaváttan, dagfest 9. januar 2007.

Almannastovan hevur útfylt innanhýsis skjal A, dagfest tann 19. juni 2007. Málsviðgerðin metir ikki, at endurbúgving ella vart starv er realistiskt vegna heilsustøðuna hjá kvinnuni. Kvinnan hevur viðfødda hjartasjúku, trupulleikar við rygginum, urinsýrugikt og lunga sjúku, og hevur fingið miðal pensjón, síðan hon var 18 ár. Málsviðgerðin metir, at kvinnan er óarbeiðsfør í einum og hvørjum arbeiði, og mælir tí til hækkan av pensjón.

Tann 19. juni 2007 eru inntøkuupplýsingar fingnar til vega frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Tann 21. juni 2007 vóru skjøl og upplýsingar í hesum máli sendar kvinnuni til hoyringar, sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini.

Almannastovan hevur tann 22. juni 2007 útfylt innanhýsis skjal D: tilráðing, har mælt verður til, at kvinnan fær játtað hækkan av pensjón, sambært § 6 í almannapensjónslógini, grundað á at hon er óarbeiðsfør í einum og hvørjum arbeiði.

Málið er viðgjørt á Pensjónsfundi tann 5. juli 2007, har avgjørt var at játta hægstu fyritíðarpensjón, sambært § 6 í almannapensjónslógini.

Tann 18. juli 2007 verður avgerðin send umsøkjaranum. Brot úr skrivinum er soljóðandi:

**„Avgerð um hækkan av tygara fyritíðarpensjón**
Víst verður til umsókn tygara um fyritíðarpensjón, dagfest 18.01.2007, móttikin á Almannastovuni tann 22.01.2007. Avgerð er tikin í málinum á fundi tann 05.07.2007.

**Avgjørt er sambært § 6 í almannapensjónslógini, at tilluta tygum hægstu fyritíðarpensjón við gildi frá 01.02.2007.**

Við støði í upplýsingum í málinum, herundir serliga um heilsuviðurskiftini, metir Almannastovan, at tygara heilsustøða er versnað soleiðis, at tygum mugu roknast sum varandi óarbeiðsfør í eini og hvørjari vinnu, ella bara at hava smávegis eftir av arbeiðsføri, orsakað av heilsuligu trupulleikunum. Tí lúka tygum treytirnar í § 6 í almannapensjónslógini fyri tillutan av hægstu fyritíðarpensjón.
…“

***Mín viðmerking:***
*Málsviðgerðartíðin í hesum máli er umleið 6 mánaðir. Hesa málsviðgerðartíð havi eg sum so onga viðmerking til.*

**Mál nr. 5**
61 ára gomul kvinna, sum søkir um fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin tann 16. oktober 2006. Heimildarváttan er latin Almannastovuni saman við umsóknini.

Tann 3. november 2006 biður Almannastovan kommunulækna um læknaváttan, og biður samstundis umsøkjaran um at seta seg í samband við læknan og umbiðja eina viðtalutíð. Tann 12. desember 2006 sendi Almannastovan áminning til kommunulæknan.

Tann 13. februar 2007 móttekur Almannastovan læknaváttanina. Læknin metir, at kvinnan er óarbeiðsfør í ófaklærda arbeiði sínum, har hon hevur arbeitt alt sítt lív. Seinastu tvey árini eru arbeiðsevnini so líðandi minkaði orsakað av pínu í knøunum. Eina tíð kláraði

hon seg við heilivági, men nú orkar hon ikki meira vegna pínuna. Læknin metir, at endurbúgvingar-møguleikarnir eru smáir í hesum førinum.

Tann 22. mai 2007 er umsøkjarin innkallað til samrøðu á Almannastovuni tann 30. mai 2007. Tann 30. mai 2007 er upprit skrivað frá samrøðu við umsøkjaran.

Tann 30. mai 2007 eru inntøkuupplýsingar fingnar til vega frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Almannastovan hevur útfylt innanhýsis skjal A, dagfest tann 10. juni 2007. Málsviðgerðin skrivar, at talan er um eina 61 ára gamla kvinnu við slitgikt, sum í meira enn 40 ár hevur arbeitt tungt, ófaklært arbeiði. Málsviðgerðin metir ikki, at endurbúgvingarmøguleiki er til staðar, av tí at kvinnan onga skúlagongd hevur. Kvinnan fær í løtuni stuðul frá ALS, men innan avmarkaða tíð fellur hon úr skipanini. Mælt verður til, at hon fær játtað fyritíðarpensjón.

Tann 10. juni 2007 vóru skjøl og upplýsingar í hesum máli sendar kvinnuni til hoyringar, sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini.

Almannastovan hevur tann 14. juni 2007 útfylt innanhýsis skjal D: tilráðing, har mælt verður til at játta pensjón av heilsuligum og sosialum orsøkum.

Málið er viðgjørt á Pensjónsfundi tann 5. juli 2007, har avgjørt var at játta lægstu fyritíðarpensjón, sambært § 8, nr. 1 í almannapensjónslógini.

Tann 18. juli 2007 verður avgerðin send umsøkjaranum. Brot úr skrivinum er soljóðandi:

> „Avgerð um fyritíðarpensjón
> Víst verður til umsókn tygara um fyritíðarpensjón, dagfest 16.10.2006, móttikin á Almannastovuni tann 16.10.2006. Avgerð er tikin í málinum á fundi tann 05.07.2007.

Avgjørt er at tilluta tygum lægstu fyritíðarpensjón, sambært § 8 stk. 1 í almannapensjónslógini frá 01.11.2006 at rokna.

*Lýsing av málinum:*
…
Endurbúgving/arbeiðsroynd er ikki roynt tí at tað ikki verður mett, at hetta fer at viðvirka til, at tygum fara at fóta tygum betur á arbeiðsmarknaðinum.

Í læknaváttan frá …, kommunulækna, dagfest 12.02.2007 verður sagt frá, at tygum hava slitgikt í knøunum, sum hevur við sær, at tygum ikki klára at arbeiða … Upplýst verður, at slitgiktapínan byrjaði fyri 2 árum síðani; og at røntgen vísir serliga artrosu vinstru megin. Tygum hava fingið …viðgerð í vinstra knæi. Sjúkan er varandi og hava avleiðingarnar av henni við sær skerjingar í tygara arbeiðsførleika.

*Meting og grundgeving fyri avgerðini:*
Við støði í eini heildarmeting av tygara heilsustøðu, samanhildið við tygara aldur og vánaligu útlitum til at finna annað hóskandi arbeiði fulla tíð, verður mett, at tygara arbeiðsførleiki er skorin við í minsta lagi eini helvt. Við støði í upplýsingum í málinum, herundir um heilsuviðurskifti, arbeiðsøki og arbeiðsroyndir tygara higartil, verður ikki mett, at rímiligt er at krevja av tygum, at tygum skulu betra tygara møguleikar á arbeiðsmarknaðinum við endurbúgvingarfyriskipan el.likn.

Hóast arbeiðsførleiki tygara er nógv skerdur orsakað av heilsuligu trupulleikunum, metir Almannastovan ikki, at hann er skerdur so nógv; at tað útilokar, at tygum arbeiða nakrar tímar um vikuna í léttari arbeiði og harvið forvinna nakað av inntøku. Mett verður, at tygum við atliti til tygara kreftir og førleikar, eiga at kunnu at átaka tygum eitt annað meiri hóskandi arbeiði í einar 15-20 tímar um vikuna.

*Niðurstøða/avgerð:*
Við støði í omanfyri standandi grundgevingum metir Almanna-

stovan, at tygara arbeiðsføri er niðursett við meiri enn eini helvt og lúka tygum tí treytirnar fyri at fáa lægstu fyritíðarpensjón sambært § 8, stk. 1 í almannapensjónslógini. Mett verður ikki, at tygum eru varandi óarbeiðsfør í eini og hvørjari vinnu ella einans at hava smávegis eftir av arbeiðsførinum, sum er treytin hjá umsøkjarum, ið hava fylt 60 ár, fyri fáa miðal fyritíðarpensjón sambært § 7, nr. 2 í almannapensjónslógini.

…

Avgerdin kann innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Føroya Kærustovnur, Skálatroð 20, Postrúm 45, FO-110 Tórshavn.

…"

***Mín viðmerking:***
*Málsviðgerðartíðin í hesum málinum er umleið 9 mánaðir. Tað ganga meira enn 3 mánaðir frá tí at kommunulæknavváttan er móttikin til samrøða verður hildin. Hetta er í longra lagi. Umframt hetta havi eg ikki viðmerkingar til hetta málið.*

**Mál nr. 6**

47 ára gamal maður, sum søkir um fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin tann 18. desember 2006. Heimildarváttan er latin saman við umsóknini.

Tann 9. mars 2007 biður Almannastovan kommunulækna um læknaváttan, og biður samstundis umsøkjaran um at seta seg í samband við læknan og umbiðja eina viðtalutíð. Tann 22. mars 2007 móttekur Almannastovan læknaváttanina. Í læknaváttanini stendur m.a., at umsøkjarin hevur stórar trupulleikar við lungunum. Hann orkar so at siga einki. Hann er als ikki arbeiðsførur sum støðan er, og útlitini eru ikki góð. Læknin metir, at óarbeiðsføri er fult, varandi og versnandi. Ímillum skjølini, sum kommunulæknin hevur sent Almannastovuni, liggur ein serlæknaváttan frá yvirlækna á Landssjúkrahúsinum, dagfest 24. august 2006, og eitt ummæli frá serlækna á Ríkissjúkrahúsinum, dagfest 4. desember 2006.

Tann 20. apríl 2007 eru inntøkuupplýsingar fingnar til vega frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Almannastovan hevur útfylt innanhýsis skjal A, dagfest tann 23. apríl 2007. Málsviðgerðin metir ikki, at endurbúgving er realistisk sum heilsustøðan er. Umsøkjarin hevur seinastu 8 árini verið merktur av versnandi heilsu og heilsustøðan er nú so vánalig, at ongi útlit eru til at fara til arbeiðis aftur.

Tann 15. mai 2007 hevur Almannastovan móttikið ummæli frá lækna-ráðgeva. Í ummælinum stendur, at avlamni umsøkjarans er varandi, at eingi útlit eru til betring, at umsøkjarin kann ikki røkja onnur størv, og at vinnuevnini eru skerd varandi og fult út. Umsøkjarin er óarbeiðsførur.

Tann 14. juni 2007 vóru skjøl og upplýsingar í hesum máli sendar manninum til hoyringar, sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini.

Almannastovan hevur tann 19. juni 2007 útfylt innanhýsis skjal D: tilráðing.

Málið er viðgjørt á Pensjónsfundi tann 5. juli 2007, har avgjørt var at játta hægstu fyritíðarpensjón, sambært § 6 í almanna-pensjónslógini.

Tann 18. juli 2007 verður avgerðin send umsøkjaranum. Skrivið var soljóðandi:

> „**Avgerð um fyritíðarpensjón**
> Víst verður til umsókn tygara um fyritíðarpensjón, dagfest 12.12.2006, móttikin á Almannastovuni tann 18.12.2006. Avgerð er tikin í málinum á fundi tann 05.07.2007.
>
> **Avgjørt er at tilluta tygum hægstu fyritíðarpensjón, sambært § 6 í almannapensjónslógini við gildi frá 01.01.2007.**

Við støði í upplýsingum í málinum, herundir serliga um heilsuviðurskiftini, metir Almannastovan, at tygum mugu roknast sum varandi óarbeiðsførur í eini og hvørjari vinnu, ella bara at hava smávegis eftir av arbeiðsføri, orsakað av heilsuligu trupulleikunum. Tí lúka tygum treytirnar í § 6 í almannapensjónslógini fyri tillutan av hægstu fyritíðarpensjón.

Mett verður ikki, vísandi til tygara heilsustøðu, at rímiligt er at krevja av tygum, at tygum skulu betra tygara møguleikar á arbeiðsmarknaðinum við endurbúgvingarfyriskipan e.l.

Gjørt verður vart við, at mál viðvíkjandi fyritíðarpensjón verða tikin upp til nýggja viðgerð, sambært § 25, stk. 1 í almannapensjónslógini, um týðandi broytingar henda í arbeiðsførinum, arbeiðsmøguleikum, inntøkuviðurskiftum e.ø. viðurskiftum, ið hava týdning fyri, um treytirnar fyri fyritíðarpensjón eru loknar. Pensjonisturin sjálvur kann biðja um at fáa málið tikið uppaftur, um tílíkar broytingar henda.

Tygum fáa skjótast til ber nærri at vita um upphæddir, útgjald o.a. Tygara málsviðgerði á Veitingardeildini á Almannastovuni er …

Avrit av viðkomandi lógargreinum úr almannapensjónslógini er hjálagt.

Avrit av hesum skrivi er sent til …, kommunulækna, …“

***Mín viðmerking:***
*Málsviðgerðartíðin í hesum máli er umleið 7 mánaðir. Almannastovan sendir ikki áheitan um læknaváttan til kommunulækna fyrr enn umleið 3 mánaðir eftir, at umsóknin er móttikin. Hetta er als ikki nøktandi. Almannastovan hevði kunna stytt munandi um viðgerðartíðina í hesum máli, um áheitan um læknaváttan var send skjótari til kommunulækna.*

**Mál nr. 7**
61 ára gamal maður, sum søkir um fyritíðarpensjón. Umsóknin er

móttikin tann 12. desember 2006. Heimildarváttan til at innheinta og víðarilata upplýsingar er latin saman við umsóknini.

Tann 15. desember 2006 biður Almannastovan kommunulækna um læknaváttan, og biður samstundis umsøkjaran um at seta seg í samband við læknan og umbiðja eina viðtalutíð. Tann 19. desember 2006 móttekur Almannastovan læknaváttanina, og í henni stendur, at lungnafunktión hjá umsøkjaranum er vánalig, og at hetta samsvarar við subjektiva upplivilsi hjá umsøkjaranum av hvørja arbeiðsorku hann hevur. Kommunulæknin metir, at støðan hjá umsøkjaranum er varandi, og harumframt versnandi.

Við skrivi, dagfest 2. mars 2007, biður Almannastovan síðani mannin koma til samrøðu tann 15. mars 2007 kl. 14.00. Einki upprit liggur í málinum frá samrøðuni.

Almannastovan hevur útfylt innanhýsis skjal A, dagfest tann 22. mars 2007. Málsviðgerðin skrivar, at umsøkjarin klárar arbeiðsuppgávur, ið ikki eru kropsliga krevjandi, men at hann ikki klárar fulltíðararbeiði. Hann hevur møguleika at átaka sær smávegis arbeiðsuppgávur, ið hann kann røkja, um hann sjálvur kann leggja sína arbeiðstíð og sítt arbeiðsavrik til rættis, alt eftir hvussu hann er fyri heilsuliga. Inntøkan er minkað munandi seinastu 4 árini vegna heilsuligar trupulleikar.

Tann 1. mai 2007 eru inntøkuupplýsingar fingnar til vega frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Tann 25. mai 2007 hevur Almannastovan móttikið ummæli frá læknaráðgeva. Av ummælinum framgongur, at umsøkjarin hevur bronkitis, hóttandi KOL og gikt í rygginum, at avlamni umsøkjarans er varandi, at hann ikki klárar likamliga hart arbeiði, men at hann tó kann klára lættari, parttíðar arbeiði, og at vinnuevnini eru skerd varandi við 2/3 ella meira.

Tann 7. juni 2007 vóru skjøl og upplýsingar í hesum máli sendar manninum til hoyringar, sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini.

Almannastovan hevur tann 13. juni 2007 útfylt innanhýsis skjal D: tilráðing, har mælt verður til at játta pensjón.

Málið er viðgjørt á Pensjónsfundi tann 5. juli 2007, har avgjørt var at játta lægstu fyritíðarpensjón, sambært § 8, nr. 1 í almannapensjónslógini.

Tann 19. juli 2007 verður avgerðin send umsøkjaranum. Brot úr skrivinum er soljóðandi:

„**Avgerð um fyritíðarpensjón**
Víst verður til umsókn tygara um fyritíðarpensjón, dagfest 10.12.2006, móttikin á Almannastovuni tann 12.12.2006. Avgerð er tikin í málinum á fundi tann 05.07.2007.

**Avgjørt er at tilluta tygum lægstu fyritíðarpensjón sambært § 8. stk. 1 í almannapensjónslógini frá 01.01.2007 at rokna.**

*Lýsing av málinum:*
…
Tygum skiftu vinnuveg av tí, at tygum ikki kláraðu sitandi arbeiði og hava tygum tey seinastu 15 árini, arbeitt sum … Seinastu árini hava tygum bert átikið tygum lættari arbeiði og hava í løtuni bert smávegis arbeiðsuppgávur. Endurbúgving/arbeiðsroynd er ikki roynd, tí at tað ikki verður mett, at hetta fer at viðvirka til, at tygum fara at fóta tygum betur á arbeiðsmarknaðinum.

Tygum hava kroniska bronchitis og gikt í lendunum. Kommunulæknin sigur í læknaváttan, móttikin á Almannastovuni tann 08.02.2007, at tygum hava vánaliga lungnafunktión, og tað er vegna kroniska bronchitis og hóttandi KOL (kroniska obstruktiva lungasjúku). Sjúkan er varandi og hava avleiðingarnar av henni við sær skerjingar í tygara arbeiðsførleika.

*Meting og grundgeving fyri avgerðini:*
Við støði í upplýsingum í málinum, herundir um aldur, heilsuviðurskifti, arbeiðsøki og arbeiðsroyndir tygara higartil, verður

ikki mett, at rímiligt er at krevja av tygum, at tygum skulu betra tygara møguleikar á arbeiðsmarknaðinum við endurbúgvingarfyriskipan el.líkn.

Hóast arbeiðsførleiki tygara er nógv skerdur orsakað av heilsuligu trupulleikunum, metir Almannastovan ikki, at hann er skerdur so nógv, at tað útilokar, at tygum arbeiða nakrar tímar um vikuna í lættari arbeiði og harvið forvinna nakað av inntøku. Mett verður, at tygum við tygara útbúgving og arbeiðsroyndurn og við atliti til tygara kreftir og førleikar, eiga at kunnu at átaka tygum eitt arbeiði nakrar tímar um vikuna.

*Niðurstøða/avgerð:*
Við støði í omanfyri standandi grundgevingum metir Almannastovan, at tygara arbeiðsføri er niðursett við meiri enn eini helvt og lúka tygum tí treytirnar fyri at fáa lægstu fyritíðarpensjón sambært § 8, stk. 1 í almannapensjónslógini. Mett verður ikki, at tygum eru varandi óarbeiðsførur í eini og hvørjari vinnu ella einans at hava smávegis eftir av arbeiðsføri, sum er treytin hjá umsøkjarum, ið hava fylt 60 ár, fyri fáa miðal fyritíðarpensjón sambært § 7, nr. 2 í almannapensjónslógini.

…

Avgerðin kann innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum á Foroya Kærustovnur, Skálatrøð 20, Postrúm 45, PO-110 Tórshavn.

…“

***Mín viðmerking:***
*Málsviðgerðartíðin í hesum málinum er umleið 7 mánaðir. Tað ganga umleið 3 mánaðir frá tí at kommunulæknaváttan er móttikin á Almannastovuni, til umsøkjarin er til samrøðu á Almannastovuni. Hetta kundi verið skjótari atborið. Annars havi eg ikki aðrar viðmerkingar til hetta málið.*

**<u>Mál nr. 8</u>**

53 ára gomul kvinna, sum søkir um fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin tann 31. august 2006. Heimildarváttan er latin saman við umsókníni.

Tann 22. september 2006 biður Almannastovan kommunulækna um læknaváttan, og biður samstundis umsøkjaran um at seta seg í samband við læknan og umbiðja eina viðtalutíð. Tann 24. november 2006 móttekur Almannastovan læknaváttan frá serlækna á Landssjúkrahúsinum, og í henni stendur m.a., at sjúklingurin bert hevur 7. klassa, hevur arbeitt ófaklært arbeiði alt sítt lív, og fær afturstig viðvíkjandi sjúku síni, tá ið hon hevur likamliga hart arbeiði. Læknin metir ikki, at sjúklingurin kann klára likamliga hart arbeiði. Vegna hennara stuttu skúlagongd, vil tað verða trupult at finna eitt arbeiði, ið hon klárar, uttan at hon skal ígjøgnum longri endurbúgving. Støðan hjá sjúklinginum er varandi, møguleikar eru ikki til betran, og tí má væntast, at sjúklingurin í tíðarbilum ferð at verða heilt óarbeiðsfør.

Umsøkjarin hevur, tann 2. mars 2007, ringt til Almannastovuna, og rykt eftir viðgerðini av pensjónsmáli sínum. Notat er skrivað frá samrøðuni. Av notatinum sæst, at málsviðgerðin hevur biðið um orsaka, og sagt, at málsviðgeri umsøkjarans ikki er til staðar, men at nýggjur málsviðgeri ikki er at hitta fyrr enn 12. mars 2007.

Tann 22. mars 2007 hevur Almannastovan móttikið ummæli frá læknaráðgeva. Í ummælinum stendur, at tað neyvan er møguleiki fyri betran av avlamninum, at avlamni er varandi, at sjúklingurin ikki kann klára sítt vanliga arbeiði, at sjúklingurin í tíðarbilum vil verða heilt óarbeiðsfør, og vinnuevnini eru skerd varandi við 2/3 el. meira.

Tann 25. mai 2007 hevur umsøkjarin verið til samrøðu á Almannastovuni. Notat er skrivað frá samrøðuni. Av notati í málinum sæst, at umsøkjarin er illa nøgd við, at hon hevur skula bíða so leingi at koma til samrøðu.

Almannastovan hevur útfylt innanhýsis skjal A, dagfest tann 20. juni 2007. Í skjalinum stendur m.a., at talan er um eina kvinnu á 53 ár við sjúku. Kvinnan hevur bert 7 ára skúlagongd. Endurbúgvingarroynd er ikki gjørd. Viðkomandi hevur sjálv bert ynski um at søkja fyritíðarpensjón. Hevur ikki møguleika fyri at átaka sær arbeiði undir

vanligum umstøðum, soleiðis at hon kann verða sjálvforsyrgandi. Málsviðgerðin metir, at tað verður torført at finna henni eitt arbeiði, har hon kann verða sjálvforsyrgandi.

Tann 21. juni 2007 eru inntøkuupplýsingar fingnar til vega frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Tann 22. juni 2007 vóru skjøl og upplýsingar í hesum máli sendar kvinnuni til hoyringar, sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini.

Almannastovan hevur tann 25. juni 2007 útfylt innanhýsis skjal D: tilráðing. Málsviðgerðin metir, at tað er grundarlag fyri fyritíðarpensjón.

Málið er viðgjørt á Pensjónsfundi tann 5. juli 2007, har avgjørt var at játta miðal fyritíðarpensjón, sambært § 7, nr. 1 í almannapensjónslógini.

Tann 24. juli 2007 verður avgerðin send umsøkjaranum. Brot úr skrivinum er soljóðandi:

> „*Meting og grundgeving fyri avgerðini:*
> Við støði í upplýsingum í málinum, herundir um arbeiðsøki og arbeiðsroyndir tygara higartil, verður ikki mett, at rímiligt er at krevja av tygum, at tygum skulu betra tygara møguleikar á arbeiðsmarknaðinum við endurbúgvingarfyriskipan el.líkn., tí Almannastovan metir ikki, at ein endurbúgvingar- ella arbeiðsroynd fer at viðvirka til, at tygum fara at fóta tygum betur á arbeiðsmarknaðinum.
> Grundað á læknaligu upplýsingarnar í málinum metir Almannastovan, at tygara vinnuevni varandi eru skorin við í minsta lagi 2/3. Mett verður tó ikki, at tygum kunnu roknast sum varandi óarbeiðsfør í eini og hvørjari vinnu, ella einans at hava smávegis eftir av arbeiðsførinum.
>
> Hóast arbeiðsførleiki tygara er nógv skerdur orsakað av heilsuligu trupulleikunum, metir Almannastovan ikki, at hann er

skerdur so nógv, at tað útlokar, at tygum arbeiða nakrar tímar um vikuna í lættari ófaklærdum arbeiði, og harvið forvinna nakað av inntøku. Mett verður, at tygum við tygara arbeiðsroyndum og við atliti til tygara kreftir og førleikar, eiga at kunnu átaka tygum eitt lættari arbeiði í einar 10-12 tímar um vikuna. Arbeiðsútboðið í økinum, tygum búgva, skuldi ikki forða fyri hesum.

*Niðurstøða/avgerð:*
Við støði í omanfyristandandi grundgevingum metir Almannastovan, at tygara vinnuevni varandi eru skorin við í minsta lagi við 2/3, og hevur tí avgjørt at tilluta tygum miðal fyritíðarpensjón, sambært § 7, nr. 1 í almannapensjónslógini. Almannastovan metir ikki, at tygum eru varandi óarbeiðsfør í eini og hvørjari vinnu ella einans hava smávegis eftir av arbeiðsførinum. Tí kann hægsta fyritíðarpensjón sambært § 6 í almannapensjónslógini ikki tillutast tygum.
…
Avgerðin kann innan 4 vikur kærast til kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Føroya Kærustovnur, Skálatrøð 20, Postrúm 45, FO-110 Tórshavn.“

***Mín viðmerking:***
*Málsviðgerðartíðin í hesum málinum er 11 mánaðir. Tað er ikki nøktandi, at einki hendir í málinum í 6 mánaðir frá tí, at Almannastovan móttekur læknaváttan, tann 24. november 2006, til umsøkjarin er til samrøðu á Almannastovuni, tann 25. mai 2007. Tað ganga nærum 3 vikur frá tí at avgerð er tikin til avgerðarskriv verður sent umsøkjaranum. Hetta er í longra lagi.*

**Mál nr. 9**
46 ára gamal maður, sum søkir um fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin tann 16. november 2006. Heimildarváttan er latin saman við umsóknini.

Tann 29. november 2006 biður Almannastovan kommunulækna um læknaváttan, og biður samstundis umsøkjaran um at seta seg í samband

við læknan og biðja um eina viðtalutíð. Tann 7. desember 2006 móttekur Almannastovan læknaváttanina. Læknin metir ikki, at umsøkjarin longur er mentur at útinna sítt vanliga arbeiði, ið er hart likamligt arbeiði. Hetta vegna pínu og objektivt ávíst degenerativar- og arthosubroytingar í akslum, ryggi og knøum. Í læknaváttanini verður harumframt mett, at støðan hjá umsøkjaranum er varandi og versnandi, einki útlit er til betring. Hjálagt læknaváttanini frá kommunulæknanum, er ein serlæknaváttan frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi, dagfest 18. apríl 2006.

Í málinum liggur eitt upprit frá samrøðu við umsøkjaran, dagfest 28. desember 2007. Rætta dagfestingin er allarhelst: 28. desember 2006.

Umsøkjarin hevur rykt Almannastovuni eftir svarið í málinum tann 22. desember 2006, 5. januar 2007, 5. februar 2007, 20. februar 2007 og 14. mai 2007.

Tann 27. februar 2007 hevur Almannastovan móttikið ummæli frá læknaráðgeva. Í ummælinum stendur, at tað ikki eru útlit fyri betran av avlamninum, at avlamni er varandi, at umsøkjarin ikki klárar likamliga krevjandi arbeiði, men at hann klárar lættari arbeiði, og at vinnuevnini eru varandi skerd við 2/3 ella meira. Læknin mælir til, at sjúkuupplýsingar verða innheintaðar viðvíkjandi úrsliti av røntgenkanning av knæi.

Við skrivum, dagfest 28. februar 2007 og 2. mars 2007, sendir Almannastovan, eftir tilmæli frá læknaráðgevanum, áheitan til Landssjúkrahúsið um at senda Almannastovuni úrslit av røntgenkanning. Tann 6. mars 2007 eru upplýsingarnar móttiknar á Almannastovuni.

Almannastovan hevur útfylt innanhýsis skjal A, dagfest tann 19. juni 2007. Í skjalinum stendur m.a., at umsøkjarin er ófaklærdur, og hevur arbeitt hart likamligt arbeiði alt sítt lív. Hann noyddist at gevast við sínum arbeiði, av tí hann megnaði ikki arbeiði uttan at fáa sera nógva pínu. Hann hevur verið alkoholmisnýtari í nógv ár. Endurbúgving hevur verið roynd, men royndirnar eru miseydnaðar.

Arbeiðsroynd er ikki roynd. Málsviðgerðin metir ikki, at tað er realistiskt at gjøgnumføra skúlagongd vegna sosialar og heilsuligar trupulleikar. Mett verður, at umsøkjarin kann vera niðurslitin, og bert kann arbeiða fáar tímar um vikuna. Hann hevur ikki stórar møguleikar sum ófaklærdur. Málsviðgerðin dugir ikki at síggja, at fleiri tiltøk kunnu verða roynd í hesum málinum.

Tann 25. juni 2007 vóru skjøl og upplýsingar í hesum máli sendar manninum til hoyringar, sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini. Í skrivinum verður sagt, at umsøkjarin sjálvur hevur ynskt at fingið málið við á næsta pensjónsfund tann 5. juli 2007, uttan at hava havt høvi at gera viðmerkingar.

Tann 25. juni 2007 eru inntøkuupplýsingar fingnar til vega frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Almannastovan hevur tann 25. juni 2007 útfylt innanhýsis skjal D: tilráðing.

Málið er viðgjørt á Pensjónsfundi tann 5. juli 2007, har avgjørt var at játta miðal fyritíðarpensjón, sambært § 7, nr. 1 í almanna-pensjónslógini.

Tann 25. juli 2007 verður avgerðin send umsøkjaranum. Brot úr skrivinum er soljóðandi:

> „*Meting og grundgeving fyri avgerðini:*
> Við støði í upplýsingum í málinum, herundir um heilsuviðurskifti, arbeiðsøki og arbeiðsroyndir tygara higartil verður ikki mett, at framhaldandi endurbúgvingarroyndir fara at viðvirka til, at tygum fara at fóta tygum betur á arbeiðsmarknaðinum. Grundað á heilsuupplýsingarnar í málinum metir Almannastovan, at tygara vinnuevni varandi eru skorin við í minsta lagi 2/3, men ikki at tygum kunnu roknast sum varandi óarbeiðsførur í eini og hvørjari vinnu, ella einans at hava smávegis eftir av arbeiðsførinum.

Hóast arbeiðsførleiki tygara er nógv skerdur orsakað av heilsuligu trupulleikunum, metir Almannastovan ikki, at hann er skerdur so nógv, at tað útilokar, at tygum arbeiða nakrar tímar um vikuna í einum léttari ófaklærdum arbeiði, og harvið forvinna nakað av inntøku. Mett verður, at tygum við tygara arbeiðsroyndum og við atliti til tygara kreftir og førleikar, eiga at kunnu átaka tygum eitt léttari arbeiði í einar 10-12 tímar um vikuna. Arbeiðsútboðið í økinum, tygum búgva, skuldi ikki forða fyri hesum.

*Niðurstøða/avgerð:*
Grundað á eina samlaða meting av heilsuupplýsingunum í málinum, og við støði í omanfyri standandi grundgevingum metir Almannastovan, at tygara vinnuevni varandi er skorin við í minsta lagi 2/3. Almannastovan hevur tí avgjørt at tilluta tygum miðal fyritíðarpensjón, sambært § 7, nr. 1 í almannapensjónslógini. Almannastovan metir ikki, at tygum eru varandi óarbeiðsførur í eini og hvørjari vinnu ella einans hava smávegis eftir av arbeiðsførinum. Tí kann hægsta fyritíðarpensjón sambært § 6 í almannapensjónslógini ikki tillutast tygum.
…
Avgerðin kann innan 4 vikur kærast til kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Føroya Kærustovnur, Skálatrøð 20, Postrúm 45, FO-110 Tórshavn.
…"

***Mín viðmerking:***
*Málsviðgerðartíðin í hesum málinum er umleið 8 mánaðir. Tað ganga meira enn 4 mánaðir frá tí, at allir upplýsingar eru til taks í málinum, til málið verður lagt fyri Pensjónsfund. Tað ganga síðani nærum 3 vikur frá tí at avgerð er tikin til avgerðarskriv verður sent umsøkjaranum. Hesi málsviðgerðarstig eru í longra lagi.*

**Mál nr. 10**
52 ára gamal maður, sum søkir um miðal fyritíðarpensjón. Umsóknin er móttikin tann 29. mars 2005. Heimildarváttan er latin saman við umsóknini.

Tann 5. juli 2005 biður Almannastovan kommunulækna um læknavváttan, og biður samstundis umsøkjaran um at seta seg í samband við læknan og umbiðja eina viðtalutíð. Tann 8. september 2005 móttekur Almannastovan læknaváttanina, og í henni stendur m.a., at umsøkjarin hevur arbeitt hart likamligt arbeiði alt sítt lív, men at hann ikki kann fara í hetta arbeiði aftur, nú hann er so lamin og veikur í høgra beini, og vandi er fyri, at mjødnin kann fara úr lið. Umsøkjarin hevur onga útbúgving. Hann býr á lítlari oyggj, og har er einki arbeiði fyri hann uttan onkur stampur at egna nú og tá. Støðan hjá umsøkjaranum er varandi, møguliga kann arbeiðsførleikin betrast, um musklarnir í høgra beini styrkjast, arbeiðsførleikin kann eisini versna vegna aldursviknan.

Við skrivi, dagfest 16. november 2005, verður umsøkjarin biðin um at koma til samrøðu á Almannastovuni tann 6. desember 2005 kl. 11.00. Upprit frá samrøðuni liggur ikki í málinum.

Tann 23. januar 2006 eru inntøkuupplýsingar fingnar til vega frá Toll- og Skattstovu Føroya.

Almannastovan hevur útfylt innanhýsis skjøl A, B, D og E, dagfest tann 23. januar 2006. Málsviðgerðin skrivar m.a., at umsøkjarin ikki er áhugaður í endurbúgving. Hann sær seg ikki føran fyri at røkja nakað starv við tí førleika hann hevur, og hann kann ikki venda aftur til hart likamligt arbeiði orsaka av heilsustøðuni. Umsøkjarin sigur, at hann seinastu árini hevur roynt at arbeitt lættari standandi arbeiði, men hann klárar illa at standa. Mælt verður til at játta pensjón.

Tann 30. januar 2006 var málið lagt fyri á Pensjónsfundi. Á fundinum verður mett, at helvtin av vinnuevnunum eru burtur. Avgjørt verður at biðja um eina læknaváttan frá ortopedkirurgi.

Tann 7. februar 2006 biður Almannastovan serlækna á Landssjúkrahúsinum um serlæknaváttan. Almannastovan móttekur, tann 21. apríl 2006, serlæknaváttan frá serlækna á Landssjúkrahúsinum. Niðurstøðan hjá serlæknanum er, at talan er um ein 53 ára gamlan mann, ið hevur verið skurðviðgjørdur í høgru mjødn, og skal nú eisini

skurðviðgerðast í vinstru mjødn. Tað hjálpir uppá hansara pínu, men serlæknin metir ikki, at umsøkjarin kann fara aftur til hart likamligt arbeiði. Tó er tað ikki ómøguligt, at sjúklingurin 3-6 mánaðir eftir skurðviðgerðina vil kunna átaka sær minni tyngjandi arbeiði, har hann ikki skal standa allan dagin.

Tann 22. mai 2006 varð málið viðgjørt á Pensjónsfundi. Á fundinum verður avgerð tikin um, at bíða við meting av pensjónsgrundarlagnum, inntil hálvt ár eftir skurðviðgerðina. Hetta av tí, at støðan ikki er stationer enn. Støðumeting av vinnuevnunum skal innheintast eitt hálvt ár eftir skurðviðgerðina.

Tann 5. januar 2007 sendi Almannastovan skriv til serlækna á Landssjúkrahúsinum við fyrispurningi um, nær umsøkjarin skuldi skurðviðgerast. Almannastovan móttekur skriv frá serlæknanum tann 15. februar 2007, har sagt verður, at umsøkjarin var skurðviðgjørdur tann 15. mai 2006. Serlæknin skýtur upp, at bíða verður við meting um, hvørt umsøkjarin kann koma aftur í arbeiði.

Tann 15. mars 2007 varð málið tikið upp á pensjónsfundi. Avgjørt var at útseta málið til støðumeting frá serlækna fyriliggur.

Við skrivi, dagfest 11. apríl 2007, sendir Almannastovan áheitan um serlæknaváttan til Landssjúkrahúsið. Tann 11. juni 2007 er serlæknaváttan móttikin á Almannastovuni. Samanumtikið sigur serlæknin, at sjúklingur við tvíliðaðari mjadnaprotesu ikki er egnaður til likamliga krevjandi, standandi ella gangandi arbeiði. Í hesum førinum metir serlæknin, at arbeiðsføri er varandi og nógv niðursett.

Málið er viðgjørt á Pensjónsfundi tann 21. juni 2007, har avgjørt var at játta miðal fyritíðarpensjón, sambært § 7, nr. 1 í almannapensjónslógini.

Tann 11. juli 2007 verður ætlaða avgerðin saman við skjølum í hesum máli sendar umsøkjaranum til hoyringar. Tann 20. juli 2007 var umsøkjarin á Almannastovuni, har hann boðaði frá, at hann ongar viðmerkingar hevði til málið.

Tann 23. juli 2007 verður avgerðin send umsøkjaranum. Brot úr skrivinum er soljóðandi:

„**Avgerð um fyritíðarpensjón**
Víst verður til umsókn tygara um fyritíðarpensjón, dagfest 23.03.2005, móttikin á Almannastovuni tann 29.03.2005. Avgerð er tikin í málinum á pensjónsfundi tann 21.06.2007.

**Avgjørt er at játta tygum miðal fyritíðarpensjón, sambært § 7, nr. 1 í almannapensjónslógini frá 01.04.2005 at rokna.**

*Lýsing av málinum:*
Tygum eru 54 ára gamal, eru ógiftur og hava ikki uppihaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár. Tygum eru ófaklærdur og hava arbeiðsroyndir sum … Tygum góvust við arbeiðinum í 2000, tá tygum fingu ein skaða umborð á bátinum. Endurbúgving/arbeiðsroynd er ikki roynd, tí at tað ikki verður mett, at hetta fer at viðvirka til, at tygum fara at fóta tygum betur á arbeiðsmarknaðinum.

Sambært serlæknaváttan frá …, ortopedkirurgi, dagfest 04.06.2007, eru tygum nú viðgjørdur fyri vinstru mjødn fyri góðum ári síðani, men tað hevur gingið strilti at koma í gongd aftur. Tygum eru plágaður av pínu í lendunum við útstrálan til beinini, tá tygum ganga, hóast avstandurin er stuttur. Serlæknin metir, at við mjadnaprotesu báðu megin, eru tygum ikki egnaður til tungt standandi ella gangandi arbeiði og tí metir hann, at vinnuevnini eru stórliga minkaði varandi.

Sjúkan er varandi og hava avleiðingarnar av henni við sær skerjingar í tygara arbeiðsførleika.

Sambært skrivi dagfest 11.07.2007 hava tygum havt høvi til at gera viðmerkingar til upplýsingar og skjøl, herundir læknaligu upplýsingarnar og tilráðingina frá Arbeiðsmarknaðardeildini, ið hava ligið til grund fyri avgerðini. Tygum møttu á Almanna-

stovuni tann 20.07.2007 og boðaðu frá, at tygum ongar viðmerkingar hava til skjølini.

*Meting og grundgeving fyri avgerðini:*
Við støði í upplýsingum í málinum, herundir um heilsuviðurskifti, arbeiðsøki og arbeiðsroyndum tygara higartil og við atliti til tygara aldur, verður ikki mett, at rímiligt er at krevja av tygum, at tygum skulu betra tygara møguleikar á arbeiðsmarknaðinum við endurbúgvingarfyriskipan el.líkn.

Hóast arbeiðsførleiki tygara er nógv skerdur orsakað av heilsuligu trupulleikunum, metir Almannastovan ikki, at hann er skerdur so nógv, at tað útilokar, at tygum arbeiða nakrar tímar um vikuna í lættari ófaklærdum arbeiði og harvið forvinna nakað av inntøku.

Mett verður, at tygum við tygara arbeiðsroyndum og við atliti til tygara kreftir og førleikar, eiga at kunnu at átaka tygum eitt hóskandi arbeiði í einar 10-12 tímar um vikuna.

*Niðurstøða/avgerð:*
Við støði í omanfyristandandi grundgevingum metir Almannastovan, at tygara arbeiðsføri varandi er minkað í minsta lagi við 2/3. Almannastovan hevur tí avgjørt at tilluta tygum miðal fyritíðarpensjón, sambært § 7, nr. 1 í almannapensjónslógini frá 01.04.2005. Almannastovan metir ikki, at tygum eru varandi óarbeiðsførur í eini og hvørjari vinnu ella einans hava smávegis eftir av arbeiðsførinum. Tí kann hægsta fyritíðarpensjón sambært § 6 í almannapensjónslógini ikki tillutast tygum.

Gjørt verður vart við, at mál viðvíkjandi fyritíðarpensjón verða tikin upp til nýggja viðgerð, sambært § 25, stk. 1 í almannapensjónslógini, um týðandi broytingar henda í arbeiðsførinum, arbeiðsmøguleikum, inntøkuviðurskiftunum e.ø. viðurskiftum, ið hava týdning fyri, um treytirnar fyri fyritíðarpensjón eru loknar.
…

> Avgerðin kann innan 4 vikur kærast til kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Føroya Kærustovnur, Skálatrøð 20, Postrúm 45, FO-110 Tórshavn.
> …“

***Mín viðmerking:***
*Málsviðgerðartíðin í hesum málinum er umleið tvey og eitt hálvt ár. Eg havi hesar viðmerkingar til ymsu málsviðgerðarstigini í málinum:*

*Almannastovan sendir ikki áheitan um læknaváttan til kommunulækna fyrr enn umleið 3 mánaðir eftir, at umsóknin er móttikin. Hetta er als ikki nøktandi.*

*Málið varð fyrstu ferð tikið upp á Pensjónsfundi fundi tann 30. januar 2006. Á fundinum metti læknaráðgevin, at helvtin av vinnuevnunum hjá umsøkjaranum vóru dottin burtur. Avgjørt var, at biðja um eina serlæknaváttan.*

*Almannastovan bíðar tó við at gera meira við málið til serlæknaváttan fyriliggur. Eisini eftir at serlæknaváttan er móttikin, tann 21. apríl 2006, verður avgjørt á Pensjónsfundi, tann 22. mai 2006, at bíða við meting av pensjónsgrundarlagnum, inntil hálvt ár eftir skurðviðgerðina. 7 ½ mánaða seinni spyr Almannastovan serlækna eftir málinum. Eftir svari frá serlækna, tekur Pensjónsfundurin aftur avgerð um at útseta málið til støðumeting frá serlækna fyriliggur. Ikki fyrr enn nýggj serlæknaváttan fyriliggur, tann 11. juni 2007, verður málið tikið uppaftur á Pensjónsfundi, tann 21. juni 2007.*

*Eg fari í hesum førinum at minna á møguleikan í § 25, stk. 1 í almannapensjónslógini. Sambært hesi grein hevur Almannastovan møguleika fyri at veita umsøkjara fyritíðarpensjón, tá ið læknaváttan fyriliggur, og síðani taka málið uppaftur til nýggja viðgerð um týðandi broytingar henda í eitt nú arbeiðsførinum.*

## *d. Niðurstøða viðvíkjandi 10 fyritíðarpensjónsmálum*

*Tá ið Almannastovan viðger fyritíðarpensjónsmál, er uppgávan hjá Almannastovuni, at:*

1. *fáa umsókn um fyritíðarpensjón, jb. § 30 í almannapensjónslógini, og heimildarváttan til innheintan av upplýsingum, jb. § 31 í almannapensjónslógini,*
2. *lýsa málið á nøktandi hátt, soleiðis at nøktandi grundarlag er til at taka avgerð í málinum, jb. § 31 í almannapensjónslógini,*
3. *meta um, av innkomnu upplýsingunum, hvørt umsøkjarin skal fáa hægstu, miðal, ella lægstu fyritíðarpensjón v.m. sambært §§ 6, 7 og 8 í almannapensjónslógini, og í hvønn mun arbeiðsføri er skert, jb. § 9 í almannapensjónslógini,*
4. *notera upplýsingar av týdningi fyri málið, jb. § 6, stk. 1 í innlitslógini,*
5. *fremja partshoyring, um upplýsingar um veruligu umstøðurnar í málinum ikki eru til fyrimuns fyri umsøkjara, jb. § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini,*
6. *fáa samtykki frá umsøkjara, um viðkvæmar upplýsingar skulu latast víðari, jb. § 10, stk. 1, nr. 1 í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, við seinni broytingum,*
7. *taka avgerð um tillutan av pensjón, jb. § 25 í almannapensjónslógini, og fráboða umsøkjaranum avgerðina,*
8. *grundgeva og veita kæruvegleiðing, um avgerðin ikki til fulnar gongur umsøkjaranum á møti, jb. §§ 21 og 24 í fyrisitingarlógini,*
9. *hava rímiliga málsviðgerðartíð, og*
10. *veita umsøkjara fyritíðarpensjón, jb. § 32 í almannapensjónslógini.*

*Eg havi tó bert kannað málsviðgerðina í 10 fyritíðarpensjónsmálum til avgerð verður tikin; ikki til peningaliga veitingin verður latin umsøkjara.*

*1. Viðvíkjandi umsókn og heimildarváttan*

*Umsókn er fingin til vega í øllum teimum 10 málunum um fyritíðarpensjón, ið eg havi kannað. Á umsóknarblaðnum skrivar umsøkjarin undir uppá heimildarváttan til innheintan av upplýsingum. Hetta er í tráð við § 30, stk. 1 og § 31 í almannapensjónslógini.*

*Eg fari tó at viðmerkja, at umsøkjarin í standardheimildarváttanini á umsóknarblaðnum, eisini skrivar undir uppá, at umsøkjarin er kunnaður um, at hann hevur skyldu til at boða frá einhvørjari broyting í sínum viðurskiftum, ið kunnu ætlast at hava við sær, at pensjónin lækkar ella fellur burtur. Hetta hevur ikki nakað við innheintan av upplýsingum at gera, men er ein upplýsing til umsøkjaran um, hvørjar skyldur hann hevur. Teksturin er skrivaður við lítlum, til seinast í heimildarváttanini, og kann umsøkjarin tí lættliga koma til ikki at varnast innihaldið. Eftir mínari meting verður tað ikki við hesum nóg týðiliga upplýst, hvør skylda áliggur umsøkjaranum viðvíkjandi fráboðan um broytingar í viðurskiftum hansara. Eg fari at mæla Almannastovuni til at skilja hesa orðing frá heimildarváttanini.*

*Almannastovan hevur í hoyringsskrivi sínum, dagfest 21. mai 2008, boðað frá, at Almannastovan er samd í, at upplýsingarskyldan ikki eigur at verða skrivað saman við heimildarváttanini. Almannastovan fer at taka støðu til, hvat eigur at verða nevnt í umsóknarblaðnum um skyldur umsøkjarans, og hvat eigur at verða kunnað honum, eftir at fyritíðarpensjón er tillutað. Almannastovan viðmerkir, at tá ið Almannastovan sendir umsøkjaranum, sum hevur fingið játtað fyritíðarpensjón, kunningarskriv um pensjónsupphæddir, eftirgjald av pensjón o.a. verður eitt standardskjal lagt við, har greitt verður frá upplýsingarskylduni hjá viðkomandi.*

*Eg taki undir við, at hetta verður gjørt.*

*<u>2. Viðvíkjandi lýsing av málunum</u>*
*Sambært fyrisitingarrættinum er tað ein meginregla, at almennir myndugleikar hava skyldu til at lýsa eitt mál á nøktandi hátt, áðrenn avgerð verður tikin, hetta fyri at tryggja, at avgerðin verður tikin á einum lógligum og sakligum grundarlagi. Í § 31 í almannapensjónslógini er nevnt, hvønn Almannastovan kann krevja upplýsingar frá viðvíkjandi pensjónsmálum.*

*Almannastovan innheintar inntøkuupplýsingar frá Toll- og Skattstovu Føroya í øllum teimum 10 málunum.*

*Í øllum 10 fyritíðarpensjónsmálunum hevur Almannastovan innheintað*

*kommunulæknaváttan, sum prógv fyri heilsustøðuni hjá umsøkjaranum. Í málunum nr. 2, 3, 4 og 6 hevur kommunulæknin harumframt sent Almannastovuni serlæknaváttanir av eldri dagfesting, sum gjøllari prógva heilsustøðuna hjá umsøkjaranum. Í máli nr. 9 hevur Almannastovan eftir tilmæli frá læknaráðgevanum biðið um úrslit av røntgenkanningum á Landssjúkrahúsinum, áðrenn støða varð tikin í málinum. Hetta eisini fyri at fáa nøktandi grundarlag til at taka avgerð út frá. Í máli nr. 10 hevur Almannastovan í fleiri umførum biðið um serlæknaváttanir.*

*Umboðsmaðurin hevur spurt Almannastovuna, hvørja mannagongd Almannastovan hevur viðvíkjandi innheintan av ummæli frá læknaráðgeva. Almannastovan hevur í hoyringsskrivi sínum, dagfest 21. mai 2008, greitt frá, at sum meginregla verða allir læknaligir upplýsingar í fyritíðarpensjónsmálum lagdir til læknaráðgevan. Undantøk verða tó gjørd í bráfeingismálum, tvs. har umsøkjarin er álvarsliga sjúkur, og tað er tørvur á einari heilt skjótari viðgerð. Endamálið við hesum er, at Almannastovan hevur allar neyðugar upplýsingar, áðrenn málið verður lagt fyri pensjónsfund. Læknaráðgevin metir um tað er neyðugt við fleiri upplýsingum í málinum, t.d. serlæknaváttanum ella sjúkrahúsjournalum og týðir upplýsingarnar, so tað er gjørligt hjá sosialráðgevanum at gera sína meting av skerda arbeiðsførleikanum.*

*Eg havi ikki viðmerkingar til hesa mannagongd, men kann staðfesta, at bert í 6 av teimum 10 málunum, sum umboðsmaðurin hevur fingið til láns frá Almannastovuni, hevur Almannastovan, umframt kommunulæknaváttan, innheintað ummæli frá læknaráðgeva.*

*Umframt hetta bjóðar Almannastovan í 7 av teimum 10 málunum, umsøkjaranum inn til eina samrøðu á Almannastovuni. Umboðsmaðurin hevur spurt Almannastovuna, hvat endamálið er við samrøðunum, og hvørja mannagongd stovnurin hevur viðvíkjandi samrøðum. Almannastovan hevur í hoyringsskrivi sínum greitt frá, at endamálið við samrøðuni er at avklára støðu umsøkjarans nærri, herundir møguleikar og forðingar við atliti til arbeiði og endurbúgving og nærri lýsing av grundarlagnum fyri møguligari pensjón og vavinum av skerda arbeiðsførleikanum. Samrøða er ikki neyðug í førum, har skerjingin í arbeiðsførinum er eyðsæð, tí talan er um sera álvarsama sjúku, ið er*

*varandi og útlit ikki eru til betring við viðgerð o.ø. Almannastovan hevur gjørt eitt uppritarblað „upprit til samrøðu", fyri at geva sosialráðgevanum eitt amboð til stýring av samrøðuni. Tað er ikki eitt krav, at hetta skal brúkast, men samrøðan skal noterast.*

*Eg havi ikki viðmerkingar til hesa mannagongd, men eg fari at loyva mær at ivast í, um tað var neyðugt við einari samrøðu í málum nr. 3 og nr. 5. Talan var í hesum málum um umsøkjarar, ið vóru yvir 60 ár.*

*<u>3. Viðvíkjandi meting av arbeiðsmøguleikum, og hvør pensjón skal tillutast</u>*
*Sambært § 9 í almannapensjónslógini skal Almannastovan, í metingini av í hvønn mun arbeiðsføri er minkað eftir §§ 6, 7 og 8, meta um inntøku- og arbeiðsmøguleikar v.m. hjá umsøkjaranum. Hetta hevur Almannastovan gjørt í øllum teimum 10 málunum, ið eg havi eftirkannað.*

*<u>4. Viðvíkjandi notatskylduni</u>*
*Í málum nr. 1, 7 og 10 er upplýst, at umsøkjarin er boðin til samrøðu. Tó er einki upprit skrivað frá hesum samrøðum. Sambært § 6 í innlitslógini hevur Almannastovan skyldu til at skriva niður upplýsingar viðvíkjandi veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málunum. Tað er ikki nøktandi, at einki upprit liggur í málinum frá samrøðum.*

*Umboðsmaðurin hevur spurt Almannastovuna, hví upprit ikki er skrivað frá hesum samrøðum. Almannastovan sigur í hoyringsskrivi sínum, at tað er sera óheppið, at notat ikki er skrivað í máli nr. 1, 7 og 10. Almannastovan metir tað tó verða sannlíkt, at innihaldið í samrøðunum er skrivað inn í lýsingarblað A, uttan at hetta framgongur av skjalinum. Almannastovan vil framyvir broyta mannagongdina hesum viðvíkjandi, soleiðis at í teimum førum innihaldið í samrøðuni er ein partur av „lýsingarblaði A", skal tað framganga av skjalinum, at upplýsingar frá samrøðuni eru endurgivnar har. Eg taki svarið frá Almannastovuni til eftirtektar.*

*<u>5. Viðvíkjandi partshoyring</u>*
*Sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini skal ein partur, ið ikki er kunnigur við ávísar upplýsingar um veruligu umstøðurnar í málinum,*

*verða hoyrdur um hesar upplýsingar, áðrenn avgerð verður tikin. Hetta er bert galdandi, um upplýsingarnar ikki eru til fyrimuns fyri viðkomandi part.*

*Partshoyring er framd í øllum teimum 10 fyritíðarpensjónsmálunum, ið eg havi fingið til láns frá Almannastovuni. Hetta er í tráð við § 18, stk. 1 í fyritisingarlógini viðvíkjandi teimum málunum, har hægsta fyritíðarpensjón ikki verður játtað. Men í málum nr. 4 og nr. 6 verður hægsta fyritíðarpensjón játtað, og kortini verður partshoyring framd. Umboðsmaðurin hevur spurt Almannastovuna, hví hetta verður gjørt, tá ið allir upplýsingar tykjast vera til fyrimuns fyri umsøkjaran. Almannastovan svaraði í hoyringsskrivi sínum, at mannagongdin á fyritíðarpensjónsøkinum er tann, at um ivi er um ein upplýsing er til fyrimuns ella ikki, verður partshoyring framd. Tað vil siga, at tað sum meginregla verður partshoyrt um faktiskar upplýsingar. Ein sosialráðgevi hevur ikki læknaligan førleika, og kann tí ikki vera vísur í, at allar upplýsingar eru til fyrimuns. Tí verða málini send til hoyringar, áðrenn tey verða send á pensjónsfund. Eg eri samd við Almannastovuni í hesum sjónarmiðum. Er ivi um, hvørt upplýsingar eru til fyrimuns fyri umsøkjaran, eigur at verða partshoyrt. Tað kann koma fyri, at ein sosialráðgevi hevur mælt til hægstu fyritíðarpensjón, men at pensjónsfundurin kortini, við støði í læknaligum upplýsingum í málinum, tekur avgerð um, at játta miðal ella lægstu fyritíðarpensjón. Út frá hesum sjónarmiði er neyðugt at umsøkjarin verður partshoyrdur, hóast mælt verður til hægstu fyritíðarpensjón. Almannastovan gevur umsøkjarum 14 dagar til partshoyring, hetta skuldi ikki drigið málið óneyðuga leingi út.*

*Í máli nr. 9 verða skjøl og upplýsingar sendar umsøkjaranum til hoyringar tann 25. juni 2007. Í skrivinum til umsøkjaran verður sagt, at umsøkjarin sjálvur hevur ynskt at fingið málið við á næsta pensjónsfund tann 5. juli 2007, uttan at hava høvi at gera viðmerkingar. Av tí at umsøkjarin hevur fingið skjøl og upplýsingar, og sostatt hevur havt høvi til at gera viðmerkingar áðrenn fundin, skuldi hann ynskt tað, havi eg ikki viðmerkingar til hetta málsviðgerðarstig.*

*Í máli nr. 10 verður ætlaða avgerðin, saman við skjølum í hesum*

*máli, send umsøkjaranum til hoyringar. Seinni var umsøkjarin inni á Almannastovuni og boðaði frá, at hann ongar viðmerkingar hevði til málið. Eg havi ikki viðmerkingar til hetta málsviðgerðarstig.*

*6. Víðarilatan av upplýsingum*
*Á umsóknarblaðnum skrivar umsøkjarin undir uppá heimildarváttan viðvíkjandi víðarilatan av upplýsingum. Hetta er í tráð við § 10, stk. 1, nr. 1 í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, við seinni broytingum.*

*7. Viðvíkjandi tillutan av pensjón*
*Í øllum teimum 10 málunum, ið eg havi fingið til láns frá Almannastovuni, tekur Almannastovan avgerð um tillutan av fyritíðarpensjón, og fráboðar umsøkjaranum avgerðina skrivliga.*

*8. Viðvíkjandi grundgeving og Kæruvegleiðing*
*Sambært § 21 og § 24, stk. 1 í fyrisitingarlógini skal ein avgerð, ið er fráboðað skrivliga, hava grundgeving og kæruvegleiðing uttan so, at hon til fulnar gongur partinum á møti.*

*Í øllum teimum 10 málunum, ið eg havi fingið til láns frá Almannastovuni, verður grundgivið fyri avgerðini. Kæruvegleiðing verður givin í øllum málum uttan málum nr. 4 og nr. 6. Í hesum málum var hægsta fyritíðarpensjón játtað sambært § 6 í almannapensjónslógini, og varð tí ikki neyðugt við kæruvegleiðing.*

*Málsviðgerðin av hesum 10 málum var sostatt í tráð við § 21 og § 24, stk. 1 í fyrisitingarlógini.*

*9. Viðvíkjandi málsviðgerðartíðini*
*Sum sæst omanfyri í gjøgnumgongdini av hesum 10 fyritíðar-pensjónsmálum, havi eg nógvar viðmerkingar til málsviðgerðartíðina í hesum málum. Eg fari niðanfyri at taka samanum hesar viðmerkingar.*

*Tá ið Almannastovan móttekur umsókn um fyritíðarpensjón, eigur Almannastovan beinanvegin at senda skriv til kommunulækna við umbøn um læknaváttan. Í máli nr. 3 seinkar hetta málinum í 5 vikur,*

*í máli nr. 6 og 10 seinkar hetta málinum í 3 mánaðir. Hetta leingir um samlaðu málsviðgerðartíðina, og er als ikki nøktandi.*

*Metir Almannastovan, at tað, umframt kommunulæknaváttan, er neyðugt at biðja um serlæknaváttan, eigur Almannastovan beinanvegin, tá ið stovnurin móttekur kommunulæknaváttan, at senda skriv til serlækna við umbøn um serlæknaváttan. Í máli nr. 1 ganga 8 mánaðir frá tí, at kommunulæknaváttan er móttikin, til biðið verður um serlæknaváttan. Hetta seinkar málinum óneyðuga leingi, og er als ikki nøktandi.*

*Móttekur Almannastovan ikki umbidnu læknaváttanir, eigur Almannastovan at senda áminning. Almannastovan sendir áminningar, men eftir mínari meting verða áminningarnar sendar ov seint. Í máli nr. 2 ganga 6 mánaðir, áðrenn Almannastovan sendir fyrstu áminning, og í máli nr. 3 ganga 4 mánaðir, áðrenn fyrsta áminning verður send. Eg fari at mæla Almannastovuni til at senda fyrstu áminning skjótari, og síðani at senda áminning við jøvnum millumbilum. Hetta fyri at skunda undir, at lækni sendur læknaváttan.*

*Ætlar Almannastovan at bjóða umsøkjara til samrøðu, eigur hetta at verða gjørt so skjótt sum gjørligt eftir, at læknaváttanir eru innheintaðar. Í máli nr. 3 ganga 4 mánaðir frá tí, at kommunulæknaváttan er móttikin til samrøða verður hildin, í máli nr. 5 og nr. 7 ganga 3 mánaðir frá tí, at kommunulæknaváttan verður móttikin til samrøða verður hildin, og í máli nr. 8 ganga 6 mánaðir frá tí, at serlæknaváttan er móttikin, til samrøða verður hildin. Hetta er ikki nøktandi, og er eisini við til at leingja málsviðgerðartíðina.*

*Tá ið málið er nøktandi lýst, verður máli lagt fyri á Endurbúgvingar- og pensjónsfundi. Í máli nr. 9 ganga 4 mánaðir frá tí, at allar upplýsingar eru fingnar til vega, til málið verður lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Hóast tað í hesum førinum krevst málsviðgerð, so sum at skriva upprit og fyrireika málið til fund, haldi eg ikki hesa málsviðgerðartíð verða nøktandi.*

*Í máli nr. 10 fari eg at minna Almannastovuna á møguleikan í § 25, stk. 1 í almannapensjónslógini. Sambært hesi grein hevur Almannastovan*

*møguleika fyri at veita umsøkjara fyritíðarpensjón, tá ið læknaváttan fyriliggur, og síðani taka málið uppaftur til nýggja viðgerð, um týðandi broytingar henda í eitt nú arbeiðsførinum, jb. § 25, stk. 1, nr. 2. Um Almannastovan fylgdi ásetingini í § 25, stk. 1, hevði Almannastovan kunna stytt munandi um málsviðgerðartíðina í máli nr. 10.*

*Almannastovan eigur at senda umsøkjara avgerðarskriv, so skjótt sum gjørligt eftir at avgerð er tikin í fyritíðarpensjónsmálinum. Í máli nr. 5 ganga 5 vikur frá tí, at avgerð er tikin til avgerðarskriv verður sent, og í máli nr. 6 ganga 6 vikur frá avgerð, til avgerðarskriv verður sent. Hetta er ikki nøktandi. Eisini er tað í longra lagi, at tað í málunum nr. 8 og nr. 9 tekur nærum 3 vikur frá tí, at avgerð er tikin til avgerðarskriv verður sent.*

*Almannastovan hevur í hoyringsskrivi sínum boða frá, at hon er samd við umboðsmanninum í, at møguleikin í § 25, stk. 1 í almannapensjónslógini kundi verið nýttur í máli nr. 10. Í hesum førinum var tó talan um ein umsøkjara, ið livdi av forsorgarhjálp í tí tíðarskeiðnum viðgerðin av fyritíðarpensjónsmálinum fór fram. Forsorgarveitingin var hægri enn lægsta fyritíðarpensjón. Allarhelst var hetta viðvirkandi til, at § 25, stk. 1 ikki var nýtt í hesum førinum, eins og fyrilit vóru tikin fyri, at Almannastovan hevði skyldu til at lýsa málið á nøktandi hátt, áðrenn avgerð varð tikin. Eg taki hesa viðmerking til eftirtektar.*

*Fyri at betra um málsviðgerðartíðina í fyritíðarpensjónsmálum, fari eg at mæla Almannastovuni til at broyta mannagongd viðvíkjandi málunum um fyritíðarpensjón, soleiðis at Almannastovan leggur seg eftir beinanvegin at avgreiða tey skriv, ið kunnu avgreiðast víðari uttan nakra málsviðgerð.*

*Her hugsi eg um:*

- *At skriv viðvíkjandi umbøn um kommunulæknaváttan verða send avstað so skjótt sum gjørligt eftir, at umsókn er móttikin,*
- *At skriv viðvíkjandi umbøn um serlæknaváttan, tá ið slík er neyðug, verður sent avstað so skjótt sum gjørligt eftir, at kommunulæknaváttan er móttikin,*
- *At læknaummæli, tá ið slíkt er neyðugt, verður fingið til vega, so skjótt sum gjørligt eftir, at læknaváttan er móttikin,*

- *At samrøða við umsøkjara verður hildin so skjótt sum gjørligt eftir, at allar váttanir eru innheintaðar,*
- *At avgerðarskriv verður sent so skjótt sum gjørligt eftir at avgerðin er tikin, o.s.fr.*
- *Harumframt fari eg at mæla Almannastovuni til at senda fyrstu áminning viðvíkjandi læknaváttan fyrr enn gjørt verður í dag, og síðani minna á málið við jøvnum millumbilum.*

*Verður hetta gjørt, kann málsviðgerðartíðin í fyritíðarpensjónsmálum verða munandi stytt.*

*Í hoyringsskrivi, dagfest 21. mai 2008, segði Almannastovan, at stovnurin var fult út samdur við umboðsmanninum viðvíkjandi viðmerkingunum til málsviðgerð, og tók viðmerkingarnar til eftirtektar. Almannastovan hevur roynt at gera nakað við trupulleikan viðvíkjandi fyritíðarpensjónsmálum. Almannastovan upplýsti, at ein skrivari nú hevur til uppgávu at umbiðja kommunulæknaváttan, tá ið umsókn um fyritíðarpensjón er móttikin, leggja kommunulæknaváttan til læknaráðgevan, umbiðja serlæknaváttan, um læknaráðgevin metur tað neyðugt, senda áminning til kommunulækna umleið 6. hvørja viku, og 3. hvønn mánaða til serlækna. Hesar uppgávur verða allar gjørdar á nøktandi hátt í dag. Skrivarin byrjaði í januar 2007, og frá umleið summar 2007 vóru hesi viðurskifti komin í rættlag.*

*Eg kann bert fegnast um tey stig, ið Almannastovan hevur tikið fyri at betra um málsviðgerðartíðina í fyritíðarpensjónsmálum.*

*Almannastovan sigur harumframt, at stovnurin er samdur við umboðsmanninum, at samrøðan við umsøkjaran eigur at verða hildin so skjótt sum gjørligt eftir, at læknaváttanir eru innheintaðar, og at ov long tíð gongur áðrenn avgerðarskriv verða send umsøkjara. Tó sigur Almannastovan, at tað er trupult at fáa hesi málsviðgerðarstig avgreidd skjótari. Eitt longri tíðarskeið í fjør vár og summar hevði Almannastovan trupulleikar við, at eingin leiðari var á deildini, vantandi starvsfólkaorku, og drúgt var at fáa umsóknir til leysu størvini á deildini. Við verandi starvsfólkaorku metir Almannastovan tað eisini verða trupult at fáa avgerðarskriv send til umsøkjara innan 3 vikur eftir, at avgerð er tikin í málinum.*

*Eg fari at heita á Almannastovuna um at arbeiða við at betra hesi málsviðgerðarstig.*

## 3. Endurbúgving

### a. *Lógargrundarlagið*

Endurbúgving verður veitt sambært § 18, stk. 1 í forsorgarlógini: „Lbkg. nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg", sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 99 frá 1. november 2007. § 18, stk. 1 var, inntil 1. januar 2008, soljóðandi:

> „**§ 18.** Når det anses for påkrævet af hensyn til en persons mulighed for fremtidig at klare sig selv og sørge for sin familie, kan der ydes pågældende hjælp til uddannelse og erhvervsmæssig optræning eller omskoling."

Síðani umboðsmaðurin hevur fingið hesi 15 málini til láns frá Almannastovuni, er § 18 í forsorgarlógini broytt, jb. løgtingslóg nr. 99 frá 1. november 2007. Lógarbroytingin hevur ikki týdning fyri hesi mál, av tí at hon kom í gildi tann 1. januar 2008, tvs. eftir at avgerð var tikin í teimum 15 málunum, ið umboðsmaðurin hevur kannað. Tí verður lógarbroytingin ikki tikin við her.

Á heimasíðuni hjá Almannastovuni stendur soljóðandi vegleiðing um endurbúgving:

> „**Endurbúgving**
> Hevur tú skerdan arbeiðsførleika, kanst tú fáa endurbúgvingarstuðul, um tað er ein neyðug fortreyt fyri, at tú kann gerast fíggjarliga sjálvbjargin.
>
> Endurbúgving kann verða veitt sum ráð og vegleiðing, arbeiðsroynd, umskúling, upplæring, arbeiðsvenjing, styttri ella longri skeið og sum vanlig útbúgving.

Sum dømi um persónar, sum kunnu vera í eini støðu, har endurbúgvingarstuðul er neyðugur fyri at gerast fíggjarliga sjálvbjargin við arbeiði, kunnu nevnast:

- persónar, ið bera likamligt ella sálarligt brek
- einsamallir uppihaldarar, sum eru í eini støðu, sum avmarkar teirra arbeiðsførleika
- ung, sum eru seinment ella bókliga veik
- persónar, sum leingi hava verið arbeiðsleysir, har aðrar stuðulsfyriskipanir ikki hava hjálpt
- persónar, sum hava djúptøknar arbeiðsligar ella útbúgvingarligar trupulleikar
- persónar, sum fáa sjúkradagpengar, og sum ikki kunnu væntast at kunna fara aftur til sama arbeiðið
- persónar við serligum sálarligum ella sosialum trupulleikum, herímillum t.d. misnýtslu ella kriminaliteti.
- Veitingin kann vera sum fyribils uppihaldshjálp, lærlingaløn, grundløn innan viðkomandi yrki, ískoyti til løn e.a. Hetta treytað av, hvør endurbúgvingarleiðin er.“
- (http://www.almannastovan.fo)

Av tí at § 9, stk. 2 og § 15, stk. 2 í forsorgarlógini verða nýttar í niðanfyristandandi endurbúgvingarmálum, verða greinirnar endurgivnar her. § 9, stk. 2 í forsorgarlógini er soljóðandi:

> „*Stk. 2.* Sum hjálp til uppihald verður sambært stk. 1 vanliga útgoldið í mesta lagi ein upphædd samsvarandi við fólkapensjóns grundupphæddina við einum ískoyti fyri hvørt barnið, samsvarandi barnaviðbótini eftir løgtingslóg um almannapensjónir. Við ásetan av hjálp má annars takast fyrilit fyri tílíkum føstum útreiðslum, sum grundaðar á livikorini higartil kunnu metast at vera rímiligar, og leggjast dentur á livikorini frameftir, sum kunnu gerast ein fylgja av tí broyting, sum er hend í støðuni hjá viðkomandi ella familjuni. Tann samlaða veitingin kann ikki fara upp um ta upphædd, sum verður útgoldin til persónar, ið fáa dagpening eftir hægsta satsi, og sum ikki hava aðrar inntøkur.

> Tó kann samlaði stuðulin, ið verður útgoldin persónum í sambandi við vantandi arbeiðsmøguleikar, ikki vera hægri enn hægsta útgjaldið frá ALS, og viðkomandi skal ikki hava aðrar inntøkur.“

§ 15, stk. 2 í forsorgarlógini er soljóðandi:

> „*Stk. 2.* Hvis en person har udgifter til sygebehandling, medicin, tandbehandling eller lignende, der ikke dækkes efter lovgivning for Færøerne om offentlig sygeforsikring eller social ulykkesforsikring, kan der ydes hjælp hertil, såfremt pågældende ikke selv har midler til at afholde udgifterne.“

## *b. 15 mál um endurbúgving*

**<u>Mál nr. 1</u>**
Tann 7. desember 2005 sendi ein 47 ára gomul, útlendsk kvinna, umsókn um uppihaldshjálp til Almannastovuna. Á umsóknarblaðnum hevði kvinnan sett kross við endurbúgving, tað vil siga, at kvinnan ynskti endurbúgving. Á umsóknarblaðnum hevur kvinnan undirskrivað eina heimildarváttan, ið loyvir Almannnastovuni at útvega allar fyri málsviðgerðina neyðugar upplýsingar um hennara viðurskifti.

Tann 13. mars 2007 er upprit um endurbúgving skrivað á Almannastovuni. Kvinnan er nú 49 ár, og ynskir at koma á ALV-skúlan við Áir at taka 9.-10. flokk. Eingin skrivlig umsókn um endurbúgving liggur í málinum, annað enn omanfyrinevnda umsókn um uppihaldshjálp. Í uppritinum stendur m.a., at kvinnan hevur arbeitt sum flakakvinna, inntil hon varð sjúkrameldað í 2006. Hon er framhaldandi óarbeiðsfør vegna sjúku. Umsøkjarin skilir føroyskt, men tosar mest danskt. Hevur brúk fyri meira skúlagongd fyri at styrkja um føroyska málførleikan.

Tann 7. mai 2007 móttekur Almannastovan læknafrágreiðing frá kommunulækna. Í læknaváttanini stendur, at óarbeiðsføri hjá kvinnuni er fult, at hon hevur liðagikt, at hon ikki klárar arbeiði, ið er tyngjandi fyri hendur og øklar, og at kvinnan eigur at fáa endurbúgving.

Tann 14. mai tekur Endurbúgvingar- og pensjónsfundurin avgerð um at fáa avrit av journalini á Landssjúkrahúsinum. Skriv verður sent til Landssjúkrahúsið hesum viðvíkjandi tann 24. mai 2007. Umsøkjarin verður samstundis kunnaður um hetta. Journalin er móttikin á Almannastovuni tann 5. juni 2007. Í journalini er ein læknaváttan frá serlækna, dagfest 24. apríl 2007.

Tann 21. juni 2007 verður málið aftur lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund, ið tekur avgerð um ikki at veita stuðul til endurbúgving. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „Søkir um endurbúgving at taka 9. flokk við Áir, tí hon hevur ilt í handliðunum. Kommunulæknin skrivar liðagikt í síni kommunulæknaváttan frá 03.05.2007, men í reumatologisku læknaváttanini frá 24.04.2007 verður sagt, at talan er um slitgikt í hondunum. Mett verður ikki, at tað er endurbúgvingargrundarlag, og hevði tað verið tað, hevði endurbúgvingarleiðin verið ivasom, aldurin havandi í huga. Hildið verður, at hon eigur at finna okkurt lættari handligt arbeiði á ófaklærda arbeiðsmarknaðnum, t.d. í handli, og møguliga eigur AMD at hjálpa henni at leita."

Tann 9. juli 2007 sendir kommunulæknin aftur eina læknaváttan til Almannastovuna. Kommunulæknin metir, at tað er órealistiskt at ímynda sær, at kvinnan vendur aftur til sítt vanliga arbeiði, av tí at hon ikki klárar likamliga hart arbeiði. Hon hovnar á hondum og fótum, um hon verður belastað. Kvinnan hevur fleiri ferðir verið hjá kommunulæknanum við hovnaðum liðum, ikki somu lið hvørja ferð. Tó mest í fingralið og hondlið, men eisini einkultar ferðir við hovnaðum liðum um øklar og knø. Hetta er hent, tá ið kvinnan hevur havt likamliga hart arbeiði. Kommunulæknin stuðlar ynskinum hjá umsøkjaranum at taka 9.-10. flokk, við atliti til seinni útbúgving til t.d. námsfrøðing.

Í notati, dagfest tann 17. juli 2007, skrivar málsviðgeri á Almannastovuni, at deildin hevur fingið fleiri upplýsingar frá kommunulækna, og at málið tí verður lagt aftur fyri á Endurbúgvingar- og pensjónsfund.

Kvinnan verður kunnað um avgerðina í skrivi, dagfest 23. juli 2007. Skrivið er soljóðandi:

> „**Viðvíkjandi umsókn um stuðul til endurbúgving**
> Víst verður til umsókn tína um stuðul at taka 9. flokk á Skúlanum við Áir komandi skúlaárið 2007/2008.
>
> **Almannastovan hevur avgjørt <u>ikki</u> at játta tær endurbúgvingarstuðul.**
>
> Umsóknina um endurbúgvingarstuðul grundar tú við heilsutrupulleikum. Tú upplýsir, at tú fyri uml. 1½ ári síðani fekk trupulleikar við, at hendur og føtur hovnaðu, serliga høgra hond og armur.
>
> Almannastovan hevur í sambandi við málsviðgerðina biðið um frágreiðing frá …, kommunulækna, sum í skrivi sínum, dagf. 03.05.2007 sigur, at tú hevur liðagikt. Í reumatologiskari læknaváttan frá 24.04.2007 verður sagt, at talan er um slitgikt í hondunum.
>
> Umsóknin er viðgjørd sambært § 18, stk. 1 í forsorgarlógini. (Når det anses for påkrævet af hensyn til en persons mulighed for fremtidig at klare sig selv og sørge for sin familie, kan der ydes pågældende hjælp til uddannelse og erhvervsmæssig optræning eller omskoling.) Sambært hesi lógargrein kann hjálp verða veitt til útbúgving, vinnuliga uppvenjing ella umskúling, tá tað verður mett alneyðugt við atliti til møguleikarnar hjá umsøkjaranum fyri framyvir at kunna klára seg sjálvan og uppihalda familjuni. Tað kunna vera bæði heilsuligar og sosialar grundir til, at ein umsøkjari er forðaður í at brúka síni arbeiðsevni í løntum arbeiði og harvið klára seg sjálvstøðugt fíggjarliga.
>
> Við støði í upplýsingunum í málinum verður ikki mett at heilsuligar forðingar eru fyri, at tú kanst klára eitt lættari handligt arbeiði á arbeiðsmarknaðinum t.d. í handli. Møguliga eigur Arbeiðsmarknaðardeildin at hjálpa við at leita eftir arbeiði.

> Avgerðin kann innan 4 vikur frá móttøku av hesum skrivi kærast til Kærunevndina í Almannamálum, Føroya Kærustovnur, Skálatrøð 20, Postsmoga 45, FO-110 Tórshavn."

Tann 31. august 2007 er soljóðandi notat skrivað frá endurbúgvingar- og pensjónsfundi tann 30. august 2007:

> „Skriv er komið frá kommunulæknanum dagfest 09.07.2007, har hann mælir til endurbúgving, tí hon hevur slitgikt. Hetta broytir ikki okkara áðurgjørdu niðurstøðu viðvíkjandi endurbúgvingargrundarlag. Eisini skal sigast, at hon er í arbeiði."

Mín viðmerking
*Bert ein umsókn um uppihaldshjálp, dagfest 7. desember 2005, liggur í málinum, har kvinnan hevur sett kross við endurbúgving.*

*Kvinnan fær sjúkradagpening, og kann, sambært kommunulæknanum, ikki fara aftur til likamliga krevjandi arbeiði, hon er bert 49 ár, tá ið Endurbúgvingar- og pensjónafundurin tekur avgerð um at nokta endurbúgving, og hevur sostatt umleið 18 ár eftir á arbeiðsmarknaðinum. Tá ið kvinnan søkti um uppihaldshjálp, var hon bert 47 ár. Tað kann tí undra, at hendan kvinnan ikki fær stuðul til endurbúgving. Eisini kann tað undra, at Endurbúgvingar- og pensjónsfundurin ikki tekur hædd fyri, at kommunulæknin hevur staðfest, at bæði hond- og fótliðir hjá kvinnuni hovna, tá ið hon verður belastað.*

*Á næsta Endurbúgvingar- og pensjónsfundi verður mett, at kvinnan kann finna okkurt lættari handligt arbeiði, t.d. kann arbeiða í handli. Tó sæst ikki av málinum, at kvinnan hevur verið til samrøðu á Almannastovuni, soleiðis at mett kann verða um, hvørt kvinnan er før fyri at arbeiða í handli ella lættari handligt arbeiði.*

*Almannastovan hevur innheintað kommunulæknaváttan og síðani fingið serlæknaváttan, tá ið biðið varð um journalina frá Landssjúkrahúsinum. Sambært notati frá Endurbúgvingar- og pensjónsfundi og avgerðarskrivinum, var tað hendan serlæknaváttanin, ið førdi til, at*

*endurbúgvingarstuðul varð noktaður. Tað var tí í stríð við § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini, ikki at partshoyra umsøkjaran um hesa læknaváttan.*

*Í avgerðarskrivinum verður sagt, at „Møguliga eigur Arbeiðsmarknaðardeildin at hjálpa við at leita eftir arbeiði.“ Boðskapurin í hesum setningi er ótýðiligur og til lítla hjálp hjá móttakaranum. Almannastovan hevur, í skrivum til borgaran, skyldu til at orðað seg so klárt og týðiligt sum gjørligt, soleiðis at borgarin skilir týdningin av tí, ið verður fráboðað.*

***Málsviðgerðartíð***
*Kvinnan søkir um uppihaldshjálp í desember 2005, men upprit um endurbúgving verður ikki skrivað fyrr enn í mars 2007, tað vil siga eitt ár og tríggjar mánaðir eftir at umsókn er móttikin á Almannastovuni. Hetta er ikki nøktandi.*

*Frá tí at upprit um endurbúgving verður skrivað í málinum, ganga umleið 4 mánaðir til málið er avgreitt, men av tí at gongd er í málinum alla tíðina, og læknaligir upplýsingar, bæði serlæknaváttan og kommunulæknaváttan, skulu innheintast, havi eg ikki viðmerkingar til hesi málsviðgerðarstig.*

**Mál nr. 2**
Tann 14. juni 2007 er upprit um endurbúgving gjørt á Almannastovuni. Talan er um eina 29 ára gamla kvinna, sum søkir um framhaldandi stuðul til endurbúgving til at taka HF-skeið uppá 3 ár. Hon hevur 10. flokk. Tað serliga í støðuni hjá umsøkjaranum er, at hon er einsamøll við einum brekaðum barni. Eingin skrivlig umsókn um endurbúgving liggur í málinum.

Í innanhýsis notati, dagfest 3. mai 2004, um almennu støðuna hjá umsøkjaranum stendur, at sosiala netverkið hjá umsøkjaranum er veikt. Foreldrini hjá umsøkjaranum stuðla henni, men kunnu ikki taka ábyrgdina av brekaða barninum burturav. Pápin at barninum er ikki til nógvan stuðul, tá ið tað kemur til at taka ábyrgd av barninum. Bústaðarviðurskiftini eru ikki nøktandi. Kvinnan býr inni hjá foreldrunum, og hevur ikki egnan køk og bað.

Ein læknaváttan viðvíkjandi soni umsøkjarans liggur í málinum, men eingin læknaváttan viðvíkjandi umsøkjaranum sjálvum.

Tann 21. juni 2007 verður málið lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Avgjørt verður at veita stuðul til endurbúgving til HF í 2 ár. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „Søkir um framhaldandi stuðul til endurbúgving á HF-skeiði í …, við leingjandi lestri í 3 ár. Mett verður, at tað er endurbúgvingargrundarlag, soleiðis, at hon kann fáa eina útbúgving, svarandi til miðnám. Við úrslitinum frá skúlanum við Áir í huga, er tað einki sum talar fyri, at hon hevur tørv á longri HF-skeiði enn vanligt. Játtað verður tí í mesta lagi 2 ár á HF; og tað verður ikki játtað framhaldandi endurbúgvingarstuðul til fakliga førleika.
>
> Alternativið hjá henni, eftir HF-námið, um hon sjálv ikki kemur víðari, er tann ófaklærdi arbeiðsmarknaðurin.“

Tann 26. juni 2007 verður soljóðandi skriv sent kvinnuni:

> **„Viðvíkjandi umsókn um stuðul til endurbúgving**
>
> Víst verður til umsókn tína um stuðul til at taka HF skeið í … við leingjandi lestri í 3 ár, móttikin á skúlanum við Áir tann 23.05.2007. Málið hevur verið fyri á Endurbúgvingarfundi tann 21.06.2007.
>
> **Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul til <u>HF skeið tó í mesta lagi 2 ár</u> eftir § 18 í forsorgarlógini.**
>
> Mett verður, at tað er endurbúgvingargrundarlag, soleiðis, at tú kanst fáa eina útbúgving, svarandi til miðnám. Við úrslitinum frá skúlanum við Áir í huga, er tað einki sum talar fyri, at tú hevur tørv á longri HF-skeiði enn vanligt. Játtað verður tí í mesta lagi 2 ár á HF; og tað verður ikki játtað framhaldandi

endurbúgvingarstuðul til fakliga førleika. Alternativið hjá tær, eftir HF-námið, um tú sjálv ikki kemur víðari, er tann ófaklærdi arbeiðsmarknaðurin.

*Játtanin*

Játtanin umfatar útreiðslur til

- uppihalds – um uppihaldsveitingina, sí nærri niðanfyri
- bøkur eftir váttan frá útbúgvingarstaðnum/lærararanum og við innlatan av rokning/kvittan
- ferðaútreiðslir (busskort)
- undirvísingartilfar (pappír, skriviamboð, o.t.) eftir rokning (í mesta lagi 300 kr./ár)
- skúlatasku (í mesta lagi 300 kr. einaferð)

*Treytir*

Játtanin er treytað av, at tú

- fylgir undirvísingini í nøktandi mun
- boðar útbúgvingarstaðnum frá, um tú gerst sjúk
- boðar Almannastovuni frá um sjúkralegan er longrivarandi, meiri enn ?
- boðar Almannastovuni frá, um tú heldur uppat í ótíð við útbúgvingini
- boðar Almannastovuni frá, um broytingar annars henda í persónligu og fíggjarligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær broytingar í veitingini.

*Ummæli frá útbúgvingarstaðnum*

Almannastovan fer við jøvnum millumbilum at biðja útbúgvingarstaðið um frágreiðing og meting av, hvussu tað gongur fakliga, herundir úrslit av termins- og ársroyndum og próvtøkum annars. Útbúgvingarstaðið verður eisini biðið um at boða Almannastovuni frá, um tú ikki fylgir undirvísingini á nøktandi hátt.

*Útbúgvingarstuðul ÚS*

Persónar undir endurbúgving skulu søkja ÚS-stuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðulin verður hvønn mánaða drigin frá útroknaðu uppihaldvetingini.

*Uppihaldsveitingin*
Veitingin til uppihalds verður tann sama, sum tygum higartil hava móttikið og verður umsitin av økisdeildini í …
Veitingin verður ásett sambært § 9, stk. 2 í forsorgarlógini. Í ásetan av veitingini verður fíggjarligi tørvurin fyrst kannaður og umfatar útrokningin hesar útreiðslur:

- grundupphædd til mat, klæði, persónliga røkt o.t. (svarandi til grundupphædd í fólkapensjónini)
- bústaðarútreiðslur
- el- og hitaútreiðslur
- sjúkrakassalimagjald
- og møg. aðrar rímiligar fastar útreiðslur

Vanliga kann stuðulin ikki fara uppum eina upphædd, ið svarar til hægst møguliga dagpeningaútgjaldið sambært lógini um dagpening vegna sjúku vm.

Støðið fyri mánaðarligu veitingini verður tí antin ein upphædd, svarandi til útroknaða tørvin ella svarandi til sjúkradagpeninga-hámark. Frá hesi upphædd verða drignar allar inntøkur hjá umsøkjaranum og møguligum hjúnafelaga.
Tað er ein fyritreyt fyri at fáa uppihaldsveiting, at tygum ikki hava ogn, t.v.s. peningaogn ella fastogn, ið kann seljast. Tó undantikið sethús til egnan bústað.

Veitingin verður umsitin av økisdeildini í … og fáa tygum nærri at vita um útrokningina av tygara uppihaldsveiting á økisdeildini.“

Eftirfylgjandi er soljóðandi notat skrivað í málið:

„EP-fundur tann 30.08.2007: Sambært HF-skeiði í Klaksvík ber ikki til hjá henni at lesa í 2 ár vegna plásstrot. Vit taka av í 3 ára lesnað.“

***Mín viðmerking:***
*Eingin skrivlig umsókn um endurbúgving liggur í málinum. Tað sæst*

*ikki av málinum, nær málið er visiterað til Arbeiðsmarknaðardeildina. Eingin læknaváttan viðvíkjandi umsøkjaranum liggur í málinum. Av tí at nýggjar upplýsingar ikki eru innheintaðar í hesum málinum, er eingin trupulleiki viðvíkjandi partshoyring sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini.*

*Eg skilji ikki, at Almannastovan í avgerðarskrivinum boðar kvinnuni frá, at kvinnan ikki fær játtað framhaldandi endurbúgvingarstuðul til fakligan førleika. Almannastovan eigur í hvørjum einstøkum endurbúgvingarmáli at meta um, hvørt stuðul til endurbúgving skal latast. HF er ein miðnámsútbúgving, og tí ikki førleikagevandi í sjálvum sær. Eftir mínari meting átti Almannastovan heldur at gjørt eina endurbúgvingarætlan í samráð við kvinnuna, soleiðis at kvinnan, tá ið endurbúgvingarleiðin varð av, kundi klára seg sjálvan og barn sítt.*

*Harumframt haldi eg, at hugburðurin í avgerðarskrivinum er óhøviskur og ómotiverandi. Sagt verður, at alternativið eftir HF-námið, um hon ikki sjálv kemur víðari, er tann ófaklærdi arbeiðsmarknaðurin. Eg fari at biðja Almannastovuna umhugsa slíkar útsagnir í avgerðarskrivum til viðskiftafólk síni. Slíkar útsagnir kunnu bert fáa viðskiftafólk, sum eru í einari veikari støðu, at missa móti.*

*Málsviðgerðartíðin, frá tí at upprit er skrivað, til avgerð verður fráboðað, er 12 dagar.*

**Mál nr. 3**

Tann 11. apríl 2007 hevur Almannastovan móttikið eina umsókn um uppihaldshjálp frá einum 18 ára gomlum manni. Umsøkjarin hevur á umsóknarblaðnum sett kross við endurbúgving, og hevur á umsóknarblaðnum undirskrivað heimildarváttan viðvíkjandi innheintan av øllum fyri málsviðgerðina neyðugar upplýsingar um síni viðurskifti.

Við skrivi, dagfest tann 23. apríl 2007, biður Almannastovan mannin um at koma til samrøðu tann 7. mai 2007 kl. 13.00, vísandi til at hesin hevur søkt um endurbúgving til at gera seg lidnan við miðnámsskúla. Notat, dagfest 7. mai 2007, er gjørt frá samrøðuni.

Tann 18. mai 2007 er upprit um endurbúgving gjørt á Almannastovuni. Í uppritinum stendur m.a., at umsøkjarin hevur cystiska fibrosu. Hann arbeiðir av og á 1-2 tímar um vikuna. Sambært umsøkjaranum og mammu hansara, hevur hann ikki sama møguleika sum onnur ung at arbeiða við síðuna av skúlanum vegna sítt viðfevnda brek.

Í málinum liggur læknaváttan, dagfest 8. mai 2006, frá yvirlækna á medesinsku deild á Landssjúkrahúsinum; læknaváttan, dagfest 31. oktober 2005, frá yvirlækna á Ríkissjúkrahúsinum; og læknaváttan, dagfest 19. august 2003, frá lækna á Juliane Marie Centret í Keypmannahavn. Tað sæst av læknaváttanunum, at umsøkjarin hevur fingið staðfest kroniska og lívlanga cystiska fibrosu.

Tann 21. juni 2007 verður málið lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Í fundarnotatinum verður sagt, at umsøkjarin søkir um endurbúgving til miðnámsskúla, tí hann hevur Cystiska Fibroys. Talan er um eitt víðfevnt brek, og tí verður avgjørt at veita stuðul til endurbúgving.

Tann 22. juni 2007 verður soljóðandi skriv sent manninum:

> **„Víðvíkjandi umsókn um stuðul til endurbúgving**
>
> Víst verður til umsókn tína um stuðul til skúlagongd, móttikin á Almannastovuni tann 12.04.2007.
> **Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul til liðugtgerð av … *(miðnámsskúla – mín viðm.)* eftir § 18, stk. 1 í forsorgarlógini. Stuðulin er galdandi frá 11. mai 2007 til juni 2009.**
>
> *Játtanin*
> Játtanin umfatar útreiðslur til
> uppihalds – um uppihaldsveitingina, sí nærri niðanfyri
> bøkur eftir váttan frá útbúgvingarstaðnum/læraranum og við innlatan av rokning/kvittan
> ferðaútreiðslur (busskort)
> undirvísingartilfar (pappír, skriviamboð, o.t,) eftir rokning (í mesta lagi 500 kr./ár)

skúlatasku (í mesta lagi 300 kr. einaferð)
roknimaskinu (í mesta lagi 300 kr. einaferð)

*Treytir*

Játtanin er treytað av, at tú

- fylgir undirvísingini í nøktandi mun
- boðar útbúgvingarstaðnum frá, um tú gerst sjúkur
- boðar Almannastovuni frá um sjúkralegan er longrivarandi, meiri enn ein mánað
- boðar Almannastovuni frá, um tú heldur uppat í ótíð við útbúgvingini
- boðar Almannastovuni frá, um broytingar annars henda í persónligu og fíggjarligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær broytingar í veitingini.

*Útbúgvingarstuðul ÚS*

Persónar undir endurbúgving skulu søkja ÚS-stuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðulin verður hvønn mánaða drigin frá útroknaðu uppihaldveitingini.

*Uppihaldsveitingin*

Veitingin verður ásett sambært § 9, stk. 2 í forsorgarlógini. Í ásetan av veitingini verður fíggjarligi tørvurin fyrst kannaður og umfatar útrokningin hesar útreiðslur:

- grundupphædd til mat, klæði, persónliga røkt o.t. (svarandi til grundupphædd í fólkapensjónini)
- bústaðarútreiðslur, max 1000 krónur fyri heimabúgvandi
- sjúkrakassalimagjald
- og møg. aðrar rímiligar fastar útreiðslur

Bert útreiðslur sum eru skjalprógvaðar verða íroknaðar veitingini og verður tú biðin um at lata Almannastovuni útreiðsluskjølini skjótast tilber, soleiðis at ein útrokning kann gerast.

Vanliga kann stuðulin ikki fara uppum eina upphædd, ið svarar til hægst møguliga dagpeningaútgjaldið sambært lógini um dagpening vegna sjúku vm.

> Støðið fyri mánaðarligu veitingini verður tí antin ein upphædd, svarandi til útroknaða tørvin ella svarandi til sjúkradagpeningahámark. Frá hesi upphædd verða drignar allar inntøkur hjá umsøkjaranum og møguligum hjúnafelaga.
>
> Tað er ein fyritreyt fyri at fáa uppihaldsveiting, at tú ikki hevur ogn, t.v.s. peningaogn ella fastogn, ið kann seljast. Tó undantikið sethús til egnan bústað.
>
> Veitingin verður umsitin av økisdeildini í … og fáa tygum nærri at vita um útrokningina av tíni uppihaldsveiting á økisdeildini."

***Mín viðmerking:***
*Eg havi onga viðmerking til, at bert læknaupplýsingar av eldri dagfesting verða lagdar til grund í hesum máli. Talan er um lívslanga sjúku.*

*Málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er móttikin, til avgerðarskriv verður sent, er umleið 2 mánaðir.*

**<u>Mál nr. 4</u>**
Tann 13. juni 2007 er upprit um framhaldandi stuðul til endurbúgving gjørt á Almannastovuni. Talan er um ein 28 ára gamlan mann, ið sambært sálarfrøðingi, hevur ein moderatan borderline persónleika, hevur verið úti í misbrúki og harðskapi, og hevur fingið ymiska viðgerð fyri rúsevnismisnýtslu. Málsviðgerðin metir, at grundarlag er fyri at játtað HF grundað á sálarlig og sosial viðurskifti. Eingin skrivlig umsókn um framhaldandi endurbúgving liggur í málinum.

Tað sæst av notati í málinum, at málið er visiterað til Arbeiðsmarknaðardeildina tann 5. apríl 2001.

Hjálagt uppritinum var skriv, dagfest 27. februar 2001, frá sálarfrøðingi á Landssjúkrahúsinum, og skriv, dagfest 31. januar 2005, frá viðgerðarstovni. Í skrivunum verður sálarliga og sosiala støða umsøkjarans lýst.

Tann 20. januar 2003 hevur umsøkjarin undirskrivað eina heimildarváttan, ið heimilar Almannastovuni at útvega sær neyðugar upplýsingar til viðgerð av umsóknini um endurbúgving, tað verið seg heilsuligar ella sosialar upplýsingar og/ella inntøku- og ognarupplýsingar.

Tann 21. juni 2007 verður málið lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „Søkir um endurbúgvingarstuðul til at taka HF-skeið …, sum hann vónandi verður upptikin á í summar. Hann hevur klárað seg væl í 9. flokki við Áir, og tí tykist henda leiðin vælgrundað, eins og hildið verður, at tað er endurbúgvingargrundarlag. Tí verður HF-skeiðið játtað.“

Tann 22. juni 2007 verður soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum:

> **„Viðvíkjandi umsókn um stuðul til endurbúgving**
>
> Víst verður til umsókn tína um stuðul til HF.
> **Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul til HF eftir § 18, stk. 1 í forsorgarlógini.**
>
> *Játtanin*
> Játtanin umfatar útreiðslur til
> - uppihalds – um uppihaldsveitingina, sí nærri niðanfyri
> - bøkur eftir váttan frá útbúgvingarstaðnum/læraranum og við innlatan av rokning/kvittan
> - ferðaútreiðslur (busskort)
> - undirvísingartilfar (pappír, skriviamboð, o.t.) eftir rokning (í mesta lagi 500 kr./ár)
> - roknimaskinu (bíligastu forsvarligu)
>
> *Treytir*
> Játtanin er treytað av, at tú
> - fylgir undirvísingini í nøktandi mun

- boðar útbúgvingarstaðnum frá, um tú gerst sjúk
- boðar Almannastovuni frá um sjúkralegan er longrivarandi, meiri enn 14 dagar
- boðar Almannastovuni frá, um tú heldur uppat í ótíð við útbúgvingini
- boðar Almannastovuni frá, um broytingar annars henda í persónligu og fíggjarligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær broytingar í veitingini.

*Ummæli frá útbúgvingarstaðnum*
Almannastovan fer við jøvnum millumbilum at biðja útbúgvingarstaðið um frágreiðing og meting av, hvussu tað gongur fakliga, herundir úrslit av termins- og ársroyndum og próvtøkum annars. Útbúgvingarstaðið verður eisini biðið um at boða Almannastovuni frá, um tú ikki fylgir undirvísingini á nøktandi hátt.

*Útbúgvingarstuðul ÚS*
Persónar undir endurbúgving skulu søkja ÚS-stuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðulin verður hvønn mánaða drigin frá útroknaðu uppihaldveitingini.

*Uppihaldsveitingin*
Veitingin til uppihalds verður tann sama, sum tygum higartil hava móttikið og verður umsitin av økisdeildini í …“

***Mín viðmerking:***
*Eingin skrivlig umsókn viðvíkjandi framhaldandi endurbúgving liggur í málinum. At málið er visiterað til Arbeiðsmarknaðardeildina í 2001, hevur ikki týdning fyri viðgerðina av umsóknini í 2007.*

*Eg havi onga viðmerking til, at váttanir av eldri dagfesting verða lagdar til grund í hesum máli.*

*Eftir mínari meting er tað ikki nøktandi, at Almannastovan ikki, í samráð við umsøkjaran, ger eina ætlan fyri, hvør endurbúgvingarleiðin skal verða. Hetta soleiðis, at umsøkjarin, tá ið endurbúgvingarleiðin*

*er av, kann gerast sjálvbjargin. HF er ein miðnámsútbúgving, og ikki førleikagevandi í sjálvum sær. Miðnámsútbúgvingin eigur tí at verða ein liður í einari størri endurbúgvingarætlan.*
*Málsviðgerðartíðin, frá tí at upprit er skrivað til avgerðarskriv verður sent, er 8 dagar.*

**Mál nr. 5**
Við skrivi, dagfest 12. juni 2007, søkir Ungdómsháskúla í Danmark um framhaldandi endurbúgvingarstuðul vegna ein 19-ára gamlan mann. Maðurin hevur longu verið næmingur á skúlanum í eitt ár, og søkt verður um eitt ár afturat.

Á heimasíðuni hjá ungdómsháskúlanum stendur soleiðis um skúlan:

> „… er et tilbud til unge mennesker over 18 år, som har eller har haft særlige psykiske vanskeligheder.
> Skolen modtager max. 14 elever fra hele landet.
> Grundtvigs højskoletanker om at oplive og oplyse er skolens bærende princip under hensyntagen til de særlige vanskeligheder vores elevgruppe har med sig.
> De fleste af vore elever har oplevet mange nederlag og er præget af manglende selvværd og kontaktvanskeligheder: unge med udviklingsforstyrrelse, hyppigst Asperger Syndrom, samt unge med en psykiatrisk diagnose.
> Gennem samværet med andre unge, med en tæt kontakt til stedets lærere, gennem gode oplevelser i det daglige virke på skolen, på ture og rejser, forsøger vi at vende tidligere nederlag til sejre.
> Eleverne har mulighed for jævnligt at tale med en ungdomspsykiater. Viser der sig behov for anden specialisthjælp, er skolen behjælpelig med dette.“

Tann 25. juni 2007 er upprit viðvíkjandi endurbúgving gjørt á Almannastovuni. Í uppritinum verður sosiala støðan hjá umsøkjaranum lýst, m.a. verður sagt, at umsøkjarin hevur asperger syndrom, sum er eitt lívlangt brek.

Í málinum liggur eitt ummæli, dagfest 16. mai 2006, frá sálarfrøðingi

á „Center for autisme“ í Bagsværd, Danmark. Í málinum liggja eisini tvey ummæli frá sálarfrøðingi, dagfest ávikavist 28. august 2005 og 10. apríl 2006. Í ummælunum verður sagt, at umsøkjarin hevur fingið staðfest Asperger syndrom í sambandi við, at hann luttók í eini kanning, sum Sernámsdepilin gjørdi í 2001 til 2004 fyri at lýsa talið á børnum og ungum við autismu í Føroyum.

Tann 5. juli 2007 verður málið lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „19-ára gamal maður søkir um framhaldandi uppihald á … Hetta, tí at tey enn halda, at tað eru menningarmøguleikar. Játtað verður 1 ár afturat, men vit skulu biðja stovnin um at halda eyga við møguligum vinnumøguleikum, tá komandi skeið er av.“

Tann 10. juli 2007 er soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum:

> **„Viðvíkjandi umsókn um stuðul til framhaldandi uppihald á … ungdomshøjskole**
>
> Víst verður til umsókn tína um stuðul til framhaldandi uppihald á … ungdómsháskúla.
>
> **Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul til skúlauppihald í framhaldandi 1 ár sambært § 18 í forsorgarlógini.**
>
> *Veitingin*
> játtanin umfatar útreiðslur til:
> - Skúlagjald
> - Lummapening
> - kostpening (møguliga)
> - sjúkrakassalimagjald
> - útreiðslur av ferðing heim 2 ferðir um árið
> - 10 tímar stuðul um vikuna á skúlanum
>
> *Treytir*
> Játtanin er treytað av, at tú:
> - møtir til undirvísing í nøktandi mun

- boðar skúlanum frá, um tú gerst sjúkur
- letur skúlanum læknaváttan, um sjúkan varar longri enn 3 dagar
- boðar Almannastovuni frá, um tú heldur uppat á skúlanum í ótíð
- boðar Almannastovuni frá, um broytingar annars henda í persónligu og fíggjarligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær broytingar i veitingini.

*Ummæli frá skúlanum*
Almannastovan fer við jøvnum millumbilum at biðja skúlan um frágreiðing og meting av, hvussu tað gongur hjá tær. Skúlin verður eisini biðin um at boða Almannastovuni frá, um tú ikki fylgir við á skúlanum á nøktandi hátt.

*Upphæddir vm.*
Lummapeningurin er kr. 2013 um mánaðin. Í styttri tíðarskeiðum, har tú lógliga ert burtur frá skúlanum, verður harumframt – eftir nærri avtalu – kostpeningur útgoldin við kr. 67 um dagin.

Hava tygum spurningar hesum viðvíkjandi eru tygum vælkomin at seta teg í samband við undirritaðu.

Arbeiðsmarknaðardeildin ynskir tær góða eydnu við skúlauppihaldinum.“

***Mín viðmerking:***
*Eg havi onga viðmerking til at váttanir av eldri dagfesting verða lagdar til grund í hesum máli, av tí at talan er um eitt lívlangt brek. Av tí at nýggjar upplýsingar ikki vórðu innheintaðar til hetta málið, var heimildarváttan viðvíkjandi endurbúgving ikki neyðug. Eg eri samd við Almannastovuni í, at hetta tilboðið kann nýtast til at finna fram til møguligar vinnumøguleikar hjá umsøkjaranum.*

*Í hesum máli fær umsøkjarin sett sum treyt, at hann, við sjúku, skal*

*lata skúlanum læknaváttan, um sjúkan varar longri enn 3 dagar. Eftir mínari meting er hetta ein strong treyt at seta við sjúku.*

*Málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er send til avgerðarskriv verður sent, er 1 mánaður.*

**<u>Mál nr. 6</u>**
Tann 11. mai 2007 móttekur Almannastovan eina skrivliga umsókn frá 21-ára gamlari kvinnu um stuðul til háskúlauppihald. Kvinnan hevur fyrr fingið játtað stuðul til endurbúgving.

Tann 25. juni 2007 er upprit um endurbúgving skrivað á Almannastovuni. Í uppritinum verður sosiala støðan hjá kvinnuni lýst, har stendur m.a. at kvinnan er foreldraleys, hevur arbeitt við at fóta sær eftir torføran barn- og ungdóm, har hon hevur mist nærum øll tey mest grundleggjandi tilknýtini. Mælt verður til at játtað framhaldandi endurbúgving av sosialum ávum.

Ein frágreiðing frá sálarfrøðingi, dagfest 2. januar 2006, liggur í málinum. Í frágreiðingini stendur, at kvinnan er rættiliga óbúgvin, smæðin og afturhildin.

Tann 29. november 2005, hevur kvinnan undirskrivað eina heimildarváttan viðvíkjandi innheintan av upplýsingum viðvíkjandi umsókn um uppihaldshjálp. Eingin heimildarváttan viðvíkjandi endurbúgving liggur í málinum.

Tann 5. juli 2007 verður málið lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

„Søkir um Háskúlauppihald, tí hon er, samb. sálarligari meting, rættuliga óbúgvin, og hevur verið fyri ymiskum mótbúrði í uppvøkstrinum. Tí verður hildið, at eitt Háskúlauppihald er hóskandi, sum ein forrevalidering, og tí verður tað játtað.“

Tann 11. juni 2007 verður soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum:

**„Viðvíkjandi umsókn um stuðul til Háskúlauppihald**
Víst verður til umsókn tína um stuðul til háskúlauppihald, móttikið á Almannastovuni tann 11.05.2007.

**Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul til skúlauppihald sambært § 18 í forsorgarlógini.**

*Veitingin*
- játtanin umfatar útreiðslur til
- skúlagjald
- lummapening
- sjúkrakassalimagjald
- kamar

*Treytir*
Játtanin er treytað av, at tú
- møtir til undirvísing í nøktandi mun
- boðar skúlanum frá, um tú gerst sjúk
- letur skúlanum læknaváttan, um sjúkan varar longri enn 3 dagar
- boðar Almannastovuni frá, um tú heldur uppat á skúlanum í ótíð
- boðar Almannastovuni frá, um broytingar annars henda í persónligu og fíggjarligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær broytingar í veitingini.

*Ummæli frá skúlanum*
Almannastovan fer við jøvnum millumbilum at biðja skúlan um frágreiðing og meting av, hvussu tað gongur hjá tær. Skúlin verður eisini biðin um at boða Almannastovuni frá, um tú ikki fylgir við á skúlanum á nøktandi hátt.

*Upphæddir vm.*
Lummapeningurin er kr. 1.522 um mánaðin. Í styttri tíðarskeiðum, har tú lógliga ert burtur frá skúlanum, verður harumframt – eftir nærri avtalu – kostpeningur útgoldin við kr. 51 um dagin. Sjúkrakassalimagjald verður flutt beinleiðis til sjúkrakassan.“

***Mín viðmerking:***
*Eingin heimildarváttan viðvíkjandi innheintan av upplýsingum í endurbúgvingarmálinum liggur í málinum. Av tí at nýggjar upplýsingar ikki verða innheintaðar, havi eg ikki viðmerkingar til hetta.*

*Eftir mínari meting er tað ikki nøktandi, at Almannastovan ikki, í samráð við umsøkjaran, ger eina ætlan fyri, hvør endurbúgvingarleiðin skal verða. Hetta soleiðis, at umsøkjarin, tá ið endurbúgvingarleiðin er av, kann gerast sjálvbjargin. Eitt háskúlauppihald er ikki førleikagevandi í sjálvum sær. Háskúlauppihaldið eigur tí at verða ein liður í einari størri endurbúgvingarætlan.*

*Í hesum málinum fær kvinnan sett sum treyt, at hon, við sjúku, skal lata skúlanum læknaváttan, um sjúkan varar longri enn 3 dagar. Eftir mínari meting er hetta ein strong treyt at seta við sjúku.*

*Málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er móttikin, til avgerðarskriv verður sent, er ein mánaður.*

**Mál nr. 7**
Við skrivi, dagfest 29. mai 2007, verður ein 43-ára gamal maður boðin til samrøðu á Almannastovuni tann 6. juni 2007. Notat frá samrøðuni, dagfest 6. juni, liggur í málinum. Í notatinum stendur, at maðurin hevur fingið lærupláss, og at hann ætlar at fara í gongd við læruna. Tann 6. juni 2007 hevur Almannastovan eisini móttikið eina umsókn um uppihaldshjálp frá manninum. Í umsóknini hevur maðurin sett kross við endurbúgving. Maðurin hevur eisini í hesum sambandi undirskrivað heimildarváttan til innheintan av øllum fyri málsviðgerðina neyðugar upplýsingar um síni viðurskifti.

Upprit viðvíkjandi endurbúgving er gjørt á Almannastovuni tann 25. juni 2007. Í uppritinum stendur m.a. at umsøkjarin hevur havt likamliga krevjandi arbeiði. Fyri nøkrum árum síðani fekk hann ein discus prolaps, sum hann varð skurðviðgjørdur fyri. Eftir skurðviðgerðina, hevur hann havt nógva pínu og hevur verið ofta og leingi sjúkrameldaður. Mælt verður til stuðul til endurbúgving.

Við skrivi, dagfest tann 6. juni 2007, biður Almannastovan um læknaváttan frá kommunulækna. Hjálagt skrivinum er loyvi frá umsøkjaranum til innheintan av upplýsingum. Tann 19. juni 2007 móttekur Almannastovan váttan frá kommunulækna. Í læknaváttanini stendur m.a. at umsøkjarin er skurðviðgjørdur fyri discus prolaps. Hann hevur støðuga pínu og langar periodur við sjúkrameldingum. Læknin metir, at umskúling til minni likamliga krevjandi starv er ein møguleiki, sum er verdur at troyta.

Tann 5. juli 2007 verður málið lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „… søkir endurbúgving til …, tí hann er skorðin fyri diskus, og hevur aftur fingið ilt. Tær nógvu sjúkraskrivingarnar í seinastuni týða uppá, at støðan er varðandi. Tí er endurbúgvingargrundarlag, og endurbúgvingarvegurin verður hildin at vera hóskandi. Veitt verður ískoyti millum lærlingalønina og minstu løn í yrkinum.“

Tann 9. juli 2007 er soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum:

> **„Viðvíkjandi umsókn um ískoyti til læruløn frá … upptil minstuløn innan … sambært § 18 í Forsorgarlógini.**
>
> Víst verður til umsókn tína um stuðul til útbúgving sum …, móttikin á Almannastovuni tann 06.06.2007.
>
> **Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul til útbúgving sum … eftir § 18 í forsorgarlógini.**
>
> **Praktisk frágreiðing**
> Høvuðsreglan er, at tú kemur undir vanligar arbeiðsmarknaðarligar treytir í øllum viðurskiftum s.s. skattur, frítíðarløn, løn undir sjúku, vanlukkutrygging (hjálparfólkatrygging hjá Føroya Vanlukkutrygging), uppsagnartíð og arbeiðstíð.
>
> ***Lønin verður í fyrsta umfari útgoldin av …***, og arbeiðsgevarin

skal sambært galdandi reglum, hvønn mánað ella 3. hvønn mánað (eftir avtalu) senda inn uppgerð til Almannastovuna í … yvir útgoldnað løn, frítíðarløn og arbeiðsmarknaðargjøld.

Almannastovan endurrindar so ásetta partin til arbeiðsgevaran, í hesum føri ískoyti til lærulønina upptil minstuløn … gjøgnum Føroya Gjaldstovu.

Almannastovan, Arbeiðsmarknaðardeildin skal hvørt ár gera eina meting av arbeiðsviðurskiftunum fyri at meta um viðkomandi eigur at halda fram í læruni, ella um frávera og aðrir trupulleikar í arbeiðinum tala fyri, at viðkomandi heldur uppat í læruni og ístaðin evt. skal søkja um fyritíðarpensión.

Sáttmálin millum … og Almannastovuna er ikki hjálagdur til undirskrivingar, sum vanligt er, tí bíða verður eftir avrit av lærusáttmálanum millum teg og …. Tá hesin fyriliggur, fer Almannastovan at senda arbeiðsgevaranum ein „grein 18 sáttmála“ til undirskrivingar í samband við játtanina frá Almannastovuni.

Avrit av hesum brævinum er sent til arbeiðsgevaran.

Eru spurningar til omanfyristandandi, eru tygum vælkomin at seta tygum í samband við undirritaðu.

Arbeiðsmarknaðardeildin ynskir tær góða eydnu við læruni.“

***Mín viðmerking:***
*Málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er móttikin, til avgerðarskriv verður sent, er umleið 1 mánaður.*

**Mál nr. 8**
Tann 24. mai 2007 er upprit skrivað í málinum. Talan er um eina eina 27 ára gamla kvinnu, sum søkir um framhaldandi endurbúgving til 1 ára útbúgving á Heilsuskúla. Eingin skrivlig umsókn liggur í málinum. Av notati í málinum, dagfest 19. oktober 2004, sæst, at málið er visiterað til Arbeiðsmarknaðardeildina í 2004.

Av uppritum í málinum sæst, at umsøkjarin, hevur fingið játtað stuðul til at taka 9. flokk við Áir í 2005. Í 2006 fekk hon játtað víðari endurbúgving til skúlaárið 2006/2007.

Tann 25. juni 2007 er upprit um endurbúgving skrivað á Almannastovuni. Í uppritinum stendur, at kvinnan er sálarliga viðbrekin, hevur havt ein truplan uppvøkstur, og hevur í vaksna lívi sínum verið illa viðfarin av fyrrverandi manni sínum. Sjálvt um kvinnan hevur fingið tað betur sálarliga og er betur fyri fakliga, verður mett at hon framhaldandi hevur tørv á stuðli, um hon skal kunna gjøgnumføra eina útbúgving. Mælt verður tí til at ganga umsóknini á møti av sosialum ávum.

Tann 15. oktober 2004 hevur umsøkjarin undirskrivað heimildarváttan, har hon loyvir Almannastovuni at útvega sær neyðugar upplýsingar viðvíkjandi viðgerðini av umsóknini um endurbúgving, tað verið seg heilsuligar ella sosialar upplýsingar og/ella inntøku og ognarupplýsingar.

Eingin læknaváttan ella váttan frá øðrum fakpersóni liggur í málinum.

Tann 5. juli 2007 verður málið lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjonsfund. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „Søkir framhaldandi endurbúgving á Heilsuskúla… Hesin endurbúgvingarvegur verður hildin at vera hóskandi, og tí verður tað játtað.“
>
> Tann 13. juli 2007 er soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum:
>
> **„Viðvíkjandi umsókn um stuðul til endurbúgving**
> Víst verður til umsókn tína um stuðul til framhaldandi endurbúgving á Heilsuskúlanum …
>
> Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul til útbúgving eftir § 18 í forsorgarlógini.

*Játtanin*
Játtanin umfatar útreiðslur til:
- uppihalds – um uppihaldsveitingina, sí nærri niðanfyri
- bøkur eftir váttan frá útbúgvingarstaðnum/læraranum og við innlatan av rokning/kvittan
- ferðaútreiðslur
- kamar …

*Treytir*
- Játtanin er treytað av, at tú
- fylgir undirvísingini í nøktandi mun
- boðar útbúgvingarstaðnum frá, um tú gerst sjúk
- boðar Almannastovuni frá um sjúkralegan er longrivarandi
- boðar Almannastovuni frá, um tú heldur uppat í ótíð við útbúgvingini
- boðar Almannastovuni frá, um broytingar annars henda í persónligu og fíggjarligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær broytingar í veitingini.

*Ummæli frá útbúgvingarstaðnum*
Almannastovan fer við jøvnum millumbilum at biðja útbúgvingarstaðið um frágreiðing og meting av, hvussu tað gongur fakliga, herundir úrslit av termins- og ársroyndum og próvtøkum annars. Utbúgvingarstaðið verður eisini biðið um at boða Almannastovuni frá, um tú ikki fylgir undirvísingini á nøktandi hátt.

*Útbúgvingarstuðul ÚS*
Persónar undir endurbúgving skulu søkja ÚS-stuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðulin verður hvønn mánaða drigin frá útroknaðu uppihaldveitingini.

*Uppihaldsveitingin*
Veitingin til uppihalds verður tann sama, sum tygum higartil hava móttikið og verður umsitin av økisdeildini í ….
Veitingin verður ásett sambært § 9, stk. 2 í forsorgarlógini. Í ásetan av veitingini verður fíggjarligi tørvurin fyrst kannaður og umfatar útrokningin hesar útreiðslur:

- grundupphædd til mat, klæði, persónliga røkt o.t. (svarandi til grundupphædd í fólkapensjónini)
- bústaðarútreiðslur
- el- og hitaútreiðslur
- sjúkrakassalimagjald
- og møg. aðrar rímiligar fastar útreiðslur

Vanliga kann stuðulin ikki fara uppum eina upphædd, ið svarar til hægst møguliga dagpeningaútgjaldið sambært lógini um dagpening vegna sjúku vm.

Støðið fyri mánaðarligu veitingini verður tí antin ein upphædd, svarandi til útroknaða tørvin ella svarandi til sjúkradagpeningahámark. Frá hesi upphædd verða drignar allar inntøkur hjá umsøkjaranum og møguligum hjúnafelaga.

Tað er ein fyritreyt fyri at fáa uppihaldsveiting, at tygum ikki hava ogn, t.v.s. peningaogn ella fastogn, ið kann seljast. Tó undantikið sethús til egnan bústað.

Veitingin verður umsitin av økisdeildini í … og fáa tygum nærri at vita um útrokningina av tygara uppihaldsveiting á økisdeildini."

***Mín viðmerking:***
*Eingin skrivlig umsókn viðvíkjandi framhaldandi endurbúgving liggur í málinum. At málið er visiterað til Arbeiðsmarknaðardeildina í 2004, hevur ikki týdning fyri viðgerðina av umsóknini í 2007.*

*Málsviðgerðartíðin, frá tí at upprit er skrivað, til avgerðarskriv er sent, er umleið 1 ½ mánaður.*

**<u>Mál nr. 9</u>**
Tann 3. juli 2007 er upprit um endurbúgving skrivað á Almannastovuni viðvíkjandi 33-ára gamlari kvinnu, ið søkir um framhaldandi stuðul til endurbúgving. Talan er um eina útlendska kvinnu, ið er einsamøll við trimum børnum. Mælt verður til at ganga umsóknini á

møti av sosialum ávum. Hetta fyri at kvinnan skal hava best møguligar fortreytir fyri at klára seg í Føroyum og fyri, at hon skal kunna stuðla børnunum. Eingin skrivlig umsókn liggur í málinum.

Tann 13. apríl 2004, hevur kvinnan undirskrivað heimildarváttan, ið loyvir Almannastovuni at útvega neyðugar upplýsingar viðvíkjandi umsókn um uppihaldshjálp. Eingin heimildarváttan viðvíkjandi umsókn um endurbúgving liggur í málinum.

Tann 5. juli 2007 verður málið lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „Søkir framhaldandi endurbúgving til FHS á komandi ári. Tað varð játtað á sosialum grundarlagi."

Tann 12. juli 2007 er soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum:

> „**Viðvíkjandi umsókn um stuðul til endurbúgving**
>
> Víst verður til umsókn tína um stuðul til FHS á ALV- skúlanum.
>
> **Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul til útbúgvingina eftir § 18 í forsorgarlógini.**
>
> *Játtanin*
> Játtanin umfatar útreiðslur til:
> - uppihalds – um uppihaldsveitingina, sí nærri niðanfyri
> - bøkur eftir váttan frá útbúgvingarstaðnum/læraranum og við innlatan av rokning/kvittan
> - ferðaútreiðslur (busskort)
>
> *Treytir*
> Játtanin er treytað av, at tú:
> - fylgir undirvísingini í nøktandi mun
> - boðar útbúgvingarstaðnum frá, um tú gerst sjúk
> - boðar Almannastovuni frá um sjúkralegan er longrivarandi

- boðar Almannastovuni frá, um tú heldur uppat í ótíð við útbúgvingini
- boðar Almannastovuni frá, um broytingar annars henda í persónligu og fíggjarligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær broytingar í veitingini.

*Ummæli frá útbúgvingarstaðnum*

Almannastovan fer við jøvnum millumbilum at biðja útbúgvingarstaðið um frágreiðing og meting av, hvussu tað gongur fakliga, herundir úrslit av termins- og ársroyndum og próvtøkum annars. Útbúgvingarstaðið verður eisini biðið um at boða Almannastovuni frá, um tú ikki fylgir undirvísingini á nøktandi hátt.

*Útbúgvingarstuðul ÚS*

Persónar undir endurbúgving skulu søkja ÚS-stuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðulin verður hvønn mánaða drigin frá útroknaðu uppihaldveitingini.

*Uppihaldsveitingin*

Veitingin til uppihalds verður tann sama, sum tygum higartil hava móttikið og verður umsitin av økisdeildini í …

Veitingin verður ásett sambært § 9, stk. 2 í forsorgarlógini. Í ásetan av veitingini verður fíggjarligi tørvurin fyrst kannaður og umfatar útrokningin hesar útreiðslur:

- grundupphædd til mat, klæði, persónliga røkt o.t. (svarandi til grundupphædd í fólkapensjónini)
- bústaðarútreiðslur
- el- og hitaútreiðslur
- sjúkrakassalimagjald
- og møg. aðrar rímiligar fastar útreiðslur

Vanliga kann stuðulin ikki fara uppum eina upphædd, ið svarar til hægst møguliga dagpeningaútgjaldið sambært lógini um dagpening vegna sjúku vm.

Støðið fyri mánaðarligu veitingini verður tí antin ein upphædd,

svarandi til útroknaða tørvin ella svarandi til sjúkradagpeninga-hámark. Frá hesi upphædd verða drignar allar inntøkur hjá umsøkjaranum og møguligum hjúnafelaga.

Tað er ein fyritreyt fyri at fáa uppihaldsveiting, at tygum ikki hava ogn, t.v.s. peningaogn ella fastogn, ið kann seljast. Tó undantikið sethús til egnan bústað.

Veitingin verður umsitin av økisdeildini í … og fáa tygum nærri at vita um útrokningina av tygara uppihaldsveiting á økisdeildini.

**Viðvíkjandi stuðli til teldu**
Víst verður eisini til umsókn tygara tann 12.01.2007 har søkt verður um stuðul til teldu.

Almannastovan játtar í slíkum føri stuðul til leigu av teldu. Leigugjaldið kann max. vera kr. 500 um mánaðin, og leigumálið er avmarkað til ta tíð útbúgvingin varar.

Tað vil siga at Almannastovan hervið játtar stuðul til leigu av teldu max. kr. 500 um mánaðin til og við juni 2008, tó við tí fyrivarni, at um tú gevst við útbúgvingini so fellur stuðulin til leigu av teldu burtur.

Leigusáttmáli frá teldufyritøkuni, har teldan verður leiga, skal sendast til Almannastovuna og útreiðslan verður so útgoldin saman við mánaðarligu veitingini."

***Mín viðmerking:***
*Eingin skrivlig umsókn um stuðul til endurbúgving liggur í málinum, og tað sæst ikki av málinum, nær málið er visiterað til Arbeiðsmarknaðardeildina. Av tí at nýggjar upplýsingar ikki vórðu innheintaðar til hetta málið, var heimildarváttan viðvíkjandi endurbúgving ikki neyðug.*

*Málsviðgerðartíðin, frá tí at upprit er skrivað, til avgerðarskriv verður sent, er 9 dagar.*

**Mál nr. 10**
Tann 3. juli 2007, er upprit viðvíkjandi endurbúgvingarmáli um 19-ára gamlan mann, ið søkir um framhaldandi endurbúgving, skrivað á Almannastovuni. Umsøkjarin hevur verið á eftirskúla í Danmark í 2 ár. Í hesum tíðarskeiði hevur hann ment seg á nógvum økjum, men hann er enn óbúgvin og slett ikki klárur til at fara á vanliga arbeiðsmarknaðin. Av tí at einki líknandi tilboð er í Føroyum, sum avklárar hann í mun til arbeiðsmarknaðin, verður mælt til at játta stuðul til eitt ár á skúla.

Tað sæst av notati í málinum, at málið er uppræ ttað eftir áheitan frá sosialu deild í Klaksvíkar Kommunu tann 3. mai 2006.

Á heimasíðuni hjá skúlanum stendur soleiðis:

> „… tilbyder afklaring, arbejdstræning, botræning og undervisning til unge med særlige behov mellem 17 – 25 år. … har ca. 110 elever og mere end 20 års erfaring.
>
> Vi har forskellige værksteder til vores arbejdstræning og erhvervsafklaring: Smedeværksted, tømrerværksted, gartneri, køkken/kantine, serviceværksted, grøn service, jord til bord, projekthold.
>
> Eleverne tilbydes derudover undervisning i dansk, regning og matematik på vores interne skole.
>
> 65 elever bor på … og får botræning i vores huse … Alle elever har eget værelse og deler stue, toilet og bad.
>
> Hver elev har en kontaktlærer, der følger eleven gennem hele forløbet på …“

Í málinum liggur ummæli frá tí danska eftirskúlanum frá desember 2005 og 2006. Í málinum liggur eisini ummæli frá sálarfrøðingi, dagfest 6. september 2005. Í ummælinum stendur, at talan er um ein ótryggan, smædnan drong, sum er komin seint fyri seg. Hann

hevur lítið sjálvsálit og er eitt sindur óbúgvin og dugir tí ikki so væl í samskiftinum við onnur. Hann veit sjálvur, at fakliga dugir hann lítið í mun til onnur og vil tí fegin í skúla.

Tann 11. juli 2006 hevur maðurin undirskrivað heimildarváttan, ið loyvir Almannastovuni at útvega neyðugar upplýsingar viðvíkjandi umsókn um uppihaldshjálp. Eingin heimildarváttan viðvíkjandi umsókn um endurbúgving liggur í málinum.

Tann 5. juli 2007 verður málið lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „19-ára gamal maður, sum hevur gingið á …, og hevur ymiskar menningartrupulleikar, søkir um 1 ára uppihald á …, til búðvenjing og til greiðslu av vinnumøguleikum. Tað verður játtað.“

Tann 16. juli 2007 er soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum:

> **„Víðvíkjandi umsókn um stuðul til uppihald á …**
> Víst verður til umsókn tína um stuðul til uppihald á … skúlaárið 2007-2008.
>
> Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul til skúlauppihald sambært § 18 í forsorgarlógini.
>
> *Veitingin*
> játtanin umfatar útreiðslur til
> - skúlagjald
> - lummapening
> - kostpening (møguliga)
> - útreiðslur av ferðing heim 2 ferðir um árið
> - útreiðslur av ferðing heim.
>
> *Treytir*
> Játtanin er treytað av, at tú
> - møtir til undirvísing í nøktandi mun

- boðar skúlanum frá, um tu gerst sjúkur
- letur skúlanum læknaváttan, um sjúkan varar longri enn 3 dagar
- boðar Almannastovuni frá, um tú heldur uppat á skúlanum í ótíð
- boðar Almannastovuni frá, um broytingar annars henda í persónligu og fíggjarligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær broytingar í veitingini.

*Ummæli frá skúlanum*
Almannastovan fer við jøvnum millumbilum at biðja skúlan um frágreiðing og meting av, hvussu tað gongur hjá tær. Skúlin verður eisini biðin um at boða Almannastovuni frá, um tú ikki fylgir við á skúlanum á nøktandi hátt.

*Upphæddir vm.*
Lummapeningurin er kr. 2.013 um mánaðin. Í styttri tíðarskeiðum, har tú lógliga ert burtur frá skúlanum, verður harumframt – eftir nærri avtalu – kostpeningur útgoldin við kr. 67 um dagin."

***Mín viðmerking:***
*Eingin skrivlig umsókn um framhaldandi endurbúgving liggur í málinum. Av tí at nýggjar upplýsingar ikki vórðu innheintaðar til hetta málið, var heimildarváttan viðvíkjandi endurbúgving ikki neyðug. Eg eri samd við Almannastovuni í, at tilboðið á hesum skúlanum kann nýtast til at finna fram til møguligar vinnumøguleikar hjá umsøkjaranum.*

*Í hesum málinum fær umsøkjarin sett sum treyt, at hann, við sjúku, skal lata skúlanum læknaváttan, um sjúkan varar longri enn 3 dagar. Eftir mínari meting er hetta ein strong treyt at seta við sjúku.*

*Málsviðgerðartíðin, frá tí at upprit varð skrivað til avgerðarskriv var sent, er 13 dagar.*

**<u>Mál nr. 11</u>**
Við skrivi, dagfest 18. juni 2007, hevur leiðarin av viðgerðarstaði

í Danmark, sent umsókn til Almannastovuna vegna eina 28-ára gamla kvinnu við anoreksi. Søkt verður um framhaldandi uppihald á viðgerðarstaðnum í 1 ár afturat. Í skrivinum stendur, at kvinnan enn hevur stórar trupulleikar við anoreksi, men at hon er í støðugum betringi. Viðgerðarstaði er ikki í iva um, at kvinnan við tíðini kann verða lekt fyri anoreksi og taka eina útbúgving.

Umboðsmaðurin hevur fingið eitt notat á 3 síður frá Almannastovuni viðvíkjandi hesum tilboðnum. Notatið er dagfest 4. mars 2004. Í notatinum er ein lýsing av tilboðnum, har sagt verður at tilboðið er bygt upp í 4 stigum: visitatión/motivatión, útslúsing/innslúsing, uppihaldstíð, og endaliga útslúsingin. Ein gjøllig meting er gjørd av, hvørt hetta ítøkiliga tilboðið er eitt endurbúgvingartilboð, ið eigur at verða játtað eftir § 18, stk. 1 í forsorgarlógini, ella um hetta er eitt viðgerðartilboð, ið eigur at verða játtað eftir § 15, stk. 2 í forsorgarlógini, um Landssjúkrahúsið ikki rindar. Niðurstøðan er, at stig 1, 2 og 3 í hesum tilboðið í høvuðsheitum miðja eftir at betra um tann sálarliga og sosiala førleikan, við tí fyri eyga at kunna klára seg í gerandisdegnum – alsto viðgerð, meðan stig 4 miðjar ímóti at betra um arbeiðsførleikan – altso endurbúgving.

Tann 3. juli 2007, er upprit viðv. endurbúgving skrivað á Almanna-stovuni. Í uppritinum verður støðan hjá 28-ára gomlu kvinnuni lýst, og málið verður lagt fyri endurbúgvingar- og pensjónsfund til støðutakan um kvinnan kann fáa játtan til framhaldandi uppihald á viðgerðarstaðnum.

Ein váttan frá serlækna á Ríkissjúkrahúsinum, móttikin á Almanna-stovuni tann 2. juli 2003, liggur í málinum. Í læknaváttanini stendur m.a.:

> „Patienten er en nu 24-årig pige, som igennem de sidste 4-5 år har lidt af alvorlig anorexia nervosa.
> … Alt i alt er patienten inde i en særdeles positiv udvikling, og der er rigtig gode chancer for at hun kan blive rask og komme til at udnytte sine gode evner i en uddannelse, der gør hende selvforsørgende.“

Aðrar læknaváttanir liggja ikki í málinum.

Tann 30. august 2005 hevur umsøkjarin, í samband við eina umsókn um hjálp til stakútreiðslur, givið Almannastovuni loyvi til at útvega sær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri málsviðgerðina. Eingin heimildarváttan viðvíkjandi endurbúgvingarmálinum liggur í málinum. Tann 5. juli 2007 verður málið lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „28-ára gomul kvinna søkir um framhaldandi stuðul til anoreksiviðgerð í 1 ár. Játtað verður stuðul til Grøn-service 1 ár afturat, – sum er <u>síðsta</u> ári, hetta verður játtað"

Tann 1. august 2007 er soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum:

> **„Viðvíkjandi umsókn um framhaldandi stuðul til …*(viðgerðartilboð – mín viðm.)* og … *(endurbúgvingartilboð – mín viðm.)***
>
> Víst verður til umsókn har … tína vegna søkir um framhaldandi stuðul til at tú kann luttaka í viðgerð vm. á … *(viðgerðartilboð – mín viðm.)* og … *(endurbúgvingartilboð – mín viðm.)*, móttikin á Almannastovuni tann 11.07.2007.
>
> **Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul til víðari viðgerð í … *(viðgerðartilboð – mín viðm.)*, sbrt. grein 15, stk. 2 í forsorgarlógini og játta at tú luttekur í … *(endurbúgvingartilboð – mín viðm.)*, sbrt. grein 18, stk. 1 í forsorgarlógini.**
>
> *Veitingin*
> - játtanin umfatar útreiðslur til
> - skúlagjald
> - grundarupphædd
> - útreiðslur av ferðing heim 2 ferðir um árið t/r
> - útreiðslur av ferðing heim.

*Treytir*
Játtanin er treytað av, at tú

- møtir til undirvísing í nøktandi mun
- boðar skúlanum frá, um tú gerst sjúk
- letur skúlanum læknaváttan, um sjúkan varar longri enn 3 dagar
- boðar Almannastovuni frá, um tú heldur uppat á skúlanum í ótíð
- boðar Almannastovuni frá, um broytingar annars henda í persónligu og fíggjarligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær broytingar í veitingini.

*Upphæddir vm.*
Grundarupphæddin er 4169,- um mánaðin."

***Mín viðmerking:***
*Av uppriti í málinum, dagfest 4. mars 2004, sæst, at Almannastovan hevur gjørt nógv burturúr at kanna, hvørt viðgerð fyri Anorexia Nervosa er fevnd av § 18, stk. 1 í forsorgarlógini. Eg eri samd við Almannastovuni í tulkingini av, at viðgerð fyri Anorexia Nervosa verður veitt sambært § 15, stk. 2 í forsorgarlógini, ímeðan stuðul til arbeiðsvenjing verður veitt sambært § 18, stk. 1 í forsorgarlógini.*

*Í málinum liggur bert ein váttan frá serlækna, dagfest í 2003. Síðani hevur bert viðgerðarstovnurin, ið hevur umsøkjaran undir hond, gjørt eina lýsing av støðuni hjá umsøkjaranum. Av tí at sjúkan kann broytast í hesum føri, átti Almannastovan eftir mínari meting at biðið um nýggja læknaváttan.*

*Í fundarnotati, dagfest 5. juli 2007, viðmerkir Endurbúgvingar- og pensjónsfundurin, at hetta verður síðstu ferð, stuðul verður játtaður. Almannastovan eigur í hvørjum einstøkum føri at meta um, hvørt stuðul skal veitast, og ikki frammanundan taka avgerð um, at stuðul ikki skal verða játtaður í framtíðini. Eingin endurbúgvingarætlan er gjørd í málinum.*

*Í hesum málinum fær kvinnan sett sum treyt, at hon, við sjúku, skal*

*lata skúlanum læknaváttan, um sjúkan varar longri enn 3 dagar. Eftir mínari meting er hetta ein strong treyt at seta við sjúku.*

*Málsviðgerðartíðin, frá tí at umsóknin er send Almannastovuni til avgerðarskriv verður sent kvinnuni, er á 1 ½ mánað.*

**<u>Mál nr. 12</u>**
Við skrivi, dagfest tann 15. juni 2007, hevur eitt viðgerðarstað í Danmark sent eina umsókn vegna 23-ára gamla kvinnu við anoreksi. Søkt verður um framhaldandi stuðul til eitt hálvt ár á skúla og til eitt EU-projekt í Fraklandi. Harumframt verður søkt um stuðul til innskot til eina íbúð í Danmark. Í skrivinum er statusfrágreiðing viðvíkjandi kvinnuni.

Tann 3. juli 2007, er upprit viðv. endurbúgving skrivað á Almannastovuni. Í uppritinum verður sosiala og sálarliga støða umsøkjarans lýst. Mælt verður til, at umsóknin viðvíkjandi skúlauppihaldi og egnari íbúð verður játtað. Mælt verður frá at játta stuðul til luttøku í EU-projekti. Hetta av tí, at projektið ikki er nóg væl upplýst, til at støða kann takast til tað, og mett verður ikki, at hetta er arbeiðs- ella endurbúgvingartiltak.

Ein læknaváttan A, dagfest 13. januar 2003, um óarbeiðsføri sambært dagpeningalógini liggur í málinum. Í læknaváttanini stendur, at kvinnan er innløgd á Ríkissjúkrahúsinum vegna anorexia. Harumframt liggur eitt skriv frá serlækna frá Ríkissjúkrahúsinum, dagfest 13. august 2003, og skriv frá Ríkissjúkrahúsinum, dagfest 21. oktober 2004, í málinum. Í skrivunum verður sosiala og sálarliga støðan hjá umsøkjaranum lýst. Eisini er lýsing gjørd av tilboðnum.

Aðrar læknaváttanir viðvíkjandi endurbúgvingarmálinum liggja ikki í málinum.

Ein heimildarváttan, dagfest 13. november 2003, viðvíkjandi innheintan av upplýsingum viðvíkjandi endurbúgvingarmálinum, liggur í málinum. Heimildarváttanin er tó ikki undirskrivað.

Útskrift av heimasíðuni hjá skúlanum liggur í málinum. Í hesum skjali stendur soleiðis:

> „**Sådan gør vi**
> Vores pædagogiske metode kalder vi hjælp til selvhjælp. Det er skolens overbevisning, at ethvert menneske glædes og vokser, når det får mulighed for at skabe og tage ansvar for sit eget liv. Gennem undervisning, værkstedsarbejde, rådgivning, praktisk hjælp og socialt samvær lærer hver enkelt elev at hjælpe sig selv videre i livet.
> …“

Tann 5. juli 2007 verður málið lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „Søkt verður um stuðul til … *(viðgerðartilboð – mín viðm.)* í juli og til ½ ár uppihald í … *(Endurbúgvingartilboð – mín viðm.)* í desember 2007. Hetta, sum uppfylging av etingarólganum. Hetta varð játtað, eins og innskotið til kollegie.“

Tann 1. august 2007 er soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum:

> „**Viðvíkjandi umsókn um stuðul til endurbúgving**
> Víst verður til umsókn tína um stuðul til skúlagongd …
>
> **Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul til skúlagongd á … *(endurbúgvingartilboð – mín viðm.)* § 18, stk.1 í forsorgarlógini í tíðarskeiðnum frá juli til og við desembur í 2007**
>
> *Játtanin*
> Játtanin umfatar
> - Uppihaldveiting, ið verður útgoldin hvønn mánaða
> - Ferðaseðil aftur og fram millum Danmark og Føroyar.

*Treytir*
Játtanin er treytað av, at tú

- fylgir undirvísingini í nøktandi mun
- boðar útbúgvingarstaðnum frá, um tú gerst sjúk
- boðar Almannastovuni frá um sjúkralegan er longrivarandi, meiri enn ?
- boðar Almannastovuni frá, um tú heldur uppat í ótíð við útbúgvingini
- boðar Almannastovuni frá, um broytingar annars henda í persónligu og fíggjarligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær broytingar í veitingini.

*Ummæli frá útbúgvingarstaðnum*
Almannastovan fer við jøvnum millumbilum at biðja útbúgvingarstaðið um frágreiðing og meting av, hvussu tær gongst fakliga, herundir úrslit av termins- og ársroyndum og próvtøkum annars. Útbúgvingarstaðið verður eisini biðið um at boða Almannastovuni frá, um tú ikki fylgir undirvísingini á nøktandi hátt."

***Mín viðmerking:***
*Í málinum liggja læknaváttanir frá 2003 og 2004. Av tí at sjúkan í hesum førinum kann broytast, átti Almannastovan eftir mínari meting at biðið um nýggja læknaváttan.*

*Av tí at Almannastovan ikki hevur innheintað upplýsingar í hesum máli, havi eg tó ikki viðmerkingar til, at eingin heimildarváttan er í hesum málinum.*

*Málsviðgerðartíðin frá tí, at umsókn er send Almannastovuni, til avgerðar-skriv verður sent kvinnuni, er umleið 1 ½ mánaður.*

**Mál nr. 13**
Tann 5. februar 2007 hevur Almannastovan móttikið eina umsókn um uppihaldshjálp frá einari 37-ára gamlari kvinnu. Á umsóknarblaðnum hevur kvinnan sett kross við endurbúgving. Í sambandi við umsóknina hevur kvinnan skrivað undir heimildarváttan viðvíkjandi inn-

heintan av øllum fyri málsviðgerðina neyðugar upplýsingar um síni viðurskifti.

Tann 11. mai 2007 er upprit skrivað í endurbúgvingarmálinum. Í uppritinum stendur, at kvinnan hevur tikið 1. árið á víðari lesna. Hon søkir nú um endurbúgving at gera seg lidnan. Kvinnan er sundurlisin frá manninum, og er einsamallur uppihaldari. Mett verður, at tað er grundarlag fyri at játta endurbúgving av sosialum ávum.

Eingin læknaváttan liggur í málinum.
Við skrivi, dagfest 28. apríl 2007, verður kvinnan boðin til samrøðu á Almannastovuni tann 3. mai 2007. Sambært upplýsingum frá Almannastovuni, er samrøðan skrivað inn í skjalið: „Endurbúgvingarmál – lýsing", dagfest 11. mai 2007.

Tann 7. juni 2007 verður málið lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „Søkir um endurbúgving at halda fram á … Mett verður, at tað er sosialt endurbúgvingargrundarlag, vegna samlívsslit, eftir at hon var byrjað. Tí verður endurbúgving játtað."

Tann 11. juni 2007 er soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum:

> **„Viðvíkjandi umsókn um stuðul til endurbúgving**
>
> **Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul til framhaldandi skúlagongd á pedagogskúlanum eftir § 18, stk. 1 í forsorgarlógini.**
>
> *Játtanin*
> Játtanin umfatar útreiðslur til
> - uppihalds – um uppihaldsveitingina, sí nærri niðanfyri
> - bøkur eftir váttan frá útbúgvingarstaðnum/læraranum og við innlatan av rokning/kvittan
> - ferðaútreiðslur (busskort)

- undirvísingartilfar (pappír, skriviamboð, o.t.) eftir rokning (í mesta lagi 300 kr./ár)
- skúlatasku (í mesta lagi 300 kr. einaferð)
- roknimaskinu (í mesta lagi 200 kr. einaferð)

*Treytir*
Játtanin er treytað av, at tú
- fylgir undirvísingini í nøktandi mun
- boðar útbúgvingarstaðnum frá, um tú gerst sjúk
- boðar Almannastovuni frá um sjúkralegan er longrivarandi, meiri enn fýra vikur
- boðar Almannastovuni frá, um tú heldur uppat í ótíð við útbúgvingini
- boðar Almannastovuni frá, um broytingar annars henda í persónligu og fíggjarligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær broytingar í veitingini.

*Ummæli frá útbúgvingarstaðnum*
Almannastovan fer við jøvnum millumbilum at biðja útbúgvingarstaðið um frágreiðing og meting av, hvussu tað gongur fakliga, herundir úrslit av termins- og ársroyndum og próvtøkum annars. Útbúgvingarstaðið verður eisini biðið um at boða Almannastovuni frá, um tú ikki fylgir undirvísingini á nøktandi hátt.

*Útbúgvingarstuðul ÚS*
Persónar undir endurbúgving skulu søkja ÚS-stuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðulin verður hvønn mánaða drigin frá útroknaðu uppihaldveitingini.

*Uppihaldsveitingin*
Veitingin til uppihalds verður tann sama, sum tygum higartil hava móttikið og verður umsitin av økisdeildini í ….“

***Mín viðmerking:***
*Málsviðgerðartíðin, frá tí at umsókn er móttikin, til avgerðarskriv er sent, er umleið 4 mánaðir.*

**<u>Mál nr. 14</u>**
Talan er í hesum máli um eina 18-ára gamla kvinnu, sum er seinment og hevur trupulleikar við anorexi. Ein umsókn frá 22. februar 2006 um eftirskúla til ung við serligum tørvi liggur í málinum, men umsókn um framhaldandi endurbúgving liggur ikki í málinum.

Endurbúgvingar- og pensjónsfundurin hevur fyrr játtað kvinnuni uppihald á eftirskúla í Danmark. Endurbúgvingarroyndin miseydnaðist, av tí heilsustøðan hjá kvinnuni versnaði. Á Endurbúgvingar- og pensjónsfundi tann 29. januar 2007, varð avgerð tikin um at biðja um eina almenmedisinska lýsing frá kommunulækna. Hetta av tí, at heilsustøðan var vánalig bæði við etingarólag og klórumerkjum víða um. Mælt verður ikki til endurbúgvingartiltøk aftur, fyrr enn bøtt er um heilsuligu støðuna. Síðani 1. februar 2006 hevur kvinnan fingið forsorgarhjálp.

Í málinum liggur váttan frá sálarfrøðingi, dagfest 21. februar 2006, læknaváttan frá serlækna, dagfest 13. september 2005, og læknaváttan frá kommunulækna, dagfest 7. juli 2005. Í læknaváttanini stendur, at kvinnan hevur havt trupulleikar við anorexia nervosa síðan 2001. Hevur gingið til sálarfrøðing. Hevur ynski um at fara á skúla í Danmark. Læknin viðmælir hesum. Í serlæknaváttanini stendur m.a., at kvinnan er sálarliga óbúgvin og seinment. Serlæknin metir, at krøvini til hesa seinmentu gentu gjøgnum árini kunnu hava verið ov stór og nívandi fyri hana, soleiðis at hetta hevur ført til anorexia symptomalogi. Í váttanini frá sálarfrøðingi stendur m.a., at kvinnan intellektuelt fungerar undir normaløkið, er sosialt afturhildin, og gerst lætt kensluliga ávirkað av ókendari støðu. Sálarfrøðingurin viðmælir eisini eftirskúla fyri ung við ávísum menningartrupulleikum.

Ein kommunulæknaváttan, dagfest tann 20. mars 2007, liggur í málinum. Kommunulæknin vísir til tær kanningar, ið fyrr eru gjørdar, og sigur annars, at kvinnan aktuelt er víst til psykiatriska depilin til diagnostiska staðfesting og ráðføring um víðari framferð. Kommunulæknin mælir til framhald av verandi skipan, til svar fyriliggur frá Psykiatriska deplinum.

Í málinum liggur eitt lýsingarhefti frá skúlanum. Í hesum hefti stendur m.a.:

> „Erhvervsafklaring:
> Med udgangspunkt i det økologiske gartneri og jordbrug, vedligeholdelse af bygninger, værksteder og skovprojekt afklares den unge i f.eks:
>
> - Produktion, rengøring af salg af grønsager
> - Vedligeholdelse af grønne områder
> - Pasning af frugttræer
> - Betjening og vedligehold. af maskiner
> - Vedligeholdelse og renovering af bygninger
> - Forskellige håndværk, f.eks, maler, tømrer vvs og smed
> - Brug af motorsav, brændeflækker
>
> De fleste starter i vores egen interne praktik, i en periode af ca. 3 måneder. Når den unge er faldet til på stedet, har fået de første grundlæggende færdigheder på plads i forhold til at fungere på en arbejdsplads, og vi har et kendskab til den unges ressourcer, etableres eksterne praktikker.
>
> Vi lægger stor vægt på at praktikophold primært foregår på arbejdspladser … De fleste af vores unge prøver flere forskellige arbejdsområder af, inden den enkelte har fundet det arbejdsområde, hvor de fremtidige jobmuligheder ligger. Til understøttelse af processen omkring den unges erhvervsvalg og styrkelse af kompetencer, etableres interne og eksterne kortere teoretiske og praktiske forløb.“

Tann 7. juni 2007 verður málið aftur lagt fyri Endurbúgvingar- og pensjónsfund. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „Søkir um endurbúgvingarstuðul av nýggjum, – hesu ferð á … Hetta er grundað á heilsuligum trupulleikum, serliga av sálarligum slag. Mett verður, tað er møguligt at endurbúgva hana til sjálvforsyrgilsi, og at eitt uppihald á … í 1 ár vil búna hana,

soleiðis, at hon møguliga kann koma burturúr sínum sálarligu trupulleikum, íroknað anorexi, tí verður umsóknin játtað."

Einki upprit frá málsviðgera á Almannastovuni sæst verða skrivað til hendan fundin. Almannastovan hevur tó upplýst, at eitt upprit: „Endurbúgvingarmál – lýsing", dagfest 21. juni 2006, var lagt fyri endurbúgvingar- og pensjónsfundin.

Tann 10. juli 2007 er soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum:

> „**Vedr. din revalideringssag.**
> Almannastovan, arbejdsmarkedsafdelingen (AMD) skal herved meddele, at din ansøgning om revalidering efter Lov for Færøerne om offentlig forsorg § 18 stk. 1. har været behandlet på EP-møded.07062007.
>
> **Afgørelse:**
> EP-mødet besluttede at imødekomme din ansøgning om foreløbig 1 års ophold i …
>
> Revalideringsbevillingen er gældende i henhold til „Lov for Færøerne om offentlig forsorg §§ 18 stk. 1 og 9 stk. 1-2" med henblik på at opnå:
>
> **Formål:**
> at tilbyde dig botræning, uddannelses- og erhvervsafklaring og ikke mindst hjælpe og støtte dig i at udvikle dig såvel personligt som socialt.
>
> **Bevillingen omfatter:**
> Bevillingen omfatter økonomisk støtte til opholdet iht § 18 stk. 1. jfr. samme lovs § 9 stk. 2 i Lov for Færøerne om offentlig forsorg, hvilket omfatter alle rimelige/godkendte udgifter, som er forbundet med opholdet på …, herunder depositum, bo- og erhvervsafklaringsudgifter, lomme- og tøjpenge, samt betaling af div. godkendt øvrige materialer.

Derudover afholder Almannastovan transportudgifter (bus, færge og flybilletter) i forbindelse med rejser fra Færøerne til … samt aftalte hjemrejser i ferier.

Revalideringsbevillingen er betinget af, at A deltager i opholdet i … på en tilfredsstillende måde.

… bedes kontakte Almannastovan, hvis der sker ændringer, der kan påvirke As revalideringsbevilling.

I forbindelse med din bevilling har Almannastovan, AMD d.d. fremsendt kopi af relevante sagsakter til … Formålet hermed er bl.a. at … modtager relevante oplysninger, som skal kunne gavne/støtte jeres samarbejde under dit ophold i ….

… er altid velkommen til at kontakte undertegnede på Almannastovan.

*Kopi af denne bevillingsskrivelse er sent til forældre og …, … forstander på …*

Ellers ønsker AMD dig held og lykke med opholdet."

***Mín viðmerking:***
*Eingin umsókn um framhaldandi endurbúgving liggur í hesum máli. Til endurbúgvingar- og pensjónsfundin, ið varð hildin tann 7. juni 2007, var hjáløgd ein eldri lýsing av málinum: „Endurbúgvingarmál – lýsing", dagfest 21. juni 2006.*

*Í málinum liggur eingin heimildarváttan viðvíkjandi innheintan og víðarilatan av upplýsingum til endurbúgvingarmálið. Kortini hevur Almannastovan latið relevantu skjølini í málinum til skúlan. Almannastovan eigur í slíkum førum at innheinta samtykki frá umsøkjaranum, áðrenn skjøl við heilt eymum upplýsingum verða latin víðari, jb. § 10, stk. 1, nr. 1 í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, við seinni broytingum.*

*Eftir lýsingarheftinum frá skúlanum kann hetta tilboðið nýtast til at finna fram til møguligar framtíðar vinnumøguleikar hjá kvinnuni. Eingin endurbúgvingarætlan er gjørd á Almannastovuni í hesum málinum.*

**Mál nr. 15**

Tann 29. januar 2007 hevur Almannastovan móttikið eina umsókn um uppihaldshjálp frá einari 24-ára gamlari kvinnu. Á umsóknarblaðnum hevur kvinnan sett kross við endurbúgving.

Tann 10. mai 2007 hevur kvinnan verið til samrøðu á Almannastovuni við umsókn um endurbúgving at taka 9. flokk á ALV-skúlanum við Áir. Notat er skrivað frá samrøðuni.

Tann 10. mai 2007 er upprit: „Endurbúgvingarmál – lýsing" skrivað av málsviðgera á Almannastovuni. Í uppritinum stendur, at umsøkjarin hevur havt tað trupult í fólkaskúlanum vegna happing. Hon hevur 10. flokk, men kláraði seg illa fakliga. Síðani tannárini hevur hon havt trupulleikar við liðum í hondum og knøum og eisini í rygginum. Er hypermobil, síðan føðing havt astma og tekur dagliga astmaheilivág. Hon ynskir nú at betra sína skúlagongd og søkir tí um endurbúgving at taka 9. flokk á ALV-skúlanum við Áir. Málsviðgerðin metir tað verða av týdningi, at kvinnan fær møguleika at betra um sína skúlagongd. Mælt verður tí til at játta endurbúgving.

Við skrivi, dagfest 10. mai 2007, hevur Almannastovan heitt á kommunulækna um at gera eina meting/kanning í sambandi við, at kvinnan hevur søkt Almannastovuna um fíggjarligan stuðul til at taka 9. flokk á ALV-skúlanum við Áir. Eingin læknaváttan liggur tó í málinum.

Tann 10. mai 2007 hevur umsøkjarin undirskrivað eina heimildarváttan, har umsøkjarin gevur Almannastovuni loyvi til at útvega sær neyðugar upplýsingar til viðgerð av umsókn hennara um endurbúgving, tað verið seg heilsuligar- ella sosialar upplýsingar og/ella inntøku- og ognarupplýsingar.

Tann 7. juni 2007 hevur málið verið fyri á Endurbúgvingar- og pensjónsfundi. Soljóðandi notat er skrivað frá fundinum:

> „Søkir um endurbúgving til 9. flokk við Áir. Tað varð játtað av sosialum og heilsuligum ávum."

Tann 11. juni 2007 er soljóðandi játtanarskriv sent umsøkjaranum:

> **„Viðvíkjandi umsókn um stuðul til endurbúgving**
>
> **Almannastovan hevur avgjørt at játta tær stuðul komandi skúlaár at taka 9. flokk á ALV-skúlanum við áir eftir § 18, stk. 1 í forsorgarlógini.**
>
> *Játtanin*
> Játtanin umfatar útreiðslur til
> - uppihalds – um uppihaldsveitingina, sí nærri niðanfyri
> - bøkur eftir váttan frá útbúgvingarstaðnum/læraranum og við innlatan av rokning/kvittan
> - ferðaútreiðslur (busskort)
> - undirvísingartilfar (pappír, skriviamboð, o.t.) eftir rokning (í mesta lagi 300 kr./ár)
> - skúlatasku (í mesta lagi 300 kr. einaferð)
> - roknimaskinu (í mesta lagi 200 kr. einaferð)
>
> *Treytir*
> Játtanin er treytað av, at tú
> - fylgir undirvísingini í nøktandi mun
> - boðar útbúgvingarstaðnum frá, um tú gerst sjúk
> - boðar Almannastovuni frá um sjúkralegan er longrivarandi, meiri enn 4 vikur
> - boðar Almannastovuni frá, um tú heldur uppat í ótíð við útbúgvingini
> - boðar Almannastovuni frá, um broytingar annars henda í persónligu og fíggjarligu viðurskiftunum, ið kunnu hava við sær broytingar í veitingini.

*Ummæli frá útbúgvingarstaðnum*
Almannastovan fer við jøvnum millumbilum at biðja útbúgvingarstaðið um frágreiðing og meting av, hvussu tað gongur fakliga, herundir úrslit av termins- og ársroyndum og próvtøkum annars. Utbúgvingarstaðið verður eisini biðið um at boða Almannastovuni frá, um tú ikki fylgir undirvísingini á nøktandi hátt.

*Útbúgvingarstuðul ÚS*
Persónar undir endurbúgving skulu søkja ÚS-stuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðulin verður hvønn mánaða drigin frá útroknaðu uppihaldveitingini.

*Uppihaldsveitingin*
Veitingin verður ásett sambært § 9, stk. 2 í forsorgarlógini. Í ásetan av veitingini verður fíggjarligi tørvurin fyrst kannaður og umfatar útrokningin hesar útreiðslur:

- grundupphædd til mat, klæði, persónliga røkt o.t. (svarandi til grundupphædd í fólkapensjónini)
- bústaðarútreiðslur
- el- og hitaútreiðslur
- sjúkrakassalimagjald
- og møg. aðrar rímiligar fastar útreiðslur

Vanliga kann stuðulin ikki fara uppum eina upphædd, ið svarar til hægst møguliga dagpeningaútgjaldið sambært lógini um dagpening vegna sjúku vm.

Støðið fyri mánaðarligu veitingini verður tí antin ein upphædd, svarandi til útroknaða tørvin ella svarandi til sjúkradagpeningahámark. Frá hesi upphædd verða drignar allar inntøkur hjá umsøkjaranum og møguligum hjúnafelaga.

Tað er ein fyritreyt fyri at fáa uppihaldsveiting, at tygum ikki hava ogn, t.v.s. peningaogn ella fastogn, ið kann seljast. Tó undantikið sethús til egnan bústað.

Veitingin verður umsitin av økisdeildini í …, og fáa tygum nærri at vita um útrokningina av tygara uppihaldsveiting á økisdeildini.“

***Mín viðmerking:***
*Málsviðgerðartíðin, frá tí at umsøkjarin hevur sent umsókn til avgerðarskriv er sent, er umleið 5 mánaðir.*

## *d. Niðurstøða viðvíkjandi 15 endurbúgvingarmálum*

*Tá ið Almannastovan viðger endurbúgvingarmál, er uppgávan hjá Almannastovuni, at:*

1. *fáa umsókn um stuðul til endurbúgving, ella taka málið upp av egnum ávum,*
2. *fáa heimildarváttan frá umsøkjara til innheintan av upplýsingum, jb. § 10, stk. 1, nr. 1 í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, við seinni broytingum,*
3. *lýsa málið á nøktandi hátt, soleiðis at nøktandi grundarlag er fyri at taka avgerð í málinum, herundir læknaváttanir, upplýsing um sosialu støðuna hjá umsøkjaranum, um endurbúgvingartilboðið v.m.,*
4. *notera upplýsingar av týdningi fyri málið, jb. § 6, stk. 1 í innlitslógini,*
5. *fremja partshoyring, um upplýsingar um veruligu umstøðurnar í málinum ikki eru til fyrimuns fyri umsøkjaran, jb. § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini,*
6. *fáa samtykki frá umsøkjara, um viðkvæmar upplýsingar skulu latast víðari, jb. § 10, stk. 1, nr. 1 í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, við seinni broytingum,*
7. *meta um, við støði í innkomnu upplýsingum, hvørt endurbúgvingargrundarlag er, og hvørt talan er um eitt endurbúgvingartilboð sambært § 18, stk. 1 í forsorgarlógini; taka avgerð og fráboða umsøkjaranum avgerðina,*
8. *grundgeva og veita kæruvegleiðing, um avgerðin ikki til fulnar gongur umsøkjaranum á møti, jb. §§ 21 og 24 í fyrisitingarlógini, og*
9. *hava rímiliga málsviðgerðartíð.*

*Eg havi gjørt viðmerkingar undir hvørjum máli sær, sí omanfyri undir gjøgnumgongdini av málunum, men fari niðanfyri at taka saman um viðmerkingarnar, samanborið við omanfyristandandi uppgávur.*

*1. Viðvíkjandi umsóknum til endurbúgving*

*Eg havi spurt Almannastovuna, hví skrivligar umsóknir um endurbúgving ikki vóru í øllum málunum, ið eg havi fingið til láns frá Almannastovuni.*

*Almannastovan sigur í hoyringsskrivi sínum, dagfest 21. mai 2008, at hetta partvíst skyldast, at Almannastovan arbeiðir við elektroniskum málum, og at nøkur av teimum elektroniskt skrásettu skjølunum ikki verða skrivað út og løgd í fysiska málið. Hetta biður Almannastovan um umbering fyri.*

*Almannastovan ásannar, at tað er óheppið og ikki nøktandi, at ein skrivlig umsókn ikki liggur í teimum málum, har søkt verður um endurbúgving. Í teimum førum, har málið er visiterað frá øðrum deildum á Almannastovuni, átti hetta at framgingið av einum uppriti í tí einstaka málinum, og heimildarváttan verið undirskrivað.*

*Tá ið søkt verður um endurbúgving eigur umsøkjari at lata Almannastovuni umsókn. Í 9 av teimum málum, ið eg havi fingið til láns frá Almannastovuni, er umsókn móttikin. Í 6 av málunum er eingin umsókn til ítøkiliga málið í journalini. Í málum nr. 2 og 9 sæst ikki, at málið er visiterað til Arbeiðsmarknaðardeildina, í málum nr. 4, 8 og 10 er málið visiterað til Arbeiðsmarknaðardeildina í ávikavist 2001, 2004 og 2006. Langt áðrenn hesi ítøkiligu málini um framhaldandi endurbúgving byrjaðu. Í máli nr. 14 liggur bert ein gomul umsókn, eingin umsókn er til hetta ítøkiliga málið um framhaldandi endurbúgving. Tað sæst heldur ikki av málinum, nær søkt verður um endurbúgving, og um umsøkjarin hevur váttað, at Almannastovan kann innheinta upplýsingar um umsøkjaran. Hetta er ikki nøktandi. Harumframt fari eg at viðmerkja, at Almannastovan eigur at hava eina fullfíggjaða journal, soleiðis at øll skjøl eru í ítøkiliga málinum.*

*2. Viðvíkjandi heimildarváttan*

*Í fleiri av teimum málum, ið eg havi fingið til láns, er eingin heimildarváttan til innheintan av upplýsingum viðvíkjandi endurbúgvingarmálinum. Í fleiri av málunum eru nýggjar, viðkvæmar upplýsingar ikki innheintaðar, og í hesum førum er ikki neyðugt við heimildarváttan, men tað kann undra, at Almannastovan ikki hevur eina fasta mannagongd, soleiðis at allir umsøkjarar, ið søkja um endurbúgvingarstuðul, skriva undir heimildarváttan viðvíkjandi innheintan av upplýsingum. Sostatt høvdu treytirnar í § 10, stk. 1, nr. 1 í persónsupplýsingarlógini í øllum førum verið loknar.*

*Eg spurdi Almannastovuna, hví fólk, ið søkja um endurbúgvingarstuðul, ikki altíð geva skrivlig samtykki til innheintan av upplýsingum.*

*Almannastovan hevur í hoyringsskrivi sínum ásanna, at mannagongdirnar viðvíkjandi heimildarváttanum ikki eru greiðar nokk, og fer at stramma upp hesum viðvíkjandi. Almannastovan upplýsir, at arbeitt verður við at gera nýtt umsóknarblað til endurbúgving og vart starv. Í tí sambandi verður umrøtt, um hesi eisini skulu nýtast í teimum førum, tá viðkomandi verður visiteraður frá øðrum deildum á Almannastovuni, og vil ein tílík mannagongd gera, at tað altíð verður undirskrivað ein heimildarváttan.*

*Á fundi við umboðsmannin, tann 26. mai 2008, handaði Almannastovan mær eitt nýtt umsóknarblað viðvíkjandi endurbúgving, sum Almannastovan hevur tilevnað, og sum skal nýtast til endurbúgvingarmál.*

*Eg havi tikið hetta til eftirtektar.*

*3. Viðvíkjandi skylduni at lýsa málið*

*Sambært fyrisitingarrættinum er tað ein meginregla, at almennir myndugleikar hava skyldu til at lýsa eitt mál á nøktandi hátt, áðrenn avgerð verður tikin. Hetta fyri at tryggja, at avgerðin verður tikin á einum lógligum og sakligum grundarlagi, og til tess at fyribyrgja tilvildarligum og ófullfíggjaðum avgerðum. Meginreglan hoyrir til tær sonevndu „garantiforskriftirnar"; tað vil siga, at er málið ikki lýst á nøktandi hátt, kann hetta føra við sær, at avgerðin verður ógildað.*

*Í 8 av teimum málum, ið eg havi kannað, liggur ein kommunulæknaváttan, í 8 málum liggja serlæknaváttanir ella váttanir frá sálarfrøðingi, í 5 málum er eingin læknaváttan ella váttan frá sálarfrøðingi. Eg spurdi Almannastovuna um, hvørja mannagongd stovnurin hevur viðvíkjandi innheintan av læknaváttanum og øðrum váttanum til endurbúgvingarmál.*

*Almannastovan hevur í hoyringsskrivi sínum greitt mær frá, at tá ið talan er um heilsuliga grundaðar skerjingar, verður kommunulæknaváttan innheintað. Serlæknaváttan verður innheintað, um læknaráðgevin á endurbúgvingarfundinum metir tørvur er á tí. Kannað verður eisini, um umsøkjarin hevur onnur mál á Almannastovuni, og um læknaváttanir í hesum málum kunnu nýtast í endurbúgvingarmálinum. Sum útgangsstøði er ikki tørvur á læknaváttan í málum, har endurbúgving kann játtast av sosialum ávum.*

*Eg taki hesa frágreiðing Almannastovunar til eftirtektar, og geri ikki meira við hetta.*

*Í málum nr. 11 og nr. 12 meti eg tó, at Almannastovan átti at fingið nýggjar læknaváttanir/váttanir til vega, áðrenn avgerð var tikin í málunum.*

*Í teimum flestu málunum, ið eg havi fingið til láns, sæst ikki, at nøkur samrøða er hildin við umsøkjara fyri at lýsa sosialu støðu hansara/hennara. Í uppriti A og øðrum uppritum í málunum verður sosiala støðan hjá umsøkjaranum lýst, men tað sæst ikki, hvussu hesar upplýsingar eru fingnar til vega. Eg spurdi Almannastovuna, hvørt samrøður verða hildnar við umsøkjaran, og í hvørjum førum Almannastovan tekur umsøkjarar í endurbúgvingarmálum inn til samrøðu.*

*Almannastovan hevur í hoyringsskrivi sínum upplýst, at við fáum frávikum verða allir umsøkjarar bodnir til samrøðu skjótast gjørligt eftir, at umsóknin um endurbúgving er móttikin. Endamálið við samrøðuni er at lýsa umsøkjaran og avklára hansara støðu nærri. Upplýsingar frá samrøðunum verða skrivaðar niður á uppritarblað, ella um talan er um samrøður, ið verða hildnar, áðrenn málið verður*

*lagt á endurbúgvingarfund, verður samrøðan niðurskrivað á skjalið: „Endurbúgvingarmál – lýsing“.*

*Eg havi onga viðmerking til, hvat skjal ein samrøða verður niðurskrivað á. Tað eigur bert at framganga av málinum, at umsøkjarin hevur verið til samrøðu, og nær samrøðan hevur funnið sær stað. Hetta soleiðis at tað eftirfylgjandi kann dokumenterast, at umsøkjarin hevur verið til samrøðu, og at notatskyldan verður hildin.*

*Sambært § 18, stk. 1 í forsorgarlógini er endamálið við endurbúgvingarstuðlinum, at persónurin framyvir skal kunna gerast sjálvbjargin. Í málum nr. 2 og nr. 4 verður stuðul veittur til HF, ið ikki er førleikagevandi í sjálvum sær, uttan at framhaldandi endurbúgvingarætlan verður gjørd. Í máli nr. 6 verður stuðul veittur til háskúlauppihald, ið heldur ikki er førleikagevandi í sjálvum sær, uttan at framhaldandi endurbúgvingarætlan verður gjørd. Í málum nr. 11, 12 og 14 verður stuðul veittur til arbeiðsvenjing, uttan at framhaldandi endurbúgvingarætlan er gjørd.*

*Eftir mínari meting eigur Almannastovan í øllum málum, í samráð við umsøkjaran, at lýsa, hvat fyri ynski og førleikar umsøkjarin hevur viðvíkjandi endurbúgving, meta um eina realistiska endurbúgvingleið, og gera eina ætlan fyri endurbúgvingarvegnum. Hetta eisini fyri at tryggja, at umsøkjarin fær rætta tilboðið beinanvegin, soleiðis hann, tá ið endurbúgvingarleiðin er liðug, kann verða sjálvbjargin, og fyri at tryggja, at myndugleikin hevur eina æltan við, hvat tilboðið skal føra til. Eg spurdi Almannastovuna, hví hetta ikki verður gjørt.*

*Almannastovan er samd við umboðsmanninum í, at tað í hvørjum einstøkum føri átti at verið gjørd ein endurbúgvingarætlan fyri umsøkjaran. Tó metir Almannastovan, at tað ikki altíð er gjørligt at gera endurbúgvingarætlanir, út frá verandi støðu umsøkjarans. Trupulleikin er, at umsøkjarar ofta eru illa fyri heilsuliga, og tí er ikki gjørligt hjá umsøkjaranum at seta orð á tey ynski, tey hava. Sosialráðgevar lýsa støðuna hjá umsøkjaranum, soleiðis at greiða kann fáast á, hvørjar skerjingar umsøkjarin hevur, og hvørji vinnuevni eru eftir. Hetta fyri at tryggja at valda endurbúgvingarleiðin er gjørlig, og at viðkomandi*

*hevur møguleika fyri at gerast sjálvbjargin. Almannastovan fer at eftirmeta, um tað kemur greitt nokk fram undir „lýsing av málinum“, hvør ætlanin og málini eru við endurbúgvingini.*

*Eg fari at biðja Almannastovuna lata meg frætta, hvat víðari hendir á hesum økinum.*

*4. Viðvíkjandi notatskylduni*
*Eg havi ikki viðmerkingar viðvíkjandi notatskylduni, jb. § 6, stk. 1 í innlitslógini, í teimum 15 málunum, ið eg havi fingið til láns frá Almannastovuni.*

*5. Viðvíkjandi partshoyring*
*Sambært § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini skal ein partur, ið ikki er kunnigur við ávísar upplýsingar um veruligu umstøðurnar í málinum, verða hoyrdur um hesar upplýsingar, áðrenn avgerð verður tikin í málinum. Hetta er bert galdandi, um upplýsingarnar ikki eru til fyrimuns fyri viðkomandi part.*

*Í máli nr. 1 verður endurbúgvingarstuðul noktaður. Almannastovan hevur innheintað kommunulæknaváttan og síðani fingið serlæknaváttan, tá ið biðið varð um journalina frá Landssjúkrahúsinum. Sambært notati frá Endurbúgvingar- og pensjónsfundi og avgerðarskrivinum, var tað hendan serlæknaváttanin, ið førdi til, at endurbúgvingarstuðul varð noktaður. Tað var tí í stríð við § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini, ikki at partshoyra umsøkjaran um hesa læknaváttan.*

*Í máli nr. 2 verður endurbúgvingarstuðul partvíst noktaður. Av tí at Almannastovan ikki hevur innheintað upplýsingar í hesum málinum, eru ikki trupulleikar viðvíkjandi partshoyring.*

*6. Viðvíkjandi víðarilatan av upplýsingum*
*Í máli nr. 14 eru viðkvæmar upplýsingar latnar víðari, uttan at samtykki er fingið til vega frá umsøkjara. Hetta meti eg ikki verða í tráð við § 10 í persónsupplýsingarlógini. Almannastovan eigur í slíkum førum at innheinta samtykki frá umsøkjaranum, áðrenn skjøl við heilt viðkvomum upplýsingum verða latin víðari.*

*7. Viðvíkjandi játtan/noktan av endurbúgving, treytum og veiting*

*Av teimum 15 endurbúgvingarmálunum, ið eg havi havt til láns, undraðist eg á niðurstøðuna í ávísum málum, sí viðmerkingarnar undir teimum einstøku málunum. Í máli nr. 1 undraðist eg á, hví endurbúgving ikki varð játtað. Í máli nr. 2 undraðist eg á, hví endurbúgving ikki varð játtað fult út, og hví umsøkjarin fekk at vita, at framhaldandi endurbúgvingarstuðul ikki fór at verða játtaður. Í máli nr. 11 undraðist eg á, at Endurbúgvingar- og pensjónsfundurin tók avgerð um, at hetta var síðstu ferð, at stuðul til endurbúgving varð játtaður. Eg bað tí Almannastovuna um at útgreina niðurstøðurnar í hesum málum fyri mær.*

*Í hoyringsskrivi sínum, dagfest 21. mai 2008, greiddi Almannastovan frá orsøkini til at kvinnan í máli 1 ikki hevði fingið játtað stuðul til endurbúgving. Endurbúgvingar- og pensjónsfundurin metti, at havandi aldurin hjá umsøkjaranum í huga, var ein endurbúgvingarleið byrjandi við 9. flokki ivasom. Hetta av tí at ein slík endurbúgvingarleið aloftast inniheldur eftirfylgjandi miðnámsskúla og eina útbúgving aftaná. Endurbúgvingarleiðin er sostatt 7 ár, og havandi aldurin hjá umsøkjaranum í huga, var spurningurin um ikki eitt styttri arbeiðsmarknaðartiltak hevði verið rættari endurbúgvingarleið.*

*Eg ivist í, um tað í hesum førinum er sakligt at nokta endurbúgving bert vísandi til aldurin, uttan at mett er um ítøkiligu umstøðurnar annars hjá umsøkjaranum.*

*Í máli nr. 2 fær kvinnan í fyrsta umfari játtað endurbúgving til at taka HF uppá 2 ár, hóast hon søkir um endurbúgving yvir 3 ár. Eftirfylgjandi fær hon játtað stuðul í 3 ár vegna plásstrot á skúlanum í Klaksvík. Eg undraðist á, hví kvinnan í fyrsta umfari bert fekk játtað 2 ára HF, serliga sæð í mun til, at hon var einsamøll við einum brekaðum barni. Eg bað tí Almannastovuna um at útgreina hesa niðurstøðuna fyri mær, herundir hvørt onnur tiltøk eru sett í verk fyri at stuðla kvinnuni og brekaða barninum.*

*Almannastovan greiddi í hoyringsskrivi sínum frá, at umsøkjarin fekk játtað HF, men ikki til víðari lestur. Grundgevingin fyri hesum*

*er, at umsøkjarin hevur eina avmarkaða skerjing. Umsøkjarin hevur eitt brekað barn, sum umsøkjarin fær stuðul til. Barnið hevur stuðul í skúlanum og 30 tímar heima. Harumframt verður stuðul játtaður til aðrar útreiðslur til barnið sambært § 17 í forsorgarlógini. Tað at vera stakur uppihaldari til brekað barn gevur ikki í sjálvum sær rætt til endurbúgving. Hinvegin hevur umsøkjarin verið burtur av arbeiðsmarknaðinum í nógv ár, og tí verður út frá einari sosialfakligari heildarmeting mett ráðiligt at stuðla umsøkjaranum at koma í gongd, soleiðis at hon sjálv er betur før fyri at koma út á arbeiðsmarknaðin.*

*Eg taki hesa frágreiðing til eftirtektar, og havi tí ikki viðmerkingar til, at kvinnan í fyrsta umfari fekk játtað stuðul í 2 ár til HF.*

*Tá ið endurbúgving verður játtað, fylgja treytir við. Hetta verður fráboðað umsøkjaranum í avgerðarskrivinum. Í summum av teimum málum, ið eg havi fingið til láns frá Almannastovuni, verða strangari treytir settar enn í øðrum málum. Í málunum nr. 5, 6, 10 og 11 hevur Almannastovan sett sum treyt, at umsøkjarin skal lata skúlanum læknaváttan, um viðkomandi er longri sjúkur enn 3 dagar. Tað er í lagi, at Almannastovan setir rímiligar treytir viðvíkjandi fráboðan av sjúkralegu, men at seta treyt um, at ein umsøkjari skal lata skúlanum læknaváttan longu, tá ið viðkomandi hevur verið sjúkur í 3 dagar, meti eg verða ov stranga treyt at seta í einum endurbúgvingarmáli.*

*Almannastovan hevur í hoyringsskrivi sínum, boða mær frá, at stovnurin sum skjótast fer at rætta standardskrivini soleiðis, at standartreytirnar verða eins í málum viðvíkjandi føroyskum og donskum skúlum.*

*8. Viðvíkjandi grundgeving og kæruvegleiðing*
*Sambært § 21 og § 24, stk. 1 í fyrisitingarlógini skal ein avgerð, ið er fráboðað skrivliga, hava grundgeving og kæruvegleiðing uttan so, at hon til fulnar gongur partinum á møti.*

*Í máli nr. 1 verður endurbúgvingarstuðul noktaður. Í máli nr. 2 verður endurbúgvingarstuðul partvíst noktaður. Eftir mínari meting er grundgevingin í hesum málum fyri at nokta endurbúgving ikki nøktandi.*

*Í málum nr. 1 og 2 er kæruvegleiðing givin. Hetta er í tráð við § 24, stk. 1 í fyrisitingarlógini.*

*<u>9. Viðvíkjandi málsviðgerðartíð</u>*
*Í teimum málum, sum eg havi kannað, sæst umsókn til ítøkiliga málið at vera móttikin í 9 málum. Í 5 av hesum málum er málsviðgerðartíðin í lagi, men í málum nr. 13 og 15 er málsviðgerðartíðin á ávikavist 4 og 5 mánaðir í longra lagi, og í máli nr. 1 er málsviðgerðartíðin á 1 ½ ár als ikki nøktandi. Av tí at tað í hinum 6 málunum ikki er ein skrivlig umsókn um endurbúgving til ítøkiligu málini, havi eg ikki grundarlag fyri at gera nakra niðurstøðu viðvíkjandi samlaðu málsviðgerðartíðini.*

*<u>Viðmerking viðvíkjandi hugburði í avgerðarskrivum</u>*
*Generelt haldi eg, at avgerðarskrivini eru ópersónlig og lítið motiverandi. Tey fólk, ið søkja um endurbúgving hava tørv á at verða motiveraði fyri at fara í gongd við útbúgving. Hóast allar upplýsingar eru við í avgerðarskrivinum, er møguligt at gera skrivið munandi meira persónligt og jaligt, soleiðis at móttakarin kennir seg motiveraðan at fara undir útbúgving. Í málum nr. 5 og nr. 7 verður ynskt umsøkjaranum góða eydnu við útbúgvingini. Hetta meti eg verða góðan hugburð mótvegis umsøkjaranum. Í máli nr. 14 verður boðað frá, at umsøkjarin altíð er vælkomin til at seta seg í samband við málsviðgerðan á Almannastovuni, og málsviðgerðin ynskir til síðst umsøkjaranum góða eydnu við uppihaldinum. Hetta er dømi um eitt jaligt og motiverandi avgerðarskriv.*

*Í hoyringsskrivi sínum harmast Almannastovan um málburðin í máli nr. 2, og er samd við viðmerkingunum hjá umboðsmanninum um, at játtanarskrivini tørva at verða meira jalig og motiverandi. Hetta fer Almannastovan at hava í huga, tá skrivini verða endurskoðað. Eisini fer Almannastovan at heita á starvsfólki um at nýta høviskan málburð í samskifti við viðskiftafólkini.*

*Eg taki hesar viðmerkingar hjá Almannastovuni til eftirtektar, og fari at biðja Almannastovuna lata meg frætta, hvat víðari hendir viðvíkjandi hesari endurskoðan.*

*Viðvíkjandi lóggávu*

*Samanumtikið tykist viðgerðin av endurbúgvingarmálum nakað tilvildarlig, men hetta kann koma av, at so fáar reglur eru á økinum. Eftir mínari meting eigur tað at verða ásett í lóg ella kunngerð, hvat endurbúgvingarstuðul kann veitast til, at myndugleikarnir skulu gera eina ætlan fyri endurbúgvingartilboðnum, hvat stuðulin skal fevna um, hvørjar upphæddir skulu verða galdandi v.m.*

*Eg fari at heita á Landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum um at umhugsa at áseta meira útgreinaðar reglur á endurbúgvingarøkinum.*

# *VI. Skjøl*

## Skjal 1

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

**1. Partur**
**Umboðsmaðurin og Løgtingið**

**§ 1.** Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

*2. stk.* Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.

*3. stk.* Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2.** Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3.** Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**
**Heimildir**

**§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu).

*2. stk.* Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um almennar skráir.

*3. stk.* Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.

*4.stk.* Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.

*5. stk.* Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5.** Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir

ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

**3. Partur**
**Kærumál og egin mál**

**§ 6.** Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.

*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.

*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

*5. stk.*Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.

**4. Partur**
**Kanningar**

**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina kæru til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í kæruni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.

*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

**§ 9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

## 5. Partur
## Niðurstøður

**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.

*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.

*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.

*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. Partur
## Lønar- og eftirlønarviðurskifti

**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.

*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

## 7. Partur
## Fyrisiting

**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg

*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

## 8. Partur
## Ígildisreglur

**§ 18.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.

*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# Skjal 2

***Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann***

**Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um**

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingarmyndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndugleikarnir, sum t.d. løgreglan hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar. Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

**Hvussu kunnu tygum klaga**

Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, **hvønn** og **hvat** tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað lættir um málsviðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndugleikunum osv.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

**Hvat kann umboðsmaðurin gera**

Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin ikki sjálvur kann broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í hesum sambandi skulu tygum

hava í huga, at umboðsmaðurin hevur avmarkaðar møguleikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

**Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu**

Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

1. Klagan verður kannað nærri.
2. Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

*1. Klagan verður kannað nærri.*

Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

*2. Klagan verður avvíst.*

Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

„*Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum…*“ (§ 6, stk. 3)

Um tað er møguligt at kæra eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.

„…Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.“ (§ 6, stk. 2)

Orðingin „viðurskifti“ fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðsmannin, t.d. viðgerðina av einum máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í máli-

num, atburðin o.s.v. Klaga tygum um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

*3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.*

Í umboðsmanslógini stendur:

*„Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.“* (§ 6, stk. 4)

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar**

Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

**Um umboðsmannin og embætið**

Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løgtingsins umboðsmann. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu 2/3 av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00 ella venda tygum til skrivstovuna í Traðagøtu 43, Argir, um tygum hava spurningar.

# *Lógaryvirlit*

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir ta lóggávuna, sum er umrødd / nevnd í álitunum frá umboðsmanninum. Yvirlitið fevnir bæði um hesa og tær undanfarnu ársfrágreiðingarnar. Yvirlitið vísir til einstøku málini, ið eru nevnd t.d. 02/23.2, og merkir hetta, at talan er um mál nr. 23.2 í ársfrágreiðingini fyri 2002.


**Lóggáva, kunngerð v.m.** **Mál:**

ALS-lógin (løgtingslóg nr. 113 frá 13.06.1997):
– § 1 .......... 03/10.1
– § 7 .......... 03/10.1
– § 14 .......... 05/28.4
– § 19 .......... 05/28.4
– § 26, stk. 1, 2. pkt .......... 03/10.1

Ábyrgd landsstýrismanna (løgtingslóg nr. 90 frá 04.06.1996):
– § 2 .......... 02/23.2
– § 4 .......... 02/23.2
– § 5 .......... 02/23.2

Almannapensiónslógin (løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almanna pensiónir):
– § 2 .......... 08/31.1
– § 6 .......... 08/31.1
– § 7 .......... 08/31.1
– § 8 .......... 08/31.1
– § 9 .......... 08/31.1
– § 25 .......... 08/31.1
– § 30 .......... 08/31.1
– § 31 .......... 08/31.1
– § 32 .......... 08/31.1
– § 33 .......... 08/31.1
– § 39 .......... 08/31.1

Barnaforsorgarlógin (Lb. Nr. 104 frá 02. 03.1988):
– § 32, stk. 1 .......... 04/11.2

Barsilsskipanarkunngerðin (kunngerð nr. 91 frá 31.05.2001):
– § 6 ........................................ 03/20.2
Barsilsskipanarlógin (løgtingslóg nr. 48 frá 03.04.2001):
– § 5........................................ 03/20.2
– § 12........................................ 03/20.2
– § 18........................................ 03/20.2
– § 25........................................ 03/20.2
Býarskipanarlógin (løgtingslóg nr. 13 frá 21.05.1954):
– § 5........................................ 04/21.2
– § 10........................................ 04/21.4
– § 10, stk.2.................................. 04/21.2
– § 12, stk. 1 ................................ 02/21.1
– § 15........................................ 02/21.1
– § 17........................................ 02/21.1
Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu
– § 9........................................ 04/21.2
– § 10........................................ 04/21.2
Byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu kap. I.
– § 4........................................ 04/21.4
– § 7 nr. 1 og 2 .............................. 04/21.4
– § 9, stk. 1 ................................ 04/21.4
Byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu kap. IV
– § 5, stk. 6 ................................ 04/21.4
– § 25 nr. 5 og 6 ............................. 04/21.4
Dagstovnalógin (løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000):
– § 8........................................ 05/28.3
– § 10........................................ 05/28.3
– § 11........................................ 05/28.3
Djórasjúkur (Løgtingslóg nr. 16 frá 23.02.2001):
– § 47........................................ 04/23.4
Djórainnflutningur (løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003):
– § 1........................................ 05/29.1
Europeiski mannarættindasáttmálin (kgl. fyriskipan
nr. 136 frá 25.02.2000):
– art. 8 ...................................... 03/25.1
Fornminnissavnslógin (løgtingslóg nr. 32 frá 02.05.1952):
– § 3........................................ 03/28.3

Forsorgarlógin (lógarkunngerð nr. 100 frá 02.03.1988):
– § 9 .......................................... 03/20.1
– § 17.......................................... 03/20.1
Fólkaskúlalógin (løgtingslóg nr. 125 frá 20.06.1997):
– § 26.......................................... 02/27.1
– § 26, stk. 1 .................................. 02/27.1
– § 29 .......................................... 02/27.1
– § 29, stk. 5 .................................. 02/27.1
– § 40.......................................... 02/27.1
– § 41, stk. 1 .................................. 02/27.1
– § 41, stk. 2 .................................. 02/27.1
– § 46.......................................... 02/27.1
– § 47, stk. 1 .................................. 02/27.1
– § 47, stk. 3 .................................. 02/27.1
– § 57, stk. 7 .................................. 02/27.1
– § 59.......................................... 02/27.1
Fríðtíð við løn (Løgtingslóg nr. 30 frá 7.04.1986):
– § 21, stk. 4 .................................. 04/10.3
Frítíðargrunnurin (K.nr. 101 frá 12.08.1988):
– § 3........................................... 04/10.3
Frítíðarkunngerðin (kunngerð nr. 14 frá 16.02.1987):
– § 3, stk.1, 1. pkt.............................. 03/20.2
Frítíðarlógin (løgtingslóg nr. 30 frá 07.04.1986):
– § 1........................................... 03/20.2
– § 10.......................................... 03/20.2
– § 12.......................................... 03/20.2
Fyrisitingarlógin (løgtingslóg nr. 132 frá 10.06.1993):
– § 1........................................... 02/27.2
– § 1........................................... 02/27.4
– § 2........................................... 04/11.2
– § 2, stk. 1 ................................... 04/21.5
– § 2, stk. 1 ................................... 08/28.3
– § 3, stk. 1, nr. 5 ............................. 02/21.1
– § 7, stk. 1 ................................... 02/27.3
– § 7, stk. 1 ................................... 04/11.1
– § 7, stk. 2 ................................... 04/11.4

– § 8 . . . . . . . . . . 05/28.3
– § 9 . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 9 . . . . . . . . . . 05/28.2
– § 10, stk. 2 . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 12, stk. 2 . . . . . . . . . . 04/28.3
– § 16 . . . . . . . . . . 04/23.2
– § 18 . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 18 . . . . . . . . . . 04/10.1
– § 18 . . . . . . . . . . 05/28.3
– § 18 . . . . . . . . . . 05/29.1
– § 18, stk. 1 . . . . . . . . . . 03/21.1
– § 18, stk. 1 . . . . . . . . . . 03/28.3
– § 18, stk. 1 . . . . . . . . . . 08/28.5
– § 18, stk. 2, nr. 1 . . . . . . . . . . 03/21.1
– § 18, stk. 2 . . . . . . . . . . 04/21.2
– § 19 . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 20 . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 20 . . . . . . . . . . 02/28.4
– § 21 . . . . . . . . . . 04/28.3
– § 21 . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 21 . . . . . . . . . . 02/10.5
– § 21 . . . . . . . . . . 02/11.1
– § 21 . . . . . . . . . . 02/28.1
– § 21 . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 22 . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 23 . . . . . . . . . . 04/28.3
– § 23 . . . . . . . . . . 04/23.2
– § 23 . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 23 . . . . . . . . . . 02/10.5
– § 23 . . . . . . . . . . 02/28.1
– § 23 . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 23, stk. 1 . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 23, stk. 2 . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 23, stk. 2 . . . . . . . . . . 08/28.2
– § 24 . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 24 . . . . . . . . . . 05/28.3

– § 25 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
Forsorgarlógin (løgtingslóg nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentligforsorg):
– § 18, stk 1. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 08.32.1
Grundlógin:
– § 14, 2. pkt. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/28.1
– § 73 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/21.1
HF-kunngerðin (kunngerð nr. 103 frá 17.07.1996):
– § 20, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
HF-lógin (løgtingslóg nr. 107 frá 29.06.1995):
– § 15 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 16 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 16, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 16, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 20 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
Hýruvognskunngerð í Tórshavn
– § 2, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/10.2
– § 15, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/10.2
– § 15, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/10.2
Hýruvognsreglugerð í Tórshavn (K.nr. 90 frá 20.10.1987):
– § 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/10.2
Innlitslógin (løgtingslóg nr. 133 frá 10.06.1993):
– § 4, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/11.1
– § 4, stk. 1, 2. pkt. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/11.1
– § 4, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/11.2
– § 4, stk. 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/11.1
– § 4, stk. 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 4, stk. 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/11.1
– § 5, stk. 1, nr. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.1
– § 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/28.1
– § 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.3
– § 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/10.2
– § 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/21.2
– § 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/21.1
– § 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 08/28.4
– § 6, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/28.3

– § 7 .......... 02/11.1
– § 7 .......... 04/11.2
– § 7 .......... 08/11.1
– § 8 .......... 04/11.2
– § 8 .......... 08/11.1
– § 11 .......... 02/11.1
– § 11 .......... 08/11.1
– § 12 .......... 04/11.5
– § 12, stk. 1 nr. 2 .......... 04/11.3
– § 13 .......... 04/11.5
– § 13, stk. 1 nr. 5 .......... 04/11.3
– § 13, stk. 1 nr. 5 .......... 08/21.1
– § 13, stk. 1, nr. 6 .......... 02/11.1
– § 15 .......... 04/11.2
– § 15, stk. 1 .......... 04/11.4
– § 16 .......... 04/21.1
– § 16 .......... 04/11.5
– § 16, stk. 1 .......... 04/11.3
– § 16, stk. 1 .......... 01/11.1
– § 16, stk. 1 .......... 03/11.1
– § 16, stk. 2 .......... 04/11.1
– § 16, stk. 2 .......... 04/11.3
– § 16, stk. 3 .......... 01/11.1
– § 16, stk. 3 .......... 03/11.1
Javnstøðulógin (løgtingslógnr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum menn og kvinnur):
– § 11 .......... 08/28.5
Kommunulógin (løgtingslóg nr. 45 frá 29.06.1972):
– § 4 .......... 02/27.1
– § 41 .......... 02/21.1

Kommunustýrislógin (løgtingslóg nr. 87 frá 17.05.2000):
– § 12 .......... 02/27.1
– § 12, stk. 1 .......... 02/27.1
– § 13, stk. 1 .......... 02/27.1
– § 13, stk. 2 .......... 02/27.1
– § 14 .......... 02/27.1

– § 27, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
– § 55. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/21.1
– § 55 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
– § 55, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
Kommunuvallógin (løgtingslóg nr. 44 frá 19.06.1972):
– § 3. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.1
Kringvarpslógin (løgtingslóg nr. 22 frá 20.02.1998):
– § 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 5. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
– § 5, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.2
– § 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
– § 6, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
– § 6, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.2
– § 6, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 13. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 13. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
– § 13, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 13, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
– § 15. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
– § 17 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 18, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 20, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/27.1
– § 25. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 25, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
Kunngerð um gjøld fyri avrit og fotoavrit
(K.nr.199 frá 15.12.93) . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.2
Landsvegalógin (løgtingslóg nr. 51 frá 25.07.1972):
– § 5. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/21.1
Lærararáðskunngerðin (kunngerð nr. 46 frá 09.05.1997):
– § 7, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2

Lærarautbúgving (løgtingslóg nr. 69 frá 28. mai 1980):
– § 1. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 05/28.2
– § 16. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 05/28.2
Matrikuleringslógin (Løgtingslóg nr. 64 frá 11.12.1962):
– § 15. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/21.5
– § 16. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/21.5

– § 17 . . . . . . . . . . 04/21.5
– § 18 . . . . . . . . . . 04/21.5
– § 20 . . . . . . . . . . 04/21.5
Matvørulógin (Løgtingslóg nr. 46 frá 21.06.1985):
– § 41, stk. 5 . . . . . . . . . . 04/11.4
Meirvirðisgjaldsfrítøka
(kunngerð nr. 136 frá 17. juni 1993):. . . . . . . . . . 02/22.1
Meirvirðisgjaldsfrítøka
(kunngerð nr. 166 frá 12. des. 1992): . . . . . . . . . . 02/22.1
Meirvirðisgjaldslógin (løgtingslóg nr. 136 frá 08.09.1992):
– § 1 . . . . . . . . . . 02/22.1
– § 2 . . . . . . . . . . 02/22.1
– § 2, stk. 3 . . . . . . . . . . 02/22.1
– § 2, stk. 5 . . . . . . . . . . 02/22.1
– § 3 . . . . . . . . . . 02/22.1
– § 4 . . . . . . . . . . 02/22.1
– § 5 . . . . . . . . . . 02/22.1
– § 12 . . . . . . . . . . 02/22.1
Navnakunngerðin (kunngerð nr. 71 frá 29.06.2002):
– § 1-3 . . . . . . . . . . 03/25.1
Navnalógin (løgtingslóg nr. 41 frá 26.03.2002):
– § 2, stk. 3 . . . . . . . . . . 03/25.1
– § 2, stk. 4 . . . . . . . . . . 03/25.1
Ognartøkulógin (lov nr. 69 frá 07.05.1881):
– § 2 . . . . . . . . . . 03/21.1
Postgjøld (kunngerð nr. 134 frá 11.10.2001): . . . . . . . . . . 02/27.4
Próvtøkukunngerðin (kunngerð nr. 65 frá 27.04.2001):
– § 52, stk. 3 . . . . . . . . . . 02/27.3
– § 53 . . . . . . . . . . 02/27.3
– § 67 . . . . . . . . . . 02/27.3

Rúsdrekkalógin (Løgtingslóg nr. 20 frá 10.03.1992):
– § 1 . . . . . . . . . . 04/23.7
– § 9 . . . . . . . . . . 04/23.7
– § 10, stk. 1 . . . . . . . . . . 04/23.7
– § 11 . . . . . . . . . . 04/23.7
– § 13 . . . . . . . . . . 04/23.7

Sjónvarpsgjaldskunngerðin (kunngerð nr. 103 frá 20.12.2002):
– § 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/27.1
Skattafyrisitingarlógin (løgtinglóg nr. 169 frá 30.12.1997):
– § 16 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.1
– § 17 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.1
– § 17, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.1
Skipaskráseting (løgtingslóg nr. 9 frá 05.03.1970):
– § 35 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.2
– § 35, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.2
– § 36 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.2
– § 36, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.2
– § 37 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.2
– § 37, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.2
– § 37, stk. 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.2
Starvsskipan fyri kommunalar skattakærunevndir
(kunngerð nr. 48 frá 15.04.1998):
– § 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.1
– § 8 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.1
– § 9 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.1
– § 11 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.1
– § 13, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/10.1
Sterkstreymsútbúnaður (Løgtingslóg nr. 134 frá 10.06.1993):
– § 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/29.1
– § 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/29.1
– § 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/29.1
Studentaskúlakunngerðin (kunngerð nr. 102 frá 17.06.1996):
– § 12 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
Studentaskúlakunngerðin (kunngerð nr. 102 frá 26.06.2001):
– § 20 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.3
– § 20, stk. 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.3
– § 20, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.3
– § 30 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.3
Studentaskúlalógin (løgtingslóg nr. 106 frá 29.06.1995):
– § 9 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 10 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 10, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2
– § 10, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/28.2

– § 13 .......................................... 02/28.2
– § 13, stk. 1 .......................................... 02/28.2
– § 13, stk. 2 .......................................... 02/28.2
– § 13, stk. 3 .......................................... 02/28.2
Stýrisskipanarlógin (løgtingslóg nr. 103 frá 26.07.1994):
– § 29, stk. 2 .......................................... 03/28.3
– § 33, stk. 1 .......................................... 01/28.1
– § 33, stk. 3 .......................................... 03/28.3
– § 56.......................................... 02/27.1
Tænastumannaeftirlønarlógin (løgtingslóg nr. 32 frá 05.07.1971):
– § 2.......................................... 01/28.1
– § 10.......................................... 01/28.1
Tænastumannalógin (løgtingslóg nr. 31 frá 05.07.1971):
– § 29.......................................... 02/28.1
Tænastumannalógin
(løgtingslóg nr. 31 frá 12.07.1971) Kap. 5 ............. 04/28.1
Umboðsmanslógin (løgtingslóg nr. 60 frá 10.05.2000):
– § 4.......................................... 02/27.2
– § 4 .......................................... 02/27.4
– § 4.......................................... 03/10.1
– § 4.......................................... 03/21.2
– § 4, stk. 2 .......................................... 01/11.2
– § 4, stk. 4 .......................................... 04/29.1
– § 4, stk. 4 .......................................... 04.21.1
– § 4, stk. 5 .......................................... 04/29.1
– § 5.......................................... 02/27.4
– § 6.......................................... 02/27.4
– § 6, stk. 1 .......................................... 03/21.2
– § 6, stk. 2 .......................................... 04/21.3
– § 6,stk.2 .......................................... 04/23.1
– § 6, stk. 2 .......................................... 03/21.2
– § 6, stk. 3 .......................................... 02/10.1
– § 6, stk. 3 .......................................... 04/10.1
– § 6, stk. 3 .......................................... 04/10.2
– § 6, stk. 3 .......................................... 04/11.2
– § 6, stk. 3 .......................................... 04/21.3
– § 6, stk. 4 .......................................... 03/28.3

– § 6, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/11.1
– § 6, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/21.3
– § 6, stk. 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/29.1
– § 10 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/10.3
– § 10. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/11.5
– § 10, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/21.1
– § 10, stk. 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/11.1
– § 12. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.3
– § 12. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 01/11.2
– § 12. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.2
– § 12. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/27.4
– § 12. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 03/20.1
– § 18. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.1
– § 18. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/10.3
– § 18. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/21.1
– § 18, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.1
Veterinert eftirlit (K.nr. 24 frá 16.03.2001):
– § 1. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.4
Veterinert eftirlit-gjøld (K.nr. 124 frá 28.08.2001):
– § 6. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.4
– § 7. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.4
Vinnuligur fiskiskapur (løgtingslóg nr. 28 frá 10.03.1994):
– § 5, stk.3. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.2
– § 5, stk. 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04.23.1
– § 5, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.2
– § 5, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.1
– § 5, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.6
– § 7. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.2
– § 7. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.1
– § 7. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.2
– § 8. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.2
– § 8, stk. 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 02/23.2
– § 28. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.2
– § 31. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.2
– § 31. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.6
– § 31, stk. 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 04/23.3